**Løgmansskrivstovan**

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 20. desember 2019 |
| Mál nr.: | 0605-004/16 |
| Málsviðgjørt: | KTH |
| Eftirkannað: | 25. november 2019 |

**Løgtingsmál nr. 51/2019: Uppskot til løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum (Dátuverndarlógin)**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**vernd av persónupplýsingum**
**(Dátuverndarlógin)**

## Kapittul 1
## Virkisøki, landøkisásetingar o.a.

*Innihald og endamál*

**§ 1.** Løgtingslógin ásetur reglur um vernd av einstaklingum í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum, og reglur um frían flutning av persónupplýsingum.

*Virkisøki*

**§ 2.** Løgtingslógin er galdandi fyri viðgerð av persónupplýsingum:
1) um viðgerðin heilt ella lutvíst er automatisk, og
2) um persónupplýsingar eru ella verða settar í eina skrá, sjálvt um viðgerðin ikki er automatisk.

**§ 3.** Løgtingslógin er ikki galdandi fyri ta viðgerð av persónupplýsingum, sum einstaklingar gera til heilt persónlig endamál.
*Stk. 2.* Løgtingslógin er ikki galdandi fyri ta viðgerð av persónupplýsingum, sum fer fram sum liður í tingarbeiðinum hjá Løgtinginum.
*Stk. 3.* Kapitlarnir 2-7 eru ikki galdandi fyri viðgerð av persónupplýsingum við einans listarligum, bókmentaligum ella journalistiskum endamáli. Tó eru §§ 41, 42 og 47 galdandi.
*Stk. 4.* Kapitlarnir 2-7 eru ikki galdandi fyri viðgerð av persónupplýsingum, sum eru í kunningardátugrunnum, sum hava journalistiskt endamál, og sum einans rúma tilfari, sum frammanundan er almannakunngjørt. Hetta er treytað av, at tilfarið í kunningardátugrunninum er óbroytt í mun til almannakunngeringina. Tó eru §§ 41, 42 og 47 galdandi.

**§ 4.** Ásetingar um viðgerð av persónupplýsingum í aðrari lóggávu, sum geva skrásetta eina betri rættarstøðu, ganga fram um ásetingarnar í hesi løgtingslóg.

*Landøkisásetingar*

**§ 5.** Løgtingslógin er galdandi fyri viðgerð av persónupplýsingum, sum verður gjørd fyri:

1) privatan dátuábyrgdara ella dátuviðgera, sum er staðsettur í Føroyum, sama um viðgerðin fer fram í Føroyum ella ei, og
2) almennan dátuábyrgdara ella dátuviðgera, sum er staðsettur í Føroyum, og sum er undir myndugleika heimastýrisins, sama um viðgerðin fer fram í Føroyum ella ei.

*Stk. 2.* Løgtingslógin er galdandi fyri viðgerð av persónupplýsingum um skrásett, sum eru í Føroyum, og verður gjørd av dátuábyrgdara ella dátuviðgera, sum ikki er staðsettur í Føroyum, um viðgerðin viðvíkur:

1) útboði av vørum ella tænastum til skrásett í Føroyum, sama um gjald verður kravt frá teimum, ella
2) yvirvøku av atferðini hjá skrásettum, um teirra atferð fer fram í Føroyum.

*Allýsingar*

**§ 6.** Í hesi løgtingslóg er at skilja við:

1) Persónupplýsingar: Ein og hvør upplýsing og meting, sum er knýtt ella kann knýtast at einum ávísum likamligum persóni, t.e. tann skrásetti.
2) Viðgerð: Øll nýtsla, so sum savnan, skráseting, samkoyring, goyming, víðarigeving, avhending o.a. ella ein sameining av hesum, líkamikið um henda er automatisk ella ei.
3) Profilering: Eitt og hvørt slag av automatiskari viðgerð av persónupplýsingum, sum nýtir persónupplýsingarnar til at meta um ávís persónlig viðurskifti hjá einum ávísum persóni, fyri at greina ella meta um arbeiðsavrik, fíggjarliga støðu, heilsu, persónligar tokkar, áhugamál, álitissemi, atferð, staðseting ella rørslur hjá viðkomandi.
4) Dulnevning: Viðgerð av persónupplýsingum á ein slíkan hátt, at persónupplýsingarnar ikki longur kunnu beinast til ein ávísan skrásettan, uttan so at eyka upplýsingar verða nýttar. Tað er ein fortreyt, at slíkar eyka upplýsingar verða goymdar fyri seg og koma undir tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, sum tryggja, at persónupplýsingarnar ikki kunnu beinast til ein eyðmerktan persón ella ein persón, sum kann eyðmerkjast.
5) Skrá: Eitt og hvørt skipað savn av persónupplýsingum, sum er atkomandi eftir ávísum eyðkennum, annaðhvørt savnið er miðsavnað, miðspjatt ella býtt sundur eftir virki ella staði.
6) Dátuábyrgdari: Ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur, ein almennur myndugleiki, ein stovnur ella ein onnur eind, sum eina ella saman við øðrum ger ainnliv, til hvørji endamál og við hvørjum hjálpitólum persónupplýsingar kunnu viðgerast.
7) Dátuviðgeri: Ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur, ein almennur myndugleiki, ein stovnur ella ein onnur eind, sum viðger persónupplýsingar dátuábyrgdarans vegna.
8) Triðipersónur: Ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur, ein almennur myndugleiki, ein stovnur, felagsskapur o.s.fr., sum ikki er tann skrásetti, dátuábyrgdarin, dátuviðgerin og teir persónar undir beinleiðis myndugleika dátuábyrgdarans ella dátuviðgerans, sum hava heimild at viðgera persónupplýsingar.
9) Móttakari: Ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur, ein almennur myndugleiki, ein stovnur ella annar, sum fær persónupplýsingar, eisini hóast hetta er triðipersónur. Almennir myndugleikar, sum móttaka persónupplýsingar í sambandi við einstakar fyrispurningar, eru ikki móttakarar. Viðgerðin hjá myndugleikunum av hesum upplýsingum skal halda galdandi dátuverndarreglur.
10) Samtykki frá skrásetta: Eitt sjálvboðið, nágreiniligt, kunnað og greitt viljaboð

frá skrásetta, har skrásetti við fráboðan ella greiðari váttan játtar, at persónupplýsingar, um viðkomandi kunnu viðgerast.

11) Ílegudátur: Persónupplýsingar, sum viðvíkja arvaðum ella ognaðum íleguserkennum hjá einum persóni, sum geva eintýddar upplýsingar um lívvirki ella heilsu hjá persóninum, og sum eru tøkar eftir, at ein lívfrøðilig roynd frá viðkomandi er greinað.
12) Biometriskar dátur: Persónupplýsingar, ið sum fylgi av tekniskari viðgerð av likamligum, lívvirkisligum ella atferðarligum serkenni hjá einum persóni loyva ella vátta eina eintýdda eyðmerking av viðkomandi, t.d. andlitsmynd ella fingramerkisupplýsingar.
13) Heilsuupplýsingar: Persónupplýsingar, sum viðvíkja likamligu ella sálarligu heilsuni hjá einum persóni, her undir veitingar av heilsutænastum, og sum geva upplýsingar um heilsustøðuna hjá viðkomandi.
14) Útland: Land, sum er limur í Evropeiska Samveldinum, ES ella í Evropeiska Búskaparliga Samstarvinum, EBS.
15) Triðjaland: Land, sum ikki er limur í Evropeiska Samveldinum, ES ella Evropeiska Búskaparliga Samstarvinum, EBS.
16) Kunningarsamfelagstænasta: Ein og hvør tænasta í kunningarsamfelagnum, t.e. ein og hvør tænasta, sum vanliga verður veitt fyri gjald, og sum verður fjarvarpað elektroniskt eftir umbøn frá einum tænastumóttakara.

## Kapittul 2
## Meginreglur og viðgerðarreglur

*Meginreglur fyri viðgerð av persónupplýsingum*

**§ 7.** Persónupplýsingar skulu:

1) Viðgerast lógliga, rímiliga og á ein gjøgnumskygdan hátt í mun til tann skrásetta.
2) Savnast til nágreiniliga tilskilað og heimilað endamál og skulu ikki seinni viðgerast á ein hátt, sum er í ósamsvari við hesi endamál.
3) Vera nøktandi, viðkomandi og avmarkaðar til tað, sum er neyðugt til tey endamál, sum tær verða viðgjørdar til.
4) Vera rættar og nøktandi dagførdar. Øll rímilig stig skulu takast fyri at tryggja, at persónupplýsingar, sum eru rangar í mun til tey endamál, sum tær verða viðgjørdar til, verða strikaðar ella rættaðar beinanvegin.
5) Goymast soleiðis, at ikki ber til at eyðmerkja tey skrásettu í longri tíðarskeið enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini.
6) Viðgerast á ein hátt, sum tryggjar nøktandi trygd av persónupplýsingum, undir hesum vernd ímóti óheimilaðari ella ólógligari viðgerð og ímóti missi av tilvild, fyribeining ella skaða, við nýtslu av hóskandi tøkniligum ella bygnaðarligum, herundir fysiskum, tiltøkum.

*Stk. 2.* Dátuábyrgdari hevur ábyrgdina av og skal kunna vísa á, at stk. 1 verður hildið.

*Stk. 3.* Um seinni viðgerð av persónupplýsingum einans fer fram við søguligum, hagfrøðiligum ella vísindaligum endamáli, er henda viðgerð at rokna sum verandi í samsvari við upprunaendamálið við innsavnanini, um bágin, tann einstaki hevur av hesari, má metast eigur at víkja fyri tí munandi samfelagsliga týdningi, viðgerðin hevur.

*Lóglig viðgerð*

**§ 8.** Viðgerð av persónupplýsingum er lóglig um í minsta lagi eini av hesum viðurskiftum gera seg galdandi:

1) Skrásetti hevur givið sítt samtykki til viðgerð av persónupplýsingum, til eitt ella fleiri nágreinað endamál.
2) Viðgerðin er neyðug fyri at halda eina avtalu, sum skrásetti er partur í, ella fyri at gera tað, sum eftir áheitan frá

skrásetta er neyðugt, áðrenn avtalan verður inngingin.
3) Viðgerðin er neyðug fyri at halda eina rættarliga skyldu, sum áliggur dátuábyrgdaranum.
4) Viðgerðin er neyðug fyri at verja altumráðandi áhugamál hjá skrásetta ella øðrum persóni.
5) Viðgerðin er neyðug til tess at røkja samfelagsáhugamál ella uppgávur sum liggja undir almennari myndugleikaútinnan, sum dátuábyrgdaranum er áløgd.
6) Viðgerð er neyðug fyri, at dátuábyrgdarin ella ein triðipersónur kann fylgja einum heimilaðum áhugamáli, um ikki áhugamál ella grundleggjandi rættindi hjá skrásetta, sum krevja vernd av persónupplýsingum, ganga fram um.

*Stk. 2.* Stk. 1, nr. 6 er ikki galdandi fyri almennar myndugleikar, tá ið teir røkja sínar uppgávur.

*Treytir fyri samtykki*

**§ 9.** Er viðgerð av persónupplýsingum grundað á samtykki skal dátuábyrgdarin kunna vísa á, at tann skrásetti hevur givið samtykki til viðgerðina.
*Stk. 2.* Verður samtykki hjá skrásetta givið í skrivligari váttan, sum eisini viðvíkur øðrum viðurskiftum, skal fyrispurningurin um samtykki leggjast fram á ein lætt skiljandi og lætt atkomiligan hátt, á einum greiðum og einføldum máli og á ein hátt, sum týðiliga skilur seg frá hinum viðurskiftunum.
*Stk. 3.* Skrásetti hevur til eina og hvørja tíð rætt til at taka sítt samtykki aftur. Afturtøka av samtykki ávirkar ikki lóggildið av viðgerð, sum er grundað á samtykki áðrenn afturtøkuna.
*Stk. 4.* Áðrenn samtykki verður givið, skal skrásetti kunnast um, at samtykki kann verða tikið aftur. Tað skal vera eins lætt at taka samtykki aftur sum at geva tað.

*Treytir fyri samtykki frá einum barni í sambandi við kunningarsamfelagstænastur*

**§ 10.** Er viðgerð av persónupplýsingum um eitt barn í sambandi við útboð av kunningarsamfelagstænastum beinleiðis til børn grundað á samtykki, er viðgerðin bara lóglig, um barnið er í minsta lagi 13 ár.
*Stk. 2.* Er barnið undir 13 ár, skal samtykki verða givið ella góðkent av tí, sum hevur foreldramyndugleikan. Í slíkum førum skal dátuábyrgdarin í rímiligan mun royna at kanna, at viðkomandi, sum hevur foreldramyndugleikan, hevur givið ella góðkent samtykkið.

*Viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum*

**§ 11.** Viðgerð av persónupplýsingum um húðarlit, ættarslag ella etniskan uppruna, politiska, átrúnaðarliga ella heimspekiliga sannføring ella yrkisfelagsligt tilknýti eins og viðgerð av ílegudátum, biometriskum dátum við tí endamáli eintýtt at eyðmerkja ein persón, heilsuupplýsingum, upplýsingum um kynslig viðurskifti, revsiverd viðurskifti ella upplýsingar um munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti er bannað.
*Stk. 2.* Viðgerð av persónupplýsingum sbrt. stk. 1 er loyvd um heimild er fyri hesum í §§ 12-14 ella 18-19.

**§ 12.** Viðgerð av persónupplýsingum sbrt. § 11, stk. 1 er loyvd, um eitt av hesum viðurskiftum ger seg galdandi:
1) Skrásetti hevur givið nágreiniligt samtykki til viðgerð av persónupplýsingunum til eitt ella fleiri nágreinað endamál, uttan so at tað í lóg er ásett, at tað ikki kann víkjast frá banninum í § 11, stk. 1 við samtykki.
2) Viðgerðin er heimilað í lóg.
3) Viðgerðin er neyðug fyri at halda starvsrættarligar skyldur og tilskilað rættindi hjá dátuábyrgdaranum ella skrásetta.
4) Viðgerðin er neyðug fyri at verja altumráðandi áhugamál hjá skrásetta ella einum øðrum persóni í førum, tá skrásetti hvørki likamliga ella løgfrøðiliga fær givið samtykki.

5) Viðgerðin verður framd av almannagagnligum felagi ella grunni, sum ikki virkar við vinningi fyri eyga, og hvørs endamál er av politiskum, heimspekiligum, átrúnaðarligum ella yrkisfelagsligum slagi, sum liður í heimilaðum virksemi og við hóskandi trygd, og treytað av, at viðgerðin einans viðvíkur limum, fyrrverandi limum ella persónum, sum við sama endamáli javnan eru í sambandi við hesi, og at persónupplýsingarnar ikki verða víðarigivnar uttan samtykki frá tí skrásetta.
6) Viðgerðin viðvíkur persónupplýsingum, sum eyðsýnt eru almannakunngjørdar av skrásetta.
7) Viðgerðin er neyðug fyri, at rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast.
8) Viðgerðin er neyðug fyri at fáa haldgóða fyribyrgjandi sjúkraviðgerð, læknafrøðiliga sjúkraviðgerð, sjúkrarøkt, sjúklingaviðgerð, fyri arbeiðslæknafrøði fyri at meta um arbeiðsførleikar hjá arbeiðsfólki, ella fyri veiting ella umsiting av almannarøkt ella umsiting av læknatænastum og heilsutænastum, og persónupplýsingarnar verða viðgjørdar av starvsfólkum innan heilsuverkið, sum sbrt. lóggávuni hava fingið álagt tagnarskyldu.

*Stk. 2.* Viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum sbrt. § 11, stk. 1 kann eisini fara fram, um viðgerðin er neyðug til tess at røkja týðandi samfelagsáhugamál. Um henda viðgerð fer fram fyri ein privatan dátuábyrgdara, krevst loyvi frá Dátueftirlitinum. Dátueftirlitið kann áseta nærri treytir fyri viðgerðini.

*Stk. 3.* Avvarðandi landsstýrismaður kann í samráð við landsstýrismannin í dátuverndarmálum áseta reglur um viðgerð av persónupplýsingum nevndar í § 11, stk. 1. Hesar reglur skulu veita hóskandi trygd fyri rættindum hjá skrásetta.

*Viðgerð av persónupplýsingum um revsiverd viðurskifti*

**§ 13.** Almennir myndugleikar kunnu viðgera persónupplýsingar um revsiverd viðurskifti, sbrt. § 11, stk. 1, um tað er neyðugt fyri, at myndugleikin kann røkja sínar uppgávur.

*Stk. 2.* Tað er ikki loyvt almennum myndugleikum at víðarigeva persónupplýsingar um revsiverd viðurskifti. Víðarigeving kann tó fara fram, um:
1) tann skrásetti hevur givið nágreiniligt samtykki til víðarigevingina,
2) víðarigevingin skal røkja privat ella almenn áhugamál, sum greitt ganga fram um áhugamálini, sum krevja loynsemi,
3) víðarigevingin er neyðug fyri, at ein almennur myndugleiki kann útinna sítt virksemi, ella er neyðug fyri eina avgerð, sum myndugleikin skal taka, ella
4) víðarigeving er neyðug fyri, at uppgávur, sum ein persónur ella fyritøka røkja fyri tað almenna, kunnu útinnast.

*Stk. 3.* Privat kunnu viðgera persónupplýsingar um revsiverd viðurskifti, um tann skrásetti hevur givið nágreiniligt samtykki. Viðgerð kann eisini fara fram, um tað er neyðugt fyri at røkja sjálvsøgd heimilað áhugamál, og hesi áhugamál greitt ganga fram um fyrilitini fyri skrásetta.

*Stk. 4.* Tað er ikki loyvt at víðarigeva tær persónupplýsingar, sum eru nevndar í stk. 3, uttan at tann skrásetti hevur givið nágreiniligt samtykki til víðarigevingina. Víðarigeving uttan samtykki kann tó fara fram, tá ið víðarigevingin skal røkja privat ella almenn áhugamál, sum greitt ganga fram um áhugamálini, sum krevja loynsemi.

*Stk. 5.* Viðgerð av persónupplýsingum um revsiverd viðurskifti, sbrt. stk. 1-4, kann eisini fara fram, um treytirnar í § 12 eru loknar.

**§ 14.** Ein fullfíggjað skrá við revsirættarligum dómsúrskurðum er bert loyvd at gera fyri tað almenna.

*Viðgerð, sum ikki krevur eyðmerking*

**§ 15.** Um endamálini við eini viðgerð av persónupplýsingum ikki krevja ella ikki longur krevja, at tann skrásetti kann eyðmerkjast, hevur dátuábyrgdarin ikki skyldu at varðveita, útvega ella viðgera fleiri upplýsingar fyri at kunna eyðmerkja tann skrásetta bara fyri at halda hesa løgtingslóg.
*Stk. 2.* Kann dátuábyrgdarin í slíkum førum, sum nevnd í stk. 1, vísa á, at viðkomandi ikki fær eyðmerkt tann skrásetta, skal dátuábyrgdarin kunna tann skrásetta um hetta, um tað er gjørligt. Í slíkum førum eru §§ 26-31 ikki galdandi, uttan so at tann skrásetti fyri at útinna síni rættindi sbrt. hesum greinum veitir fleiri upplýsingar, ið gera tað møguligt at eyðmerkja viðkomandi.

## Kapittul 3
## Serligar viðgerðarstøður

*Viðgerð av persónstalinum*

**§ 16.** Almennir myndugleikar kunnu viðgera upplýsingar um persónstalið til eintýdda eyðmerking ella sum skránummar.
*Stk. 2.* Privat kunnu viðgera upplýsingar um persónstalið, tá ið:
1) viðgerðin er heimilað í lóg,
2) skrásetti hevur givið nágreiniligt samtykki,
3) treytirnar í § 12 eru loknar, ella
4) viðgerðin bert fer fram til søgulig, vísindalig ella hagfrøðilig endamál.

*Stk. 3.* Viðgerðin í stk. 2, nr. 1-3 fevnir ikki um víðarigeving, sum bert er loyvd, um:
1) víðarigevingin er heimilað í lóg,
2) skrásetti hevur givið nágreiniligt samtykki til víðarigevingina,
3) víðarigevingin er kravd av einum almennum myndugleika, ella
4) víðarigevingin er ein natúrligur liður í regluliga virkseminum hjá virkjum o.ø. av tílíkum slagi og er altýðandi fyri eina eintýdda eyðmerking av skrásetta.

*Stk. 4.* Ásetingarnar í stk. 1-3 fevna ikki um at gera persónstalið alment kent. Til tað krevst samtykki frá skrásetta.

*Viðgerð av persónupplýsingum í sambandi við beinleiðis marknaðarføring*

**§ 17.** Fyritøkur kunnu ikki, uttan at samtykki er fingið frá skrásetta, geva víðari til aðrar fyritøkur ella vegna aðrar fyritøkur brúka persónupplýsingar um skrásettta sum lið í beinleiðis marknaðarføring. § 6 í løgtingslóg um marknaðarføring er galdandi, tá samtykki skal fáast til vega.
*Stk. 2.* Víðarigeving og nýtsla av persónupplýsingum sbrt. stk. 1 er loyvd uttan samtykki, um talan er um almennar kundaupplýsingar, sum eru grundarlag undir flokking í kundabólkar, og um treytin fyri viðgerð av persónupplýsingum í § 8, stk. 1, nr. 6 er lokin.
*Stk. 3.* Viðkvæmar persónupplýsingar, sbrt. § 11, stk. 1 kunnu ikki víðarigevast ella nýtast eftir stk. 2.

*Viðgerð av persónupplýsingum til søgulig, hagfrøðilig og vísindalig endamál*

**§ 18.** Viðkvæmar persónupplýsingar, sbrt. § 11, stk. 1, kunnu viðgerast, um viðgerðin er neyðug til søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál, og bágin, tann einstaki hevur av viðgerðini, má metast at skula víkja fyri tí munandi samfelagsliga týdningi, viðgerðin hevur.
*Stk. 2.* Tær í stk. 1 nevndu persónupplýsingar kunnu ikki seinni viðgerast til annað endamál. Somuleiðis er við øðrum persónupplýsingum, sum bert verða viðgjørdar til søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál.
*Stk. 3.* Víðarigeving av persónupplýsingum, fevndar av stk. 1 og 2, til triðjapersón, krevur loyvi frá Dátueftirlitinum frammanundan. Dátueftirlitið kann áseta treytir fyri víðarigevingini.

*Rættarkunningarskipanir*

**§ 19.** Viðkvæmar persónupplýsingar, sbrt. § 11, stk. 1, kunnu viðgerast í rættarkunningarskipanum, sum hava alstóran samfelagsligan týdning, um viðgerðin er neyðug fyri at røkja skipaninar.
*Stk. 2.* Tær í stk. 1 nevndu persónupplýsingar kunnu ikki seinni viðgerast til annað endamál. Somuleiðis er við øðrum persónupplýsingum, sum bert verða viðgjørdar til tess at røkja rættarkunningarskipanir.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um treytir fyri tær viðgerðir, sum eru nevndar í stk. 1. Sama er galdandi fyri tær persónupplýsingar, sum eru fevndar av § 8, og sum bert verða viðgjørdar í sambandi við røkt av rættarkunningarskipanum.

*Goymsla av upplýsingum*

**§ 20.** Persónupplýsingar fevndar av løgtingslógini kunnu flytast til goymslu í skjalasavni sbrt. løgtingslóg um skjalasøvn.

## Kapittul 4
## Rættindi hjá skrásetta

*Gjøgnumskygd kunning, fráboðanir og nærri reglur um útinnan av rættindunum hjá skrásetta*

**§ 21.** Dátuábyrgdarin skal tryggja, at allar upplýsingar um viðgerð av persónupplýsingum, sum verða latnar skrásetta eftir løgtingslógini, verða latnar á ein stuttorðaðan, gjøgnumskygdan, lætt skilligan og lætt atkomiligan hátt.
*Stk. 2.* Dátuábyrgdarin skal gera tað ómakaleyst hjá skrásetta at brúka rættindi í §§ 26-36 og kann ikki nokta umbøn frá skrásetta, uttan so at dátuábyrgdarin vísir á, at tað ikki ber til at eyðmerkja skrásetta, sbr. § 15, stk. 2.
*Stk. 3.* Dátuábyrgdarin skal uttan óneyðugt drál og í seinasta lagi 4 vikur eftir, at umbøn er móttikin, kunna skrásetta um øll tiltøk, sum verða sett í verk í sambandi við umbønina. Um serstøk viðurskifti so sum nøgd og torgreidni gera, at tað er ógjørligt at svara umbønini innan 4 vikur, kann tíðarskeiðið leingjast við 8 vikum. Dátuábyrgdarin skal tá í einum fyribilssvari innan 4 vikur eftir, at umbønin er móttikin, greiða frá orsøkini til seinkanina, og nær roknast kann við endaligum svari.
*Stk. 4.* Setur dátuábyrgdarin ikki tiltøk í verk í sambandi við umbøn frá skrásetta, skal dátuábyrgdarin alt fyri eitt og í seinasta lagi 4 vikur eftir, at umbønin er móttikin, kunna skrásetta um orsøkina og um møguleikan at kæra til Dátueftirlitið.
*Stk. 5.* Upplýsingar, sum verða latnar skrásetta sbrt. §§ 23 og 24 og fráboðanir o.a., sum verða settar í verk sbrt. §§ 26-36 og 48 eru ókeypis. Er umbøn frá skrásetta greitt ógrundað ella órímilig, kann dátuábyrgdarin annaðhvørt krevja eitt hóskandi gjald ella nokta at eftirlíka umbønini. Dátuábyrgdarin ber próvbyrðuna fyri, at umbønin er greitt ógrundað ella órímilig.

**§ 22.** Um umbøn frá skrásetta verður latin elektroniskt, skulu upplýsingarnar so vítt møguligt latast elektroniskt, uttan so at skrásetti biður um annað.
*Stk. 2.* Upplýsingar kunnu gevast munnliga, um skrásetti biður um tað, treytað av, at hann skjalprógvar sín samleika. Er rímiligur ivi um samleikan hjá persóni, sum setur fram umbøn, kann dátuábyrgdarin biðja um fleiri upplýsingar fyri at staðfesta samleikan hjá viðkomandi.

*Kunningarskylda tá persónupplýsingar verða savnaðar frá skrásetta*

**§ 23.** Tá persónupplýsingar verða savnaðar frá skrásetta, skal dátuábyrgdarin av sínum eintingum siga skrásetta frá:
1) navni og samskiftisupplýsingum dátuábyrgdarans og møguligum umboðsfólkum,

2) samskiftisupplýsingum hjá dátuverndarfólki,
3) endamálinum við viðgerðini, og heimildini fyri hesari,
4) heimilaðu áhugamálunum, sum dátuábyrgdarin ella ein triðipersónur fylgir, um viðgerðin er grundað á § 8, stk. 1, nr. 6,
5) móttakarum ella bólkum av móttakarum av persónupplýsingunum, og
6) at dátuábyrgdarin ætlar at flyta persónupplýsingarnar til eitt útland, eitt triðjaland ella ein millumtjóðafelagsskap, og um landsstýrismaðurin hevur tikið avgerð um nøktandi verndarstøði. Er talan um flutning sbrt. §§ 61-64 skal dátuábyrgdarin vísa á grundarlagið fyri flutninginum.

*Stk. 2.* Um tað er neyðugt fyri at tryggja skrásetta eina rímiliga og gjøgnumskygda viðgerð skal dátuábyrgdarin eisini siga skrásetta frá:
1) tíðarskeiðnum persónupplýsingarnar verða goymdar ella, um hetta ikki er gjørligt, teimum fortreytum, sum nýttar verða at áseta hetta tíðarskeið,
2) rættindum í kapitli 4,
3) rættinum at taka samtykki aftur, um viðgerðin er grundað á samtykki,
4) rættinum at kæra til Dátueftirlitið,
5) um skrásetti hevur upplýsingarskyldu sbrt. lóg ella avtalu, ella um hetta er krav, sum skal vera lokið fyri at innganga avtalu, og um møguligar avleiðingar um upplýsingar ikki verða givnar, og
6) at automatiskar avgerðir verða tiknar, og í minsta lagi væntaðu avleiðingunum fyri skrásetta.

*Stk. 3.* Ætlar dátuábyrgdarin seinni at viðgera persónupplýsingarnar til annað endamál enn tað, tær eru savnaðar til, letur dátuábyrgdarin skrásetta upplýsingar um hetta og aðrar viðkomandi upplýsingar, sbr. stk. 2, áðrenn seinna viðgerðin fer fram.

*Stk. 4.* Stk. 1-3 eru ikki galdandi, um tann skrásetti frammanundan kennir hesar upplýsingar.

*Kunningarskylda tá persónupplýsingar verða savnaðar frá øðrum enn skrásetta*

**§ 24.** Tá persónupplýsingarnar verða savnaðar frá øðrum enn skrásetta sjálvum, skal dátuábyrgdarin av sínum eintingum siga skrásetta frá:
1) navni og samskiftisupplýsingum dátuábyrgdarans og møguligum umboðsfólkum,
2) samskiftisupplýsingum hjá dátuverndarfólki,
3) endamálinum við viðgerðini og heimildini fyri hesari,
4) sløgum av persónupplýsingum,
5) móttakarum ella bólkum av móttakarum av persónupplýsingunum, og
6) um dátuábyrgdarin ætlar at flyta persónupplýsingarnar til eitt útland, eitt triðjaland ella ein millumtjóðafelagsskap, og um landsstýrismaðurin hevur tikið avgerð um nøktandi verndarstøði. Er talan er um flutning sbrt. §§ 61-64 skal dátuábyrgdarin vísa á grundarlagið fyri flutninginum.

*Stk. 2.* Um tað er neyðugt fyri at tryggja skrásetta eina rímiliga og gjøgnumskygda viðgerð, skal dátuábyrgdarin eisini siga skrásetta frá:
1) tíðarskeiðnum persónupplýsingarnar verða goymdar ella, um hetta ikki er gjørligt, teimum fortreytum, sum nýttar verða at áseta hetta tíðarskeið,
2) heimilaðu áhugamálunum, sum dátuábyrgdarin ella ein triðipersónur fylgir, um viðgerðin er grundað á § 8, stk. 1, nr. 6,
3) rættindum í kapitli 4,
4) rættinum at taka samtykki aftur, um viðgerðin er grundað á samtykki,
5) rættinum at kæra til Dátueftirlitið,
6) hvaðani persónupplýsingarnar stava, og

7) at automatiskar avgerðir verða tiknar, og í minsta lagi væntaðu avleiðingunum fyri skrásetta.

*Stk. 3.* Ætlar dátuábyrgdarin seinni at viðgera persónupplýsingarnar til annað endamál enn tað, tær eru savnaðar til, letur dátuábyrgdarin skrásetta upplýsingar um hetta og aðrar viðkomandi upplýsingar, sbr. stk. 2, áðrenn seinna viðgerðin fer fram.

**§ 25.** Dátuábyrgdarin skal geva skrásetta upplýsingarnar í § 24, stk. 1 og 2:

1) innan eina hóskandi freist eftir, at persónupplýsingarnar eru savnaðar, tó í seinasta lagi áðrenn 4 vikur eru gingnar,
2) í seinasta lagi fyrstu ferð samskift verður við skrásetta, ella
3) í seinasta lagi fyrstu ferð, persónupplýsingarnar verða givnar víðari.

*Stk. 2.* Kunningarskyldan í § 24 er ikki galdandi:

1) um tann skrásetti longu kennir upplýsingarnar,
2) um tað er ógjørligt ella órímiliga torført at halda skylduna,
3) um tað er ómøguligt ella í sera stóran mun vil forða fyri, at endamálið við viðgerðini verður rokkið,
4) um savnan og víðarigeving er heimilað í lóggávu, sum dátuábyrgdarin er fevndur av, ella
5) um persónupplýsingarnar skulu verða verandi í trúnaði sbrt. lógarásettari tagnarskyldu.

*Stk. 3.* Í teimum førum, sum eru nevnd í stk. 2, nr. 2 og 3 skal dátuábyrgdarin seta hóskandi tiltøk í verk fyri at verja rættindini hjá skrásetta, her undir við at gera upplýsingarnar alment atkomuligar.

*Innlitsrætturin hjá skrásetta*

**§ 26.** Krevur skrásetti innlit, skal dátuábyrgdarin upplýsa um persónupplýsingar verða viðgjørdar og geva skrásetta atgongd til persónupplýsingarnar. Dátuábyrgdarin skal eisini geva skrásetta upplýsingar um:

1) endamálið við viðgerðini,
2) sløg av persónupplýsingum,
3) móttakarar ella bólkar av móttakarum, sum persónupplýsingarnar eru ella verða givnar víðari til, serliga móttakarar í útlondum, í triðjalondum ella millumtjóðafelagsskapum,
4) hvussu leingi persónupplýsingarnar verða goymdar ella, um hetta ikki er møguligt, tær fortreytir, sum nýttar verða at áseta hetta tíðarskeið,
5) rættin at biðja dátuábyrgdaran um rætting í ella striking av persónupplýsingum, viðgerðaravmarking ella at mótmæla viðgerðini,
6) rættinum at kæra til Dátueftirlitið,
7) tøkar upplýsingar um, hvaðani persónupplýsingarnar stava, um tær ikki eru savnaðar hjá skrásetta, og
8) at automatiskar avgerðir verða tiknar, og í minsta lagi væntaðu avleiðingarnar fyri skrásetta.

*Stk. 2.* Verða persónupplýsingarnar fluttar til eitt triðjaland ella ein millumtjóðafelagsskap sbrt. §§ 61-64 skal dátuábyrgdarin vísa á grundarlagið fyri flutninginum.

*Stk. 3.* Dátuábyrgdarin útflýggjar eitt avrit av persónupplýsingunum, sum verða viðgjørdar. Biður tann skrásetti um fleiri avrit, kann dátuábyrgdarin krevja eitt hóskandi gjald.

*Rætturin til rætting*

**§ 27.** Dátuábyrgdarin skal av sínum eintingum ella eftir áheitan frá skrásetta uttan óneyðugt drál rætta persónupplýsingar, sum eru rangar.

*Stk. 2.* Tann skrásetti hevur rætt til at krevja ófullfíggjaðar persónupplýsingar fullfíggjaðar, t.d. við at leggja fram eina ískoytisváttan.

*Rætturin til striking*

**§ 28.** Dátuábyrgdarin skal av sínum eintingum ella eftir áheitan frá skrásetta uttan óneyðugt drál strika persónupplýsingar tá:
1) persónupplýsingarnar ikki longur eru neyðugar at náa tí endamáli, sum tær vórðu savnaðar ella viðgjørdar til,
2) skrásetti tekur samtykkið aftur, sum er heimild fyri viðgerðini, og eingin onnur heimild er fyri viðgerðini,
3) skrásetti mótmælir viðgerðini, og treytirnar í §§ 32 ella 33 eru loknar,
4) persónupplýsingarnar eru viðgjørdar ólógliga,
5) persónupplýsingarnar skulu strikast fyri at halda eina rættarskyldu, sum áliggur dátuábyrgdaranum, ella
6) persónupplýsingarnar eru savnaðar í sambandi við útboð av kunningarsamfelagstænastum, sbr. § 10, stk. 1.

*Stk. 2.* Hevur dátuábyrgdarin almannakunngjørt persónupplýsingar, sum sbrt. stk. 1 skulu strikast, skal dátuábyrgdarin seta hóskandi tiltøk í verk fyri at boða dátuábyrgdarum, sum viðgera persónupplýsingarnar, frá, at skrásetti hevur biðið hesar dátuábyrgdarar um at strika allar leinkjur til, avrit ella endurgevingar av viðkomandi persónupplýsingum.

*Stk. 3.* Stk. 1 og 2 eru ikki galdandi um viðgerðin er neyðug:
1) fyri at brúka rættin til framsøgufrælsi og kunningarfrælsi,
2) fyri at halda eina rættarliga skyldu, sum áliggur dátuábyrgdaranum, fyri at røkja samfelagsáhugamál ella uppgávur, sum liggja undir almennari myndugleikaútinnan, sum dátuábyrgdaranum er áløgd,
3) til savnsendamál, søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál í tann mun striking sannlíkt vil gera tað ómøguligt ella í sera stóran mun vil forða fyri at endamálini við viðgerðini verða rokkin, ella
4) fyri at rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast.

*Rætturin til viðgerðaravmarking*

**§ 29.** Krevur skrásetti tað, skal dátuábyrgdarin seta avmarkingar á viðgerð í hesum førum:
1) ímeðan dátuábyrgdarin kannar, um persónupplýsingarnar eru rættar, tá skrásetti hevur mótmælt rættleikanum,
2) viðgerðin er ólóglig, og skrásetti setir seg upp ímóti, at persónupplýsingarnar verða strikaðar og í staðin biður um, at nýtslan av teimum verður avmarkað,
3) dátuábyrgdarin hevur ikki longur tørv á persónupplýsingunum til viðgerð, men tær eru neyðugar fyri, at rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast, ella
4) ímeðan dátuábyrgdarin kannar, hvørt treytirnar í § 32 eru loknar, tá skrásetti hevur mótmælt viðgerðini.

*Stk. 2.* Er viðgerðin avmarkað sbrt. stk. 1, kunnu persónupplýsingarnar bert viðgerast:
1) um skrásetti samtykkir,
2) fyri at eitt rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast,
3) fyri at verja ein annan likamligan ella løgfrøðiligan persón, ella
4) fyri at verja týdningarmikil samfelagsáhugamál.

*Stk. 3.* Er viðgerðaravmarking framd sbrt. stk. 1, skal dátuábyrgdarin kunna skrásetta, áðrenn viðgerðaravmarkingin verður tikin av.

*Fráboðanarskylda dátuábyrgdarans*

**§ 30.** Dátuábyrgdarin skal geva øllum móttakarum, sum persónupplýsingar eru víðarigivnar til, boð um allar rættingar, strikingar ella viðgerðaravmarkingar, sum eru gjørdar sbrt. § 27, § 28, stk. 1 og § 29, uttan so at hetta vísir seg at vera ógjørligt ella órímiliga torført. Dátuábyrgdarin skal kunna skrásetta um hesar móttakarar, um skrásetti biður um tað.

*Rætturin til dátuflutning*

**§ 31.** Skrásetti kann krevja tær persónupplýsingar frá dátuábyrgdara, sum

skrásetti sjálvur hevur latið, og kann flyta hesar upplýsingar til ein annan dátuábyrgdara, tá:
1) viðgerðin er grundað á samtykki ella avtalu, og
2) viðgerðin er automatisk.

*Stk. 2.* Persónupplýsingarnar, sum skrásetti móttekur sbrt. stk. 1, skulu verða í einum skipaðum, vanliga nýttum og teldutøkum sniði.

*Stk. 3.* Um tað er tøkniliga gjørligt, kann skrásetti krevja, at persónupplýsingarnar, sbr. stk. 1, verða fluttar beinleiðis frá einum dátuábyrgdara til ein annan.

*Rætturin til mótmæli*

**§ 32.** Av orsøkum, sum viðvíkja serligu støðuni hjá viðkomandi, kann skrásetti mótmæla viðgerð av sínum persónupplýsingum, sum er grundað á § 8, stk. 1, nr. 5 ella 6.

*Stk. 2.* Dátuábyrgdarin hevur eftir mótmæli ikki loyvi at viðgera persónupplýsingarnar, uttan so at dátuábyrgdarin kann vísa á týðandi heimilaðar orsakir til viðgerðina, sum ganga fram um áhugamálini hjá skrásetta, ella um viðgerðin er neyðug fyri, at rættarkrøv kunnu sannast, gerast galdandi ella verjast.

**§ 33.** Um persónupplýsingar verða viðgjørdar til beinleiðis marknaðarføring, kann skrásetti til eina og hvørja tíð mótmæla viðgerðini.

*Stk. 2.* Um skrásetti mótmælir viðgerð til beinleiðis marknaðarføring, hevur dátuábyrgdarin ikki longur loyvi at viðgera persónupplýsingarnar til hetta endamál.

**§ 34.** Fyrstu ferð samskift verður við skrásetta skal viðkomandi nágreiniliga verða kunnaður um rættin í §§ 32 og 33. Henda kunning skal vera greið og sundurskild frá øllum øðrum upplýsingum.

*Automatiskar individuellar avgerðir, undir hesum profilering*

**§ 35.** Skrásetti eigur ikki at vera fyri avgerð, sum einans er grundað á automatiska viðgerð, undir hesum profilering, og sum hevur rættarvirknað ella á líknandi hátt týðandi ávirkar viðkomandi.

*Stk. 2.* Stk. 1 er ikki galdandi, um avgerðin:
1) er neyðug fyri at gera ella halda eina avtalu millum tann skrásetta og ein dátuábyrgdara,
2) er heimilað í lóggávu, sum dátuábyrgdarin er fevndur av, ella
3) er grundað á nágreiniligt samtykki frá skrásetta.

*Stk. 3.* Í førum, nevnd í stk. 2, nr. 1 og 3, skal dátuábyrgdarin seta hóskandi tiltøk í verk fyri at verja rættindini hjá skrásetta.

*Stk. 4.* Avgerðir, sbrt. stk. 2, kunnu ikki grundast á viðkvæmar persónupplýsingar sbrt. § 11, stk. 1 uttan so, at § 12, stk. 1, nr. 1 ella § 12, stk. 2 eru galdandi, og hóskandi tiltøk eru sett í verk fyri at verja rættindini hjá skrásetta.

*Avmarkingar í rættindunum hjá skrásetta*

**§ 36.** Ásetingarnar í § 23, stk. 1-3 og § 24 um kunningarskyldu, § 26 um innlit og § 48 um fráboðan til skrásetta um brot fevna ikki um persónupplýsingar, sum:
1) um tær koma í ljósmála, kunnu skaða landsins trygd, verju ella samskifti við útlendskar tjóðir ella felagsskapir,
2) eiga at dyljast við atliti at fyribyrging, eftirkanning, avdúking og rættarsøkjan av revsiverdum gerðum ella fremjan av revsirættarligum tiltøkum, her undir verjan ímóti og fyribyrgjan av hóttanum ímóti tí almennu trygdini,
3) ikki er ráðiligt, at skrásetti fær kunnleika um, umhugsandi heilsuna hjá skrásetta ella tøtt persónsambond við skrásetta,
4) eru fevndar av tagnarskyldu ásett í lóggávu, ella
5) áhugin hjá skrásetta at fáa kunning um eigur at víkja fyri, orsakað av altavgerandi almennum ella privatum áhugamálum.

*Stk. 2.* Upplýsingar, sum verða viðgjørdar av almennu fyrisitingini sum liður í umsitingarligari málsviðgerð, kunnu verða undantiknar rættinum til innlit í § 26 í sama mun sum ásett í §§ 7-11 og 14 í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina.
*Stk. 3.* Ásetingarnar í §§ 26, 27, 29 og 32 eru ikki galdandi, um upplýsingarnar einans verða viðgjørdar til søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál, og um persónupplýsingarnar bert verða goymdar sum persónupplýsingar so leingi, sum neyðugt er, við atliti at endamálinum við viðgerðini.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um onnur undantøk frá reglunum um innlit og kunningarskyldu og um treytir annars í sambandi við, at innlit verður givið.

## Kapittul 5
## Dátuábyrgdari og dátuviðgeri

*Ábyrgd dátuábyrgdarans*

**§ 37.** Dátuábyrgdarin skal seta hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk í verk fyri at tryggja og kunna vísa á, at viðgerð er í samsvari við løgtingslógina. Dátuábyrgdarin skal í hesum sambandi leggja upp fyri slagi, vavi, samanhangi og endamáli við viðgerðini umframt váðum fyri rættindini hjá skrásetta.

*Dátuvernd ígjøgnum sniðgeving og dátuvernd ígjøgnum standardstillingar*

**§ 38.** Dátuábyrgdarin skal seta hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk í verk, bæði tá tólini til viðgerð verða løgd føst, og tá viðgerðin fer fram, sum eru sniðgivin á ein slíkan hátt, at viðgerðin lýkur krøvini í løgtingslógini.
*Stk. 2.* Dátuábyrgdarin skal seta hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk í verk fyri ígjøgnum standardstillingar at tryggja, at einans persónupplýsingar, sum eru neyðugar til endamálið, verða viðgjørdar.

*Felags dátuábyrgdarar*

**§ 39.** Um tveir ella fleiri dátuábyrgdarar í felag skipa endamálini við og hjálpitólini til viðgerð, eru teir felags dátuábyrgdarar. Dátuábyrgdararnir skipa á gjøgnumskygdan hátt sínámillum ábyrgd at halda skyldurnar sbrt. hesi løgtingslóg.

*Umboð fyri dátuábyrgdarar og dátuviðgerar, sum ikki eru staðsettir í Føroyum*

**§ 40.** Dátuábyrgdari ella dátuviðgeri fevndur av § 5, stk. 2 skal skrivliga tilnevna eitt umboð í Føroyum.
*Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1 er ikki galdandi fyri:
1) viðgerð, sum er viðhvørt, sum ikki í stórum fevnir um viðkvæmar persónupplýsingar, sbrt. § 11, stk. 1, og sum sannlíkt ikki hevur við sær ein váða fyri rættindi hjá einstaklingum, ella
2) almennar myndugleikar, stovnar og eindir.

*Stk. 3.* Umboðið kann móttaka fráboðanir afturat ella vegna dátuábyrgdaran ella dátuviðgeran í sambandi við allar spurningar um viðgerð av persónupplýsingum.

*Dátuviðgeri*

**§ 41.** Dátuábyrgdarin skal einans nýta dátuviðgerar, sum veita fullgóða trygd fyri, at hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk verða sett í verk, sum tryggja, at viðgerðin lýkur krøvini í løgtingslógini.
*Stk. 2.* Viðgerðin hjá einum dátuviðgera skal vera grundað á avtalu, sum er bindandi, og sum m.a. ásetir evnið fyri viðgerðini, endamál, eins og skyldur og rættindi hjá dátuábyrgdaranum. Avtalan ásetir harafturat serliga, at dátuviðgerin:
1) einans viðger persónupplýsingar eftir skjalfestum boðum frá dátuábyrgdaranum, uttan so at hetta er ásett í lóggávu, sum dátuviðgerin er fevndur av,

2) tryggjar, at teir persónar, sum hava heimild til at viðgera persónupplýsingar, hava tagnarskyldu,
3) lýkur treytirnar í § 42 fyri at brúka annan dátuviðgera,
4) fremur tiltøk, sum eru kravd sbrt. § 46,
5) stuðlar dátuábyrgdaranum við at svara umbønum sbrt. kapittul 4,
6) hjálpir dátuábyrgdaranum at tryggja, at skyldurnar sbrt. §§ 46-52 verða hildnar,
7) strikar ella letur aftur allar persónupplýsingar eftir, at viðgerðin er liðug, og strikar verandi avrit, um ikki er álagt í lóggávu at goyma persónupplýsingarnar,
8) letur dátuábyrgdaranum allar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at vísa á, at krøvini í hesi grein verða hildin, og
9) fær í lag og hjálpir til við skoðan.

*Stk. 3.* Um dátuviðgerin metir, at eini kravboð frá dátuábyrgdaranum eru í ósamsvari við galdandi lóggávu, boðar dátuviðgerin uttan drál dátuábyrgdaranum frá hesum.

*Stk. 4.* Um ein dátuviðgeri brýtur hesa løgtingslóg við at gera av, til hvørji endamál og við hvørjum hjálpitólum persónupplýsingar kunnu viðgerast, verður dátuviðgerin mettur at vera dátuábyrgdari í mun til hesa viðgerð, uttan at hetta ávirkar §§ 77-79.

**§ 42.** Ein dátuviðgeri hevur ikki loyvi at nýta annan dátuviðgera uttan ítøkiligt ella alment loyvi frá dátuábyrgdaranum. Hevur dátuviðgerin alment loyvi, skal hann boða dátuábyrgdaranum frá ætlaðari broyting av dátuviðgera, so at dátuábyrgdarin kann mótmæla.

*Stk. 2.* Um ein dátuviðgeri nýtir ein annan dátuviðgera í sambandi við viðgerð fyri dátuábyrgdaran, skal hesin dátuviðgeri halda somu dátuverndarskyldur sum tær, sum eru í avtaluni millum dátuábyrgdaran og dátuviðgeran.

**§ 43.** Landsstýrismaðurin kann eftir ummæli frá Dátueftirlitinum áseta standardásetingar í teimum førum, sum eru nevnd í § 41, stk. 2 og § 42, stk. 2.

*Stk. 2.* Avtalan millum dátuábyrgdaran og dátuviðgeran kann heilt ella lutvíst verða grundað á tær standardásetingar, sum landsstýrismaðurin ásetur. Avtalan skal vera til taks skrivliga, her undir elektroniskt.

*Yvirlit yvir viðgerðir*

**§ 44.** Dátuábyrgdarar skulu gera yvirlit yvir allar viðgerðir undir teirra ábyrgd. Hesi yvirlit skulu fata um:
1) navn og samskiftisupplýsingar hjá dátuábyrgdaranum,
2) endamálið við viðgerðini,
3) eina lýsing av bólkum av skrásettum og sløgum av persónupplýsingum,
4) bólkar av móttakarum, her undir móttakarum í útlondum, triðjalondum ella millumtjóðafelagsskapum,
5) upplýsing um flutning av persónupplýsingum til eitt útland, eitt triðjaland ella ein millumtjóðafelagsskap,
6) ætlaðu tíðarfreistirnar fyri striking av ymisku sløgunum av upplýsingum, og
7) eina almenna lýsing trygdartiltøkunum, sum eru nevnd í § 46, stk. 1.

*Stk. 2.* Dátuviðgerar skulu gera yvirlit yvir øll sløg av viðgerðum, sum verða framd dátuábyrgdarans vegna. Hesi yvirlit skulu fata um:
1) navn og samskiftisupplýsingar hjá dátuviðgera og fyri hvønn dátuábyrgdara, persónupplýsingarnar verða viðgjørdar,
2) sløg av viðgerð av persónupplýsingum,
3) upplýsing um flutning av persónupplýsingum til eitt útland, eitt triðjaland ella ein millumtjóðafelagsskap, og
4) eina almenna lýsing av trygdartiltøkunum, sum eru nevnd í § 46, stk. 1.

*Stk. 3.* Yvirlitini í stk. 1 og 2 skulu vera skrivlig, her undir elektronisk, og skulu eftir umbøn latast Dátueftirlitinum.

*Stk. 4.* Stk. 1-3 eru eisini galdandi fyri umboð dátuábyrgdarans og dátuviðgerans.

**§ 45.** § 44 er ikki galdandi fyri fyritøkur, sum hava færri enn 250 starvsfólk. § 44 er hóast 1. pkt. galdandi um viðgerðin:
1) sannlíkt hevur við sær ein váða fyri rættindi hjá teimum skrásettu,
2) ikki bara er viðhvørt, ella
3) fevnir um viðkvæmar persónupplýsingar sbrt. § 11, stk. 1.

*Viðgerðartrygd*

**§ 46.** Dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu seta í verk hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, sum tryggja eitt trygdarstøði, sum hóskar til váðarnar, sum standast av viðgerðini. Dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu í hesum sambandi hava fyrilit fyri verandi tøkniliga støði, verksetanarkostnaði og slagi av viðgerð, vavi, samanhangi og endamáli, umframt sannlíku váðunum og álvarum fyri rættindi hjá einstaklingum. Hesi tiltøk kunnu fevna um:
1) dulnevning ella bronglan av persónupplýsingum,
2) at tryggja áhaldandi trúnað, integritet, atkomu og haldføri frá viðgerðarskipanum og viðgerðartænastum,
3) føri til rættstundis at fáa í rættlag atkomu og atgongd til persónupplýsingar eftir fysiskan ella tøkniligan tilburð, og
4) mannagongd til regluliga royndarkanning, meting og eftirmeting av virkisføri í sambandi við tøkniligu og bygnaðarligu tiltøkini, sum tryggja viðgerðartrygd.

*Stk. 2.* Í metingini av, um trygdarstøðið er hóskandi, skulu serlig atlit takast til teir váðar, sum standast av viðgerðini, herundir serliga møguleikanum fyri, at persónupplýsingar av tilvild ella ólógliga verða burturbeindar, burturmistar, broyttar ella minka í virði ella at óviðkomandi fáa kunnleika til persónupplýsingar, sum eru sendar, goymdar ella á annan hátt viðgjørdar, misbrúka tær ella annars ólógliga viðgera tær.
*Stk. 3.* Dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu taka stig til at tryggja, at ein og hvør, sum fremur arbeiði fyri dátuábyrgdaran ella dátuviðgeran, og sum fær innlit í persónupplýsingar, bert viðger hesar eftir boðum frá dátuábyrgdaranum, um ikki viðgerð er kravd sbrt. lóg.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann, í samráð við avvarðandi landsstýrismann, áseta nærri reglur um, at persónupplýsingar, sum verða viðgjørdar í ávísum kt-skipanum fyri almennu fyrisitingina, heilt ella lutvíst skulu goymast í Føroyum.

*Fráboðan til Dátueftirlitið um brot á persóndátutrygdina*

**§ 47.** Dátuábyrgdarin skal boða Dátueftirlitinum frá broti á persóndátutrygdina uttan óneyðugt drál og um gjørligt innan 72 tímar eftir, at hesin er vorðin kunnugur við brotið. Verður brotið ikki fráboðað innan 72 tímar skal grundgevast fyri hesum, tá fráboðanin verður givin.
*Stk. 2.* Stk. 1 er ikki galdandi um tað er ósannlíkt, at brotið á persóndátutrygdina hevur við sær ein váða fyri rættindi hjá einstaklingum.
*Stk. 3.* Eftir at vera vorðin kunnugur við brot á persóndátutrygdina skal dátuviðgerin uttan óneyðugt drál boða dátuábyrgdaranum frá brotinum.
*Stk. 4.* Fráboðanin í stk. 1 skal í minsta lagi:
1) lýsa slag av broti á persóndátutrygdina, her undir so vítt møguligt sløgini og umleið hvussu nógv skrásett hetta fevnir um og eisini sløgini og umleið hvussu nógvar skrásetingar av persónupplýsingum talan er um,
2) upplýsa navn og samskiftisupplýsingar hjá dátuverndarfólkinum ella øðrum sambindingarliði, har fleiri upplýsingar kunnu fáast til vega,
3) lýsa sannlíkar avleiðingar av brotinum, og

4) lýsa tey tiltøk, sum dátuábyrgdarin hevur sett í verk ella mælir til, fyri at handfara brotið.

*Stk. 5.* Er tað ikki gjørligt at lata upplýsingarnar í einum, kunnu upplýsingarnar latast stigvíst uttan óneyðugar eyka seinkingar.

*Stk. 6.* Dátuábyrgdarin skal skjalfesta øll brot á persóndátutrygdina. Dátueftirlitið kann nýta skjalfestingina at kanna, at henda grein er hildin.

*Fráboðan til skrásetta um brot á persóndátutrygdina*

**§ 48.** Tá brot á persóndátutrygdina eftir øllum at døma hevur við sær stóran váða fyri rættindi hjá einstaklingum, skal dátuábyrgdarin uttan óneyðugt drál boða skrásetta frá um brotið.

*Stk. 2.* Fráboðanin til skrásetta skal á einum greiðum og skilligum máli lýsa slag av broti og í minsta lagi innihalda upplýsingarnar í § 47, stk. 4, nr. 2-4.

*Stk. 3.* Ikki er neyðugt at boða skrásetta frá brotinum um ein av hesum treytum er lokin:

1) dátuábyrgdarin hevur sett í verk hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, og hesi tiltøk eru nýtt til tær persónupplýsingar, sum brotið fevnir um, serliga tiltøk, sum gera persónupplýsingarnar óskiljandi fyri tann, sum ikki hevur heimilaða atgongd til hesar,
2) dátuábyrgdarin hevur sett í verk eftirfylgjandi tiltøk, sum tryggja, at stóri váðin fyri rættindi hjá skrásetta, sbrt. stk. 1, sannlíkt ikki longur er til staðar, ella
3) tað krevur eitt ósamsvarandi arbeiði.

*Stk. 4.* Um dátuábyrgdarin ikki longu hevur boðað skrásetta frá um brotið, kann Dátueftirlitið eftir at hava mett um sannlíkindini fyri, at brotið hevur við sær ein stóran váða, krevja, at dátuábyrgdarin ger hetta, ella avgera, at ein av treytunum í stk. 3 er lokin.

*Avleiðingargreining um dátuvernd*

**§ 49.** Um eitt slag av viðgerð, serliga tá ið nýggj tøkni verður nýtt, við atliti at slagi, vavi, samanhangi og endamáli, sannlíkt hevur við sær stóran váða fyri rættindi hjá einstaklingum, skal dátuábyrgdarin undan viðgerðini gera eina greining av, hvørjar avleiðingar ætlaða viðgerðin hevur fyri dátuverndina. Ein avleiðingargreining kann fevna um fleiri sløg av viðgerðum, sum hava líknandi stóran váða við sær.

*Stk. 2.* Ein avleiðingargreining um dátuvernd er m.a. kravd í sambandi við:

1) eina skipaða og víðfevnda meting av persónligum viðurskiftum um einstaklingar, sum er grundað á automatiska viðgerð, og sum er grundarlag fyri avgerðum, sum hava rættarvirknað fyri einstaklingin ella á samsvarandi hátt munandi ávirka viðkomandi,
2) viðgerð í stórum av viðkvæmum persónupplýsingum, sbrt. § 11, stk. 1, ella
3) umfatandi og skipaða yvirvøku av alment atkomiligum øki.

*Stk. 3.* Dátueftirlitið skal gera og almannakunngera ein lista yvir sløg av viðgerðum, tá avleiðingargreining um dátuvernd er neyðug.

*Stk. 4.* Dátueftirlitið kann eisini gera og almannakunngera ein lista yvir sløg av viðgerðum, tá avleiðingargreining um dátuvernd ikki er neyðug.

**§ 50.** Avleiðingargreiningin, sbrt. § 49, skal í minsta lagi fevna um:

1) eina skipaða lýsing av ætlaðu viðgerðini og endamálinum við viðgerðini, her undir heimilaðu áhugamálunum, sum verða fylgd av dátuábyrgdaranum,
2) eina meting av, um viðgerðin eru neyðug og stendur í rímiligum lutfalli við endamálið,
3) eina meting av váðunum fyri rættindi hjá teimum skrásettu, og
4) tey tiltøk, sum eru ætlaði fyri at ganga váðunum á møti, her undir trygdir, trygdarfyriskipanir og mekanismur,

sum kunnu tryggja dátuvernd og vísa á, at henda løgtingslóg verður hildin.

*Stk. 2.* Er broyting í váðanum, sum stendst av viðgerðini, skal dátuábyrgdarin gjøgnumganga viðgerðina av nýggjum fyri at meta um, hvørt viðgerðin er í samsvari við avleiðingargreiningina.

**§ 51.** Er ein avleiðingargreining um dátuvernd gjørd í sambandi við, at ein lóg, sum viðvíkur viðgerð av persónupplýsingum, er sett í gildi, eru §§ 49 og 50 ikki galdandi.

*Ummæli frá Dátueftirlitinum áðrenn viðgerð*

**§ 52.** Vísir ein avleiðingargreining um dátuvernd, at viðgerðin fer at hava við sær stóran váða, sum dátuábyrgdarin ikki fær avmarkað, skal dátuábyrgdarin biðja Dátueftirlitið um ummæli, áðrenn viðgerðin verður sett í verk.

*Stk. 2.* Um Dátueftirlitið metir, at ætlaða viðgerðin er brot á løgtingslógina, skal Dátueftirlitið innan átta vikur, geva dátuábyrgdaranum ella dátuviðgeranum skrivliga ráðgeving og kann brúka sínar heimildir sbrt. løgtingslógini. Tíðarskeiðið kann leingjast við seks vikum, um ætlaða viðgerðin er torgreidd. Dátueftirlitið skal tá í einum fyribilssvari innan fýra vikur eftir, at umbønin er móttikin, greiða frá orsøkini til seinkanina.

*Stk. 3.* Dátuábyrgdarin skal lata Dátueftirlitinum hesar upplýsingar í sambandi við umbøn um ummæli, sbrt. stk. 1:

1) ábyrgdarøkini hjá ávikavist dátuábyrgdarum, felags dátuábyrgdarum og dátuviðgerum, sum er uppi í viðgerðini,
2) endamálið við ætlaðu viðgerðini og hvørji hjálpitól skulu nýtast,
3) tiltøk og trygdir at verja rættindi hjá teimum skrásettu í mun til hesa løgtingslóg,
4) samskiftisupplýsingar hjá dátuverndarfólkinum,
5) avleiðingargreiningina um dátuvernd, og
6) aðrar upplýsingar, sum Dátueftirlitið biður um.

*Val av dátuverndarfólki*

**§ 53.** Í hesum førum skulu dátuábyrgdarin og dátuviðgerin tilnevna eitt dátuverndarfólk:

1) tá dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin er ein almennur myndugleiki,
2) tá kjarnuvirksemi dátuábyrgdarans ella dátuviðgerans er viðgerð, sum sbrt. sínum eyðkenni, vavi ella endamáli krevur umfatandi regluliga og skipaða yvirvøku av skrásettum persónum, ella
3) tá kjarnuvirksemi dátuábyrgdarans ella dátuviðgerans er umfatandi viðgerð av viðkvæmum persónupplýsingum, sbrt. § 11, stk. 1.

*Stk. 2.* Eitt samtak kann velja eitt felags dátuverndarfólk.

*Stk. 3.* Almennir myndugleikar kunnu í samsvari við bygnað og stødd velja eitt felags dátuverndarfólk.

**§ 54.** Dátuverndarfólkið skal tilnevnast grundað á fakligan førleika, serliga serkunnleika í dátuverndarrætti og dátuverndarsiðvenju umframt førleika at útinna tær uppgávur, sum eru ásettar í § 58.

*Stk. 2.* Dátuverndarfólkið kann antin vera starvsfólk hjá dátuábyrgdaranum ella dátuviðgeranum ella útinna uppgávurnar sbrt. einum tænastuveitingarsáttmála.

*Stk. 3.* Dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin skal almannakunngera samskiftisupplýsingarnar hjá dátuverndarfólkinum og geva Dátueftirlitinum boð.

*Starvið hjá dátuverndarfólkinum*

**§ 55.** Dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu tryggja, at dátuverndarfólkið rættstundis verður tikið við upp á ráð í øllum spurningum um vernd av persónupplýsingum.

*Stk. 2.* Dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu stuðla dátuverndarfólkinum, í tann

mun tað er neyðugt, fyri at hesin kann útinna uppgávurnar sbrt. § 58 og varðveita sín sakkunnleika, umframt at veita atgongd til persónupplýsingar og viðgerðir.
*Stk. 3.* Dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu tryggja, at dátuverndarfólkið ikki fær kravboð um, hvussu starvið skal røkjast. Dátuverndarfólkið kann ikki sigast upp ella aðramáta verða fyri agatiltøkum vegna uppgávur sínar sum dátuverndarfólk.
*Stk. 4.* Dátuverndarfólkið kann hava aðrar uppgávur og skyldur. Dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin tryggja, at slíkar uppgávur og skyldur ikki hava við sær áhugamálsstríð.

**§ 56.** Dátuverndarfólkið skal geva frágreiðing beinleiðis til ovasta leiðslustig.
*Stk. 2.* Skrásett kunnu seta seg í samband við dátuverndarfólkið um allar spurningar um viðgerð av teirra persónupplýsingum og um útinnanina av rættindum teirra sbrt. hesi løgtingslóg.

**§ 57.** Dátuverndarfólk, tilnevnd sbrt. § 53, stk. 1, nr. 2 og 3, hava ikki loyvi óheimilað at geva víðari ella brúka upplýsingar, sum er komnar til teirra kunnleika sum dátuverndarfólk.

*Uppgávur hjá dátuverndarfólki*

**§ 58.** Dátuverndarfólkið skal í minsta lagi hava hesar uppgávur:
1) kunna og ráðgeva dátuábyrgdaran, dátuviðgeran og starvsfólk, sum viðgera persónupplýsingar um teirra skyldur sbrt. løgtingslógini,
2) halda eyga við, at løgtingslógin, aðrar reglur o.a. um dátuvernd verða hildnar,
3) ráðgeva, tá ið biðið verður um tað, um avleiðingargreiningina um dátuvernd og at halda eyga við, at hon verður gjørd í samsvari við reglurnar,
4) samstarva við Dátueftirlitið, og
5) virka sum samskiftisstað hjá Dátueftirlitinum í spurningum um viðgerð av persónupplýsingum.

*Stk. 2.* Dátuverndarfólkið skal røkja sínar uppgávur við hóskandi fyriliti fyri tí váða, sum er knýttur at ítøkiligu uppgávuni.

## Kapittul 6
## Flutningur av persónupplýsingum til útlond, triðjalond ella millumtjóðafelagsskapir

*Flutningur av persónupplýsingum til útlond*

**§ 59.** Flutningur av persónupplýsingum til útlond krevur ikki serliga góðkenning ella loyvi frammanundan.

*Flutningur til triðjalond o.a., sum er grundaður á nøktandi verndarstøði*

**§ 60.** Persónupplýsingar kunnu flytast til eitt triðjaland ella ein millumtjóðfelagsskap uttan góðkenning ella loyvi frammanundan, um landsstýrismaðurin hevur ásett, at triðjalandið, eitt øki ella ein ella fleiri ávísir geirar í hesum triðjalandi ella millumtjóðfelagsskapurin, hevur eitt nøktandi verndarstøði.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir eftir ítøkiliga meting av verndarstøðinum, og eftir ummæli frá Dátueftirlitinum, at eitt triðjaland o.a. tryggja eitt nøktandi verndarstøði.
*Stk. 3.* Dátueftirlitið fylgir við um verndarstøðið í einum triðjalandi o.a., sbrt. stk. 2, er nøktandi. Metir Dátueftirlitið, at verndarstøði ikki longur er nøktandi, boðar Dátueftirlitið uttan drál landsstýrismanninum frá hesum.

*Flutningur til triðjalond o.a., sum er grundaður á fullgóða trygd*

**§ 61.** Um nøktandi verndarstøði ikki er ásett sbrt. § 60, kann ein dátuábyrgdari ella dátuviðgeri flyta persónupplýsingar til eitt triðjaland o.a., um viðkomandi veitir fullgóða trygd, og treytað av, at rættindi og virkin rættarstig fyri skrásett eru tøk.
*Stk. 2.* Fullgóð trygd, sbrt. stk. 1, kann veitast í:
1) einum bindandi skjali, sum kann handhevjast, millum almennar myndugleikar, ella

2) standardásetingum um dátuvernd, góðkendar av landsstýrismanninum eftir ummæli frá Dátueftirlitinum.

*Stk. 3.* Við fyrivarni fyri góðkenning frá Dátueftirlitinum kann fullgóð trygd sbrt. stk. 1 eisini veitast í sáttmálaásetingum ímillum dátuábyrgdaran ella dátuviðgeran og dátuábyrgdaran, dátuviðgeran ella móttakaran av persónupplýsingum í triðjalandinum o.a.

*Undantøk í serligum førum*

**§ 62.** Er ikki heimild fyri flutningi í §§ 60 ella 61 kann flutningur av persónupplýsingum til eitt triðjaland o.a. bert fara fram um ein av hesum treytum er lokin:

1) skrásetti hevur givið nágreiniligt samtykki til ætlaða flutningin eftir at vera kunnaður um møguliga váðan, sum flutningurin kann hava við sær fyri skrásetta, av tí at treytirnar í §§ 60 og 61 ikki eru loknar,
2) flutningurin er neyðugur fyri at halda eina avtalu ímillum skrásetta og dátuábyrgdaran ella fyri at fremja tey tiltøk, sum verða sett í verk eftir áheitan frá skrásetta, áðrenn avtalan verður inngingin,
3) flutningurin er neyðugur fyri at fáa í lag ella halda eina avtalu, sum skrásetta til fyrimuns verður inngingin ímillum dátuábyrgdaran og ein annan likamligan ella løgfrøðiligan persón,
4) flutningurin er neyðugur fyri týðandi samfelagsáhugamál,
5) flutningurin er neyðugur fyri, at rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast,
6) flutningurin er neyðugur fyri at verja altumráðandi áhugamál hjá skrásetta ella einum øðrum persóni í førum, tá skrásetti hvørki likamliga ella løgfrøðiliga fær givið samtykki, ella
7) flutningurin verður framdur frá eini skrá, sum sbrt. lóg er ætlað at kunna almenningin, og sum annaðhvørt er atkomulig hjá almenninginum ella hjá persónum, sum kunnu ávísa at hava ein heimilaðan áhuga í hesum, um treytirnar fyri almennari atkomu eru loknar í hvørjum einstøkum føri.

*Stk. 2.* Flutningur sbrt. stk. 1, nr. 7 kann ikki fevna um allar persónupplýsingar ella heilar bólkar av persónupplýsingum í eini skrá.

**§ 63.** Er ikki heimild fyri flutningi í §§ 60 ella 61, og eru treytirnar í § 62 ikki loknar, kann flutningur til eitt triðjaland o.a. bert fara fram um flutningurin:

1) ikki verður endurtikin,
2) bara snýr seg um eitt avmarkað tal av skrásettum,
3) er neyðugur í mun til týðandi heimilað áhugamál, sum dátuábyrgdarin fylgir, og áhugamálini ella rættindi hjá skrásetta ikki ganga fram um hesi áhugamál, og
4) dátuábyrgdarin hevur mett um allar umstøður í sambandi við flutningin og á hesum grundarlagi veitir fullgóða trygd fyri vernd av persónupplýsingum.

*Stk. 2.* Dátuábyrgdarin skal kunna Dátueftirlitið um flutning sbrt. stk. 1. Dátuábyrgdarin skal eisini kunna skrásetta um flutning sbrt. stk. 1, og um tey týðandi heimilaðu áhugamálini, sum verða fylgd.

**§ 64.** § 62, stk. 1, nr. 1-3 og § 63 eru ikki galdandi fyri almennar myndugleikar, tá ið teir røkja sínar uppgávur.

*Stk. 2.* Dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin skulu skjalfesta metingina og fullgóðu trygdina sbrt. § 63, stk. 1, nr. 4 í yvirlitunum nevnd í § 44.

*Forboð fyri flutningi av viðkvomum persónupplýsingum*

**§ 65.** Er avgerð um nøktandi verndarstøði sbrt. § 61 ikki tikin, kann Dátueftirlitið í serligum førum nokta, avmarka ella fyribils banna flutningi av viðkvomum persónupplýsingum sbrt. § 11, stk. 1 til eitt triðjaland o.a.

## Kapittul 7
## Dátueftirlitið

*Bygnaður*

**§ 66.** Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarmyndugleiki og fremur sítt virksemi í fullum óheftni.
*Stk. 2.* Dátueftirlitið er skipað við ráði og avgreiðsluskrivstovu og hevur eftirlit við allari viðgerð av persónupplýsingum, sum løgtingslógin fevnir um.
*Stk. 3.* Dagliga virksemið hjá Dátueftirlitinum verður røkt av avgreiðsluskrivstovuni undir leiðslu av einum stjóra.
*Stk. 4.* Dáturáðið ásetir egna starvsskipan og nærri reglur um arbeiðsbýtið millum Dáturáð og avgreiðsluskrivstovu.

**§ 67.** Landsstýrismaðurin setir eitt Dáturáð, sum er skipað við formanni, sum skal verða løgfrøðingur, umframt fýra øðrum limum. Tveir av limunum vera tilnevndir eftir tilmæli frá Kommunufelagnum og Føroya Arbeiðsgevarafelag.
*Stk. 2.* Tiltaksfólk verða tilnevnd fyri limirnar. Limir og tiltakslimir verða tilnevndir fyri 4 ár, og kunnu endurtilnevnast tvær ferðir. Tilnevningin av formanni, øðrum limum og tiltakslimum skal vera grundað á teirra fakligu førleikar.

*Uppgávur*

**§ 68.** Dátueftirlitið skal m.a.:
1) av sínum eintingum ella eftir klagu frá skrásetta ansa eftir, at viðgerð av persónupplýsingum bert fer fram í samsvari við løgtingslógina og tær reglur, sum eru ásettar sbrt. løgtingslógini,
2) styrkja almenna kunnleikan til dátuvernd,
3) ráðgeva Føroya landsstýri og øðrum stovnum o.a. um lóggávu og umsitingarlig tiltøk dátuvernd til frama,
4) styrkja kunnleikan hjá dátuábyrgdarum og dátuviðgerum um teirra skyldur sbrt. hesi løgtingslóg,
5) gera kanningar, har persónupplýsingar verða viðgjørdar,
6) fylgja við í og kunna um gongdina í viðgerðini av persónupplýsingum her á landi og uttanlands, og
7) gera eina ársfrágreiðing, sum skal almannakunngerast.

**§ 69.** Dátueftirlitið skal samstarva við aðrar eftirlitsmyndugleikar í Føroyum og uttanlands í tann mun, tað er neyðugt.

*Heimildir*

**§ 70.** Dátueftirlitið kann geva dátuábyrgdara ella dátuviðgera ávaring um, at ætlað viðgerð sannlíkt er í ósamsvar við løgtingslógina og kann geva dátuábyrgdara ella dátuviðgera átalu, um viðgerð hevur verið í ósamsvari við løgtingslógina.
*Stk. 2.* Dátueftirlitið kann krevja, at dátuábyrgdari ella dátuviðgeri steðgar viðgerð, og at viðkomandi rættar, strikar ella viðgerðaravmarkar ávísar upplýsingar, sum eru fevndar av tílíkari viðgerð.
*Stk. 3.* Dátueftirlitið kann geva dátuábyrgdara ella dátuviðgera kravboð um at fáa viðgerð o.a. í samsvar við løgtingslógina innan eina nærri ásetta freist.
*Stk. 4.* Dátueftirlitið kann geva dátuábyrgdara ella dátuviðgera kravboð um at fremja tøknilig og bygnaðarlig, herundir fysisk, trygdartiltøk, so at bert viðgerð fer fram, sum hevur heimild í løgtingslógini, og so at persónupplýsingar ikki ólógliga forkomast, missast ella skerjast, og at tær ikki koma óviðkomandi til kunnleika ella verða misnýttar.

**§ 71.** Dátueftirlitið kann krevja allar upplýsingar útflýggjaðar, sum eru av týdningi fyri virksemið hjá eftirlitinum.
*Stk. 2.* Ráðslimir og leiðandi starvsfólk í Dátueftirlitinum hava til eina og hvørja tíð uttan dómsúrskurð, við at vísa galdandi

samleikaprógv, atgongd til øll høli, haðani persónupplýsingar verða viðgjørdar og til høli, haðani atgongd er til tær persónupplýsingar, sum verða viðgjørdar. Dátueftirlitið hevur eisini atgongd til høli, har persónupplýsingar ella teknisk hjálparamboð verða goymd ella nýtt.

*Avgerðir hjá Dátueftirlitinum o.a.*

**§ 72.** Fyrisitingarligar avgerðir hjá Dátueftirlitinum sbrt. løgtingslógini eru endaligar innan fyrisitingina.

**§ 73.** Dátueftirlitið kann almannakunngera síni úttalilsi og avgerðir. Avgerðir, sum verða kunngjørdar, skulu vera navnleysar og gjørdar so ókenniligar sum gjørligt. § 36 er galdandi í mun til almannakunngeringina.

**§ 74.** Uppskot til løgtingslógir, kunngerðir, rundskriv o.tíl., sum hava ásetingar um viðgerð av persónupplýsingum, skulu sendast til ummælis hjá Dátueftirlitinum.

**§ 75.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at samskifti við Dátueftirlitið skal vera talgilt, her undir at samskiftast skal ígjøgnum ávísa kt-skipan, at ávíst talgilt fílasnið skal nýtast o.tíl.

## Kapittul 8
## Rættarráð, ábyrgd og revsing

*Rætturin at klaga*

**§ 76.** Skrásetti kann klaga til Dátueftirlitið um viðgerð av persónupplýsingum viðvíkjandi honum.

*Endurgjald*

**§ 77.** Dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin skal endurgjalda skaða, sum kemur av, at viðgerð fer fram ímóti ásetingum í løgtingslógini, uttan so at sannað verður, at skaðin ikki kundi verið forðaður við tí eftiransni og umhugsni, sum krevst í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum.

*Revsing*

**§ 78.** Um ikki hægri revsing er ásett eftir aðrari lóg, verður tann revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 mánaðir, sum:
1) ikki heldur skyldur dátuábyrgdarans ella dátuviðgerans í § 10, § 15, §§ 38-42, § 43, stk. 2, 2. pkt., § 44, §§ 46-50, § 52, stk. 1 og 3, § 53, § 55 ella § 58,
2) viðger persónupplýsingar ímóti § 7, stk. 1 og 2, § 8, § 9, stk. 1-2 og 4, § 11, § 12, stk. 1-2, §§ 13-14, §§ 16-17, § 18 ella § 19, stk. 1-2,
3) ikki heldur ásetingar um rættindini hjá skrásettum í § 9, stk. 3, §§ 21-22, § 23, stk. 1-3, § 24, § 25, stk. 1 ella §§ 26-27, § 28, stk. 1-2 ella §§ 29-35,
4) flytur persónupplýsingar til triðjalond o.a. ímóti §§ 60-63, § 64, stk. 2 ella § 65.
5) ikki gevur upplýsingar ella forðar atgongd sbrt. § 71,
6) ikki aktar treytir ella kravboð, sett av Dátueftirlitinum sbrt. § 12, stk. 2, § 18, stk. 3, § 19, stk. 3 ella § 70, stk. 1-4,
7) á annan hátt letur vera við at eftirlíka avgerðum frá Dátueftirlitinum sbrt. løgtingslógini ella setur til síðis treytir fyri einum loyvi sbrt. løgtingslógini.

*Stk. 2.* Tann sum brýtur § 57 verður revsaður við sekt, um ikki hægri revsing er ásett eftir aðrari lóg.
*Stk. 3.* Í reglum givnum við heimild í hesi løgtingslóg kann ásetast revsing við sekt.
*Stk. 4.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar, koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.
*Stk. 5.* Fyrningarfreistin fyri brot á hesa løgtingslóg, ella reglur givnar við heimild í hesi løgtingslóg, er 5 ár.

*Fyrisitingarlig sektaruppskot*

**§ 79.** Um mett verður, at brot á hesa løgtingslóg, sbrt. § 78, ella brot á reglur givnar við heimild í hesi løgtingslóg, ikki kemur undir strangari revsing enn sekt,

kann Dátueftirlitið við einum fyrisitingarligum sektaruppskoti boða frá, at málið kann avgerast uttan rættarmál, um tann, sum hevur framt brotið, játtar seg sekan í brotinum og váttar at gjalda sektina sbrt. sektaruppskotinum innan nærri ásetta freist.
*Stk. 2.* Reglurnar í rættargangslógini um innihald í ákæruritum og um, at skuldsetti ikki hevur skyldu til at úttala seg, verða at nýta samsvarandi.
*Stk. 3.* Verður fyrisitingarliga sektaruppskotið samtykt, fellur onnur revsirættarsókn burtur.

*Frádøming av vinnurætti*

**§ 80.** Tann, sum rekur ella fæst við rættarkunningarskipanir, sbrt. § 19, og privatir dátuviðgerar, sum goyma persónupplýsingar, kunnu við dómi fyri revsiverd viðurskifti frádømast rættin hesum viðvíkjandi, um nærliggjandi vandi er fyri misbrúki. § 79, stk. 3 og 4 í revsilógini eru galdandi.

## Kapittul 9
## Gildiskoma o.a.

**§ 81.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021, og samstundis fer løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum úr gildi.
*Stk. 2.* Loyvi, sum Dátueftirlitið hevur givið, sbrt. løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, eru hóast stk. 1 galdandi til 1. januar 2022.
*Stk. 3.* Dátuviðgeraravtalur, sbrt. § 31, stk. 2 í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, inngingnar, áðrenn henda løgtingslóg kemur í gildi, skulu í seinasta lagi 1. januar 2022 vera í samsvari við hesa løgtingslóg.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Galdandi løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum er frá 2001. Lógin er sostatt vorðin til í eini tíð, tá internetið ikki varð nýtt í eins stóran mun, sum í dag, og tá viðgerð og flutningur av upplýsingum ikki var eins útbreitt og í dag.

Løgtingslógin er m.a. grundað á eitt ES-direktiv, sum bleiv samtykt í 1995.

Økta altjóðagerðin, kunningarsamfelagið og ikki minst økta viðgerðin av persónupplýsingum á internetinum hevði við sær, at ES-nevndin í 2012 setti fram uppskot um ein dátuverndarpakka, sum skuldi tryggja persónupplýsingar á nøktandi hátt.

Dátuverndarpakkin hjá ES-nevndini var samansettur av eini fyriskipan, sum skuldi verða alment galdandi, og sum skuldi koma ístaðin fyri ES-direktivið frá 1995, og einum direktivi, sum skuldi verða galdandi fyri rættarhandhevjandi myndugleikar. Dátuverndarpakkin bleiv samtyktur í 2016 og fekk gildi í ES-londunum í 2018.

Fyriskipanin – á enskum General Data Protection Regulation (GDPR) – er beinleiðis galdandi í ES-londunum og er eisini sett í gildi í EBS-londunum, haruppií Norra.

Tann lóggáva, sum føroyska lógin frá 2001 er grundað á, er sostatt sett úr gildi, og í staðin er komin ein nýggj lóggáva, sum í størri mun tekur hædd fyri teimum avbjóðingum, sum eitt kunningarsamfelag við m.a. talgildum loysnum setur, tá tað kemur til vernd av persónupplýsingum.

Kunngingarsamfelagið og altjóðagerðin hava eisini við sær, at tað í størri mun er neyðugt, at persónupplýsingar verða fluttir um landamørk.

Føroyar blivu í 2010 av ES-nevndini mettar at vera eitt sokallað trygt triðjaland í mun til persónupplýsingar. Hetta hevur við sær, at persónupplýsingar úr ES frítt kunnu flytast til Føroyar. Í sambandi við, at ES hevur sett í gildi nýggja lóggávu, skulu tey lond, sum fyrr eru góðkend sum trygg triðjalond, metast av nýggjum, og verður hetta gjørt út frá tí trygdarstøði, sum tann nýggja lóggávan í ES gevur skrásetta.

Tað er umráðandi fyri Føroyar – bæði fyri privata og almenna geiran – at Føroyar framhaldandi verða góðkendar av ES-nevndini sum eitt trygt triðjaland, so at upplýsingar millum Føroyar og ES-lond frítt kunnu verða fluttar.

Fyri at tryggja, at verdarstøðið fyri skrásett er nóg gott og tíðarhóskandi, og fyri at tryggja, at Føroyar kunnu fylgja altjóðagerðini og verða góðkendar av ES-nevndini sum trygt triðjaland, verður uppskot sett fram um eina nýggja dátuverndarlóg.

#### *1.1.1. Søguliga gongdin á persónupplýsingarøkinum*

*Frá skrásetingarlóggávu til persónupplýsingarlóg árini 1984-2002*
Fyrsta lóggávan á persónupplýsingarøkinum í Føroyum kom í gildi í 1984. Talan var um tvær løgtingslógir. Løgtingslóg nr. 62 frá 5. juni 1984 um evnisskráir hjá almennum myndugleikum, sum kom í gildi 1. apríl 1984, og løgtingslóg nr. 107 frá 15. november 1984 um privatar skráir v.m., sum kom í gildi 1. oktober 1984.

Løgtingslógin um evnisskráir hjá almennum myndugleikum var galdandi fyri EDV-skráir, sum vóru førdar fyri almennu fyrisitingina undir heimastýrinum, og sum innihildu upplýsingar um fólk. Í lógini varð nágreinað, at við EDV-skráir var at skilja skráir ella onnur skipað evnisyvirlit, har ið elektronisk dataviðgerð varð nýtt.

Løgtingslógin um privatar skráir v.m. var galdandi fyri skrásetingar við upplýsingum um fólk, har elektronisk dataviðgerð varð nýtt og fyri miðvísa skráseting við upplýsingum um privat ella fíggjarlig viðurskifti hjá persónum, stovnum, feløgum ella virkjum, ella upplýsingar um persónlig viðurskifti, sum hóskandi kunnu krevjast ikki at vera atkomandi hjá almenningi.

Í báðum løgtingslógunum vóru upplýsingar um fólk at skilja, sum upplýsingar, sum kundu vísa til ávís fólk, sjálvt um hetta var treytað av kunnleika um persónstal, skrásetingarnummar ella tílíkar serligar sannanir.

Eftirlitið við, at løgtingslógirnar vórðu hildnar var lagt til Skrásetingareftirlitið, sum varð skipað við ráði og avgreiðsluskrivstovu. Ráðið í Skrásetingareftirlitinum, sum bleiv sett av Føroya landsstýri, varð skipað við formanni, sum skuldi vera løgfrøðingur, einum datakønum limi, einum limi við kunnleika til fyrisiting, tveimum limum umboðandi lønmóttakarafeløgini og tveimum limum umboðandi arbeiðsgevarafeløgini.

Tann 4. mai 2000 varð ein arbeiðsbólkur settur at endurskoða skrásetingarlóggávuna í Føroyum og gera uppskot til nýggja lóggávu á økinum. Orsøkin var m.a., at skrásetingarlógirnar vóru mettar ikki at vera tíðarhóskandi.

Tann 25. september 2000 læt arbeiðisbólkurin úr hondum sítt tilmæli og álit. Í álitinum var m.a. søgulig og løgfrøðilig lýsing av gongdini í Føroyum í mun til skrásetingarlóggávuna, lýsing av heimildum og virksemi hjá Skrásetingareftirlitinum og at enda var eisini uppskot til nýggja løgtingslóg á økinum.

Í álitinum er m.a. hetta at lesa um niðurstøðuna hjá arbeiðsbólkinum:

> "Niðurstøðan hjá bólkinum er, at galdandi lóggáva ikki virkar eftir ætlan. Lógirnar eru ótíðarhóskandi til eitt kunningarsamfelag, har kunning bæði um tann einstaka og um vinnuvirkir, stovnar v.m. er neyðug. Gongdin innan teldutøkni ger tað léttari at goyma og finna fram nærum allar tær upplysingar ein sóknast eftir. Vandi kann er tí misnýtslu í hesum sambandi. Lóggávan um persónsupplýsingar má skipast, so at hon er í samsvari við almennu samfelagshugsanina um rættin hjá tí einstaka og tørvin at viðgera upplýsingar í einum kunningarsamfelag. Mett verður eisini, at Skrásetingareftirlitið ikki hevur virkað eftir ætlan og mælt verður tí til at umskipa eftirlitið. Eisini verður mælt til at broyta navni á eftirlitinum, soleiðis at tað hóskar betur til tær nýggju uppgávurnar, eftirlitið fær sambært lógaruppskotinum."

Arbeiðsbólkurin gjørdi í samsvari við arbeiðssetningin uppskot til nýggja løgtingslóg, sum fekk heitið løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum.

Løgtingslógin um viðgerð av persónsupplýsingum byggir á norsku lov om behandling av personopplysninger (Personopplysningsloven), sum kom í gildi 1. januar 2001 og á donsku lov om behandling af personoplysninger (Persondataloven), sum kom í gildi 1. juli 2000.

Løgtingslógin er sostatt í ávísan mun ein samanrenning millum lóggávuna í tveimum ymiskum londum.

Bæði norska personopplysningsloven og danska persondataloven seta í gildi reglurnar í ES-direktivi frá 1995 (Europa-Parlamentets og Rådets direktiv 95/46/EF af 24. oktober 1995 om beskyttelse af fysiske personer i forbindelse med behandling af personoplysninger og om fri udveksling af sådanne oplysninger). Danmark ger hetta sum limur av Evropasamveldinum, ES, og Norra ger hetta sum limur av Evropeiska Búskaparliga Samstarvinum, EBS.

Tað er upp til tey einstøku ES og EBS londini, hvussu direktivásetingar verða framdar nationalt, og tí eru norsku og donsku lógirnar ikki eins.

ES-direktivið bleiv kunngjørt 24. oktober 1995 og var úrslit av 5 ára longum samráðingum ímillum ES-limalondini. Uppruna direktivið – og uppruna grundarlagið undir føroysku løgtingslógini – bleiv sostatt lagt fram av ES-nevndini í juli 1990.

Løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum kom í gildi 1. januar 2002.

*1.1.2. ES-lóggáva á persónupplýsingarøkinum*
Fyrsta lóggáva á persónupplýsingarøkinum í ES høpi er ES-direktivið frá 1995. Direktivið, sum bleiv samtykt eftir drúgvar samráðingar, hevði við sær, at persónupplýsingarlóggávan bleiv harmoniserað í ES-londunum.

Sum álitið frá arbeiðsbólkinum, sum gjørdi uppskot til løgtingslógina um viðgerð av persónsupplýsingum eisini ber brá av, fekk viðgerð og vernd av persónupplýsingum størri og størri fokus móti endanum av 1990unum og í byrjanini av 2000unum. Hetta økta fokusið er helst orsøk til, at tað í ES-sáttmálanum um Grundleggjandi Rættindi frá 2000 er ein serstøk grein, sum ásetur, at øll hava rætt til vernd av persónupplýsingum.

ES-sáttmálin um Grundleggjandi Rættindi bleiv við Lissabon-sáttmálanum frá 2007 løgfrøðiliga bindandi fyri ES-limalondini á sáttmálastøði. At dátuvernd bleiv alment viðurkent sum grundleggandi rættindi – samstundis sum kunningarsamfelagið alsamt tók seg fram – hevði m.a. við sær, at ein tilgongd byrjaði í ES at endurnýggja direktivið frá 1995.

Hóast dátuverndarøkið bleiv harmoniserað í ES í 1995, hevði lóggávuleisturin – direktiv, sum ikki er beinleiðis galdandi í limalondunum, men skal fremjast í nationalari lóggávu – víst seg at hava við sær, at dátuverndarlóggávan í ES var fragmenterað og bar brá av nationalum serloysnum.

Við einum ynski um økta harmonisering og eini felags lóggávu um dátuvernd setti ES-nevndin í 2012 fram uppskot um ein dátuverndarpakka. Dátuverndarpakkin innihelt eina almenna fyriskipan um dátuvernd, sum skuldi koma í staðin fyri direktivið frá 1995, og eitt direktiv, sum skuldi verða galdandi fyri rættarhandhevjandi myndugleikar, og sum skuldi koma í staðin fyri eina rammuavgerð frá 2008.

Fyriskipanir eru beinleiðis galdandi í ES-limalondunum og skulu sostatt ikki fremjast í nationalari lóggávu. Á henda hátt er møguligt at totalharmonisera eitt rættarøki í ES-londunum.

Eftir drúgvar samráðingar bleiv dátuverndarpakkin samtyktur í 2016.

ES-fyriskipanin um viðgerð av persónupplýsingar, sum best er kend undir ensku styttingini GDPR (General Data Protection Regulation), varð kunngjørd 27. apríl 2016 og kom formliga í gildi í ES-londunum 25. mai 2016. Fyriskipanin hevði eina skiftistíð á tvey ár og fekk sostatt virknað í ES 25. mai 2018. Somuleiðis var við direktivinum fyri rættarhandhevjandi myndugleikar, sum ES-limalondini skuldu fremja í nationalari lóggávu í seinasta lagi 25. mai 2018.

*1.1.3. Um tilgongdina at gera hesa løgtingslóg*
Arbeiði við at gera nýggju persónupplýsingarlógina byrjaði í byrjanini av 2018. Arbeiðið bleiv grundfest á Løgmansskrivstovuni.

Semja var í landsstýrinum um, at ein nýggj føroysk persónupplýsingarlóg skuldi leggja seg so tætt upp at GDPR, sum tað innihaldsliga gav meining. Hetta m.a. tí, at tað á dátuverndarøkinum er trupult at síggja, at serføroysk viðurskifti gera seg galdandi, sum hava við sær, at serføroyskar reglur eru fyri neyðini, og tí at tað er ein fyrimunur fyri m.a. privatar fyritøkur, sum samskifta nógv við ES-lond, at reglurnar eru eins.

Viðkomandi partar vóru tiknir við í arbeiðið at gera nýggja persónupplýsingarlóg. Løgmansskrivstovan skipaði sostatt tríggjar bólkar við umboðum fyri tey, sum vóru mett at hava ein serligan áhuga í eini nýggjari persónupplýsingarlóg.

Hesir bólkar vóru:

**Bólkur 1:** Umboð fyri almennar og kommunalar myndugleikar. Í bólkinum vóru umboð fyri TAKS, Gjaldstovuna, Talgildu Føroyar, Landssjúkrahúsið, Almannaverkið og Kommunufelagið.

**Bólkur 2:** Umboð fyri bankar, tryggingar- og pensjónsfeløg. Í bólkinum vóru umboð fyri Betri, BankNordik, Norðoya Sparikassa, Suðuroyar Sparikassa og LÍV.

**Bólkur 3:** Umboð fyri KT-veitarar. Í bólkinum vóru umboð fyri Føroya Tele, Hey, Elektron, Formula og KT-felagið. Og harumframt vóru eisini kt-grannskoðarar við.

Harumframt hevur Løgmansskrivstovan hildið fundir við Dátueftirlitið, t.e. bæði við ráðið og avgreiðsluskrivstovuna.

Tað, sum bólkarnir yvirskipað vóru samdir um, var, at føroyska lóggávan átti at líkjast ES-lóggávuni so nógv sum gjørligt. Mett var ikki, at tað var nøkur orsøk til at hava serføroyska lóggávu á hesum økinum. Serliga var ynski um, at vegleiðingar o.a., sum bleiv nýtt í ES, eisini skuldi kunna nýtast í Føroyum.

Víst var eisini á fyrimunirnar við, at tær telduskipanir og software annars, sum er ment til at vera í samsvar við GDPR, eisini kunnu nýtast í Føroyum, eins og skipanir o.a., sum verða mentar í Føroyum, samstundis lúka treytirnar í ES. Tað var mett, sum eitt ógvuliga stórt og tungt arbeiði at menna telduskipanir o.a. til eina serføroyska persónupplýsingarlóg.

Dátueftirlitið legði í arbeiðinum serliga dent á, at verndarstøðið hjá tí einstaka í einari nýggjari persónuppýsingarlóggávu ikki verður lægri enn tað er í dag.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi løgtingslóg á økinum er løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum kom í gildi 1. januar 2002. Løgtingslógin er broytt einaferð við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004 um broyting í løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum.

Tríggjar kunngerðir eru givnar við heimild í persónsupplýsingarlógini.

1) Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, vanliga nevnd trygdarkunngerðin, sum kom í gildi 1. mars 2003. Kunngerðin er ongantíð broytt.
2) Kunngerð nr. 31 frá 21. mars 2019 um flutning av persónupplýsingum til útlond. Kunngerðin kom í staðin fyri kunngerð nr. 33 frá 11. apríl 2005 um at flyta persónsupplýsingar av landinum uttan loyvi frá Dátueftirlitinum. Kunngerðin ásetur, hvørji lond eru at meta sum trygg útlond og treytirnar fyri at flyta persónupplýsingar til hesi lond.
3) Kunngerð nr. 124 frá 19. september 2011 um fráboðanarskyldu og undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi, sum kom í gildi 22. september 2011. Kunngerðin er ongantíð broytt.

Niðanfyri verða reglurnar í persónsupplýsingarlógini lýstar í høvuðsheitum.

#### *1.2.1. Endamál, orðlýsingar og virkisøki*

Endamálið við løgtingslógini er at tryggja persónverndina hjá tí einstaka, tá persónupplýsingar verða viðgjørdar. Viðgerðin skal m.a. virða persónliga frælsi hjá tí einstaka.

Løgtingslógin hevur eitt breitt virkisøki og er í útgangsstøðinum galdandi fyri alla viðgerð av persónupplýsingum, sum fer fram bæði fyri tað almenna og fyri tað privata, um so er at viðgerðin heilt ella lutvíst er elektronisk ella um persónupplýsingarnar eru settar í eina skrá.

Landafrøðiliga er løgtingslógin galdandi fyri viðgerð av persónupplýsingum fyri dátuábyrgdara, sum rekur virksemi sítt í Føroyum, og fyri viðgerð av persónupplýsingum fyri almennan dátuábyrgdara, um hesin er undir myndugleika heimastýrisins. Lógin er harumframt galdandi fyri viðgerð fyri dátuábyrgdara, sum rekur virksemi sítt uttan fyri Føroyar, um hjálparamboð í Føroyum verða nýtt, uttan so at hesi bert verða nýtt at senda upplýsingar um landið, ella upplýsingar verða savnaðar í Føroyum við atliti at viðgerð uttan fyri Føroyar.

Løgtingslógin inniheldur orðlýsingar av aðalhugtøkum, so sum persónupplýsing, viðgerð og persónskrá.

Sum nakað nýtt í mun til áður galdandi lógir skilur persónupplýsingarlógin ímillum tvey sløg av persónupplýsingum – vanligar og viðkvæmar persónupplýsingar. Hugtakið *viðkvæmar persónupplýsingar* er allýst í § 2, nr. 9 og fevnir m.a. um upplýsingar um lit, ættarslag og átrúnað. Treytirnar fyri at viðgera viðkvomu upplýsingarnar eru strangari enn fyri viðgerð av vanligum persónupplýsingum.

#### *1.2.2. Viðgerð av persónupplýsingum*

Grundleggjandi byggir persónupplýsingarlógin á ta skipan, at tað eru ávísar almennar *meginreglur*, sum altíð skulu verða fylgdar, tá persónupplýsingar verða viðgjørdar, og síðani

eru *viðgerðarreglur*, sum áseta treytirnar fyri, nær viðgerð av persónupplýsingum lógliga kann fara fram.

Meginreglurnar eru, at dátuábyrgdarin samsvarandi góðum dátuviðgerðarsiði skal ansa eftir, at persónupplýsingarnar eru loyvdar at viðgera og bert verða savnaðar saman til eitt nágreiniliga tilskilað endamál, sum er sakliga grundað í virksemi dátuábyrgdarans, og at seinni viðgerð samsvarar hesum endamáli. Eisini skal dátuábyrgdarin tryggja, at persónupplýsingar bert verða viðgjørdar, um tær eru viðkomandi og ikki fevna um meira enn, hvat krevst fyri at røkja endamálið við innsavnanini og víðari nýtsluni av upplýsingunum, og ikki verða nýttar til onnur endamál, sum ikki samsvara við upprunaliga endamálinum, uttan so at skrásetti hevur givið sítt samtykki. Dátuábyrgdarin skal eisini tryggja, at persónupplýsingar verða varðveittar soleiðis, at ikki er gjørligt at eyðmerkja skrásetta longur enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini, og at persónupplýsingarnar eru rættar og verða nøktandi dagførdar.

Eru meginreglurnar uppfyltar kunnu vanligar persónupplýsingar viðgerast, um tann skrásetti hevur givið sítt samtykki, um viðgerðin er heimilað í lóg, ella um viðgerðin t.d. er neyðug til tess at halda avtalu, sum gjørd er við skrásetta, ella sum skrásetti er partur í, ella fyri at gera tað, sum neyðugt er, fyri at slík avtala eftir áheitan frá skrásetta kann fáast í lag. Viðgerð kann eisin fara fram, um viðgerðin t.d. er neyðug til tess at halda eina rættarliga skyldu, sum áliggur dátuábyrgdaranum at verja altumráðandi áhugamál hjá skrásetta, ella av røttum at kunna fylgja einum sjálvsagt heimilaðum áhugamáli hjá dátuábyrgdaranum ella tí triðjapersóni, sum hevur fingið persónupplýsingarnar, og fyrilitini fyri skrásetta ikki eru eins stór og hesi áhugamál.

Er talan um viðkvæmar persónupplýsingar eru treytirnar fyri viðgerð strangari, umframt at viðgerðarloyvi í útgangsstøðinum krevst.

Løgtingslógin hevur eisini reglur um serligar viðgerðarstøður, undir hesum um viðgerð av persónstalinum.

*1.2.3. Flutningur av persónupplýsingum til útlond*

Persónupplýsingar kunnu einans flytast úr Føroyum til útlond, um útlondini tryggja eina fullgóða viðgerð av persónupplýsingum. Útlond er at skilja, sum øll onnur lond enn Føroyar og fevnir eisini um Danmark og Grønland.

Landsstýrismaðurin kann eftir ummæli frá Dátueftirlitinum góðkenna útlond sum trygg í mun til flutning av persónpplýsingum, um londini tryggja eina fullgóða viðgerð av persónupplýsingum. Hetta er ásett í kunngerðini frá 2019 um flutning av persónupplýsingum til útlond. Hóast eitt útland er góðkent sum trygt av landsstýrismanninum, skal allur flutningur av persónupplýsingum fráboðast Dátueftirlitinum. Flutningur av viðkvæmum upplýsingum krevur harumframt viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum.

Henda skipan, at fráboðan ella loyvi krevst, hóast persónupplýsingar verða fluttar til eitt góðkendt útland, er serføroysk. Í Danmark – og øðrum ES-londum – er skipanin so, at tá eitt triðjaland er góðkent sum trygt, so kunnu persónupplýsingar frítt – t.e. uttan góðkenning ella fráboðan – flytast til hetta land.

Um eitt útland ikki tryggjar fullgóða viðgerð av persónupplýsingum, kunnu persónupplýsingar í einstøkum førum við loyvi frá Dátueftirlitinum flytast til útlandið.

*1.2.4. Rættindi hjá skrásetta*
Umframt at áleggja dátuábyrgdarum skyldur og áseta reglur um nær, og hvussu persónupplýsingar kunnu viðgerast, inniheldur persónsupplýsingarlógin týdningarmiklar reglur um rættindi hjá tí skrásetta.

Ein grundleggjandi regla er rætturin til innlit. Við rættinum til innlit kann skrásetti fáa upplýst frá dátuábyrgdaranum, hvørjar persónupplýsingar um viðkomandi verða viðgjørdar og við hvørjum endamáli.

Løgtingslógin hevur eisini eina áseting um *alment* innlit, sum hevur við sær, at ein og hvør kann krevja at fáa at vita, hvørjar persónupplýsingar ein dátuábyrgdari viðgerð.

Fyri at skrásetti skal kunna gera nýtslu av sínum rættindum, heruppií rættinum til innlit, er tað ein fortreyt, at skrásetti veit, at persónupplýsingar verða viðgjørdar. Tí hevur dátuábyrgdarin eina kunningarskyldu, bæði tá persónupplýsingar verða savnaðar frá skrásetta, og tá persónupplýsingar verða savnaðar frá øðrum enn skrásetta. Á henda hátt fær skrásetti tær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri, at viðkomandi kann røkja síni áhugamál.

Rætturin til innlit og kunning er ikki óavmarkaður og kann dátuábyrgdarin í ávísum førum gera undantak.

Umframt rættin til innlit og kunning ásetur persónupplýsingarlógin eisini, at skrásetti hevur rætt til at átala, at persónupplýsingar um hann ella hana verða viðgjørdar, eins og dátuábyrgdarin av sínum eintingum ella eftir áheitan frá skrásetta skal rætta, strika ella steinga persónupplýsingar, sum eru rangar, villleiðandi ella eru viðgjørdar ímóti lóg ella ásetingum, heimilaðum í lóg.

Persónsupplýsingarlógin ásetur, at skrásetti kann taka eitt samtykki aftur, og at skrásetti kann klaga til Dátueftirlitið um viðgerð, sum viðvíkir honum ella henni.

*1.2.5. Viðgerðartrygd*
Persónsupplýsingarlógin hevur reglur um viðgerðartrygd, sum álegga dátuábyrgdaranum og dátuviðgeranum við væl tryggjaðum tiltøkum at tryggja, at viðgerðin av persónupplýsingum lýkur krøvini í lógini. Harafturat er ásett, at persónupplýsingar einans skulu verða viðgjørdar eftir fyriskipan dátuábyrgdarans, og at skrivlig avtala skal verða gjørd, áðrenn dátuábyrgdarin letur øðrum persónupplýsingar at viðgera.

Við heimild í løgtingslógini eru reglur ásettar í kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum (trygdarkunngerðin). Kunngerðin ásetur meira nágreiniligar reglur um viðgerðartrygd. Trygdarkunngerðin er ein týdningarmikil partur av persónupplýsingarlóggávuni og inniheldur m.a. reglur um skyldur hjá dátuábyrgdarum í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum.

*1.2.6. Fráboðanarskylda til Dátueftirlitið og viðgerðarloyvi*
Persónsupplýsingarlógin ásetur, at dátuábyrgdarin ella tann, sum virkar hansara vegna, í útgangsstøðinum skal fráboða Dátueftirlitinum, tá persónupplýsingar verða elektroniskt viðgjørdar, og tá persónupplýsingar verða viðgjørdar í manuellari skrá.

Landsstýrismanninum er heimilað at áseta reglur um frávik frá fráboðanarskylduni. Reglurnar í kunngerð nr. 124 frá 19. september 2011 um fráboðanarskyldu og undantøk frá reglunum

um viðgerðarloyvi hava við sær, at fráboðan í útgangsstøðinum ikki er neyðug, um einans vanligar persónupplýsingar verða viðgjørdar. Tó skal t.d. flutningur av vanligum persónupplýsingum til útlond og viðgerð við vakmyndatóli altíð fráboðast.

Viðgerð av viðkvomum persónupplýsinum krevur í útgangsstøðinum viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum. Dátueftirlitið kann eisini krevja viðgerðarloyvi til viðgerð av øðrum persónupplýsingum, um viðgerðin skilliga ger seg inn á týðandi persónverndaráhugamál. Dátueftirlitið skal í avgerð síni ætla um slagið av persónupplýsingunum, hvussu nógvar og umfatandi hesar eru og um endamálið við viðgerðini. Dátueftirlitið kann í viðgerðarloyvinum seta serligar viðgerðartreytir til tess at avmarka bágan, viðgerðin hevur fyri skrásetta.

*1.2.7. Eftirlit og revsing*
Við persónsupplýsingarlógini bleiv Dátueftirlitið, sum er ein óheftur fyrisitingarligur myndugleiki, sett á stovn. Dátueftirlitið hevur eftirlit við, at persónsupplýsingarlógin verður hildin og er skipað við avgreiðsluskrivstovu og Dáturáði.

Dáturáðið ger egna reglugerð fyri virksemi sítt og tekur avgerðir eftir ummæli frá avgreiðsluskrivstovuni í prinsipiellum málum og málum, sum mett verða at hava stóran samfelagsligan áhuga.

Í løgtingslógini er ásett, at Dátueftitlitið skal:

1) av sínum eintingum ella eftir klagu frá skrásetta ansa eftir, at viðgerð av persónupplýsingum bert fer fram í samsvari við lógina og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini,
2) viðgera fráboðanir og umsóknir um loyvi og áleggja treytir sambært lógarheimild,
3) hava ein skipaðan almennan lista yvir allar fráboðanir og loyvir sambært lógini,
4) geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum viðvíkur persónupplýsingum,
5) gera kanningar, har persónupplýsingar verða viðgjørdar,
6) vegleiða privat og tað almenna í ivamálum og virka fyri, at upplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði,
7) fylgja við í og kunna um gongdina í viðgerðini av persónupplýsingum her á landi og uttanlands og
8) gera árliga ársfrágreiðing.

Dátueftirlitið hevur heimild at krevja allar upplýsingar, sum hava týdning fyri eftirlitið, útflýggjaðar frá dátuábyrgdaranum og kann krevja, at dátuábyrgdari steðgar viðgerð, sum er brot á lógina, og at hann rættar, strikar ella steingir ávísar persónupplýsingar. Dátueftirlitið kann eisini sambært løgtingslógini fáa atgongd til høli uttan rættarúrskurð.

Brot á persónsupplýsingarlógina ella boð frá Dátueftirlitinum kann verða revsað við bót ella hefti (t.e. fongsul upp til 4 mánaðir).

*1.2.8. Føroyar góðkent sum trygt triðjaland av ES-nevndini*
ES-dátuverndarlóggávan tryggjar eitt ávíst verndarstøði fyri skrásett í ES og hevur við sær, at persónupplýsingar í útgangsstøðinum ikki kunnu verða fluttar út úr ES, um hetta hevur við sær, at verndarstøðið fyri tann skrásetta verður lægri.

ES-lóggávan – bæði direktivið frá 1995 og galdandi fyriskipan – ásetur í hvørjum førum persónupplýsingar kunnu verða fluttar úr ES. Hetta kann m.a. vera við loyvi frá dátueftirlitum

í hvørjum einstøkum føri. Tað er tó eisini møguligt, at ES-nevndin alment góðkennir eitt triðjaland sum trygt, um trygdarstøðið í landinum sum heild verður mett at vera nøktandi. Hesi lond verða kallað trygg triðjalond.

At eitt land er góðkent av ES-nevndini sum trygt triðjaland í mun til persónupplýsingar merkir, at borgarar, fyritøkur og almennir myndugleikar í ES frítt kunnu flyta persónupplýsingar úr ES til góðkenda landið, uttan at hetta krevur serstakt loyvi ella fráboðan.

Síðani 15. juni 2010 hava Føroyar verið góðkendar sum trygt triðjaland í ES í mun til persónupplýsingar. Hetta bleiv formliga gjørt við avgerð 2010/146/ frá ES-nevndini (Kommissionens afgørelse af 5. marts 2010 om tilstrækkeligheden af det beskyttelsesniveau, der sikres ved den færøske lov om behandling af personoplysninger, jf. Europa-Parlamentets og Rådets direktiv 95/46/EF). Avgerðin var endin á eini longri tilgongd, sum byrjaði í 2007.

Avgerðin frá ES-nevndini er galdandi fyri sama øki, sum tann føroyska persónsupplýsingarlógin er galdandi fyri, sbr. um virkisøkið omanfyri undir pkt. 1.2.1.

*1.2.9. Endurskoðan av avgerðini um Føroyar sum trygt triðjaland*
Í ES-direktivinum frá 1995 um persónupplýsingar vóru ikki ásettar reglur um periodiska endurskoðan av góðkenningunum av tryggum triðjalondum. ES-nevndin hevði tó sjálvsagt heimild at taka aftur góðkenningar, um treytirnar fyri góðkenningini ikki longur vórðu loknar.

Í GDPR er beinleiðis ásett, at góðkenningar av tryggum triðjalondum skulu endurskoðast minst fjórða hvørt ár, og hetta er eisini galdandi fyri góðkenningar grundaðar á direktivið frá 1995. Endurskoðanin tekur støði í GDPR og tí í einum hægri verndarstøði fyri tann einstaka.

ES-nevndin hevur boðað Løgmansskrivstovuni frá, at henda tíðarfreist skal roknast frá 25. mai 2016, tá ið GDPR formliga kom í gildi. Hetta merkir, at góðkenningin av Føroyum skal verða endurskoðað í seinasta lagi 25. mai 2020.

Tilgongdin at endurskoða avgerðina hjá ES-nevndini byrjaði í 2017, tá ið Løgmansskrivstovan fekk ymsar fyrispurningar frá ES-nevndini. Løgmansskrivstovan hevur síðani leypandi samskift við ES-nevndina í sambandi við góðkenningina.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Høvuðsendamálini við hesum løgtingslógaruppskoti eru tvinni.

Í fyrsta lagi er endamálið at hækka verndarstøðið fyri tann einstaka, tá persónupplýsingar verða viðgjørdar. Hetta endamál verður rokkið við at dagføra løgtingslógina um viðgerð av persónupplýsingum nú hon er vorðin 19 ára gomul og í ávísan mun er ótíðarhóskandi. Galdandi lógartekstur stavar frá tíðini, áðrenn internetið var ein partur at gerandisdegnum hjá føroyinginum.

Í dag fer stórur partur av viðgerðini av persónupplýsingunum fram á internetinum ella í talgildum loysnum annars. Løgtingslógin treingir tí til at endurskoðast, so at hon er í tráð við talgilda veruleikan.

Í øðrum lagi er endamálið at tryggja, at Føroyar vera endurgóðkendar av ES-nevndini sum trygt triðjaland í mun til persónupplýsingar.

Nýggju reglurnar um dátuvernd í ES hava við sær, at ES-góðkenningar um trygg triðjalond skulu endurskoðast minst fjórða hvørt ár. At Føroyar framhaldandi verða at meta sum eitt trygt triðjaland er umráðandi – bæði fyri privatar fyritøkur og almennar myndugleikar, sum í tí dagliga virkseminum samskifta og á annan hátt samstarva við fyritøkur og myndugleikar í ES-londunum.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Løgtingslógaruppskotið hevur ikki við sær, at føroyska persónupplýsingarlóggávan sum heild verður kollvelt. Grundleggjandi reglurnar um nær persónupplýsingar kunnu viðgerast, treytirnar fyri viðgerð og rættindini hjá skrásettum verða í stórum varðveittar og í ávísan mun útbygdar. Hinvegin hevur løgtingslógaruppskotið broytingar við sær, serliga í mun til, hvussu ábyrgdin fyri viðgerð verður skipað og í mun til leiklutin hjá Dátueftirlitinum.

Eitt av aðalmálunum við løgtingslógaruppskotinum er at tryggja, at tann skrásetti í størri mun fær ræði á sínum persónupplýsingum. Eisini setur uppskotið fleiri krøv til dátuábyrgdarar og dátuviðgerar, eins og tað við nýggju reglunum verður miða eftir, at eftirlitið við reglunum kann virka meira effektivt.

Í samsvari við ynski hjá landsstýrinum liggur lógaruppskotið innihaldsliga tætt upp at GDPR, tó at tað bæði í mun til einstøku ásetingarnar og skipanina sum heild er mett um, í hvønn mun hetta passar til føroyska samfelagið og føroysk viðurskifti annars.

Niðanfyri verður greitt frá yvirskipaðum viðurskiftum, umframt at reglurnar í høvuðsheitum verða lýstar.

*1.4.1. Alment galdandi reglur*
Dátuverndarlógin fer – eins og galdandi persónsupplýsingarlóg – at verða galdandi fyri alla viðgerð av persónupplýsingum. Løgtingslógin fer sostatt at verða galdandi tvørturum nógv ymisk rættarøki.

Løgtingslógin ásetur grundleggjandi reglur og meginreglur, sum altíð eiga at verða fylgdar, tá persónupplýsingar verða viðgjørdar. Hetta uttan mun til um viðgerðin fer fram í privata ella almenna geiranum.

Tað verður framhaldandi møguligt at áseta serligar reglur um viðgerð av persónupplýsingum í aðrari lóggávu, um mett verður, at tørvur t.d. er á meiri nágreiniligum reglum. Útgangsstøðið er tó, at tað ikki kann víkjast frá verndarstøðinum í dátuverndarlógini. Sí serligu viðmerkingarnar til § 4 niðanfyri.

*1.4.2. Ábyrgd og váðagrundað tilgongd*
Uppskotið til nýggja dátuverndarlóg byggir á eitt útgangsstøði um, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin *taka ábyrgd* (“ansvarlighed”, “accountability”).

Hetta inniber, at tað í størri mun enn í dag, verður ábyrgdin hjá dátuábyrgdaranum og dátuviðgeranum at meta um og tryggja, at ásetingarnar í løgtingslógini verða hildnar, tá ein viðgerð fer fram, uttan at Dátueftirlitið verður tikið við frammanundan viðgerð. T.d. verða reglurnar um fráboðan og viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum strikaðar.

Tað er sostatt ikki Dátueftirlitið, sum skal meta um, hvørt ein viðgerð er ella fer at vera innanfyri karmarnar í løgtingslógini ella hvørji tiltøk skulu setast í verk fyri at tryggja, at løgtingslógin verður hildin. Hetta er ábyrgdin hjá dátuábyrgdaranum og dátuviðgeranum.

Løgtingslógaruppskotið byggir harnæst í størri mun enn í dag á eina váðagrundaða tilgongd til dátuvernd (“risikobaseret tilgang”, “risk-based approach”). Hetta hevur við sær, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum skulu meta um váðarnar við viðgerðini fyri at fáa greiðu á, hvør váði stendst av viðgerðini og hvørji trygdartiltøk eru neyðug í hesum sambandi.

Ein fyrimunur við hesi tilgongd er, at tann umsitingarliga byrðan hjá dátuábyrgdaranum og dátuviðgeranum í útgangsstøðinum verður lættari, av tí at byrðar einans verða álagdar, tá hetta verður mett neyðugt, sbr. t.d. reglurnar um fráboðan av brotum í § 47, stk. 1 og 2.

Váðagrundaða tilgongdin til dátuvernd hevur við sær, at jú størri váðin er, jú hægri eru krøvini til trygdina.

Váðagrundaða tilgongdin krevur eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri. Við í samlaðu metingini um tað er ein váði við viðgerðini, um váðin er stórur og hvørji trygdartiltøk skulu setast í verk, skal hædd m.a. takast fyri verandi tøkniliga støði, verksetanarkostnaði, slagi av viðgerð og slagi av upplýsingum. Eisini vavi, samanhangur og endamálið við viðgerðini og álvarin fyri rættindi hjá einstaklingum skal takast við í metingina. Víst verður t.d. til áskoðan nr. 75-76 og 91 í GDPR.

Ein av høvuðsorsøkunum til, at lagt verður upp til eina dátuverndarlóggávu, sum byggir á ábyrgd og váðagrundaða tilgongd er, at mett verður, at fyrimunirnir við skipanini, vit kenna í dag við t.d. fráboðanum til og loyvum frá Dátueftirlitinum í sambandi við viðgerð, ikki standa mát við teir umsitingarligu vansarnar, samstundis sum tað ikki er givið, at verndarstøðið fyri tann einstaka av hesi orsøk verður betri.

Mett verður samlað, at verndarstøðið hjá tí einstaka við hesum lógaruppskoti verður hægri.

*1.4.3. Viðgerðartrygd*

Sjálvt um tað við løgtingslógaruppskotinum verður upp til tann einstaka dátuábyrgdaran og dátuviðgeran at tryggja nøktandi verndarstøðið, eru hesir ikki sleptir upp á fjall í mun til, hvørji tiltøk skulu setast í verk. Í løgtingslógaruppskotinum er vegleiðing um, hvussu nøktandi verndarstøði kann tryggjast, eins og tað er væntandi, at Dátueftirlitið fer at gera vegleiðingar um m.a. trygdartiltøk í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum.

Trygdarkunngerðin, sum í dag er galdandi, verður við uppskotinum sett úr gildi, og í staðin skulu dátuábyrgdarin og dátuviðgerin við støði í § 46 um viðgerðartrygd meta um, hvørji trygdartiltøk eru fyri neyðini í mun til eina ávísa viðgerð.

Dátuábyrgdarin og dátuviðgerðin skulu seta í verk hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, soleiðis at trygdarstøðið hóskar til váðarnar við viðgerðini. Dátueftirlitið hevur í útgangsstøðinum einki við viðgerðina og metingina av váðunum at gera undan viðgerðini, og tí er tað upp til dátuábyrgdaran og dátuviðgeran at meta um, hvørji tiltøk skulu setast í verk.

Sum dømi um tiltøk – tøknilig og bygnaðarlig – sum kunnu setast í verk fyri at ganga váðunum í samband við eina ítøkiliga viðgerð á møti kunnu nevnast:

- Tiltøk, sum tryggja, at tað er møguligt aftaná viðgerðina at kanna og gera av, um og hvør hevur viðgjørt persónupplýsingar (logging).
- Tilnevning av dátuverndarfólki – eisini tá hetta ikki er krav sambært løgtingslógini.
- Innanhýsis reglur um bygnaðarlig viðurskifti og fysiska trygd, undir hesum trygdarskipan, avmarking ella eftirlit við atgongd, góðkenningarskipanir.
- Tiltøk, sum tryggja, at einans persónar, sum eru heimilaðir til hetta, kunnu fáa atgongd til persónupplýsingar.
- Reglur um tagnarskyldu.
- Leiðreglur um, hvussu dátuábyrgdarin hevur eftirlit við trygdartiltøkum.
- Nøktandi vegleiðing og upplæring av starvsfólki, sum viðgera persónupplýsingar.
- Dulnevning av persónupplýsingum.
- Bronglan av persónupplýsingum.
- Reglulig skoðan og eftirlit við tøkniligu og bygnaðarligu tiltøkunum.
- Skráseting av avvístari atgongd.

Harumframt kunnu dátuábyrgdarin og dátuviðgerin, hóast trygdarkunngerðin verður sett úr gildi, fáa íblástur úr kunngerðini í mun til hvørji trygdartiltøk, kunnu ella skulu setast í verk. Avgerandi er, at tiltøkini svara til tann váða, sum viðgerðin hevur við sær.

Tað er umráðandi, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin hava skjalprógv fyri, hvørji trygdartiltøk eru sett í verk, sbr. § 44 um yvirlit. Skjalprógv skal m.a. brúkast í sambandi við eftirlit.

*1.4.4. Virkisøki, landøkisásetingar o.a.*
Endamálið verður við uppskotinum víðkað nakað. Frá at áseta, at endamálið er at verja tann einastaka, verður lagt upp til at áseta, at endamálið er eisini at tryggja frían flutning av persónupplýsingum.

Eins og galdandi løgtingslóg hevur uppskotið eitt breitt virkisøki og er í útgangsstøðinum galdandi fyri alla viðgerð av persónupplýsingum, sum fer fram bæði fyri tað almenna og fyri tað privata. Landafrøðiliga verður virkisøkið broytt í ávísan mun.

Uppskotið inniheldur orðlýsingar av aðalhugtøkum, so sum persónupplýsing, viðgerð og skrá. Í mun til galdandi rætt eru allýsingarnar meira nágreiniligar, eins og fleri hugtøk verða allýst.

*1.4.5. Meginreglur og viðgerðarreglur*
Grundleggjandi byggir uppskotið á somu skipan, sum galdandi løgtingslóg. T.e., at tað eru ávísar almennar *meginreglur*, sum altíð skulu verða fylgdar, tá persónupplýsingar verða viðgjørdar, og síðani eru *viðgerðarreglur*, sum áseta treytirnar fyri, nær viðgerð av persónupplýsingum lógliga kann fara fram.

Meginreglurnar eru í høvuðsheitum álíkar galdandi meginreglum, tó at tær eru orðaðar gjølligari. Tað er dátuábyrgdarin, sum hevur ábyrgdina av, at meginreglurnar verða fylgdar.

Viðgerðarreglurnar – ellar viðgerðarheimildirnar – áseta nær og undir hvøjrum umstøðum persónupplýsingar kunnu viðgerðast. Eins og í galdandi løgtingslóg verður lagt upp til, at treytirnar fyri at viðgera viðkvæmar persónupplýsingar eru strangari enn treytirnar fyri at

viðgera vanligar persónupplýsingar. Umframt almennu viðgerðarheimildirnar, eru eisini reglur um serligar viðgerðarstøður.

*1.4.6. Rættindini hjá skrásetta*

Uppskotið til dátuverndarlóg inniheldur eins og galdandi løgtingslóg eina røð av rættindum til tann skrásetta.

Rættindini í galdandi lóg – t.e. rætturin til innlit, rætturin at móttaka upplýsingar við savnan av persónupplýsingum, rætturin at átala og rætturin at krevja upplýsingar rættaðar, strikaðar ella stongdar – verða førd víðari í uppskotinum. Hóast rættindini eru at kenna aftur frá galdandi løgtingslóg, eru tey í flestu førum orðað gjølligari og eru í ávísum førum meira umfatandi.

Afturat rættindinum, sum eru at kenna aftur frá galdandi løgtingslóg, eru eisini nýggj rættindi við í uppskotinum. Talan er m.a. um rættin til dátuflutning og reglur um individuellar avgerðir, undir hesum profilering.

*1.4.7. Dátuábyrgdari og dátuviðgeri*

Í uppskotinum eru fleiri ásetingar, sum snúgva seg um skyldurnar hjá dátuábyrgdara og dátuviðgera, herundir viðurskiftini teirra millum, og sum fremja grundreglurnar um ábyrgd og váðagrundaða tilgongd til dátuvernd, sbr. pkt. 1.4.2. omanfyri.

Ein av mest ítøkiligu broytingunum er, at dátuábyrgdaranum og dátuviðgeranum verða álagt at gera yvirlit yvir viðgerðir, sum kunnu nýtast til eftirfylgjandi eftirlit. Samstundis verða reglurnar um fráboðan av viðgerð og viðgerðarloyvi settar úr gildi. Hetta merkir, at tað ikki longur er Dátueftirlitið, sum frammanundan viðgerð skal meta um, hvørt viðgerðin lýkur treytirnar í løgtingslógini. Dátueftirlitið kann við eftirfylgjandi eftirliti kanna um treytirnar vórðu loknar.

Sum nakað nýtt verður ásett, at dátuábyrgdarin undir ávísum treytum skal tryggja dátuvernd ígjøgnum sniðgeving og ígjøgnum standardstillingar.

Dátuábyrgdaranum verður í ávísum førum álagt at gera eina avleiðingargreining (konsekvensanalyse) um dátuvernd. Eisini verður dátuábyrgdaranum og dátuviðgeranum álagt at boða Dátueftirlitinum og skrásetta frá, um brot er á persóndátutrygdina.

Lagt verður eisini upp til reglur um sokallað dátuverndarfólk, sum ávísir dátuábyrgdarar og dátuviðgerar hava skyldu at tilnevna. Dátuverndarfólk – Data Protection Officers – hava til uppgávu at ráðgeva og vegleiða dátuábyrgdara og dátuviðgera um øll viðurskifti viðvíkjandi dátuvernd.

*1.4.8. Flutningur av persónupplýsingum til útlond, triðjalond og millumtjóðafelagsskapir*

Uppskotið hevur reglur um flutning av persónupplýsingum úr Føroyum. Skilt verður ímillum flutning til *útlond*, t.e. ES- og EBS-lond, og flutning til *triðjalond* o.a., t.e. lond, sum ikki eru limir í ES ella EBS.

Lagt verður upp til, at flutningur av persónupplýsingum til útlond kann fara fram uttan loyvi ella góðkenning frammanundan.

Tá tað kemur til triðjalond o.a. verður lagt upp til eina skipan, sum er lík henni, vit kenna í dag. Útgangsstøðið er sostatt, at persónupplýsingar ikki kunnu flytast til triðjalond, tí hesi ikki tryggja eitt nøktandi verndarstøði. Bert um heimild er fyri hesum í dátuverndarlógini, kunnu upplýsingar flytast til hesi lond.

Persónupplýsingar kunnu flytast til eitt triðjaland o.a.:

- um landsstýrismaðurin hevur ásett, at eitt triðjaland tryggjar nøktandi verndarstøði
- um fullgóð trygd er fyri verndini av persónupplýsingum
- í serligum undantaksførum

Skipanin, sum vit kenna í galdandi løgtingslóg, við fráboðanarskyldu og viðgerðarloyvi, verður ikki førd víðari – heldur ikki í sambandi við flutning av persónupplýsingum úr Føroyum. Mett verður, at verandi skipan umsitingarliga er ov kostnaðarmikil og tíðarkrevjandi og ikki stendur mát við vinningin av hesum. Tá landsstýrismaðurin ásetur, at eitt land er at meta sum trygt í mun til flutning av persónupplýsingum, er henda áseting nóg mikið, og fleiri trygdartiltøk eru óneyðug.

*1.4.9. Dátueftirlitið*

Eins og galdandi løgtingslóg hevur lógaruppskotið ásetingar um eitt dátueftirlit, sum eins og í dag skal verða ein óheftur fyrisitingarligur myndugleiki, og sum skal hava eftirlit við, at løgtingslógin verður hildin. Lagt verður upp til, at Dátueftirlitið eins og í dag skal vera sett saman av einum Dáturáðið og eini avgreiðsluskrivstovu.

Umframt at áleggja Dátueftirlitinum eina røð av uppgávum, hevur lógaruppskotið eisini eina røð av heimildum, sum eftirlitið kann nýta í samband við, at tað fremur sítt virksemi.

Ein týdningarmikil broyting í mun til galdandi rætt er, at reglurnar um fráboðan og viðgerðarloyvi, sum eru í galdandi lóg, verða strikaðar. Hetta er grundað á eina meting av, at fyrimunirnir av fráboðanum og viðgerðarloyvunum ikki standa mát við t.d. umsitingarliga kostnaðin av teimum – hvørki fyri Dátueftirlitið ella fyri dátuábyrgdaran.

Heldur eigur skipanin hesum viðvíkjandi at umskipast soleiðis, at ábyrgdin fyri at løgtingslógin verður hildin, altíð í fyrstu syftu liggur hjá teimum, sum eru fevnd av løgtingslógini, t.e. serliga á dátuábyrgdaranum, sum altíð skal kunna vísa á og skjalprógva, at løgtingslógin verður hildin.

Hetta hevur við sær, at Dátueftirlitið í staðin fyri at nýta orku uppá fráboðanir og at meta um, hvørt ein viðgerð er í samsvari við lógina áðrenn viðgerðin verður sett í gongd, skal nýta sína orku til m.a. eftirlitsvitjanir og seinna kanna, um reglurnar eru fylgdar.

Umframt eftirlit verður tað ein raðfest uppgáva hjá Dátueftirlitinum at kunna um dátuverndarøkið. Dátueftirlitið skal bæði hækka kunnleikan til dátuverndarøkið sum heild í samfelagnum og kunna dátuábyrgdarar og dátuviðgerar um teirra skyldur sambært lógini. Henda kunning kann fara fram við almennum vegleiðingum og leiðbeiningum o.ø., umframt ítøkiligari ráðgeving og kunning. Av tí, at reglurnar um t.d. loyvi frammanundan verða strikaðar, og stovnar og fyritøkur tí sjálvi skulu meta um, hvørt treytirnar fyri viðgerð eru loknar, hevur tað alstóran týdning, at dátuábyrgdarar o.o. hava nøktandi vitan og amboð at tryggja, at lógin verður fylgd.

*1.4.10. Rættarráð, ábyrgd og revsing*

Lagt verður upp til, at tann skrásetti eins og í dag kann klaga til Dátueftirlitið um viðgerð av persónupplýsingum um hann ella hana, og at tað undir ávísum treytum skal vera rættur til endurgjald fyri skaða, sum er íkomin av viðgerð í ósamsvari við lógina.

Eins og í galdandi løgtingslóg verður eisini lagt upp til reglur um revsing. Brot á nærri ásettar reglur í løgtingslógini skal sostatt kunna revsast við sekt ella við fongsli upp til 6 mánaðar.

Í sambandi við gildiskomu av GDPR var stórt fokus á, at revsingin fyri at bróta dátuverndarreglurnar skuldi verða strangari, herundir serliga at sektarstøðið skuldi verða hægri. Í GDPR eru eisini ásettar maksimum sektarupphæddir, sum úr einum føroyskum sjónarmiðið eru at meta sum sera høgar.

Í artikli 83 er sostatt ásett, at brot fyri ávísar ásetingar skal hava við sær sekt upp til 10 mió. evrur ella 2 % av árliga altjóða umsetninginum um hendan upphæddin er størri og fyri aðrar ásetingar sekt upp til 20 mio. evrur ella 4 % av árliga altjóða umsetninginum um henda upphæddin er størri.

Fyri revsirættarlig tiltøk er ásett í artikli 84, at hesi skulu verða virkin, standa mát við brotið og hava ræðandi virknað.

Í mun til, hvat sektarstøðið í Føroyum skal verða, verður hetta til dómstólarnar at meta um í hvørjum einstøkum føri. Í artikli 83, stk. 2 eru ásett viðurskifti, sum skulu takast við í metingina, tá sektin verður ásett. Hetta er t.d um brotið er tilætlað ella framt við ósketni, um dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin hava roynt at avmarka skaðan, hvussu langa tíð brotið hevur vart o.s.fr. Hesi viðurskifti eiga eisini at verða tikin við í metingini, tá revsing verður ásett í ítøkiligum revsimálum í Føroyum. Harumframt er kapitli 10 í revsilógini um áseting av revsing galdandi.

Hóast tað er upp til dómstólarnar at meta í hvørjum einstøkum føri, skal tað tó viðmerkjast, at tað við uppskotinum er lagt upp til, at sektarstøðið verður hækkað munandi í mun til galdandi støðið. Tað er umráðandi, at reglurnar um dátuvernd verða tiknar í størsta álvara, og eitt hægri sektarstøði er ein partur av hesum.

Mett verður, at spurningurin um sektarstøðið hevur týdning í mun til spurningin um endurgóðkenning av Føroyum sum trygt triðjaland. Tað er í tí samanhanginum umráðandi, at virknaðurin av revsing í Føroyum kann metast við virknaðin av (fyrisitingarligum) sektum, sum verða givnar í ES-londunum.

Í donsku lógini, sum supplerar GDPR, er lagt upp til, at danska sektarstøðið verður hækkað munandi. Sektir eftir áður galdandi lóg í Danmark lógu ímillum 2000 kr. og 25.000 kr. Lagt verður upp til, at sektarstøðið í Føroyum í útgangsstøðinum skal fylgja gongdini í Danmark uttan so, at tað eru serlig føroysk viðurskifti, sum gera seg galdandi, sum kunnu grundað, at sektarstøðið skal eitt annað. Tað kann í tí samanhanginum viðmerkjast, at tað, at sektarstøðið skal fylgja gongdini í Danmark, ikki í øllum førum merkir, at sektin í krónum og oyrum skal verða tann sama í Danmark og í Føroyum. Støddin á samfelagnum og á fyritøkum er í sær sjálvum viðurskifti, sum kunnu grunda, at sektarstøðið kann vera øðrvísi.

Tað skal serliga viðmerkjast, at støddin á fyritøkum og fyrimunirnir, sum eru fingnir við at bróta lógina, skulu takast við í metingina av, hvussu høg sektin skal verða. Tað er sostatt ikki

endamálið við at hækka sektarstøðið, at sektirnar skulu gerast so høgar, at fyritøkur ikki hóra undan fíggjarliga, um løgtingslógin verður brotin.

Viðmerkjast skal eisini, at lagt er upp til, at Dátueftirlтið í sambandi við, at málið verður latið politinum, gevur tilmæli um, hvat sektarstøðið skal vera.

Enn er eingin dómur fallin í Danmark, men Datatilsynet hevur latið politinum fleiri mál, har mælt verður til sektir upp til 1,2 mió. kr.

*1.4.11. Serligt um fyrisitingarlig sektaruppskot*
Umframt at hava reglur um revsing, eru eisini reglur í GDPR um fyrisitingarligar sektir (administrative bøder), sum dátueftirlitini í eini fyrisitingarligari avgerð skulu kunna áleggja fyri brot á fyriskipanina.

Tað er ivingarsamt um fyrisitingarligar sektir eru í samsvari við § 3 í grundlógini, sum ásetur valdsbýti millum lóggevandi, útinnandi og dømandi valdið. Tað er ein grundleggandi meginregla í donskum og føroyskum rætti, at sektir, sum eru at meta sum eitt revsirættarligt tiltak, einans kunnu verða álagdar av einum dómstóli og við teimum trygdum fyri ákærda, sum revsirættargangurin gevur.

Hóast ein sekt verður kallað fyrisitingarlig, kemst sostatt ikki uttanum, at virknaðurin er at meta sum ein revsing. Serliga við sektarupphæddum, sum GDPR leggur upp til. At tað umframt eina fyrisitingarliga sekt er møguligt at revsa, t.d. við eini revsirættarligari sekt, hevur eisini við sær møguleika fyri dupultari revsing.

Av hesi orsøk verður lagt upp til somu skipan sum í Danmark á hesum øki. Útgangsstøðið verður, at sekt (ella fongsul) fyri brot á løgtingslógina verður ásett av dómstolunum, t.e. í praksis Føroya Rætti, sum eitt revsirættarligt tiltak.

Samstundis verður sett inn ein heimild til Dátueftirlitið at boða frá fyrisitingarligum sektaruppskoti (administrative bødeforlæg), sum er eitt slag av revsirættarligum tiltaki, og sum ikki er tað sama sum fyrisitingarligar sektir, sum eru fyrisitingarligar avgerðir.

Hetta hevur við sær, at Dátueftirlitið í málum, sum eru einføld og uttan próvlig ivamál, kunnu boða viðkomandi, sum hevur brotið lógina, frá fyrisitingarligum sektaruppskoti, sum viðkomandi kann velja at taka við. Hesi mál kunnu verða avgreidd sum revsirættarlig játtanarmál.

Mál, sum ikki kunnu avgreiðast við einum fyrisitingarligum sektaruppskoti, t.d. tí viðkomandi ikki kann játta seg sekan ella tí málið ikki er einfalt, verða latin politinum og ákæruvaldinum at avgreiða. Í hesum sambandi skal Dátueftirlitið leggja við eitt uppskot um, hvat sektin fyri brotið skal vera.

Treytirnar fyri at nýta fyrisitingarlig sektaruppskot eru strangar. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 79.

Tá fyrisitingarlig sektaruppskot verða givin, skal sektarstøðið fyri (slagi av) brotið, vera lagt fast av dómstólinum frammanundan. Fyrisitingarligu sektaruppskotini fylgja eftir hetta sama sektarstøðið, sum sektir, sum verða givnar av dómstólinum.

Um politiið og ákæruvaldið viðgera mál, sum Dátueftirlitið ikki hevur latið hesum myndugleikum við einum tilmæli um, hvør revsing er hóskandi, skal málið sendast Dátueftirlitinum til ummælis áðrenn ákæruvaldið ger av, um ákærast skal í málinum.

*1.4.12. Serligt um sambandi ímillum hetta løgtingslógaruppskot og ríkismyndugleikar í Føroyum*

Sambært ríkisrættarligu støðu Føroya, hevur føroyska heimastýrið lóggávumyndugleika og fyrisitingarmyndugleika á yvirtiknum málsøkjum. Hetta merkir hinvegin, at heimastýrið ikki kann lóggeva um ríkismyndugleikar og virksemi teirra í Føroyum, eins og tað hevur við sær, at føroyskir myndugleikar ikki kunnu hava fyrisitingarligt eftirlit við ríkismyndugleikum í Føroyum. Ríkismyndugleikarnir í Føroyum eru í løtuni: Føroya Rættur, Politiið, Kriminalforsorgin, Ríkisumboðið og Landslæknin.

Henda løgtingslóg, eins og galdandi persónsupplýsingarlóg, verður ikki galdandi fyri ríkismyndugleikar í Føroyum. Ríkismyndugleikarnir eru fevndir av anordning nr. 754 av 19. juni 2017 om ikrafttræden af lov om behandling af personoplysninger for rigsmyndighedernes behandling af oplysninger på Færøerne. Við hesi fyriskipan frá 2017 bleiv tann áður galdandi persónupplýsingarlógin í Danmark, persondataloven, sett í gildi fyri ríkismyndugleikarnar. Danska Datatilsynet hevur eftirlit við, at ríkismyndugleikarnir halda lógina.

Verða málsøki yvirtikin og koma undir myndugleika heimastýrisins, verður møgulig viðgerð av persónupplýsingum, sum er innanfyri lógarinnar virkisøki, fevnt av løgtingslógini og harvið eftirlitinum hjá Dátueftirlitinum, sbr. tó niðanfyri um rættarhandhevjandi myndugleikar.

*1.4.13. Serligt um rættarhandhevjandi myndugleikar*

GDPR er ikki galdandi fyri viðgerð av persónupplýsingum, sum rættarhandhevjandi myndugleikar fremja fyri at fyribyrgja, eftirkanna, avdúka ella rættarsøkja revsiverdar gerðir ella fyri at fremja revsirættarlig tiltøk, undir hesum tiltøk, sum skulu verja ímóti og fyribyrgja hóttanir móti almennu trygdini.

Rættarhandhevjandi myndugleikarnir, t.e. politiið, undir hesum ákærumyndugleikin og hernaðarligi ákærumyndugleikin, kriminalforsorgin, óhefti politiklagumyndugleikin og dómstólarnir eru í staðin fevndir av ES-direktivinum um rættarhandhevjan - Europa-Parlamentets og Rådets direktiv (EU) 2016/680 af 27. april 2016 – sum var partur av dátuverndarpakkanum frá ES-nevndini og sum í Danmark er framt við lov nr. 410 af 27 april 2017 om retshåndhævende myndigheders behandling af personoplysninger.

Í løtuni eru allir rættarhandhevjandi myndugleikar í Føroyum ríkismyndugleikar og verða tískil ikki fevndir av hesi løgtingslóg. Koma hesir myndugleikar ella málsøki seinni undir myndugleika heimastýrisins, eigur broyting at verða gjørd samsvarandi í hesi løgtingslóg, eins og støða eigur at verða tikin til, um henda løgtingslóg skal verða galdandi, ella um serlig løgtingslóg skal gerast.

*1.4.14. Serligt um umsiting av dátuverndarlógini*

Tá farið var undir at endurskoða persónsupplýsingarlógina í 2018 var semja í landsstýrinum um, at nýggja løgtingslógin skuldi liggja tætt upp at GDPR. Hetta m.a. tí, at júst á hesum øki er trupult at síggja, hvørji serføroysk viðurskifti gera seg galdandi, sum hava við sær, at

neyðugt er við serføroyskum reglum. Samstundis hevur verið víst á fyrimunir, undir hesum at vegleiðingar o.tíl. frá ES og ES-limalondum á henda hátt kunnu nýtast í Føroyum, føroyskum skrásettum, dátuábyrgdarum o.ø. til fyrimunar.

Landsstýrið, sum tók við í september 2019, tók undir við hesum og arbeitt hevur tískil verið víðari eftir hesum leisti, sum hevur við sær, at lógaruppskotið byggir á somu skipan sum GDPR, og at fleiri av ásetingunum í lógaruppskotinum eru grundaðar á GDPR-tekstin við málsligum tillaginum. Í tann mun tað hevur verið gjørligt, eru orðingarnar úr galdandi løgtingslóg varðveittar.

Í mun til tulking víkir lógaruppskotið ikki løgfrøðiliga frá øðrum lógaruppskotum, og skal løgtingslógin, tá hon er samtykt og sett í gildi, umsitast á sama hátt, sum øll onnur føroysk lóggáva eftir teimum prinsippum, sum vanliga eru galdandi.

Um umsiting av hesum lógaruppskoti skal tó serliga viðmerkjast, at tá lógaruppskotið í høvuðsheitum er grundað á GDPR, er lagt upp til, at rættarstøðan í Føroyum í mest møguligan mun skal vera í samsvari við rættarstøðuna í ES.

Hetta hevur fyrst og fremst við sær, at fyriskipanin – á øllum góðkendum málum – kann nýtast sum íkast, tá løgtingslógin skal tulkast.

Eisini hevur hetta við sær, at tað í útgangsstøðinum verður møguligt hjá dátuábyrgdarum, dátuviðgerum, skrásettum o.ø. at nýta vegleiðingar o.a. frá ES-stovnum, undir hesum Evropeiska dátuverndarráðnum (EDPB) og ES-dómstólinum, og eftirlitsmyndugleikum í ES-londum. Eisini kann Dátueftirlitið nýta skjølini í sínum arbeiði um hetta verður mett viðkomandi.

Tá tað er sagt, so er tað Dátueftirlitið, sum er myndugleiki á økinum, sum eins og í dag hevur ábyrgdina av at nágreina innihaldið í løgtingslógini, og sum tí í ítøkiligum málum og almennum vegleiðingum o.a. fer at gera av, hvussu løgtingslógin skal tulkast. Dátueftirlitið skal tó í hesum arbeiði hava í huga, at landsstýrið og løgtingið við hesum løgtingslógaruppskotið hava lagt upp til, at rættarstøðan í Føroyum og ES so vítt møguligt skal vera eins.

Danska Løgmálaráðið hevur skrivað eitt álit um fyriskipanina, Betænkning nr. 1556 om databeskyttelsesforordningen (2016/679). Álitið varð skrivað í tíðini eftir, at fyriskipanini var sett í gildi, og áðrenn hon fekk virknað. Álitið hevur verið brúkt í arbeiðinum at gera hetta løgtingslógaruppskot.

Harafturat kann nevnast, at ávísar ásetingar í lógaruppskotinum eru grundaðar á donsku lógina, sum supplerar GDPR (lov nr. 502 af 23. maj 2018 om supplerende bestemmelser til forordning om beskyttelse af fysiske personer i forbindelse med behandling af personoplysningar og om fri udveksling af sådanne oplysningar (databeskyttelsesloven)).

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Almannamálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Uttanríkis- og mentamálaráðnum, Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Fiskimálaráðnum, Dátueftirlitinum, Tórshavnar Kommunu, Klaksvíkar Kommunu, Kommunufelagnum, Landssjúkrahúsinum, Ílegusavninum, Fróðskaparsetri Føroya, Fólkaheilsuráðnum, Heilsutrygd, Almannaverkinum, Familjufyrisitingini, Deildini fyri

Arbeiðs- og Almannaheilsu, Gjaldsstovuni, TAKS, Talgildu Føroyum, Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum, Umhvørvisstovuni, Undirvísingarstýrinum, Sjóvinnustýrinum, Vinnuhúsinum, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Starvsmannafelagnum, Føroya Tele, Hey, SPEKT, Wired Relations, Januar, Elektron, Bank Nordik, Betri, Norðoyar Sparikassa, Suðuroyar Sparikassa, Faroe Law, Føroya Politi og Føroya Rætti.

Uppskotið hevur eisini ligið á ummælisportalinum hjá Føroya landsstýri. Harumframt hevur Løgmansskrivstovan, meðan uppskotið hevur verið til ummælis, hildið fleiri kunningarfundir fyri áhugaðum pørtum, eitt nú bólkunum, sum eru nevndir undir pkt. 1.1.3. omanfyri, har greitt hevur verið frá uppskotinum.

Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið, Uttanríkis- og mentamálaráðið, Umhvørvis- og vinnumálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Fiskimálaráðið, Dátueftirlitið, Klaksvíkar Kommuna, Kommunufelagið, Landssjúkrahúsið, Ílegusavnið, Granskingarráðið, Fróðskaparsetur Føroya, Fólkaheilsuráðið, Almannaverkið, Familjufyrisitingin, Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Gjaldsstovan, Arbeiðs- og Brunaeftirlitið, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Starvsmannafelagið, KT-felagið, LÍV, Bank Nordik, Betri, Faroe Law, Felagið Føroyskir Grannskoðarar og Føroya Politi hava latið Løgmansskrivstovuni ummælisskriv.

Víst verður til ummælisskjalið (fylgiskjal 2).

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Løgtingslógaruppskotið hevur við sær ein meirkostnað fyri land og kommunur.

Allir almennir myndugleikar eru í dag fevndir av persónupplýsingarlógini frá 2001 og teimum skyldum, sum løgtingslógin ásetur.

Í løgtingslógaruppskotinum eru nýggjar umsitingarligar skyldur fyri dátuábyrgdaran og dátuviðgeran, men samstundis sum hesar verða álagdar, verða aðrar strikaðar. T.d. verður øllum dátuábyrgdarum og dátuviðgerum álagt at gera yvirlit yvir viðgerðir, samstundis sum fráboðanarskyldan og kravið um viðgerðarloyvi frammanundan verður slept. Løgtingslógaruppskotið leggur í størri mun enn galdandi løgtingslóg upp til, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin sjálvir leggja arbeiðið til rættis við dátuvernd.

Lagt verður upp til, at møguligur meirkostnaður skal so vítt møguligt haldast innan fyri egnar karmar.

*Dátuverndarfólk*

Ásett verður, at allir almennir myndugleikar, t.e. bæði landsmyndugleikar og kommunalir myndugleikar, skulu hava eitt dátuverndarfólk.

Tað er ikki eitt krav, at dátuverndarfólkið einans virkar sum dátuverndarfólk. Tað er sostatt møguleiki fyri, at ein persónur, sum longu er í starvi, eisini átekur sær leiklutin sum dátuverndarfólk. At vera dátuverndarfólk kann í ávísan mun samanberast við at vera álitisfólk og trygdarumboð. Eisini er gjørligt at hava eitt dátuverndarfólk, sum tekur sær av fleiri almennum myndugleikum.

Tað er eitt krav, at viðkomandi hevur frælsi og umstøður til at røkja sín leiklut sum dátuverndarfólk.

Lagt verður upp til, at eisini møguligur kostnaður fyri dátuverndarfólkið í útgangsstøðinum skal haldast innan fyri egnar karmar.

*Dátueftirlitið*
Dátueftirlitið heldur fram sum eftirlitsmyndugleiki á dátuverndarøkinum. Hvussu eftirlitið verður skipað, hvørjar uppgávur tað skal hava o.a., er ásett í kapittul 7 í løgtingslógaruppskotinum. Hildið verður fast við núverandi bygnaði við avgreiðsluskrivstovu og Dáturáði.

Við løgtingslógaruppskotinum verður lagt upp til, at tað ikki longur krevst loyvi frá Dátueftirlitinum, og at viðgerðir ikki longur skulu fráboðast. Í staðin skal Dátueftirlitið í serligan mun nýta orku til kunnandi og vegleiðandi arbeiði – alment og ítøkiligt – og sjálvsagt til eftirlit. Frá at løgtingslógaruppskotið verður samtykt, til løgtingslógin kemur í gildi, hevur Dátueftirlitið harumframt eina stóra kunningaruppgávu.

Av tí, at dátuverndarøkið í ávísan mun verður umskipað, byggir løgtingslógaruppskotið eisini á eina fortreyt um, at Dátueftirlitið fær hægri játtan.

Dátueftirlitið hevur árini 2008-2017 talt 2,8 ársverk.

Í 2018 var farið undir eina tilgongd at styrkja Dátueftirlitið fíggjarliga. Í 2019 hækkaði játtanin við 400 tkr., so at Dátueftirlitið kundi seta ein nýggjan fulltrúa (í 2020 verður hækkingin framskrivað til 600 tkr fyri eitt fult ársverk). Eftir ætlan verður játtanin til Dátueftirlitið hækkað aftur í 2020, 2021 og 2022, so at ein nýggjur fulltrúi kann setast í 2020, og aftur ein í 2021. Tá fer Dátueftirlitið at telja seks starvsfólk – fýra fulltrúar og ein skrivara umframt stjóran.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Løgtingslógaruppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunu.

Løgtingslógaruppskotið hevur við sær bæði umsitingarligar léttar og umsitingarligar byrðar, tá samanborið verður við galdandi løgtingslóg. Samanumtikið verður tað tó í størri mun upp til dátuábyrgdaran ella dátuviðgeran – heldur enn Dátueftirlitið – at leggja arbeiðið til rættis.

Allir almennir myndugleikar eru í dag fevndir av persónsupplýsingarlógini og halda tí tær skyldur, sum løgtingslógin ásetur.

Í løgtingslógaruppskotinum eru nýggjar umsitingarligar skyldur, men samstundis sum hesar verða álagdar, verða aðrar strikaðar. T.d. verður øllum dátuábyrgdarum og dátuviðgerum álagt at gera yvirlit yvir viðgerðir, samstundis sum fráboðanarskyldan og kravið um loyvi frammanundan verður slept. Lógaruppskotið leggur í størri mun enn galdandi løgtingslóg upp til, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin sjálvir leggja arbeiðið til rættis við dátuvernd.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Tær flestu ásetingarnar í galdandi løgtingslóg fevna eisini um privata geiran. Privatar fyritøkur o.o. halda tí tær skyldur, sum galdandi løgtingslóg ásetur.

Sum greitt er frá omanfyri undir pkt. 2.1. og pkt. 2.2., hevur løgtingslógaruppskotið við sær bæði umsitingarligar léttar og umsitingarligar byrðar fyri almennar myndugleikar. Tað sama er í útgangsstøðinum galdandi fyri vinnuna. Samanumtikið verður tó mett, at umsitingarligu léttarnir sum frá líður verða fleiri enn byrðarnar.

Umframt tær broytingarnar, sum eru nevndar omanfyri undir pkt. 2.1. og pkt. 2.2., er í mun til vinnuna serliga at viðmerkja, at ásetingarnar um flutning av persónupplýsingum til útlond og triðjalond verða broyttar, so at flutningurin umsitingarliga verður léttari enn í galdandi løgtingslóg.

Um dátuverndarfólkið er serliga at viðmerkja, at henda skylda í ávísum førum verður áløgd privatum dátuábyrgdarum og dátuviðgerum. Viðmerkingarnar omanfyri undir pkt. 2.1. um dátuverndarfólk galda samsvarandi.

Leggjast skal eisini afturat at fokusið, sum er komið á dátuverndarøkið, serliga vegna nýggju reglurnar í ES (GDPR), kann hava við sær, at vinnan lutfalsliga fer at fáa fleiri fyrispurningar frá skrásettum um innlit, rætting av upplýsingum, striking av upplýsingum o.s.fr. Hetta er tó ikki beinleiðis ein avleiðing av hesum uppskoti, sum í stóran mun førir víðari reglurnar í galdandi løgtingslóg um rættindi hjá skrásetta.

Viðmerkjast skal eisini, at tað verður mett at vera ein fyrimunur fyri vinnuna, at dátuverndarøkið við hesum lógaruppskotið verður regulerað á sama hátt sum í ES. Hetta hevur við sær, at fyritøkur við at fylgja føroyskari lóggávu, eru á støði við ES-lond. Hetta kann t.d. hava týdning, tá kt-loysnir skulu seljast inn á ES-marknaðin, ella tá føroyskar fyritøkur skulu skjalprógva, at tær eru "GDPR-compliant".

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Løgtingslógarauppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lagt verður upp til, at løgtingslógin skal verða galdandi alment fyri øll í Føroyum, og tí hevur uppskotið ikki serligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lagt verður upp til, at løgtingslógin skal regulera viðgerð av persónupplýsingum alment, t.e. eins fyri øll í Føroyum, og hevur tískil ikki serligar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

Lagt verður tó upp til, at løgtingslógin – eins og galdandi løgtingslóg – inniheldur ásetingar um, at ávísar persónupplýsingar, undir hesum um ættarslag, politiska sannføring og fakfelagsviðurskifti, eru at meta sum viðkvæmar persónupplýsingar. Krøvini at viðgera hesar persónupplýsingar eru strangari enn krøvini til viðgerð av vanligum persónupplýsingum.

Ein serlig viðgerðarheimild er í § 12, stk. 1, nr. 5 fyri almannagagnlig feløg og grunnar, sum í serligum førum kunnu viðgera viðkvæmar persónupplýsingar um egnar limir í hesum felagsskapum. Henda regla er eisini galdandi í dag.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
28. januar 1981 lat fyrsti millumtjóðasáttmáli á økinum upp fyri undirskriving. Talan er um millumtjóðasáttmála nr. 108 frá Evroparáðnum, á enskum Convention for the Protection of

Individuals with regard to Automatic Processing of Personal Data. Millumtjóðasáttmálin kom í gildi 28. januar 1985, eftir at 5 lond høvdu staðfest sáttmálan.

Danmark skrivaði eisini undir sáttmálan 28. januar 1981, men tók fyrivarni fyri Føroyum og Grønlandi. 23. oktober 1989 staðfesti Danmark sáttmálan, og 1. februar 1990 kom hann í gildi í Danmark. Sáttmálin er framhaldandi ikki galdandi í Føroyum ella Grønlandi.

M.a. í sambandi við, at nýggjar reglur eru settar fram og komnar í gildi í ES, arbeiðir Evroparáðið við at endurskoða sáttmálan.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

**1) Hoyvíkssáttmálin**
Ísland er limur í EFTA og harvið eisini limur í EBS. EBS er samstarv ímillum ES og EFTA um felags innmarknað, tó við undantaki fyri fiskivinnu og landbúnað. Kravið fyri at vera limur í EBS er, at ES-lóggávan, sum fevnir um tey øki, sum EBS fevnir um, skal setast í gildi í øllum EBS-limalondunum. Hetta merkir, at rættiliga nógv ES-lóggáva er galdandi í Íslandi vegna EBS, m.a. GDPR.

Henda løgtingslóg kann tí lætta um elektroniskt samskifti ímillum Føroyar og Ísland, bæði hjá privatum borgarum og hjá fyritøkum, tí at lógirnar í stóran mun verða eins.

**2) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**
Persónupplýsingar eru fevndar av EMRS grein 8 um privatlív og familjulív. Løgtingslógaruppskotið snýr seg serliga um at verja hesar persónupplýsingar og stuðlar tí undir endamálinum við grein 8, sum er at verja um rættin til privatlív og familjulív.

Løgtingslógaruppskotið hevur eisini áseting um avmarking av virkisøkinum í mun til viðgerð av persónupplýsingum til journalistisk endamál. Hetta í trá við skrivi- og talufrælsi í grein 10 í EMRS.

Tá tað kemur til vernd av persónupplýsingum, so er hetta rættindi, sum skulu verjast á sama hátt sum onnur grundleggjandi rættindi. Í ávísum førum er tað neyðugt, at hesi rættindi verða viga upp ímóti hvør øðrum. Í hesum førum verður tað framhaldandi so, at rætturin til skrivi- og talufrælsi ikki kann verða skerdur vísandi til dátuvernd. Víst verður til § 3, stk. 3-4 og serligu viðmerkingarnar til hesar ásetingar.

Í § 70 og § 71 eru ásettar heimildir til Dátueftirlitið, sum stovnurin kann brúka í sambandi við sítt virki. Hetta eru heimildir, sum eisini eru at finna í galdandi lóg. Dátueftirlitið fær m.a. heimild at krevja allar upplýsingar útflýggjaðar, sum eru av týdningi fyri virksemi hjá eftirlitinum, og kann fáa atgongd til høli o.a. uttan rættarúrskurð. Hóast talan kann vera um álvarslig inntriv, metir Løgmansskrivstovan, at hesi eru av stórum týdning fyri, at Dátueftirlitið kann føra eitt virkið eftirlit. Við teimum treytum fyri nýtslu, sum eru ásettar, og sum verja tann einstaka, metir Løgmansskrivstovan, at lutfalsmeginreglan er lokin.

**3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
Løgtingslógaruppskotið hevur – eins og galdandi løgtingslóg – við sær, at persónupplýsingar um heilsu eru at meta sum viðkvæmar persónupplýsingar. Hetta hevur við sær, at krøvini at viðgera hesar persónupplýsingar eru strangari enn krøvini til viðgerð av vanligum persónupplýsingum.

Løgtingslógaruppskotið stuðlar tí undir ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

## 2.9. Markaforðingar

Galdandi løgtingslóg hevur við sær ávísar markaforðingar bæði í mun til norðurlond og til ES. Orsøkirnar til hesar markaforðingar eru tvíbýttar.

Onnur orsøkin er, at galdandi løgtingslóg er ein samanrenning ímillum donsku og norsku persónupplýsingarlógirnar, og harvið samsvarar hon við hvørgan teirra, og heldur ikki við persónupplýsingarlógirnar í hinum ES-limalondunum. Hetta merkir m.a. fyri føroyska vinnulívið, at tær telduskipanir og tað software, sum verður ment til føroyska marknaðin, ikki beinleiðis kann nýtast í ES. Hinvegin merkir tað eisini, at vinnulívið og borgarar annars, ikki uttan víðari kunnu nýta telduskipanir og software úr ES, tá ið hugsað verður um krøvini til viðgerð av persónupplýsingum.

Henda løgtingslóg leggur upp til, at føroyska persónupplýsingarlógin í størsta mun samsvarar við lóggávuna í ES, t.e. GDPR. Henda markaforðing verður tí strikað.
Hin orsøkin er tann skipanin, sum í dag er í mun til flutning av persónupplýsingum úr Føroyum. Í dag er tað sostatt so, at hóast landsstýrismaðurin hevur góðkent øll ES-limalondini og EBS-limalondini sum trygg triðjalond, skal flutningur av persónupplýsingum til hesi lond, og til øll onnur trygg triðjalond, annaðhvørt fráboðast til Dátueftirlitið, ella eisini, tá ið talan er um upplýsingar sum eru viðkvæmar, hava viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum.

Hetta er ein dupultskipan, sum umsitingarliga er tung, og sum ikki stendur mát við teir fyrimunir, sum hon hevur við sær. Henda dupultskipan verður tí við uppskotinum strikað. Hetta hevur við sær, at eisini henda markaforðing verður strikað.

## 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Í løgtingslógaruppskotinum verður lagt upp til, at Dátueftirlitið framhaldandi skal hava eina røð av heimildum, sum Dátueftirlitið kann brúka í sínum arbeiði at føra eftirlit við, at løgtingslógin verður hildin.

Í mun til revsing verður lagt upp til, at revsiramman verður hækkað úr hefti (t.e. fongsul í upp til 4 mánaðir) til fongsul í upp til 6 mánaðar. Eisini verður lagt upp til, at sektarstøðið verður hækkað.

Sum nakað nýtt hevur løgtingslógaruppskotið eisini eina áseting um fyrisitingarligar sektir, sum Dátueftirlitið kann áleggja fyri brot á løgtingslógina. Ásetingin hevur við sær, at Dátueftirlitið í málum, sum eru einføld og uttan próvligar ivaspurningar, kunnu boða viðkomandi, sum hevur brotið lógina, frá fyrisitingarligum sektaruppskoti, sum viðkomandi kann velja at taka við. Treytirnar fyri at kunna áleggja fyrisitingarlig sektaruppskot eru strangar.

Tað er umráðandi, at reglurnar um dátuvernd verða tiknar í størsta álvara, og eitt hægri sektarstøðið og møguleikin fyri fyrisitingarligum sektaruppskoti er ein partur av hesum.

Um revsing, undir hesum sektarstøði og fyrisitingarlig sektaruppskot, verður sum heild víst til pkt. 1.4.10. og 1.4.11. omanfyri og til serligu viðmerkingarnar til §§ 78-79.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Løgtingslógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Í uppskotinum til § 21, stk. 5 og § 26, stk. 3 er ásett, at dátuábyrgdarin í ávísum førum kann krevja eitt hóskandi gjald frá skrásetta. Hetta eru rímilig ómaksgjald, sum svara til tær umsitingarligu útreiðslurnar, sum dátuábyrgdarin hevur, í sambandi við, at skrásetti útinnir síni rættindi.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Løgtingslógaruppskotið hevur við sær, at skyldur verða lagdar á dátuábyrgdarar og dátuviðgerar. Hetta fevnir um bæði almennar myndugleikar og privatar fyritøkur.

Flestu av skyldunum eru longu galdandi, herundir kunningarskyldan tá persónupplýsingar verða savnaðar.

Uppskotið áleggur skyldur fyri dátuábyrgdaran og dátuviðgeran, men samstundis sum hesar verða álagdar, verða aðrar strikaðar. T.d. verður øllum dátuábyrgdarum og dátuviðgerum álagt at gera yvirlit yvir viðgerðir, samstundis sum fráboðanarskyldan og kravið um viðgerðarloyvi frammanundan verður slept.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Í løgtingslógaruppskotinum eru heimildir til landsstýrismannin at áseta nærri reglur. Hesar heimildir svara í høvuðsheitum til heimildirnar, sum landsstýrismaðurin hevur eftir galdandi løgtingslóg.

Sambært § 12, stk. 3 kann avvarðandi landsstýrismaður í samráð við landsstýrismannin í dátuverndarmálum áseta reglur um viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum.

Sambært § 19, stk. 3 kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um treytir fyri viðgerðir í sambandi við rættarkunningarskipanir.

Sambært § 36, stk. 3 kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um undantøk frá reglunum um innlit og kunningarskyldu.

Sambært § 43 kann landsstýrismaðurin eftir ummæli frá Dátueftirlitinum áseta standardásetingar, sbrt. § 41, stk. 2 og § 42, stk. 2.

Sambært § 46, stk. 3 kann landsstýrismaðurin í samráð við avvarðandi landsstýrismann áseta nærri reglur um, at persónupplýsingar, sum verða viðgjørdar í ávísum kt-skipanum fyri almennu fyrisitingina heilt ella lutvíst skulu goymast í Føroyum.

Sambært § 60, stk. 2 kann landsstýrismaðurin eftir ummæli frá Dátueftirlitinum áseta, at eitt triðjaland o.a. hevur eitt nøktandi verndarstøði.

Sambært § 67 setur landsstýrismaðurin eitt Dáturáð.

Sambært § 75 kann landsstýrismaðurin áseta reglur um, at samskifti við Dátueftirlitið skal verða talgilt.

Dátueftirlitið er eftirlitsmyndugleiki sambært løgtingslógini, og fyrisitingarligu avgerðirnar hjá Dátueftirlitinum sambært løgtingslógini eru endaligar innan fyrisitingina. Skrásetti kann tó, sum á øðrum økjum, venda sær til Løgtingsins umboðsmann ella leggja avgerðir fyri Føroya Rætt eftir borgarliga rættarganginum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Løgtingslógaruppskotið førir víðari rættin hjá Dátueftirlitinum at krevja allar upplýsingar, sum eru av týdningi fyri virksemi hjá Dátueftirlitinum, útflýggjaðar. Eisini førir uppskotið víðari rættin hjá ráðslimum og leiðandi starvsfólki í Dátueftirlitinum til eina og hvørja tíð uttan dómsúrskurð og við at vísa galdandi samleikaprógv, at fáa atgongd til høli, haðani persónupplýsingar verða viðgjørdar.

Hóast talan kann vera um álvarsom inntriv, metir Løgmansskrivstovan, at hesi eru av stórum týdningi fyri, at Dátueftirlitið kann føra eitt virkið eftirlit. Við teimum treytum fyri nýtslu, sum eru ásettar, og sum verja tann einstaka, metir Løgmansskrivstovan, at lutfalsmeginreglan er lokin.

Víst verður harumframt til serligu viðmerkingarnar til § 71.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Løgtingslógaruppskotið hevur við sær, at dátuverndin í Føroyum verður hægri enn hon er í dag. Hetta er serliga tí skrásetta til fyrimuns.

Av tí, at leikluturin hjá Dátueftirlitinum við løgtingslógaruppskotinum í hægri mun verður at vegleiða og kunna um dátuvernd alment og ítøkiligt, hevur lógaruppskotið við sær eina økta vitan og tilvit um dátuvernd í samfelagnum sum heild.

Løgtingslógaruppskotið verður harumframt mett at økja um sannlíkindini fyri, at Føroyar framhaldandi verða mettar sum eitt trygt triðjaland av ES-nevndini, sum er farin undir at endurskoða avgerðina frá 2010.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sosialar avleiðingar | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Umframt 99 greinar hevur GDPR 173 áskoðanir (betragtninger, recitals). Hesar áskoðanir svara í ávísan mun til viðmerkingar, sum vit kenna tær frá føroyskum lógaruppskotum. Í serligu viðmerkingunum niðanfyri verður víst til, hvør grein og hvørjar áskoðanir í GDPR innihaldsliga svara til viðkomandi áseting.

GDPR verður lagt við hesum løgtingslógaruppskotinum sum fylgiskjal. GDPR er sostatt ikki ein partur av løgtingslógaruppskotinum og verður ikki kunngjørt saman við løgtingslógini. Greinarnar og áskoðaninar í GDPR kunnu tó verða nýttar, tá løgtingslógin skal tulkast. Sum greitt er frá í almennu viðmerkingunum, m.a. undir pkt. 1.4.14. um umsiting av dátuverndarlógini, er tað við hesum løgtingslógaruppskoti lagt upp til eina rættarstøðu, sum liggur tætt upp at rættarstøðuni í ES.

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Kapittul 1**
**Virkisøki, landøkisásetingar o.a.**

Kapittul 1 um virkisøki, landøkisásetingar o.a. svarar innihaldsliga í høvuðsheitum til kapittul 1 í GDPR.

Sí eisini áskoðan nr. 1-14 í GDPR.

**Innihald og endamál**

**Til § 1**
*§ 1* byggir á innihaldið í grein 1 í GDPR og ásetur endamálið við løgtingslógini.

Lagt verður upp til at víðka endamálið við løgtingslógini nakað í mun til § 1 í galdandi løgtingslóg, sum hevur til endamáls at tryggja persónvernd hjá tí einstaka.

Víðkanin hevur við sær, at løgtingslógin hevur til endamáls bæði at áseta reglur um vernd av einstaklingum í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum, heruppií at verja grundleggjandi rættindi og frælsisrættindi hjá tí einstaka, og eisini at áseta reglur um frían flutning av persónupplýsingum.

Lagt verður sostatt upp til, at løgtingslógin skal hava tvey javnsett endamál. Við hesum verður hædd tikin fyri bæði tí einstaka og fyri kunningarsamfelagnum og altjóðagerðini, her undir týdninginum fyri tann einstaka og fyri samfelagið av, at persónupplýsingar kunnu flytast frítt – í og úr Føroyum.

Sí eisini áskoðan nr. 14 í GDPR.

**Virkisøki**
Virkisøkið, sum lagt verður upp til í hesum løgtingslógaruppskoti er sama virkisøkið, sum í grein 2 í GDPR og er samstundis innanfyri teir karmar, sum GDPR ásetur í grein 85 og 86.

Um virkisøkið sí eisini áskoðan nr. 15-21.

**Til § 2**
Lagt verður upp til, at løgtingslógin hevur sama breiða virkisøki sum í dag, sambært § 3, stk. 1 í galdandi løgtingslóg. Hetta hevur við sær, at løgtingslógin verður galdandi fyri alla viðgerð av persónupplýsingum. Tað merkir, at løgtingslógin er galdandi bæði fyri viðgerð, sum heilt ella lutvíst er automatisk og fyri aðra ikkiautomatiska viðgerð av persónupplýsingum, sum eru ella fara at verða partur av eini skrá.

Tá tað í uppskotinum verður víst til *automatiska* viðgerð, so er hetta at skilja á sama hátt, sum *elektronisk* viðgerð, sum er nýtt í galdandi áseting.

Dátuverndarlógin verður við hesum virkisøki – eins og í dag – galdandi fyri alla viðgerð av persónupplýsingum. Hetta hevur við sær, at lógin verður galdandi tvørturum nógv ymisk rættarøki. Víst verður eisini til pkt. 1.4.1. í almennu viðmerkingunum.

Breiða virkisøkið hevur við sær, at løgtingslógin eisini er galdandi fyri viðgerð av persónupplýsingum, sum fer fram í sambandi við sjónvarpseftiransing (TV-overvågning), t.e. við vakmyndatóli, og øðrum yvirvøkutólum.

Umframt at vera fevnd av hesi løgtingslóg er sjónvarpseftiransing (TV-overvågning) fevnd av lov nr. 278 frá 9. juni 1982 om forbud mod privates TV-overvågning.

**Til § 3**
Eins og í § 3, stk. 2 í galdandi løgtingslóg verður í *§ 3, stk. 1* lagt upp til, at løgtingslógin ikki skal vera galdandi fyri viðgerð av persónupplýsingum, sum einstaklingar gera til heilt persónlig endamál. Ásetingin hevur sama innihald sum grein 2, stk. 2, litra c í GDPR.

Orsøkin til, at henda viðgerð er undantikin lógarinnar virkisøki er, at tørvurin á dátuvernd ikki er tann sami, tá viðgerð fer fram til persónlig endamál.

Hetta sokallaða húsarhaldsundantakið hevur við sær, at privat samskifti, ein adressubók, ein elektroniskur familjukalendari o.s.fr. í útgangsstøðinum ikki er fevnt av løgtingslógini.

Sambært áskoðan 18 í GDPR eru eisini aktivitetir á sosialum miðlum fevndir av undantakinum um so er, at aktivitetirnir burturav eru persónligir ella viðvíkja húskinum. Hetta hevur í útgangsstøðinum við sær, at ein persónur, sum hevur ein privatan og afturlatnan profil á einum sosialum miðli, t.d. Facebook, ikki er fevndur av løgtingslógini, tá viðkomandi ger uppsløg o.s.fr.

Í *stk. 2* verður lagt upp til, at viðgerð av persónupplýsingum í sambandi við tingarbeiði í Løgtinginum ikki skal verða fevnt av løgtingslógini. Hetta undantakið fevnir um politisku viðgerðina í løgtingssalinum og í tingnevndum. Løgtingslógin verður tó framhaldandi galdandi fyri annað arbeiði í Løgtinginum, t.e. fyri umsitingina.

Galdandi løgtingslóg er galdandi fyri alt arbeiðið í Løgtinginum; tó er Løgtingið í ein ávisan mun undantikið fráboðanarskylduni. Orsøkin til, at lagt verður upp til at broyta virkisøkið er, at politiska arbeiðið í Løgtinginum skal kunna fara fram ótarnað og uttan at avmarka talufrælsið hjá teimum fólkavaldu óneyðugt.

Í *stk. 3* og *stk. 4* verður § 6 í galdandi løgtingslóg førd víðari. Ásetingarnar javnmeta dátuverndarrættin mótvegis skrivi- og talufrælsinum, sum m.a. er kjølfest í grein 10 í EMRS.

Ásetingarnar hava við sær, at viðgerð av persónupplýsingum, sum einans hevur listarlig, bókmentalig ella journalistisk endamál og viðgerð av persónupplýsingum í kunningardátugrunnum, sum hevur journalistiskt endamál, í høvuðsheitum verða undantiknar frá løgtingslógarinnar virkisøki. Tað verða sostatt einans §§ 41, 42 og 47 um dátuviðgerar og viðgerðartrygd og kapittul 8, herundir § 77 um endurgjald, sum eru galdandi fyri hesar viðgerðir.

**Til § 4**
*§ 4* ásetur – eins og § 4 í galdandi løgtingslóg – at ásetingar í aðrari lóggávu um viðgerð av persónupplýsingum, sum geva tí skrásetta eina betri rættarstøðu, skulu ganga fram um ásetingarnar í hesi løgtingslóg.

Dátuverndarlógin verður galdandi fyri alla viðgerð av persónupplýsingum, uttan mun til rættarøki. Hetta hevur við sær, at løgtingslógin verður galdandi tvørturum nógv ymisk rættarøki. Sí pkt. 1.4.1. í almennu viðmerkingunum.

Dátuverndarlógin útilokar ikki serreglur um viðgerð av persónupplýsingum. Tá serreglur verða ásettar eiga reglurnar tó at verða innanfyri teir almennu karmar, sum dátuverndarlógin ásetur. Tað merkir, at grundleggjandi reglurnar altíð eiga at verða fylgdar.

Hetta hevur við sær, at tað ber til í aðrari lóggávu at nágreina almennu reglurnar, sum eru í dátuverndarlógini – t.d. greiða frá í hvønn mun meginreglurnar eru uppfyltar, at áseta eina rættarliga skyldu sum viðgerðargrundarlag, at útgreina, hvussu upplýsingarskyldan verður fylgd á ávísum øki o.s.fr. – ella tryggja skrásetta eitt hægri verndarstøðið ella betri rættarstøðu enn tað, sum verður givið í dátuverndarlógini, t.d. eina víðkaða upplýsingarskyldu og avmarkingar í nær viðgerð kann fara fram. Hinvegin eigur tað í útgangsstøðinum ikki at víkjast frá grundleggjandi reglunum, heruppií meginreglunum í § 7, um hetta hevur við sær eina verri rættarstøðu fyri tann skrásetta.

Um tann skrásetti fær eina betri rættarstøðu verður mett ítøkiliga í hvørjum einstøkum føri. Uppskotið til § 4 hevur ikki við sær, at tað ikki kann gerast undantak frá ávísum ásetingum í hesi løgtingslóg, um tað út frá eini heildarmeting verður mett, at rættarstøðan hjá tí skrásetta verður betri.

Viðmerkjast skal eisini, at í metingini skal havast í huga, at dátuverndarlógin ásetur reglur um, nær persónupplýsingar *kunnu* viðgerðast. Í serlóggávu eru ofta ásettar reglur um, at persónupplýsingar av einhvørjari orsøk *skulu* viðgerðast.

Um frávik frá dátuverndarlógini verða gjørd í serlóggávu eigur tað í viðmerkingunum at verða greitt frá, hví tað er neyðugt at víkja frá reglunum í dátuverndarlógini, og hvussu hetta ávirkar tann skrásetta.

**Landøkisásetingar**

**Til § 5**
Uppskotið byggir á innihaldið í grein 3 í GDPR. Uppskotið svarar eisini í høvuðsheitum til § 7 í galdandi løgtingslóg.

Sambært *stk. 1* skal løgtingslógin vera galdandi fyri viðgerð av persónupplýsingum, sum verður gjørd fyri almennan og privatan dátuábyrgdara ella dátuviðgera, sum er staðsettur í Føroyum, sama um viðgerðin fer fram í Føroyum ella ei.

Løgtingslógin verður eins og í dag avmarkað til at vera galdandi fyri almennar myndugleikar, sum eru undir myndugleika heimastýrisins. Hetta hevur við sær, at løgtingslógin ikki er galdandi fyri ríkismyndugleikar, t.d. politi og dómstólar, hóast teir eru staðsettir í Føroyum. Víst verður eisini til pkt. 1.4.12. og 1.4.13. í almennu viðmerkingunum.

Í mun til galdandi løgtingslóg verður orðið "staðsettur" nýtt í staðin fyri "at reka sítt virksemi". At verða staðsettur skal skiljast á sama hátt, sum "etableret" í ES-rættinum, og fevnir um allan aktivitet, sum verður framdur gjøgnum einhvønn støðugan struktur í Føroyum. Hugtakið verður støðugt tulkað, og markið fyri, nær ein er "staðsettur" er ikki høgt.

Hvørt ein dátuábyrgdari ella dátuviðgeri er staðsettur í Føroyum er ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri.

Í mun til galdandi áseting verður virkisøkið eisini víðkað til at fevna um dátuviðgerar, sum eru staðsettir í Føroyum, t.e. sjálvt um dátuábyrgdarin ikki er staðsettur í Føroyum.

Í *stk. 2* verður landafrøðiliga virkisøkið broytt nakað í mun til galdandi løgtingslóg. Lagt verður upp til, at løgtingslógin – umframt virkisøkið í stk. 1 – eisini skal vera galdandi fyri viðgerð av persónupplýsingum um skrásett, sum eru í Føroyum, og verður gjørd av dátuábyrgdara ella dátuviðgera, sum *ikki* er staðsettur í Føroyum,

Ásetingin er ikki tengd at, at tann skrásetti er búsitandi í Føroyum, men einans, at skrásetti *er* í Føroyum.

*Stk. 2, nr. 1* fevnir um viðgerð, sum viðvíkur útboði av vørum ella tænastum til skrásett í Føroyum, sama um gjald verður kravt frá teimum. Tað skal m.a. takast við í hesa metingina, um dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin vendir sær (beinleiðis) til skrásett í Føroyum. Tað er sostatt ikki í sær sjálvum nokk, at ein dátuábyrgdari ella dátuviðgeri hevur eina heimasíðu, sum er atkomulig úr Føroyum, og at fólk í Føroyum kunnu skriva til eina upplýsta teldupostadressu.

*Stk. 2, nr. 2* fevnir um yvirvøku av atferðini hjá skrásettum, um teirra atferð fer fram í Føroyum. Hetta fevnir serliga um yvirvøku av persónum á internetinum við tí endamáli at profilera viðkomandi, so at mett kann verða um tokkar o.s.fr. hjá viðkomandi.

Víst verður serliga til áskoðan nr. 23 og 24 um, hvussu virkisøki skal skiljast.

Broytingin av landafrøðiliga økinum hevur til endamáls at tryggja, at verndarstøðið hjá tí einstaka skrásetta í Føroyum í útgangsstøðinum ikki er tengt at, um dátuábyrgdarin, dátuviðgerin ella hjálparamboð eru í Føroyum.

Høvuðsinnihaldið í § 7, stk. 3 og 4 í galdandi løgtingslóg um umboð í Føroyum verður flutt til § 40 í hesum løgtingslógaruppskoti. Sí serligu viðmerkingarnar til hesa áseting.

Sí eisini áskoðan nr. 22-25 í GDPR.

**Allýsingar**

**Til § 6**
Lagt verður upp til eina grein við allýsingum, sum í høvusheitum byggir á innihaldið í grein 4 í GDPR, tó so, at bara tær allýsingar, sum verða mettar neyðugar í einum føroyskum samanhangi eru tiknar við. Hóast ikki allar allýsingarnar eru skrivaðar inn í føroysku lógina, kunnu allýsingarnar í GDPR nýtast, sum vegleiðing, um hetta er viðkomandi. Sí eisini áskoðan nr. 26-37 í GDPR.

Fleiri av hugtøkunum, sum verða allýst, eru eisini at finna í § 2 í galdandi løgtingslóg. Mest møguligt er valt at nýta somu orðingar. Mett verður sostatt, at nýggju allýsingarnar í GDPR – hóast tær eru gjølligari – ikki broyta galdandi rætt munandi. Hetta hevur eisini við sær, at tað verður møguligt framhaldandi í storan mun at nýta galdandi siðvenju í sambandi við tulking av hugtøkunum.

Lagt verður upp til hesar allýsingar:

*Nr. 1. Persónupplýsingar*
Allýsingin av persónupplýsingum er – eins og í § 2, nr. 1 í galdandi lóg – sera breið og fevnir um eina og hvørja upplýsing, sum kann knýtast at einum likamligum persóni.

Ásetingin skal skiljast í samsvari við innihaldið í grein 4 nr. 1 í GDPR og fevnir um eina og hvørja upplýsing um ein eyðmerktan persón ella ein persón, sum kann eyðmerkjast.

Við persón, sum kann eyðmerkjast, er at skilja ein einstaklingur, sum beinleiðis ella óbeinleiðis kann eyðmerkjast við einum eyðmerki, sum t.d. navni, eyðmerkistali, staðsetingsdátum, álinju-eyðmerki (onlineidentifikator) ella einum ella fleiri eyðkennum, sum eru serstøk fyri likamliga, lívvirkisliga, arvafrøðiliga, sálarliga, fíggjarliga, mentanarliga ella sosiala samleikan hjá hesum persóni.

Tað skal ikki nógv til fyri, at ein einstaklingur beinleiðis ella óbeinleiðis kann eyðmerkjast. Eisini upplýsingar, sum er treytaðar av kunnleika til persónstal, skrásetingarnummar ella annað eru persónupplýsingar.

Fyri at gera av um ein persónur kann eyðmerkjast skulu øll amboð takast í nýtslu, sum skynsamiliga kunnu hugsast at verða nýtt av dátuábyrgdaranum ella einum øðrum persóni til beinleiðis ella óbeinleiðis at eyðmerkja persónin. Víst verður til áskoðan nr. 26 í GDPR.

Løgtingslógin fevnir einans um livandi persónar. Upplýsingar um deyðar persónar eru bert fevndar av ásetingini, um tær kunnu knýtast at einum livandi persóni, t.d. um upplýsingar um ein deyðan persón siga nakað um arvaligar sjúkur hjá einum núlivandi persóni.

Allýsingin fevnir einans um likamligar persónar og sostatt ikki um løgfrøðiligar persónar.

*Nr. 2. Viðgerð*
Lagt verður upp til at nýta somu orðing sum í § 2, nr. 2 í galdandi løgtingslóg. Eisini hendan allýsingin er breið og fevnir um eina og hvørja viðgerð av persónupplýsingum.

Í samsvari við innihaldið í grein 4, nr. 2 í GDPR fevnir allýsingin um ein og hvønn aktivitet ella røð av aktivitetum, við ella uttan automatiskari viðgerð, har persónupplýsingar ella ein

samanseting av persónupplýsingum verða t.d. savnaðar, skrásettar, skipaðar, samskipaðar, goymdar, tillagaðar ella broyttar, endurfunnar, gjøgnumleitaðar, nýttar, víðarigivnar við sending, útbreiddar ella á annan hátt gjørdar tøkar, samanbornar ella samankoyrdar, avmarkaðar, strikaðar ella fyribeindar.

Tá tað í allýsingini stendur automatisk viðgerð, er hetta at skilja á sama hátt sum elektronisk viðgerð, sum verður nýtt í galdandi allýsing.

*Nr. 3. Profilering*
Allýsingin er nýggj í mun til galdandi rætt og byggir á innihaldið í grein 4, nr. 4 í GDPR.

Í áskoðan nr. 71 er greitt nærri frá, hvussu hugtakið skal skiljast. Allýsingin hevur serligan týdning – og skal lesast saman við – § 35, sum snýr seg um automatiskar individuellar avgerðir, undir hesum profilering. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til hesa áseting.

*Nr. 4. Dulnevning*
Allýsingin er nýggj í mun til galdandi rætt og byggir á innihaldið í grein 4, nr. 5 í GDPR.

Tá dulnevning verður nýtt í hesum lógaruppskoti, er tað sum eitt dømi um eitt trygdartiltak, sum dátuábyrgdarin kann seta í verk. Dulnevning – ella pseudonymisering – hevur nevniliga við sær, at tað í útgangsstøðinum ikki er møguligt hjá óviðkomandi at eyðmerkja ein skrásettan uttan at nýta eyka upplýsingar. Dulnevning økir á tann hátt um dátuverndina hjá tí einstaka.

*Nr. 5. Skrá*
Allýsingin byggir á innihaldið í grein 4, nr. 6 í GDPR. Lagt verður samstundis upp til at nýta somu orðing sum í § 2, nr. 3 í galdandi løgtingslóg við málsligum tillaginum.

Eingin broyting er ætlað í mun til galdandi løgtingslóg og allýsingin skal lesast saman við uppskotinum til § 2, stk. 1, nr. 2, sum hevur við sær, at løgtingslógin, umframt at vera galdandi fyri automatiska dátuviðgerð, er galdandi fyri ikki automatiska viðgerð av persónupplýsingum, sum eru ella fara at verða partur av eini skrá.

*Nr. 6. Dátuábyrgdari*
Allýsingin byggir á innihaldið í grein 4, nr. 7 í GDPR.

Eitt týdningarmikið hugtak í persónupplýsingarrætti er dátuábyrgdari. Burtursæð frá smáum málsligum broytingum er talan um somu allýsing, sum í § 2, nr. 4 í galdandi løgtingslóg.

Dátuábyrgdarin er tann, sum yvir fyri tí skrásetta og øðrum hevur ábyrgdina av viðgerðini, sum í tí dagliga ræður yvir persónupplýsingunum, og sum avger, hvussu hesar skulu viðgerast.

Tað kunnu vera fleiri, sum hava ábyrgdina av eini viðgerð, og eru hesi tá felags dátuábyrgdarar. Sí eisini serligu viðmerkingarnar til § 39.

*Nr. 7. Dátuviðgeri*
Allýsingin byggir á innihaldið í grein 4, nr. 8 í GDPR.

Burtursæð frá smáum málsligum broytingum er eisini talan um somu allýsing, sum í § 2, nr. 5 í galdandi løgtingslóg.

Ein dátuviðgeri viðger ikki persónupplýsingarnar egna vegna og til egið endamál, men fyri dátuábyrgdaran, sum eisini hevur ábyrgdina mótvegis tí skrásetta.

*Nr. 8. Triðipersónur*
Allýsingin byggir á innihaldið í grein 4, nr. 10 í GDPR.

Burtursæð frá smáum málsligum broytingum er talan um somu allýsing, sum í § 2, nr. 6 í galdandi løgtingslóg av triðjapersóni.

*Nr. 9. Móttakari*
Allýsingin byggir á innihaldið í grein 4, nr. 9 í GDPR.

Burtursæð frá smáum málsligum broytingum er talan um somu allýsing, sum í § 2, nr. 7 í galdandi løgtingslóg.

Allýsingin hevur serliga týdning í mun til ásetingarnar í kapitli 4 um rættindini hjá tí skrásetta, t.d. skal dátuábyrgdarin upplýsa um móttakarar, sbrt. § 23, stk. 1, nr. 5, eins og hann skal boða øðrum móttakarum frá rættingum o.a. av persónupplýsingum sbrt. § 30.

Serliga ásetingin um almennar myndugleikar hevur við sær, at myndugleikar, sum móttaka persónupplýsingar fyri at kunna svara einum einstøkum fyrispurningi, ikki verða at meta sum móttakarar.

Ásetingin er serliga viðkomandi í sambandi við myndugleikasamskifti, tá ein myndugleiki (A) fyri at røkja egnar uppgávur, hevur brúk fyri upplýsingum frá øðrum myndugleika (B). Í sínum fyrispurningi til myndugleika B, sendir myndugleiki A persónupplýsingar víðari (t.d. navn og føðidato hjá skrásetta) fyri at fáa almennar upplýsingar um eitt øki ella fyri at fáa ítøkiligar upplýsingar um skrásetta. Í hesum dømi er myndugleiki B ikki at rokna sum móttakari.

Ein *einstakur fyrispurningur* kann t.d. vera ein fyrispurningur um ein einstakan persón. Hesir fyrispurningar eiga altíð at vera skrivligir og grundaðir og eiga ikki at fevna um eina heila skrá av upplýsingum el.líkn. Talan skal eisini verða um fyrispurningar, sum einans eru viðhvørt.

Sí eisini áskoðan nr. 31 í GDPR.

*Nr. 10. Samtykki frá skrásetta*
Allýsingin byggir á innihaldið í grein 4, nr. 11 í GDPR.

Persónupplýsingar kunnu viðgerðast við samtykki frá skrásetta. Samtykki er einasta viðgerðargrundarlagið, sum er allýst.

Samtykki frá skrásetta er eisini allýst í § 2, nr. 8 í galdandi løgtingslóg, men nýggja allýsingin herðir krøvini til samtykki, av tí at tað verður mett av stórum týdningi, at skrásetti í mest møguligan mun hevur ræði á persónupplýsingum um seg sjálvan og hevur eitt nøktandi

grundarlag at taka støðu til eina ávísa viðgerð. Samtykki frá skrásetta er umrøtt og lýst í fleiri áskoðanum í GDPR, eitt nú áskoðan nr. 32, 42 og 43.

Eitt samtykki skal lúka hesar treytir:

Eins og galdandi er í dag, skal samtykki vera eitt *sjálvboðið viljaboð*, sum merkir, at tað skal vera givið frá skrásetta sjálvum ella einum, sum hevur fulltrú frá skrásetta, og at tað ikki á nakran hátt kann verða givið undir tvingsli, hvørki frá dátuábyrgdara, dátuviðgera ella øðrum.

Sambært grein 7, stk. 4 í GDPR skal tað, tá mett verður um samtykkið er givið *sjálvboðið*, takast mest møguligt atlit til um útinnan av eini avtalu, t.d. um tænastuveiting, er gjørd treytað av samtykki at viðgera persónupplýsingar, sum ikki eru neyðugar fyri at útinna avtaluna. Er tað so, eru sannlíkindi fyri at samtykkið ikki er givið sjálvboðið.

Í áskoðan nr. 43 stendur, at eitt samtykki helst ikki er givið sjálvboðið, um tað er ein greiður skeivleiki ímillum tann skrásetta og dátuábyrgdaran, serliga um dátuábyrgdarin er ein almennur myndugleiki, og at tað tí er ósannlíkt, at samtykkið er givið sjálvboðið.

Løgtingslógaruppskotið skal eisini hesum viðvíkjandi tulkast í samsvari við GDPR.

Lagt skal verða til merkis í hesum sambandi, at áskoðan nr. 43 ikki hevur við sær, at almennir myndugleikar eru útilokaðir frá at nýta samtykki sum viðgerðargrundarlag. Eru upplýsingarnar neyðugar fyri almenna myndugleikan, og kunnu tær ikki savnast á annan hátt, kann almenni myndugleikin eftir eina ítøkiliga meting nýta samtykki sum viðgerðargrundarlag. Í ivamálum kann almenni myndugleikin eisini kanna, um aðrar viðgerðarheimildir kunnu nýtast, t.d. § 8, stk. 1, nr. 3 ella 5.

At samtykki skal vera *viljaboð* frá skrásetta, har tann skrásetti við fráboðan ella greiðari váttan játtar at viðgerð kann fara fram, hevur við sær, at tað ikki ber til at geva samtykki tigandi ella óbeinleiðis.

Samtykki skal harafturat vera *nágreiniligt og greitt*, sum merkir, at eingin ivi skal vera um, at samtykkið er givið, hvørjum tað er givið og hvørjar viðgerðir samtykki er givið til.

Samtykki skal vera *kunnað*, sum merkir, at tann samtykkjandi skal hava fingið so mikið av upplýsingum, at viðkomandi er fullgreitt vitandi um, hvat samtykkið fevnir um, herundir eisini fylgjurnar av, at samtykki verður givið.

Sum eftir galdandi løgtingslóg verða ikki sett formkrøv til samtykki, sum sostatt kann verða givið munnligt, skrivligt, elektroniskt ella á annan hátt. Próvbyrðan fyri, at samtykki er givið liggur framhaldandi hjá dátuábyrgdaranum, sum eigur at tryggja sær skjalprógv. Sí eisini serligu viðmerkingarnar til § 9, sum nágreinar treytirnar til samtykkið.

*Nr. 11 og 12. Ílegudátur og biometriskar dátur*
Allýsingarnar byggja á innihaldið í grein 4, nr. 13 og 14 í GDPR.

Tað er nýtt, at ílegudátur og biometriskar dátur verða allýstar. Eisini er tað nýtt, at hesar dátur ítøkiliga verða reguleraðar í persónupplýsingarlóggávu.

Sambært § 11 eru hesar upplýsingar at rokna sum viðkvæmar persónupplýsingar, sum hevur við sær, at viðgerð í útgangsstøðinum er bannað. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 11.

Sí eisini áskoðan nr. 34 og 51.

*Nr. 13. Heilsuupplýsingar*
Allýsingin byggir á innihaldið í grein 4, nr. 15 í GDPR.

Allýsingin fevnir um núverandi, komandi og fyrrverandi likamligu og sálarligu heilsustøðuna hjá einum persóni og somuleiðis um upplýsingar um misnýtslu av heilivagi, rúsevni, narkotika, rúsdrekka og øðrum njótingarevnum.

Heilsuupplýsingar skal tulkast breitt og fevnir sostatt um upplýsingar um øll viðurskifti, sum hava við likamligu og sálarligu heilsuna hjá skrásetta at gera.

Eins og í dag verða upplýsingar um heilsu roknaðar at vera viðkvæmar persónupplýsingar, og viðgerð av hesum upplýsingum er í útgangsstøðinum bannað. Sí serligu viðmerkingarnar til § 11 í hesum uppskoti. Tað er nýtt, at heilsupplýsingar verða allýstar.

Sí eisini áskoðan nr. 35.

*Nr. 14. Útland*
Lagt verður upp til, at allýsingin av útlandi verður broytt í mun til galdandi løgtingslóg. Í galdandi løgtingslóg er útland øll onnur lond enn Føroyar, t.e. eisini Danmark og Grønland.

Lagt verður upp til, at útland í hesi løgtingslóg skal skiljast sum land, sum er limur í Evropeiska Samveldinum (ES) ella Evropeiska Búskaparliga Samstarvinum (EBS).

Orsøkin til, at allýsingin verður broytt er, at tað verður lagt upp til eina aðra skipan enn hana vit kenna í dag, tá tað kemur til flutning av persónupplýsingum úr Føroyum til onnur lond.

Allýsingin hevur sostatt serliga týdning fyri reglurnar um flutning av persónupplýsingum til onnur lond í kapitli 6. Víst verður til pkt. 1.4.8 í almennu viðmerkingunum og til serligu viðmerkingarnar til hesar ásetingar.

*Nr. 15. Triðjaland*
Allýsingin skal lesast saman við allýsingini av útlandi í § 6, nr. 14. Triðjaland er land, sum ikki er limur í Evopeiska Samveldinum (ES) ella Evropeiska Búskaparliga Samstarvinum (EBS).

Eisini henda allýsingin hevur serliga týdning fyri reglurnar um flutning av persónupplýsingum til onnur lond í kapittul 6. Víst verður til pkt. 1.4.8 í almennu viðmerkingunum og til serligu viðmerkingarnar til hesar ásetingar.

*Nr. 16. Kunningarsamfelagstænasta*
Allýsingin byggir á innihaldið í grein 4, nr. 25 í GDPR.

Allýsingin er nýggj og er serliga viðkomandi fyri tulking og nýtslu av §§ 10 og 28, stk. 1, nr. 6.

At tænastan skal verða *fjarvarpað* merkir, at tað er ein tænasta, sum verður veitt, uttan at partarnir eru tilstaðar samstundis.

At tænastan verður fjarvarpað *elektronist* merkir, at tænastan frá sendistaðnum verður send og á móttøkustaðnum verður móttikin við elektroniskum dátuviðgerðartólum og dátugoymingartólum, og at hon verður send, rutað og móttikin gjøgnum tráð, radio, sjónarmiðlar ellar aðrar elektromagnetiskar miðlar.

At tænasta er eftir umbøn frá einum tænastumóttakara merkir, at tænastan verður veitt eftir serstakari umbøn.

Kunningarsamfelagstænastur fevna m.a. um online-spøl og sosialar miðlar, so sum Facebook, Snapchat og Instagram. Almennar talgildar tænastur, som sum Mín-boks, verða vanliga ikki roknaðar at verða kunningarsamfelagstænastur fevndar av hesi allýsing.

## Kapittul 2
## Meginreglur og viðgerðarreglur

Kapittul 2 um meginreglur og viðgerðarreglur svarar innihaldsliga til kapittul 2 í GDPR.

Kapittul 2 inniheldur tær mest grundleggjandi og týdningarmestu reglurnar í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum.

### Meginreglur fyri viðgerð av persónupplýsingum

**Til § 7**
Lagt verður upp til eina áseting við grundleggjandi meginreglum fyri viðgerð av persónupplýsingum, sum byggir á innihaldið í grein 5 í GDPR, og sum eisini í høvuðsheitum svarar til § 8 í galdandi løgtingslóg.

Tá persónupplýsingar verða viðgjørdar, er tað ein fortreyt, at meginreglurnar í § 7 verða fylgdar.

Í mun til galdandi løgtingslóg verður lagt upp til, at meginreglurnar í *stk. 1* verða orðaðar meira ítøkiligt. Í yvirskiftum verður lagt upp til hesar meginreglur:

1) Lógligheit, rímiligheit og gjøgnumskygni.
2) Endamálsavmarking.
3) Dátuminimering.
4) Rættleiki.
5) Goymsluavmarking.
6) Integritetur og trúnaður.

*Nr. 1. Lógligheit, rímiligheit og gjøgnumskygni*
Tá ásett verður, at persónupplýsingar skulu viðgerast lógliga og rímiliga, svarar hetta í høvuðsheitum til galdandi rætt, sum ásetur, at persónupplýsingar skulu verða loyvdar at viðgera og skulu viðgerast samsvarandi góðum dátuviðgerðarsiði. Kravið um at viðgera persónupplýsingar samsvarandi góðum dátuviðgerðarsiði liggur eisini nýggju ásetingini, og er hetta framhaldandi eitt yvirskipað krav, sum verður nágreinað av Dátueftirlitinum.

Sum nakað nýtt verður ásett, at persónupplýsingar skulu viðgerast á ein gjøgdnumskygdan hátt fyri tann skrásetta. Hetta er partur av einum av aðalmálunum við endurskoðanini av dátuverndarlóggávuni, at skrásett skulu hava størri ræði á egnum persónupplýsingum og vita, hvat tær verða nýttar til.

Í áskoðan nr. 39 er greitt frá, at kravið m.a. hevur við sær, at tað skal verða klárt fyri tann skrásetta, at persónupplýsingar um viðkomandi verða savnaðar, nýttar ella á annan hátt viðgjørdar, eins og kravið hevur við sær, at øll kunning um viðgerð av persónupplýsingum skal verða lættatkomulig og lættskiljandi.

*Nr. 2. Endamálsavmarking*
Endamálsavmarking – eisini kallað finalité-prinsippið – er ein grundleggjandi regla í persónupplýsingarlóggávu.

Endamálsavmarking hevur við sær, at persónupplýsingar skulu savnast til nágreiniliga tilskilað og heimilað endamál, og at savnaðir persónupplýsingar ikki frítt kunnu viðgerðast til onnur endamál enn tað ella tey endamál, sum persónupplýsingarnar vórðu savnaðar til.

At endamálið skal verða nágreiniliga tilskilað hevur við sær, at dátuábyrgdarin skal hava eitt greitt endamál, tá persónupplýsingarnar verða savnaðar. Tað er ikki nøktandi at upplýsa, at persónupplýsingar verða savnaðar til "fyrisitingarlig endamál" ella "handilslig endamál". At endamálið skal verða tilskilað hevur eisini við sær, at dátuábyrgdarin ikki kann savna persónupplýsingar, sum viðkomandi ikki hevur brúk fyri, men møguliga fær brúk fyri.

At endamálið skal verða heimilað hevur við sær, at ein myndugleiki ella ein fyritøka kann savna persónupplýsingar við tí endamáli at røkja ella loysa uppgávur, sum liggja innan fyri virkisøkið hjá myndugleikanum ella fyritøkuni.

Ein partur av endamálsavmarkingini er avmarkingin í mun til seinni viðgerð. Seinni viðgerð er viðgerð, sum kemur aftaná upprunaligu viðgerðina, sum persónupplýsingarnar vóru savnaðar til.

§ 8, stk. 1, nr. 2 í galdandi løgtingslóg ásetur, at seinni viðgerð av persónupplýsingum skal *samsvara* upprunaliga endamálinum. Henda orðingin er strangari enn áður galdandi danska reglan, sum ásetti, at seinni viðgerð ikki skuldi verða í *ósamsvari* við upprunaligu endamálini ("*ikke [må] være <u>uforenelig</u> med disse formål"*).

Út frá viðmerkingunum til galdandi áseting er tað ikki greitt, um tað var tilætlað, at føroyska orðingin (*í samsvari við*) skuldi verða strangari enn danska orðingin (*ikki í ósamsvari við*). Ymisku orðingarnar hava tó havt við sær, at endamálsavmarkingin er tulkað ymiskt í Føroyum og Danmark.

Í uppskotinum verður lagt upp til at broyta henda partin av endamálsavmarkingini, so hon verður orðað sum í GDPR (og sum í áður galdandi donsku lóg). Hetta merkir, at tað verður ásett, at persónupplýsingar einans kunnu savnast til nágreiniliga tilskilað og heimilað endamál, og ikki eiga at viðgerast seinni á ein hátt, sum er í *ósamsvari* við hesi endamál. Broytta orðingin hevur við sær, at kravið í meginregluni verður linkað nakað í mun til galdandi orðing. Mett verður tó ikki, at henda linkan hevur við sær nakran bága fyri tann skrásetta.

Um ein seinni viðgerð er í ósamsvari við upprunaligu endamálini, er ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri.

Hóast avmarkingina kunnu persónupplýsingarnar í flestu førum í praksis viðgerast til onnur endamál enn tey endamál, sum persónupplýsingarnar upprunaliga vórðu savnaðar til. Endamálsavmarkingin setur tó rammur fyri seinni viðgerð. T.d. kunnu persónupplýsingar ikki frítt víðarigevast millum myndugleikar, hóast hetta hevur við sær, at fleiri myndugleikar skulu savna somu upplýsingar frá skrásetta.

Grein 6, stk. 4 í GDPR hevur dømi um tey fyrilit, sum dátuábyrgdarin skal taka við í metingini av, um ein seinni viðgerð er í samsvari við upprunaligu viðgerðina. Ásetingin kann verða nýtt sum vegleiðing fyri tað meting, sum skal fara fram sbrt. § 7, stk. 1, nr. 2.

Sambært ásetingini skal dátuábyrgdarin, tá seinni viðgerð ikki er grundað á samtykki ella heimilað í lóg, m.a. taka fyrilit fyri:

- einum og hvørjum sambandi ímillum tað endamál, sum persónupplýsingarnar eru savnaðar til, og endamálið við ætlaðu seinni viðgerðini,
- tí samanhangi, persónupplýsingarnar eru savnaðar í, serliga við fyriliti fyri sambandinum ímillum tann skrásetta og dátuábyrgdaran,
- slagið av persónupplýsingum, serliga um viðkvæmar persónupplýsingar verða viðgjørdar,
- møguligum fylgjum fyri tey skrásettu av ætlaðu seinni viðgerðini,
- at hóskandi trygdartiltøk eru tøk, sum kunnu fevna um bronglan ella dulnevning.

Seinni viðgerð skal sjálvandi – umframt at lúka meginreglurnar – lúka hinar treytirnar í løgtingslógini, undir hesum hava eitt viðgerðargrundarlag.

Um seinni viðgerð til søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál, verður víst til serligu viðmerkingarnar til stk. 3 niðanfyri.

*Nr. 3. Dátuminimering*
Ásetingin svarar til § 8, stk. 1, nr. 3 í galdandi løgtingslóg og hevur m.a. við sær, at nøgdin av persónupplýsingum sum viðgerast altíð eigur at verða so lítil sum møguligt fyri at røkka endamálinum við viðgerðini.

*Nr. 4. Rættleiki*
Ásetingin svarar við málsligum tillaginum til § 8, stk. 1, nr. 6 í galdandi løgtingslóg og hevur við sær, at dátuábyrgdarin skal tryggja, at tær persónupplýsingar, sum verða viðgjørdar eru rættar og nøktandi dagførdar.

Tá tað í 2. pkt. stendur, at upplýsingar, sum eru *rangar* skulu rættast ella strikast, er ikki ætlað nøkur broyting í mun til galdandi áseting, sum vísir til *rangar ella villandi* persónupplýsingar. *Villandi* er sostatt fevnt av *rangar*.

Í mun til galdandi løgtingslóg verður ásett, at rangar persónupplýsingar skulu rættast ella strikast *beinanvegin*, og ikki *sum skjótast*. Hetta er ein herðing av kravinum. Hvussu skjótt hetta skal ganga fyri seg verður lagt fast gjøgnum praksis.

*Nr. 5. Goymsluavmarking*
Uppskotið til § 7, stk. 1, nr. 5 svarar til § 8, stk. 1, nr. 5 í galdandi løgtingslóg. Ásetingin hevur við sær, at persónupplýsingar ikki skulu goymast longur enn neyðugt.

Fyri at tryggja, at persónupplýsingar ikki verða goymdar longur enn neyðugt, eigur dátuábyrgdarin at hava freistir fyri striking ella reglur um regluliga gjøgnumgongd av upplýsingunum fyri at fáa greiðu á, um og nær tær skulu strikast. Sí eisini áskoðan nr. 39.

Í grein 5, stk. 1, litra e í GDPR er ásett, at persónupplýsingar kunnu verða goymdar í longri tíðarskeið, um persónupplýsingarnar bara verða viðgjørdar til savnsendamál í samfelagsins áhuga, til vísindalig ella søgulig granskingarendamál ella til hagfrøðilig endamál treytað av, at hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk verða sett í verk fyri at tryggja rættindi og frælsisrættindi hjá tí skrásetta. Hetta merkir, at upplýsingar, sum bara verða viðgjørdar til hesi endamál, kunnu goymast longur enn aðrar persónupplýsingar. Hetta verður eisini galdandi í Føroyum.

*Nr. 6. Integritetur og trúnaður*
Ásetingin í § 7, stk. 1, nr. 6, sum snýr seg um viðgerðartrygd, er nýggj sum partur av grundleggjandi meginreglunum fyri viðgerð av persónupplýsingum. Ásetining hevur við sær eina skyldu fyri dátuábyrgdaran at nýta hóskandi tøknilig og bygnaðarlig, herundir fysisk, tiltøk fyri at hava nøktandi trygd.

At viðgerðartrygd er ein týdningarmikil partur av dátuviðgerð er sum so ikki nýtt í mun til galdandi løgtingslóg, sum hevur nágreinaðar reglur um viðgerðartrygd í t.d. § 31 og í trygdarkunngerðini. Tað nýggja er, at viðgerðartrygdin er lyft til grundleggjandi meginreglurnar m.a. sum ein áminning til dátuábyrgdaran um týdningin av trygdini.

Eins og eftir galdandi løgtingslóg, er tað dátuábyrgdarin, sum hevur ábyrgdina av, at meginreglurnar verða fylgdar. Lagt verður upp til, at hetta verður ásett heilt greitt í *stk. 2.* Samstundis verður ásett, at dátuábyrgdarin skal kunna vísa á, at meginreglurnar eru loknar. Hvussu dátuábyrgdarin tryggjar sær, at hann kann vísa á, at so er, er til dátuábyrgdaran sjálvan at meta um. Dátuábyrgdarin eigur tó á einhvønn hátt at skjalfesta, at meginreglurnar eru fylgdar.

Í *stk. 3* verður ásett, at seinni viðgerð, sum einans fer fram við søguligum, hagfrøðiligum ella vísindaligum endamáli, er í samsvari við upprunaendamálið um bágin, tann einstaki hevur av hesi viðgerð, má metast at skula víkja fyri tí munandi samfelagsliga týdningi, viðgerðin hevur. Ásetingin svarar í høvuðsheitum til § 8, stk. 2 í galdandi løgtingslóg.

Stk. 3 tryggjar, at persónupplýsingar, sum ikki upprungaliga eru innsavnaðar til hetta endamál, kunnu viðgerast seinni til søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál. Tað er ein treyt, at seinna viðgerðin einans hevur hesi endamál, og at samfelagsligi týdningurin av viðgerðini er størri enn bágin fyri tann skrásetta.

Tað verður sostatt í stk. 3 gjørt upp við finalité-prinsippið í stk. 1, nr. 2, tá viðgerð fer fram til hesi endamál. Tann ítøkiliga metingin í hesum førum er ikki um, hvørt samsvar ella ósamsvar er ímillum endamálini, men skal í staðin taka støði í samfelagsliga týdninginum av viðgerðini mótvegis báganum fyri tann skrásetta.

Stk. 3 er ikki ein viðgerðarheimild. Tí skal heimild verða fyri viðgerðini í § 8, § 12 ella § 18 um viðgerð til søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál kann fara fram.

Viðgerð, sum bæði verður gjørd við søguligum, hagfrøðiligum ella vísindaligum endamáli og øðrum endamáli, eitt nú við fyrisitingarligum ella vinnuligum endamáli, er ikki fevnd av stk. 3.

Sí eisini sum heild áskoðan nr. 39 og 50 í GDPR.

**Lóglig viðgerð**

**Til § 8**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 6 í GDPR.

Eru meginreglurnar í § 7 loknar, kunnu persónupplýsingar viðgerast, um heimild er fyri hesum í viðgerðarreglunum.

Lagt verður upp til, at § 8 – eins og § 9 í galdandi løgtingslóg – fevnir um viðgerð av øllum vanligum persónupplýsingum. Er ikki onnur serlig heimild fyri viðgerðini, er útgangsstøðið, at heimild skal finnast í § 8, stk. 1 um persónupplýsingar skulu viðgerast.

Fleiri heimildir kunnu verða fyri somu viðgerð.

Lagt verður upp til seks viðgerðarheimildir í § 8, stk. 1:

1) Samtykki.
2) Avtala.
3) Rættarlig skylda.
4) Verja av altumráðandi áhugamálum hjá skrásetta ella øðrum persóni.
5) Samfelagsáhugamál og myndugleikaútinnan.
6) Heimilað áhugamál.

*Nr. 1. Samtykki*
Eins og í dag kunnu persónupplýsingar um tann skrásetta viðgerast, um skrásetti hevur givið samtykki. Samtykki skal skiljast á tann hátt, sum tað er allýst í § 6, nr. 10. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 6, nr. 10.

Hóast tað helst er fevnt av treytunum fyri gildi av einum samtykki í § 6, nr. 10, er tað í greinini serliga tilskilað, at samtykki skal verða givið til eitt ella fleiri tilskilað endamál. Hetta fyri at tryggja, at skrásetti veit, hvat samtykkið fevnir um.

Um treytir fyri samtykki verður eisini víst til serligu viðmerkingarnar til § 9.

*Nr. 2. Avtala*
Ásetingin svarar til § 9, stk. 1, nr. 1 í galdandi løgtingslóg við málsligum tillaginum.

Ásetingin merkir, at viðgerð er lóglig, um persónupplýsingar um skrásetta verða viðgjørdar sum liður í eini avtalu, sum skrásetti er partur av. Hetta kann t.d. verða upplýsingar um navn og bústað, bíleggingarváttanir o.s.fr.

Tað er ein treyt, at skrásetti er avtalupartur, og tí kann ein avtala millum dátuábyrgdaran og t.d. arbeiðsgevaran hjá skrásetta ikki grunda, at upplýsingar um skrásetta verða viðgjørdar. Ásetingin tryggjar eisini, at viðgerð kann fara fram, áðrenn ein avtala verður fingin í lag millum partarnar, t.d. skráseting í sambandi við tilboð um fígging.

*Nr. 3. Rættarlig skylda*
Ásetingin svarar til § 9, stk. 1, nr. 2 í galdandi løgtingslóg.

Ásetingin merkir, at persónupplýsingar kunnu viðgerðast, tá hetta er neyðugt fyri at halda eina rættarliga skyldu sum áliggur dátuábyrgdaranum.

Orðingin rættarlig skylda fevnir um skyldur sambært lóggávu ella fyrisitingarligum fyriskipanum, heimilaðum í lóg, sambært dómi ella avgerð hjá fyrisitingarligum myndugleika. Eisini skyldur sambært altjóða reglum, t.d. sáttmálum, eru fevndar av orðingini.

Rættarligar skyldur, sum eru álagdar sambært lóggávu hjá einum øðrum landi, eru í útgangsstøðinum ikki fevndar av orðingini. Avtalurættarligar skyldur, sum eru álagdar dátuábyrgdaranum, eru heldur ikki fevndar av orðingini.

*Nr. 4. Verja av altumráðandi áhugamálum hjá skrásetta ella øðrum persóni*
Ásetingin svarar til § 9, stk. 1, nr. 3 í galdandi løgtingslóg, tó so, at tað er skoytt uppí, at viðgerð eisini kann fara fram um hon er neyðug til tess at verja altumráðandi áhugamál hjá øðrum persónum.

At viðgerðin skal røkja altumráðandi áhugamál merkir, at viðgerðin skal viðvíkja áhugamálum, sum hava grundleggjandi týdning fyri skrásetta ella ein annan persón. Dømi kann vera, at skrásetti vegna ferðing ella sjúku ikki er førur fyri at geva samtykki til viðgerð, sum kann tryggja skrásetta ímóti munandi fíggjarligum tapi ella øðrum munandi skaða.

*Nr. 5. Samfelagsáhugamál og myndugleikaútinnan*
Ásetingin er í ávísan mun ein samanskriving av § 9, stk. 1, nr. 4 og 5 í galdandi løgtingslóg.

At talan skal vera um eitt samfelagsáhugamál merkir, at áhugamálið skal hava almennan áhuga, t.e. hava týdning fyri ein breiðan hóp av persónum. Tað kann t.d. vera viðgerð við søguligum, vísindaligum ella hagfrøðiligum endamáli. Sama er galdandi fyri viðgerð í rættarkunningarskipanum, sum hava til endamáls at kunna almenningin um lóggávu, rættaravgerðir o.s.fr. Eisini onnur viðgerð kann røkja samfelagsáhugamál, t.d. skráseting av upplýsingum hjá størri privatum felagsskapum ella samtøkum, sum hava áhuga fyri ein breiðan hóp.

Sjálvt um ein viðgerð hevur vinnuligt endamál, kann hon røkja eitt samfelagsáhugamál.

Umframt viðgerð fyri at røkja samfelagsáhugamál, kunnu persónupplýsingar eisini viðgerðast, um viðgerðin liggur undir almennari myndugleikaútinnan, sum dátuábyrgdarin hevur fingið álagt.

Ásetingni fevnir um allar almennar myndugleikar innan land og kommunu og einamest um viðgerð av persónupplýsingum í sambandi við fyrisitingaratgerðir, sum t.d. fráboðan um

avgerð um sosialar veitingar ella avgerð um skattseting. Ikki bert viðgerð í sambandi við ítøkiligar avgerðir er fevnd, men øll umsitingarlig viðgerð.

At orðingin um almenna myndugleikaútinnan er broytt, so at tað ikki longur verður víst til *"ella triðjapersóninum, sum hevur fingið persónupplýsingarnar útflýggjaðar"*, verður ikki mett at hava týdning í mun til galdandi rætt. Myndugleikaútinnanin kann sostatt framhaldandi verða framd av einum (privatum) triðjaparti, sum hevur fingið persónupplýsingarnar. Útflýggjanin (t.e. víðarigevingin) til triðjapersónin røkir ofta samfelagsáhugamál.

*Nr. 6. Heimilað áhugamál*
Ásetingin svarar í høvuðsheitum til § 9, stk. 1, nr. 6 í galdandi løgtingslóg við málsligum tillagingum.

Ásetingin hevur við sær, at dátuábyrgdarin ella ein triðipersónur kann viðgera persónupplýsingar, um hetta er neyðugt til tess at fylgja einum heimilaðum áhugamáli (legitim interesse), um ikki áhugamál o.a. hjá skrásetta ganga fram um. Hetta kann serliga verða viðkomandi um skrásetti er eitt barn.

Ásetingin hevur við sær, at tað í hvørjum einstøkum føri skal gerast ein ítøkilig meting har heimilaðu áhugamálini hjá dátuábyrgdaranum verða vigað upp ímóti áhugamálunum hjá tí skrásetta.

Dátuábyrgdarin og triðipersónurin kunnu røkja heimilað áhugamál hjá øðrum persónum. Ein treyt er tó, at hesi áhugamál eru heimilað hjá viðkomandi persóni.

Lagt verður upp til at áseta í *stk. 2*, at almennir myndugleikar ikki kunnu viðgera persónupplýsingar við heimild í viðgerðarregluni í § 8, stk. 1, nr. 6.

Hetta er ein broyting í mun til galdandi løgtingslóg, og er grundað á eina hugsan um, at almennir myndugleikar eiga at viðgera persónupplýsingar grundað á lóggávu, t.e. rættarligar skyldur, sbrt. stk. 1, nr. 3, ella sum liður í myndugleikaútinnan, sbrt. stk. 1, nr. 5, og ikki grundað á eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri. Sí eisini áskoðan nr. 47 í GDPR.

Ikki er væntandi, at hendan broytingin fyri almennar myndugleikar hevur stórar avmarkingar við sær í praksis, av tí at tað uttan iva er sjáldan at almennir myndugleikar nýta hetta viðgerðargrundarlag í dag av nevndu orsøkum.

Sí eisini áskoðan nr. 40 og 41 og 44-49.

**Treytir fyri samtykki**

**Til § 9**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 7 í GDPR. Líknandi áseting er ikki í galdandi løgtingslóg, tó at samtykkið, eins og í hesum uppskoti, er allýst.

Í *stk. 1* verður ásett, at tá viðgerð av persónupplýsingum er grundað á samtykki, skal dátuábyrgdarin kunna vísa í, at tann skrásetti hevur givið samtykki.

Ásetingin hevur ikki við sær formkrøv, og merkir sostatt ikki, at krav verður um, at samtykkið skal verða skrivligt. Ásetingin hevur hinvegin við sær, at tað verður heilt greitt, at

dátuábyrgdarin hevur próvbyrðuna fyri, at samtykki er givið. Tí er skilagott, um dátuábyrgdarin á einhvønn hátt skjalfestir, at samtykki er givið.

Í *stk. 2* er skotið upp, hvussu farast skal fram, um tann skrásetti skal geva samtykki til fleiri ymisk viðurskifti í einari skrivligari váttan.

Í hesum førum skal umbønin um samtykki til viðgerð av persónupplýsingum leggjast fram á ein lætt skiljandi og lætt atkomiligan hátt, á einum greiðum og einføldum máli og á ein hátt sum týðiliga skilur seg frá hinum viðurskiftunum. Hetta skal tryggja, at tann skrásetti í øllum førum veit, at hann ella hon gevur samtykki til viðgerð av persónupplýsingum, og hvat henda viðgerð snýr seg um. Ein váttan, sum ikki heldur treytirnar í hesi løgtingslóg er ikki bindandi fyri partarnar.

Eins og í galdandi løgtingslóg verður lagt upp til í *stk. 3*, at tann skrásetti til eina og hvørja tíð kann taka aftur sítt samtykki. Hetta ávirkar ikki lóggildið av viðgerðini, sum er farin fram, áðrenn samtykkið bleiv tikið aftur.

Ein viðgerð kann hava fleiri viðgerðarheimildir samstundis. Um ein viðgerð er grundað á samtykki, men tað frá byrjan eisini var møguligt at brúka eina aðra viðgerðarheimild, kann viðgerðin halda fram við hesi aðru heimild, um samtykkið verður tikið aftur.

Tað er eisini møguligt at halda fram við eini viðgerð, um tað, tá samtykki verður tikið aftur, vísir seg at verða ein onnur (nýggj) viðgerðarheimild, sum kann brúkast. Sí eisni § 28, stk. 1, nr. 2 í løgtingslógaruppskotinum.

Sum nakað nýtt verður tað í *stk. 4* ásett sum eitt krav, at tann skrásetti, áðrenn samtykki verður givið, skal verða kunnaður um, at samtykkið kann takast aftur. Eisini verður ásett, at tað skal verða eins lætt at taka eitt samtykki aftur, sum at geva tað.

Sí eisini serligu viðmerkingarnar til § 6, nr. 10 og áskoðan nr. 42 og 43 í GDPR.

**Treytir fyri samtykki frá einum barni í sambandi við kunningarsamfelagstænastur**

**Til § 10**
Ásetingin byggir í høvuðsheitum á innihaldið í grein 8 í GDPR.

Talan er um eina nýggja áseting, sum snýr seg um viðgerð av persónupplýsingum um børn í sambandi við útboð av kunningarsamfelagstænastum.

Ásetingin snýr seg ikki um almennan avtalurætt ella nær børn og ung alment kunnu binda seg løgfrøðiliga, t.e. innganga rættarhandlar og ráða yvir sínum ognum. Ásetingin er bert galdandi í mun til viðgerð av persónupplýsingum og kunningarsamfelagstænstur.

Kunningarsamfelagstænastur skal skiljast í samsvari við allýsingina í § 6, nr. 16. Kunningarsamfelagstænastur fevndar av § 10 eru t.d. sosialir miðlar (Facebook, Snapchat o.s.fr., men eisini lokal skúla-intranet kunnu verða fevnd), online-spøl og e-handil av ymsum slag.

Lagt verður upp til at áseta í *stk. 1*, at ein viðgerð av persónupplýsingum um børn – í sambandi við útboð av kunningarsamfelagstænastum beinleiðis til børn – sum hevur samtykki sum heimildargrundarlag bara er lóglig, um barnið er í minsta lagi 13 ár.

Hetta hevur við sær, at tað ikki sum í dag skal metast ítøkiliga í hvørjum einstøkum føri, um barnið er (nóg) búgvið at samtykkja til eina viðgerð av persónupplýsingum tá tað kemur til kunningarsamfelagstænastur.

Í *stk. 2* verður ásett, at um barnið er undir 13 ár skal samtykkið verða givið ella góðkent av tí, sum hevur foreldramyndugleikan.

Eisini verður lagt upp til í *stk. 2*, at dátuábyrgdarin í teimum førum, tá barnið er yngri enn 13 ár í rímiligan mun skal royna at kanna, at viðkomandi, sum hevur foreldramyndugleikan hevur givið ella góðkent samtykkið. Dátuábyrgdarin skal í sínum royndum taka atlit at tøkari tøkni. Um dátuábyrgdarin hevur gjørt nóg mikið, verður ítøkiliga mett í hvørjum einstøkum føri.

Tað verður ikki ásett meira nágreiniligt, hvørji tiltøk dátuábyrgdarin skal seta í verk fyri at kanna um tann, sum hevur foreldramyndugleikan hevur givið samtykki. Hetta verður nágreinað í praksis av Dátueftirlitinum.

Í grein 40, stk. 2, litra g í GDPR er lagt upp til, at krøvini til dátuábyrgdarar sambært grein 8 verða nágreinað í sokallaðum atferðarkodeksum, sum felagsskapir o.o., sum umboða dátuábyrgdarar ella dátuviðgerar kunnu gera. Tá hesi atferðarkodeks verða gjørd, kann Dátueftirlitið í tann mun tað er viðkomandi, taka tey við í arbeiðinum at nágreina ásetingina í § 10.

Ásetingin í § 10 svarar sum nevnt til grein 8 í GDPR, tó so, at aldursmarkið í grein 8 í GDPR er sett at vera 16 ár. Tað er tó møguligt hjá ES-limalondunum at áseta lægri aldursmark. Eins og í Danmark verður skotið upp, at aldursmarkið í føroysku ásetingini verður 13 ár.

Orsøkin til, at skotið verður upp eitt aldursmark á 13 ár, er, at børn í Føroyum – eins og børn í Danmark – eru von við at ferðast á netinum og á sosialum miðlum. Atgongdin til kunning og luttøka í online-virksemi hevur stóran samfelagsligan og sosialan týdning fyri børn, og hevur við sær, at tey hava og halda fast í samband við vinfólk, luttaka í tjakbólkum, leita eftir kunning til skúlan, spæla spøl og lurta eftir tónleiki o.a. Eitt ov høgt aldursmark kann hava við sær, at børn antin verða útihýst frá kunningarsamfelagstænastum, tí foreldur ikki vilja geva sítt samtykki, ella lúgva um sín aldur.

Samstundis, sum aldursmark verður sett at vera 13 ár í § 10, skal havast í huga, at dátuverndarlógin setur almenn krøv til dátuábyrgdarar og dátuviðgerar. At dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu hava eina váðagrundaða tilgongd til viðgerðartrygd hevur m.a. við sær, at krøvini til trygd eru serliga strong, tá persónupplýsingar um børn skulu viðgerast. Víst verður til pkt. 1.4.2. í almennu viðmerkingunum.

Sambært áskoðan nr. 38 er samtykki frá tí, sum hevur foreldramyndugleikan ikki neyðugt – heldur ikki, um barnið er undir 13 ár – um talan er um fyribyrgjandi ella ráðgevandi tænastur, sum verða bodnar barninum. Hetta hevur við sær, at barnið hevur møguleika fyri at søkja sær t.d. ráðgeving um alkoholnýtslu ella sálarligar trupulleikar, uttan at tann, sum hevur foreldramyndugleikan, samtykkir.

Sí eisini áskoðan nr. 38 í GDPR.

**Viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum**

**Til § 11**
Ásetingin byggir í høvuðsheitum á innihaldið í grein 9, stk. 1 í GDPR.

Lagt verður upp til, at tað í § 11 verður ásett, hvørjar persónupplýsingar eru viðkvæmar. Útgangsstøðið er, at viðgerð av hesum upplýsingum er bannað. Treytirnar fyri, at viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum hóast alt kann fara fram, eru strangari enn treytirnar fyri at viðgera vanligar persónupplýsingar sambært § 8.

Í *stk. 1* eru úttømandi nevndar tær persónupplýsingar, sum eru at rokna sum viðkvæmar.

Lagt verður upp til, at tær upplýsingar, sum sambært § 2, nr. 9 í galdandi løgtingslóg, eru at rokna sum viðkvæmar, framhaldandi verða at rokna sum viðkvæmar. Harafturat verða lagdar ílegudátur og biometriskar dátur.

Viðmerkjast skal í tí sambandi, at tað í galdandi løgtingslóg stendur, at upplýsing um *lit og ættarslag* er at rokna sum viðkvæmar upplýsingar. Hetta er óivað ein umseting av orðunum *racemæssig og etnisk baggrund* (á enskum *racial or ethnic origin*). Mett verður, at tað er meira rættvísandi, at hetta verður broytt til upplýsing um *ættarslag ella etniskan uppruna*.

At lagt verður upp til at halda fast í, at persónupplýsingar, sum í dag eru at rokna sum viðkvæmar, framhaldandi skulu roknast sum viðkvæmar hevur ,við sær, at ásetingin víkur eitt sindur frá ásetingini í grein 9 í GDPR, sum ikki fevnir um *revsiverd viðurskifti*, *munandi sosialar truplleikar* og *onnur heilt privat viðurskifti*.

Av tí, at GDPR er ein totalharmonisering av dátuverndarrættinum í ES, er ikki møguligt hjá ES-limalondunum at áseta serligar nationalar reglur um, at aðrar upplýsingar enn tær, sum eru nevndar í grein 9, stk. 1, eisini skulu vera viðkvæmar. Hesum kørmum er føroysk lóggáva ikki bundin av, og tí verður lagt upp til, at upplýsingar um revsiverd viðurskifti, munandi sosialar truplleikar og onnur heilt privat viðurskifti eins og í dag skulu verða at rokna sum viðkvæmar og tí fevndar av § 11, stk. 1.

Við hesum verður lagt upp til eitt hægri verndarstøði fyri tann skrásetta í mun til ES – tí krøvini til viðgerð av hesum persónupplýsingunum eisini verða strangari – uttan at tann fríi flutningurin av persónupplýsingum verður skerdur merkisvert. Tí verður ikki mett, at hetta hevur negativa ávirkan á føroyska góðkenning sum trygt triðjaland, sbrt. pkt. 1.2.8. og 1.2.9. í almennu viðmerkingunum.

Niðanfyri verða tær persónupplýsingar, sum eru at rokna sum viðkvæmar, nágreinaðar.

Upplýsingar um **húðarlit, ættarslag ella etniskan uppruna** fevna t.d. um upplýsingar um rasu og ættarviðurskifti.

Upplýsing um tjóðskap (nationalitet) ella navn er vanliga ikki viðkvæmar upplýsingar, sjálvt um hesar upplýsingar í ávísum førum kunnu geva ábendingar um ættarslag ella etniskan uppruna.

**Politisk sannføring** fevnir um politiska hugsan og sjónarmið og røkkur longur enn bert til partapolitisk tilknýti. Um ein felagsskapur er mettur at vera politiskur, kann limaskapur í hesum felagsskapi lýsa politisk sjónarmið hjá viðkomandi limi. Støða má takast í hvørjum einstøkum føri.

**Átrúnaðarlig sannføring** fevnir um upplýsingar um trúnna hjá tí einstaka, líka mikið hvør henda trúgv er. Tað, sum er nevnt omanfyri um limaskap í politiskum felagsskapi, er eisini galdandi fyri limaskap í átrúnaðarligum felagsskapi.

**Heimsspekilig sannføring** fevnir um ymiskar heimsspekiligar, filosofiskar áskoðanir.

**Yrkisfelagsligt tilknýti** fevnir um upplýsingar um limaskap í yrkisfelag, meðan upplýsing um, at ein persónur ikki er limur í yrkisfelag ikki er fevnd av § 11.

**Ílegudátur** fevna um persónupplýsingar, sum viðvíkja arvaðum ella ognaðum íleguserkennum hjá einum persóni, sum geva eintýddar upplýsingar um lívvirki ella heilsuna hjá persóninum.

**Biometriskar dátur** fevna um persónupplýsingar, ið sum fylgi av serligari tekniskari viðgerð av likamligum, lívvirkisligum ella atferðarligum serkenni hjá einum persóni loyva ella vátta eina eintýdda eyðmerking av viðkomandi, t.d. andlitsmynd ella fingramerkisupplýsingar.

**Heilsuupplýsingar** fevna um núverandi, komandi og fyrrverandi kropsligu og sálarligu heilsustøðuna hjá einum persóni og somuleiðis um upplýsingar um misnýtslu av heilivagi, rúsevni, narkotika, rúsdrekka og øðrum njótingarevnum.

Heilsuupplýsingar skal tulkast breitt og fevnir sostatt um upplýsingar um øll viðurskifti, sum hava við kropsligu og sálarligu heilsuna hjá skrásetta at gera.

Upplýsingar um, at ein persónur er sjúkur ella sjúkrameldaður uttan nærri at siga frá, hvat viðkomandi feilar, er tó í útgangsstøðinum ikki ein viðkvom upplýsing fevnd av § 11.

Sí eisini áskoðan nr. 35 í GDPR.

Upplýsingar um **kynslig viðurskifti** fevna m.a. um upplýsing um seksuellan aktivitet og sertokka og upplýsing um, at ein persónur er samkyndur.

Upplýsingar um **revsiverd viðurskifti** eru at skilja breitt og fevna um eitthvørt brot á lóggávu, sum hevur ella kann hava revsing við sær uttan mun til, um revsing ítøkiliga er áløgd. Eisini møguligar aðrar fylgjur, eitt nú frádøming av vinnurætti eru fevndar.

Upplýsing um, at ein persónur er ella hevur verið undir illgruna, er skuldsettur, ákærdur ella dømdur er fevnd av ásetingini. Hinvegin er ásetingin ikki at skilja so breitt, at hon fevnir um eina og hvørja fráboðan til politiið. Fyri at fráboðanir til politiið eru fevndar krevst, at tær á onkran hátt eru undirbygdar.

Upplýsingar um **munandi sosialar trupulleikar** fevnir m.a. um álsvarsliga ósemju millum hjún ella millum foreldur og børn, upplýsingar um, at persónur hevur verið fyri óhappi við munandi persónligum ella sosialum avleiðingum, upplýsingar um drúgt arbeiðsloysi ella um, at persónur í longri tíðarskeið hevur fingið serliga tørvandi almannastuðul.

Upplýsingar um **onnur heilt privat viðurskifti** fevna um sundurlesing, umsókn um skilnað, ættleiðing, familjuklandur o.s.fr.

Upplýsingar, sum ikki beinleiðis eru fevndar av bólkunum av upplýsingum omanfyri, men sum kunnu dragast burturúr einum samanhangi, t.d. at skrásetti hevur búð á sálarsjúkrahúsi, eru eisini at rokna sum viðkvæmar persónupplýsingar (í hesum føri ein heilsuupplýsing).

Viðgerð av nevndu persónupplýsingum er í útgangsstøðinum bannað. Í *stk. 2* verður tó ásett, at viðgerð kann fara fram, um treytirnar í §§ 12-14 ella 18-19 eru loknar. Heimild skal sostatt verða fyri viðgerðini í einum av hesum ásetingum.

**Til § 12**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 9, stk. 2 í GDPR. Líknandi áseting er í § 10 í galdandi løgtingslóg.

Í § 12 verður ásett, nær persónupplýsingar, fevndar av § 11, stk. 1, og sum tað í útgangsstøðinum ikki er loyvt at viðgera, hóast alt kunnu viðgerast.

Umframt at hava eina viðgerðarheimild í §§ 12-14 skal viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum altíð lúka meginreglurnar í § 7.

Í *stk. 1* verður lagt upp til hesar viðgerðarheimildir:

1) Nágreiniligt samtykki.
2) Heimilað í lóg.
3) Starvsrættarligar skyldur og tilskilað rættindi.
4) Verja av altumráðandi áhugamálum hjá skrásetta ella øðrum persónum.
5) Almannagagnlig feløg og grunnar.
6) Persónupplýsingar, sum eyðsýnt eru almannakunngjørdar av skrásetta.
7) Rættarkrav.
8) Sjúkraviðgerð o.a.

*Nr. 1. Nágreiniligt samtykki*
Lagt verður upp til, at tann skrásetti – eins og er galdandi fyri vanligar persónupplýsingar, sbrt. § 8, stk. 1, nr. 1 – kann geva sítt samtykki til, at viðkvæmar persónupplýsingar verða viðgjørdar.

Tá tað í *stk. 1, nr. 1* verður víst til, at tann skrásetti skal geva *nágreiniligt* samtykki, hevur hetta í útgangsstøðinum ikki strangari krøv við sær, enn tey krøv, sum eru til samtykki eftir § 8, stk. 1, nr. 1. Samtykki er allýst í § 6, nr. 10 og skal í øllum førum verða *nágreiniligt* fyri at verða eitt lógligt viðgerðargrundarlag.

At tað í stk. 1, nr. 1 kortini stendur, at tann skrásetti skal hava givið nágreiniligt samtykki, er ein eyka áminning um, at tað í hesum førum ikki skal vera nakar ivi um, hvørt skrásetti hevur givið samtykki til viðgerðina.

Er tað í lóggávu ásett, at viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum ikki kann fara fram grundað á samtykki frá tí skrásetta, kann § 12, stk. 1, nr. 1 ikki nýtast sum viðgerðarheimild.

*Nr. 2. Heimilað í lóg*
Lagt verður upp til, at tað eins og í dag skal verða møguligt at viðgera viðkvæmar persónupplýsingar um hetta er heimilað í lóg.

At viðgerðin kann verða heimilað í lóg skal skiljast sum í lóg ella ásetingum heimilaðum í lóg.

Viðgerðarheimildin hevur við sær, at Løgtingið og landsstýrið kunnu gera av, at viðkvæmar persónupplýsingar kunnu viðgerðast til ávís endamál, um ynski er um eina heilt greiða heimild.

Meðan dátuverndarlógin ásetur reglur um, nær persónupplýsingar *kunnu* viðgerðast, eru reglur í serlóggávu ofta orðaðar soleiðis, at persónupplýsingar av einhvørjari orsøk *skulu* viðgerðast. Tað er umráðandi, at hóskandi fyrilit verða tikin fyri skrásetta, tá hesar reglur verða ásettar. Sí serligu viðmerkingarnar til § 4.

*Nr. 3. Starvsrættarligar skyldur og tilskilað rættindi*
Ásetingin svarar í høvuðsheitum til § 10, stk. 1, nr. 8 í galdandi løgtingslóg, og hevur við sær, at viðkvæmar persónupplýsingar kunnu viðgerast, um viðgerðin er neyðug fyri at halda starvsrættarligar skyldur og tilskilað rættindi hjá dátuábyrgdaranum ella tí skrásetta.

Skyldur og tilskilað rættindi skulu skiljast breitt og fevna um øll sløg av skyldum og rættindum, sum áliggja dátuábyrgdaranum ella tí skrásetta á einum starvsrættarligum grundarlagi.

Skyldur og tilskilað rættindi kunnu verða grundað á antin lóggávu ella sáttmálar millum feløg á arbeiðsmarknaðinum. Tað er sostatt møguligt at viðgera viðkvæmar persónupplýsingar, um hetta er ásett í einum arbeiðsmarknaðarsáttmála, um viðgerðin er neyðug fyri at halda starvsrættarligar skyldur ella tilskilað rættindi.

*Nr. 4. Verja av altumráðandi áhugamálum hjá skrásetta ella øðrum persónum*
Ásetingin svarar til § 10, stk. 1, nr. 3 í galdandi løgtingslóg, og fevnir m.a. um, at skrásetti í sambandi við sjúku ella annað, her undir ellisviknað, sálarligan viknað ella óvit ikki megnar at geva samtykki.

Um onkur er, sum kann samtykkja vegna tann skrásetta, kann ásetingin ikki nýtast. Viðvíkjandi altumráðandi áhugamálum verður eisini víst til serligu viðmerkingarnar til § 8, stk. 1, nr. 4.

*Nr. 5. Almannagagnlig feløg og grunnar*
Ásetingin svarar í høvusheitum til § 10, stk. 2 í galdandi løgtingslóg og hevur við sær, at almannagagnlig feløg og grunnar undir ávísum treytum kunnu viðgera viðkvæmar persónupplýsingar um limir, fyrrverandi limir ella persónar, sum við sama endamáli javnan eru í sambandi við hesi.

Fevnd av ásetingini eru ikki-vinnulig feløg og grunnar, sum hava samfelagsligan týdning, t.d. samtøka av persónum, sum hava somu felags áhugamál ella áskoðanir, t.d. átrúnaðarliga, heimsspekiliga ella politiskt. Eisini fevnir ásetingin um t.d. sjúklingafelagsskapir. Fevnd eru t.d. Krabbameinsfelagið, Heilafelagið og politisk ungmannafeløg ella flokkar og fakfeløg.

At tað í nýggju ásetingini verður víst til, at almannagagnliga felagið ella grunnurin ikki skulu virka við vinningi fyri eyga er ikki ein broyting í mun til galdandi rætt.

Eins og í dag kunnu persónupplýsingarnar bara viðgerast innan fyri egnar karmar hjá feløgunum o.tíl. og í mun til ein avmarkaðan skara. Persónupplýsingar kunnu tískil ikki víðarigevast við heimild í hesi áseting. Víðarigeving krevur samtykki frá tí skrásetta.

*Nr. 6. Persónupplýsingar, sum eyðsýnt eru almannakunngjørdir av skrásetta*
Hevur skrásetti sjálvur almannakunngjørt viðkvæmar persónupplýsingar, er ikki sami tørvur á dátuvernd, og tá kunnu persónupplýsingarnar viðgerðast við heimild í § 12, stk. 1, nr. 6.

Upplýsingar eru almannakunngjørdar um tær eru komnar til kunnleika hjá einum breiðum skara av persónum, t.d. um tær eru endurgivnar í sjónvarpi, útvarpi, tíðindabløðum, á heimasíðum o.s.fr. Tað er ikki nóg mikið, at dátuábyrgdarin veit, at ávísar upplýsingar eru ætlaðar til almannakunngerðing. Skrásetti skal sjálvur hava tikið stig til almannakunngerðingina.

Almannakunngerð á sosialum miðlum, so sum Facebook, Twitter og Instagram, er eisini ein almannakunngerð, sum er fevnd av stk. 1, nr. 6 um so er, at øll kunnu fáa atgongd til upplýsingarnar. Eru upplýsingarnar lagdar í ein afturlatnan bólk og bara ein avmarkaður skari hevur atgongd, eru upplýsingarnar ikki almannakunngjørdar.

*Nr. 7. Rættarkrav*
Ásetingin svarar til § 10, stk. 1, nr. 5 í galdandi løgtingslóg.

Rættarkrav skal skiljast breitt og fevnir um fíggjarlig, løgfrøðilig o.s.fr. krøv hjá skrásetta, dátuábyrgdaranum ella triðjapersóni.

Dømi kunnu vera viðgerð av heilsuupplýsingum, sum sosialir myndugleikar gera fyri at staðfesta, um skrásetti hevur krav uppá eina veiting, ella viðgerð av heilsuupplýsingum, sum tryggingarfeløg gera fyri at meta um, hvørt skrásetti hevur eitt krav um endurgjald.

Somuleiðis tann viðgerð av upplýsingum, sum almennir myndugleikar gera sum liður í myndugleikaútinning, t.d. tá sosialir myndugleikar hava illgruna um blóðskemd ella annan kynsligan ágang móti børnum og seta seg í samband við aðrar myndugleikar so sum sjúkrahús, politi o.o. til tess at verja børnini.

Eisini fevnir reglan um ta viðgerð av upplýsingum um tann skrásetta, sum er neyðug, fyri at dátuábyrgdarin kann meta um, um krav kann gerast galdandi móti skrásetta. Ásetingin fevnir eisini um ta støðu, at viðgerð er neyðug fyri at rættarkrav hjá triðjapersóni kann staðfestast, gerast galdandi ella verjast, t.d. um dómstólarnir skulu viðgera upplýsingar um aðrar persónar enn partarnar fyri at taka avgerð í einum rættarmáli.

*Nr. 8. Sjúkraviðgerð o.a.*
Ásetingin svarar til § 10, stk. 1, nr. 7 í galdandi løgtingslóg við málsligum tillagingum.

Viðgerðarheimildin er eins og í dag treytað av, at persónupplýsingarnar verða viðgjørdar av persónum innan heilsuverkið, sum hava fingið álagt tagnarskyldu. Tagnaðarskyldan kann t.d. verða áløgd í kapitli9 í anordning nr. 821 af 22. juni 2018 om ikrafttræden for Færøerne af

sundhedsloven ella í § 152 og §§152a-f í lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939 om straffeloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 7. mai 2019.

Viðgerð sbrt. § 12, stk. 1 krevur í mun til galdandi persónsupplýsingarlóg ikki loyvi frá Dátueftirlitinum frammanundan.

Í *stk. 2* verður lagt upp til lutvíst at føra § 10, stk. 3 í galdandi løgtingslóg víðari. Viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum kann sostatt fara fram, um viðgerðin er neyðug fyri at røkja týðandi samfelagsáhugamál.

Í mun til ásetingina í galdandi løgtingslóg verður lagt upp til, at tað einans eru privatir dátuábyrgdarar, sum skulu hava loyvi frá Dátueftirlitinum frammanundan til viðgerð, sum er neyðug fyri at røkja týðandi samfelagsáhugamál. Almennir myndugleikar kunnu sostatt nýta viðgerðarheimildina uttan loyvi frá Dátueftirlitinum frammanundan.

Ásetingin er ein savningargrein, sum eins og í dag hevur eitt snævurt virkisøki og kann tí bara nýtast í einstøkum førum. Hetta er galdandi fyri bæði almennar og privatar dátuviðgerðar.

Í *stk. 3* verður lagt upp til, at avvarðandi landsstýsismaður í samráð við landsstýrismannin í dátuverndarmálum kann áseta reglur um viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum. Hesar reglur skulu veita hóskandi trygd fyri grundleggjandi rættindum og áhugamálunum hjá skrásetta.

Heimildin skal einans nýtast í serligum førum. At landsstýrismaðurin í dátuverndarmálum skal takast við uppá mál, hevur við sær, at siðvenjan verður einsrættað.

Ígjøgnum siðvenju hjá Dátueftirlitinum verða viðgerðarheimildirnar í stk. 1 og 2 nágreinaðar. Dátueftirlitið fer eisini í tann mun tað er neyðugt at gera vegleiðingar til ásetingarnar.

Viðmerkjast skal, at tað á ávísum økjum longu er ein siðvenja um samtykki, sum Dátueftirlitið skal taka hædd fyri, um kravið um samtykki verður nágreinað í vegleiðing el.tíl. Hetta er t.d. á granskingarøkinum, har Vísindasiðsemisnevndin góðkennir orðingar í samtykkum, sum vera brúkt í granskingarverkætlanum.

Um viðkvæmar persónupplýsingar sí eisini áskoðan nr. 51-56 í GDPR.

**Viðgerð av persónupplýsingum um revsiverd viðurskifti**

**Til § 13**
Ásetingin, sum snýr seg um viðgerð av persónupplýsingum um revsiverd viðurskifti, byggir á innihaldið í grein 10 í GDPR, sum snýr seg um viðgerð av persónupplýsingum um revsidómar og lógarbrot.

Lagt er upp til, at *revsiverd viðurskifti* eins og í galdandi løgtingslóg eru at meta sum viðkvæmar persónupplýsingar. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 11, stk. 1 omanfyri. Talan er tó um eina broyting í mun til galdandi løgtingslóg, at tað er lagt upp til eina serstaka áseting um viðgerð av hesum upplýsingum.

Útgangsstøðið verður, at heimild at viðgera upplýsingar um revsiverd viðurskifti skal finnast í § 13, sum ásetur neyvari treytir fyri viðgerð av hesum upplýsingum.

Í *stk. 1* verður lagt upp til, at almenna fyrisitingin kann viðgera persónupplýsingar um revsiverd viðurskifti, um tað er neyðugt fyri at myndugleikin kann røkja sínar uppgávur.

Í *stk. 2* verður ásett undir hvørjum treytum almennir myndugleikar kunnu geva upplýsingar um revsiverd viðurskifti víðari. Stk. 2 fevnir um víðarigeving til bæði aðrar myndugleikar og til privat.

Lagt verður upp til, at tað í *stk. 3* verður ásett, at privat eisini í einstøkum førum eisini kunnu viðgerða upplýsingar um revsiverd viðurskifti. Útgangsstøðið er, at privat einans kunnu viðgera hesar persónupplýsingar, um tann skrásetti hevur givið samtykki. Henda heimild kann m.a. verða nýtt í samband við starvssetan.

Hevur skrásetti ikki givið samtykki kunnu upplýsingarnar viðgerast, um hetta er neyðugt fyri at røkja sjálvsøgd heimilað áhugamál (berettiget interesse) og hesi áhugamál ganga fram um fyrilitini fyri skrásetta. Talan er um eina viðgerðarheimild, sum hevur eitt ógvuliga snævurt virkisøki, og sum einans kann nýtast í einstøkum førum. Heimildin kann t.d. nýtast, um ein privat fyritøka, t.d. ein handil, skrásetur upplýsingar um stuldur í sambandi við, at hetta skal meldast til politiið.

Í *stk. 4* eru treytirnar fyri, at privat kunnu víðarigeva persónupplýsingar um revsiverd viðurskifti. Henda heimildin hevur – eins og heimildin at viðgera upplýsingarnar – eitt snævurt virkisøki.

Lagt verður upp til, at tað í *stk. 5* verður ásett, at viðgerð av persónupplýsingum um revsiverd viðurskifti, sbrt. stk. 1-4, kann eisini fara fram, um treytirnar í § 12 eru loknar. Hetta er fyri at gera tað heilt greitt, at persónupplýsingar um revsiverd viðurskrifti eisini kunnu viðgerast, um heimild er fyri hesum í § 12, t.d. um viðgerðin er heimilað í lóg, sbr. § 12, stk. 1, nr. 2.

**Til § 14**
Lagt verður upp til, at ásetingin í § 12 í galdandi løgtingslóg verður førd víðari í § 14, so tað einans er møguligt fyri tað almenna at føra eina fullfíggjaða skrá við revsirættarligum dómsúrskurðum.

Hetta hevur við sær, at um ein privatur ger eina slíka skrá, skal tað verða gjørt undir almennum eftirliti. Skráin skal vera fullfíggjað fyri at vera fevnd av ásetingini, t.e. vera ein skrá yvir allar sagdar revsirættarligar dómsúrskurðir. Skráir, sum bert hava persónupplýsingar, sum stava frá nøkrum dómsúrskurðum, eru ikki fevndar av hesi serligu áseting.

**Viðgerð, sum ikki krevur eyðmerking**

**Til § 15**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 11 í GDPR og er nýggj í føroyskum høpi sum serstøk grein.

*Stk. 1* hevur við sær, at dátuábyrgdarin ikki hevur skyldu at viðgera fleiri upplýsingar enn neyðugt fyri at halda løgtingslógina. Ásetingin er í ávísan mun ein nágreining av meginregluni um dátuminimering í § 7, stk. 1, nr. 4 í hesum uppskoti, sum eisini er við í galdandi løgtingslóg.

Ásetingin hevur við sær, at ein dátuábyrgdari, sum viðgerð persónupplýsingar um ein skrásettan, sum dátuábyrgdarin ikki veit hvør er (tó at talan er um persónupplýsingar), hevur dátuábyrgdarin ikki skyldu at varðveita, útvega ella viðgera fleiri upplýsingar fyri at kunna halda løgtingslógina, heruppií serliga reglurnar um rættindini hjá skrásetta.

Eitt dømi kann vera, at ein dátuábyrgdari fær ein teldupost. Teldupostadressan er ein persónupplýsing, sum tó ikki í øllum førum hevur við sær, at dátuábyrgdarin veit, hvør sendarin ella skrásetti er (t.d. rennari1234@12345.fo). Í hesum førum hevur dátuábyrgdarin ikki skyldu at heinta inn fleiri upplýsingar fyri at halda løgtingslógina, t.d. fyri at tann skrásetti kann nýta síni rættindi.

Henda áseting kann t.d. vera viðkomandi fyri hald uppá tíðindaskriv ella tilboðsbløð.

Sambært *stk. 2* skal dátuábyrgdarin, um hann kann vísa á, at hann ikki fær eyðmerkt tann skrásetta, hóast hann viðger persónupplýsingar, kunna tann skrásetta um hetta, um tað er gjørligt.

Hetta er m.a. støðan, um dátuábyrgdarin einans viðgerð teldupostaddessu, t.e. ein persónupplýsing, men ikki nóg mikið til ítøkiligt at eyðmerkja tann skrásetta. Í hesum førum eru reglurnar um rættindini hjá skrásetta – burtursæð frá kunningarskylduni – ikki galdandi, uttan so, at tann skrásetti veitir dátuábyrgdaranum fleiri upplýsingar, ið gera tað møguligt at eyðmerkja tann skrásetta.

Sí eisini áskoðan nr. 57 og 64 í GDPR.

## Kapittul 3
## Serligar viðgerðarstøður

Í kapitli 3 eru viðgerðarreglur til serligar viðgerðarstøður. Talan er um støður, sum á einhvønn hátt ikki rúmast innanfyri vanligu viðgerðarreglurnar í kapitli 2 ella har tað verður mett neyðugt at hava serligar reglur, so rættarstøðan gerst heilt greið.

Kapittul 3 byggir á innihaldið í kapitli 9 í GDPR, sum eisini hevur reglur um serligar viðgerðarstøður, har tað í stóran mun verður latið ES-limalondunum sjálvi at meta um, hvussu dátuverndarlóggávan á einum serstøkum øki skal vera.

**Viðgerð av persónstalinum**
Viðgerð av persónstalinum hevur tíðum verið umrøtt, síðani Landsfólkayvirlitið við løgtingslóg nr. 86 frá 1. juni 1982 fekk heimild at geva fólki í Føroyum eitt persónstal.

Árini frá 1984, tá skrásetingarlógirnar vórðu settar í gildi, til persónsupplýsingarlógin varð samtykt í 2001, var persónstalið flokkað sum ein viðkvom persónupplýsing. Treytin fyri at viðgera persónstalið var enntá strangari enn viðgerð av øðrum viðkvomum persónupplýsingum og kravdi hetta lógarheimild í hvørjum einstøkum føri.

Strongu reglurnar um viðgerð av persónstalinum var ein av høvuðsorsøkunum til, at skrásetingarlóggávan bleiv endurskoðað, og at ein nýggj persónsupplýsingarlóg sá dagsins ljós í 2001.

Í galdandi persónsupplýsingarlóg er persónstalið ikki flokkað sum ein viðkvom persónupplýsing, og verður tað heldur ikki við hesum uppskotinum.

Tíðin, síðani hvør føroyingur fekk eitt persónstal fyrst í 1980'unum til í dag eru nógv broytt, bæði í mun til viðgerð av persónupplýsingum og í mun til tøkniliga frambrotið.

Viðgerð av persónupplýsingum fer í alsamt størri mun fram í talgildum loysnum, og hesar loysnir hava ofta tað til felags, at tær skulu nýta eina eintýðuga eyðmerking av brúkaranum. Persónstalið kann tá nýtast sum tann upplýsingin um tann einstaka, sum kann eyðmerkja viðkomandi, so at eingin ivi er um, hvønn talan er um.

At vit hava eina skipan í Føroyum har øll hava eitt persónstal – sum eintýðugt eyðmerkir hvønn einstakan – gevur m.a. møguleika at bjóða fram talgildar loysnir, sum við persónstalinum sum grundarlag eintýðugt eyðmerkja tann einstaka og geva viðkomandi atgongd til upplýsingar og tænastur, t.d. ígjøgnum internetið.

Hesar loysnir skulu sjálvtsagt umframt at gera tað lættari hjá borgarum at samskifta við myndugleikar og fyritøkur, t.d. bankar, tryggja eitt nøktandi verndarstøði, sum nýtsla av persónstali ikki í sær sjálvum tryggjar.

**Til § 16**
Ásetingin svarar til § 11 í galdandi løgtingslóg og ásetir, nær almennir og privatir dátuábyrgdarar kunnu viðgera persónstalið. Hóast orðingin í § 16 er tann sama sum § 11 í galdandi løgtingslóg, er lagt upp til, at ásetingin skal tulkast í nýggja samanhanginum, sum greitt er frá omanfyri.

Sambært *stk. 1* kunnu almennir myndugleikar viðgera upplýsingar um persónstalið til eintýdda eyðmerking ella sum skránummar.

Nøvn, adressa o.a. kann verða nýtt til eyðmerking, men tað er altíð ein møguleiki, at fleiri eita tað sama ella búgva á somu adressu. Persónstalið er serstakt fyri hvønn einstakan persón og eingin hevur júst sama persónstal.

Hjá tí almenna verður persónstalið ofta nýtt sum lykil til ymiskar aðrar upplýsingar um einstaklingin.

Nýtsla av persónstali kann lætta um og gera málsviðgerðina í umsitingini meira smidliga. Samstundis hevur hon við sær, at støðan hjá einstaklingum gerst tryggari, tí at mistøk og skeivleikar orsakað av persónsamanblandingum ella skrivivillum gerast færri.

Ein myndugleiki kann geva upplýsing um persónstalið víðari til ein privatan dátuábyrgdara, um viðkomandi privati dátuábyrgdari hevur heimild at viðgera persónstalið.

Sambært *stk. 2* kunnu privat viðgera upplýsingar um persónstalið, tá ið ein av treytinum í stk. 2, nr. 1-4 eru lokin. Í mun til í dag, verður møguleikin hjá privatum at viðgera upplýsingar um persónstalið víðkaður nakað.

Sambært stk. 2, *nr. 1* kunnu privat viðgera persónstalið, um viðgerðin er heimilað í lóg. Við hesum er at skilja heimild í lóg ella ásetingum heimilaðum í lóg.

Um heimild er í lóg at viðgera upplýsing um persónstalið er ein heildarmeting av lógargrundarlagnum. Tað kunnu sostatt vera føri, tá tað beinleiðis stendur í eini lógaráseting, at persónstaltið skal viðgerast. Tað kunnu tó eisini hugsast dømi, tá viðgerð av persónstalinum liggur undir eini lógaráseting – ella eini skipan, sum er uppræettað við lóg – sum ein fortreyt. Eisini í hesum førum kann niðurstøðan í einum ítøkiligum máli verða, at heimild er í lóg, sbrt. stk. 2, nr. 1.

Sambært stk. 2, *nr. 2* kunnu privat viðgera persónstalið, um skrásetti hevur givið nágreiniligt samtykki.

Sum nakað nýtt verður ásett í stk. 2, *nr. 3*, at privat kunnu viðgera upplýsingar um persónstalið, tá ið treytirnar í § 12 eru loknar. Orsøkin til hesa broyting er, at persónstalið ikki er at rokna sum ein viðkvom persónupplýsing, og tí eigur persónstalið (eisini) at kunna verða viðgjørt um strongu treytirnar fyri viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum eru loknar.

Sambært stk. 1, nr. 4 kunnu privat viðgera upplýsingar um persónstalið, um viðgerðin bert fer fram til søgulig, vísindalig ella hagfrøðilig endamál.

Heimildin í stk. 2, nr. 1-3 fevnir ikki um víðarigeving. Í *stk. 3* verður hinvegin ásett í hvørjum serligum førum privat kunnu geva upplýsing um persónstalið víðari. Ásetingin svarar til galdandi løgtingslóg.

Sambært stk. 3, nr. 1 og 2 kann víðarigeving fara fram um víðarigevingin er heimilað í lóg ella um tann skrásetti hevur givið nágreiniligt samtykki til víðarigevingina. Lógin ella samtykkið skulu sostatt serligt taka støðu til víðarigeving.

Stk. 3, *nr. 3 og 4* áseta, at privat kunnu víðarigeva persónupplýsingar um hetta er kravt av einum almennum myndugleika ella um víðarigevingin er ein natúrligur liður í regluliga virkseminum hjá virkjum o.ø. av tilíkum slagi og er altíðandi fyri eina eintýdda eyðmerking av skrásetta.

Útgangsstøðið er, at um privat skulu víðarigeva persónstalið, skal heimild verða fyri hesum í stk. 3, nr. 1 ella 2. Stk. 3, nr. 3 og 4 eru sostatt savningarásetingar við einum avmarkaðum virkisøki. Privat skulu tó m.a. verða heimilað at víðarigeva persónstalið, um ein myndugleiki krevur hetta sum partur av almennari myndugleikaútinnan.

Í *stk. 4* verður ásett, at stk. 1-3 ikki fevna um almannakunnger av persónstalinum. Útgangsstøðið er, at almannakunngerð av persónstalinum ikki eigur at koma fyri. Skal persónstalið almannakunngerast krevur hetta í øllum førum samtykki frá skrásetta.

Burtursæð frá broytingini í stk. 2, nr. 3 førir ásetingin galdandi rætt víðari.

**Viðgerð av persónupplýsingum í sambandi við beinleiðis marknaðarføring**

**Til § 17**
Ásetingin í stk. 1 svarar í høvuðsheitum til § 9, stk. 3 í galdandi løgtingslóg.

Sambært *stk. 1* kunnu fyritøkur ikki, uttan at samtykki er fingið frá tí skrásetta, geva víðari til aðrar fyritøkur ella vegna aðrar fyritøkur brúka persónupplýsingar um skrásettta sum lið í beinleiðis marknaðarføring.

Privatar fyritøkur, sum reka vinnu, eru fevndar av ásetingini. Áhugafeløg, feløg o.o., sum ikki reka vinnu, eru tí ikki fevnd. Limafeløg hjá vinnurekandi fyritøkum, sum t.d. bjóða limum serlig tilboð, og sum verða rikin við tilknýti til fyritøkuna eru eisini fevnd.

Í § 9, stk. 3 í galdandi løgtingslóg verður hugtakið *marknaðarrøkt* nýtt. Lagt verður lagt upp til, at hetta verður broytt til *beinleiðis markndarføring*. Tað er ikki í viðmerkingunum til galdandi løgtingslóg greitt frá, hvat er at skilja við marknaðarrøkt, men tað verður tó mett, at tað, sum tað er tørvur á at hava reglur um, er viðgerð av persónupplýsingum í sambandi við beinleiðis marknaðarføring.

Beinleiðis marknaðarføring er at skilja sum marknaðarføring, sum er rættað beinleiðis til ein ávísan persón.

Ásetingin hevur við sær, at ein fyritøka, sum viðgerð persónupplýsingar til eitt ávíst endamál – vinnuvirksemi, sum er kjarnuvirksemi hjá fyritøkuni – ikki hevur loyvi at lata kundaupplýsingarnar víðari til onnur, soleiðis at hesi kunnu fremja beinleiðis marknaðarføring. Fyritøkan kann heldur ikki fremja beinleiðs marknaðarføring fyri aðra fyritøku.

Fyri at tað skal verða loyvt at fremja hesa beinleiðis marknaðarføring krevst, at tann skrásetti hevur givið samtykki. Í útgangsstøðinum er krav um, at skrásetti skal geva samtykki til, júst hvønn persónupplýsingarnar kunnu gevast víðari til, t.e. at tað ikki er møguligt at geva eitt alment samtykki til alla víðarigeving.

Í stk. 1, síðsta pkt. verður ásett, at § 6 í løgtingslóg um marknaðarføring er galdandi, tá samtykki skal fáast til vega. Henda vísingin hevur við sær, at fyritøkan skal geva sær far um treytirnar í § 6 í løgtingslóg nr. 19 frá 8. mai 2008 um marknaðarføring, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 12. mai 2015, tá skrásetti skal samtykkja.

Sambært § 6, stk. 1 í marknaðarføringslógini er tað ikki loyvt í vinnuvirksemi at senda út lýsingar, ella á annan hátt at marknaðarføra, við elektroniskum samskifti so sum telduposti, sms, mms ella líknandi, sjálvvirkandi uppkallingarskipan, telefaxi ella telefon, uttan so, at móttakarin frammanundan hevur biðið um hetta. Sambært § 6, stk. 2 er stk. 1 ikki galdandi, tá ein vinnurekandi í sambandi við sølu av vøru ella tænastu frá kundanum hevur fingið upplýst hansara teldupostbústað. Tá er loyvt vinnurekandi at marknaðarføra egnar vørur ella tænastur samsvarandi teimum, kundin hevur keypt, á upplýsta teldupostbúðstaðinum. Hetta er tó treytað av, at kundin til eina og hvørja tíð hevur møguleika fyri, ómaksleyst og ókeypis, at biðja seg undan hesum, bæði í sambandi við at hann letur tí vinnurekandi teldupostbústaðin, og tá hann seinni fær áheitanir frá tí vinnurekandi.

Í *stk. 2* er eitt undantak frá ásetingin í stk. 1. Sambært stk. 2 er víðarigeving og nýtsla sbrt. stk. 1 loyvd uttan samtykki um talan er um almennar kundaupplýsingar, sum eru grundarlag undir flokking í kundabólkar, og um treytin fyri viðgerð av persónupplýsingum í § 8, stk. 1, nr. 6 er lokin.

Tað eru sostatt tvinnar treytir fyri at undantakið kann nýtast.
Talan skal í fyrstu syftu vera um almennar kundaupplýsingar, sum eru grundarlag undir flokking í kundabólkar.

Sum almennar kundaupplýsingar eru m.a. at skilja upplýsingar um navn, adressu, kyn og aldur. Eisini upplýsingar um, at skrásetti eigur hús, bil, teldu el.líkn. eru at rokna sum almennar kundaupplýisngar. Tað er ikki heimild í stk. 2 at geva upplýsingar víðari, sum hava við sær, at viðkvæmar upplýsingar um kundan koma fram, t.d. upplýsingar um misbrúk, sjúku ella vánaliga fíggjarliga støðu. Tað er heldur ikki heimild í stk. 2 at geva víðari meira nágreiðnaðar kundaupplýsingar ella upplýsingar um nýtsluvanar.

Er talan um almannar kundaupplýsingar, skal í aðru syftu treytin fyri at viðgera persónupplýsingar í § 8, stk. 1, nr. 6 eisini vera lokin. Hetta hevur við sær, at viðgerð skal verða neyðug fyri, at dátuábyrgdarin ella ein triðipersónur kann fylgja einum heimilaðum áhugamáli, um ikki áhugamál ella grundleggjandi rættindi og frælsisrættindi hjá tí skrásetta, sum krevja vernd av persónupplýsingum, ganga fram um.

Tað er sostatt ein ítøkilig meting, sum skal fara fram í hvørjum einstøkum føri. Henda ítøkiliga metingin kann í serligum førum hava við sær, at persónupplýsingarnar ikki kunnu gevast víðari. Hetta kann t.d. vera í førum, tá ein fyritøka hevur upplýst kundar sínar um, at persónupplýsingar ikki verða givnar víðari.

Sambært *stk. 3* kunnu viðkvæmar persónupplýsingar, sbrt. § 11, stk. 1, ikki víðarigevast ella nýtast eftir stk. 2.

§ 17 skal lesast í samanhangi við § 33, sum gevur skrásetta rætt til í einhvøjum føri at mótmæla eini viðgerð av persónupplýsingum til beinleiðis marknaðarføring. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 33.

**Viðgerð av persónupplýsingum til søgulig, hagfrøðilig og vísindalig endamál**

**Til § 18**
Líknandi áseting er í § 10, stk. 1, nr. 9 í galdandi løgtingslóg.

Í Føroyum hava vit fleiri skráir, sum hava upplýsingar um føroyingar. Tað kunnu verða allir føroyingar ella allir føroyingar, sum hava verið í samband við t.d. heilsuverkið ella almannaverkið. Dømi um skráir er Cosmic hjá Landssjúkrahúsinum, Landsfólkayvirlitið og Krabbameinsskráin. Hesar skráir kunnu verða týdningarmikil amboð í t.d. gransking í fólkaheilsu og hagfrøðiligum arbeiði.

Mett verður, at tað er tørvur á, at treytirnar fyri viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum til søgulig, hagfrøðilig og vísindalig endamál verða ásettar í serstakari grein. Viðgerð av persónupplýsingum til hesi endamál kann hava munandi samfelagsligan týdning, og tí er tað umráðandi, at lógarkarmarnir eru greiðir. Hetta fyri at tryggja, at tað verður heilt greitt – bæði fyri tann skrásetta og fyri dátuábyrgdaran – nær og í hvønn mun viðgerð til hesi endamál kann fara fram.

§ 18 er serliga ætlað sum viðgerðarheimild, tá viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum í skráum skal fara fram til søgulig, hagfrøðilig og vísindalig endamál, eisini kallað (á donskum) *registerforskning*. Gransking við útgangsstøði í skráum kann verða við til at vísa á samanhangir millum t.d. nýtslu av heilivági og aldur, sjúku og tilknýti til arbeiðsmarknaðin o.s.fr. Endamálið er at síggja almennar tendensir og ikki at leggja fast viðurskifti fyri hvønn einstakan persón.

Legg til merkis, at § 18 viðvíkur viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum. Heimild til viðgerð av vanligum persónupplýsingum til nevndu endamál kann verða funnin í § 8.

Í *stk. 1* verður – eins og í dag – ásett, at viðkvæmar persónupplýsingar, sbrt. § 11, stk. 1, kunnu viðgerast um viðgerðin er neyðug til søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál, og bágin tann einstaki hevur av viðgerðini, má metast at skula víkja fyri tí munandi samfelagsliga týdningi, viðgerðin hevur.

Stk. 1 fevnir *einans* um viðgerð til nevndu endamálini. Um ein viðgerð eisini hevur onnur endamál, t.d. journalistisk endamál, kann heimildin í § 18 ikki nýtast.

Løgtingslógaruppskotið leggur sum heild upp til, at Dátueftirlitið ikki longur skal geva viðgerðarloyvi frammanundan, tá viðkvæmar persónupplýsingar skulu viðgerast. Hetta er eisini galdandi fyri viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum til søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál. Tað verður sostatt ikki longur Dátueftirlitið, sum skal meta um samfelagsliga týdningin mótvegis báganum fyri tann einstaka. Hesa metingina skal dátuábyrgdarin gera.

Dátuábyrgdarin skal gera eina ítøkiliga meting, har samfelagsligi týdningurin av viðgerðini verður vigaður upp ímóti báganum fyri tann einstaka. Metingin hjá dátuábyrgdaranum kann t.d. taka útgangsstøði í eini grundaðari umsókn frá tí, sum ynskir at gera eina hagfrøðiliga ella vísindaliga kanning í upplýsingunum hjá dátuábyrgdaranum.

Ístaðin fyri viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum eru onnur trygdartiltøk sett inn við løgtingslógaruppskotinum, sum t.d. kravið um dátuverndarfólk og krav um yvirlit. Hesi krøv – sum bæði altíð eru galdandi fyri almennar myndugleikar – umframt krøvini at seta hóskandi tøknilig og bygnaðarlig trygdartiltøk í verk, skulu vera við til at lyfta verndarstøðið sum heild fyri tann skrásetta. Hetta er eisini galdandi fyri viðgerð til søgulig, hagfrøðilig og vísindalig endamál.

Ítøkiliga metingin sum dátuábyrgdarin skal gera í hvørjum einstøkum føri vil í útgangsstøðinum hava við sær, at t.d. landsumfatandi søguligar, hagfrøðiligar ella vísindaligar kanningar, sum alment viðurkendir stovnar ella granskarar ynskja at seta í verk, og har nøktandi trygdartiltøk verða framd, t.d. við at dulnevna ella brongla persónupplýsingarnar, kunnu fara fram.

At samfelagsligi týdningurin skal vera munandi hevur hinvegin við sær, at ikki ein og hvør kann fáa atgongd til upplýsingarnar til eitt og hvørt endamál. Tað krevst, at ætlanin hevur eitt ávíst vísindaligt støðið, og at endamálini, sum verða fylgd, koma samfelagnum til góðar so ella so.

Hóast kravið um loyvi frammanundan verður strikað, verður sjálvandi møguligt hjá dátuábyrgdarum at søkja vegleiðing frá Dátueftirlitinum – alment ella ítøkiligt – um ivi er um, hvørt treytirnar fyri viðgerð av persónupplýsingum til nevndu endamálini eru loknar.

Stk. 1 útilokar ikki, at viðgerð til søgulig, hagfrøðilig og vísindalig endamál kann hava eitt annað viðgerðargrundarlag. T.d. kann viðgerð vera grundað á samtykki ella heimilað í lóg, og gongur tað viðgerðargrundarlagið tá í útgangsstøðinum framum.

Tað skal í tí samanhanginum vísast á, at lóg um gransking í mannaílegum (ílegulógin, sbr. løgtingslóg nr. 62 frá 17. mai 2005 um gransking í mannaílegum, sum broytt við kunngerð nr. 12 frá 31. mars 2008) ásetur serligar reglur um gransking í mannaílegum, og hevur serligar ásetingar, sum tryggja vernd av tí einstaka. Ílegulógin er framhaldandi galdandi og í útgangsstøðinum gongur ílegulógin framum ásetingarnar í hesum løgtingslógaruppskoti.

§ 18, stk. 1 skal lesast saman við § 7, stk. 3, sum ásetur, at seinni viðgerð av persónupplýsingum, sum einans fer fram við søguligum, hagfrøðiligum ella vísindaligum endamáli, er at rokna sum verandi í samsvari við upprunaendamálið við innsavnanini, um bágin, tann einstaki hevur av hesari, má metast eigur at víkja fyri tí munandi samfelagsliga týdningi, viðgerðin hevur.

Hetta hevur t.d. við sær, at viðgerð av persónupplýsingum í skráum o.a. til vísindalig endamál, kann fara fram, hóast persónupplýsingarnar ikki vóru savnaðar til hetta endamál, um mett verður, at samfelagsligi týdningurin er munandi, og møguligi bágin fyri tann einstaka skal víkja, sbr. omanfyri og serligu viðmerkingarnar til § 7, stk. 3.

Sambært *stk. 2* kunnu persónupplýsingarnar, sum sambært stk. 1 verða viðgjørdar til søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál ikki viðgerast seinni til annað endamál. Somuleiðis er við øðrum persónupplýsingum, sum bert verða viðgjørdar til søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál.

Henda áseting hevur við sær, at tað ikki er loyvt at nýta persónupplýsingarnar, sum verða viðgjørdar í sambandi við eina vísindaliga kanning til annað enn ta kanningina, sum sbrt. stk. 1 hevur givið atgongd til upplýsingarnar. T.d. er ikki loyvt at taka ítøkiligar avgerðir ella fremja ítøkilig tiltøk mótvegis einum skrásettum persóni. Upplýsingarnar verða so at siga "læstar" í viðgerðini til t.d. vísindaliga endamálið. Somu bindingar eru ikki, um viðgerðin fer fram grundað á samtykki. Tí kann tað í ávísum førum verða skilabetri at nýta samtykki sum viðgerðargrundlag.

Í *stk. 3* verður ásett, at víðarigeving av persónupplýsingum, fevndir av stk. 1 og 2, til triðjapersón, krevur loyvi frammanundan frá Dátueftirlitinum.

Ásetingin fevnir um tey føri, tá persónupplýsingar fevndir av stk. 1 og 2 – t.e. persónupplýsingar, sum eru ella verða viðgjørdar til vísindalig o.a. endamál – skulu gevast víðari til ein triðjapersón. Triðipersónur skal skiljast í samsvari við allýsingina í § 6, nr. 8 og fevnir um likamligar og løgfrøðiligar persónar, almennar myndugleikar, stovnar, felagsskapir o.s.fr., sum ikki er tann skrásetti, dátuábyrgdarin, dátuviðgerin og teir persónar undir beinleiðis myndugleika dátuábyrgdarans ella dátuviðgerans, sum hava heimild at viðgera persónupplýsingar.

Dátueftirlitið kann áseta treytir fyri víðarigevingini. Dátueftirlitið kann serliga seta treytir, sum skulu tryggja, at persónupplýsingar einans verða viðgjørdar til søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál og um ávís trygdartiltøk.

**Rættarkunningarskipanir**

**Til § 19**
Í § 19 verður ásetingin í § 13 í galdandi løgtingslóg við málsligum tillaginum førd víðari.

Sambært *stk. 1* kunnu viðkvæmar persónupplýsingar viðgerast í rættarkunningarskipanum, sum hava alstóran samfelagsligan týdning, um viðgerðin er neyðug fyri at røkja skipaninar.

Sum rættarkunningarskipanir eru at skilja skipanir, sum eru tøkar fyri ein breiðan skara av haldarum fyri at tryggja eina einsháttaða løgnýtslu, t.e. skipanir, sum venda sær úteftir. Skipaninar kunnu verða atgongdar gjøgnum internetið.

Endamálið við rættarkunningarskipanum er, at ítøkiligar avgerðir og dómar verða tøk hjá einum breiðum skara. Dømi um rættarkunningarskipan er sostatt almannakunngerð av avgerðum ella dómum á eini heimasíðu.

At skipanin skal verða tøk fyri einum breiðum skara merkir, at øll skulu hava møguleika at fáa atgongd til skipanina. Tað er tó ikki neyðugt, at atgongdin er ókeypis.

Innanhýsis rættarkunningarskipanir hjá myndugleikum ella virkjum – t.d. yvirlit yvir avgerðir, sum skulu tryggja einsháttaða løgnýtslu – eru ikki fevndar, og eru vanligu viðgerðarreglurnar galdandi fyri hesar.

Viðgerðin av viðkvomu persónupplýsingunum skal verða neyðug fyri at røkja skipanina. Hetta hevur við sær, at tað ikki er heimild at viðgera viðkvomu persónupplýsingarnar í eini rættarkunningarskipan, um skipanin kann røkka sínum endamálum trygt og virkið uttan hesar upplýsingar.

Í *stk. 2* er ein áseting, sum svarar til § 18, stk. 2. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til ta ásetingina.

Í *stk. 3* verður ásett, at landsstýrismaðurin kann áseta nærri treytir fyri tær viðgerðir, sum nevndar í stk. 1, og at tað sama er galdandi fyri tær persónupplýsingar, sum eru fevndar av § 8, og sum bert verða viðgjørdar í sambandi við røkt av rættarkunningarskipanum.

Við hesum verður tryggjað, at tað er møguligt at hjá landsstýrismanninum at seta sum treyt, at t.d. navn, neyvar bústaðarupplýsingar og aðrar møguligar eyðmerkjandi upplýsingar ikki skulu verða við.

**Goymsla av upplýsingum**

**Til § 20**
Ásetingin svarar til § 14 í galdandi løgtingslóg.

Ásetingin tryggjar, at tað er heilt greitt at persónupplýsingar, fevndar av løgtingslógini kunnu flytast til goymslu í skjalasavni. Tað er løgtingslógin um skjalasøvn, sum ásetur, hvat skal goymast, og sum skal fylgjast í hesum førum.

§ 20 inniheldur ikki eitt krav um, at upplýsingar skulu flytast til goymslu á skjalasavni.

§ 20 er galdandi fyri upplýsingar, sum eru viðgjørdar bæði av almennum myndugleikum og privatum virkjum.

Ásetingin vísir eina meting millum fyrilitið at sleppa undan óneyðugari data samanstúving og fyrilitið til áhugan fyri varðveita persónupplýsingar til søgulig endamál og fyri, at gransking kann verða gjørd.

Dátuverndarlógin skipar dagligu og fyrisitingarligu nýtsluna av persónupplýsingum, meðan skjalasavnslóggávan skipar ta nýtslu, sum verður gjørd í sambandi við gransking, eftir at persónupplýsingarnar ikki verða nýttar fyrisitingarliga. Talan er sostatt ikki um ósamsvar millum lóggávurnar, men dátuverndarlógin er grundað á tað støði, at spurningurin um skjalasavnsnýtslu av persónupplýsingum, eigur at skipast i skjalasavnslóggávuni.

§ 20 er ein almenn áseting, sum tryggjar, at tað er greitt, at persónupplýsingar, fevndar av løgtingslógini, kunnu flytast til goymslu í skjalasavni sambært løgtingslógini um skjalasøvn.

At talan er um eina almenna áseting hevur við sær, at ásetingar í serlóggávu ikki verða ávirkaðar. Um tað í serlóggávu eru ásettar reglur um, hvussu persónupplýsingar skulu goymast – t.d. í ílegulógini og autorisatiónslógini – ganga hesar reglur framum almennu ásetingina í § 20.

§ 20 fangar sostatt tær upplýsingar, sum verða viðgjørdar eftir hesi løgtingslóg, og sum ikki eru fevndar av aðrari lóggávu, sum tekur støðu til spurningin um goymslu av upplýsingum.

Ásetingin er í samsvari við meginregluna um goymsluavmarking. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 7, stk. 1, nr. 5.

## Kapittul 4
## Rættindini hjá skrásetta

Kapittul 4 um rættindi hjá skrásetta svarar til kapittul 3 í GDPR.

Líknandi ásetingar eru í kapitlinum 6 og 7 í galdandi løgtingslóg, tó at rættindini hjá skrásettum verða víðkað nakað í løgtingslógaruppskotinum, og í flestu førum eisini lýst meira gjølla.

### Gjøgnumskygd kunning, fráboðanir og nærri reglur um útinnan av rættindunum hjá skrásetta

**Til § 21**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 12 í GDPR.

§ 21 inniheldur yvirskipað krøv til, hvussu rættindini hjá skrásetta skulu skiljast og haldast, og hvussu tað skal samskiftast um hesi. Líknandi áseting finst ikki í galdandi løgtingslóg, tó at innihaldið óivað í stóran mun er í samsvari við verandi siðvenju.

Í *stk. 1* verður lagt upp til, at dátuábyrgdaran skal tryggja, at upplýsingar, sum verða veittar skrásetta, verða veittar á ein slíkan hátt, at tann skrásetti skilir upplýsingarnar.

Dátuábyrgdarin skal í tí sambandi m.a. taka hædd fyri, hvør móttakarin er, heruppií um upplýsingarnar venda sær til eitt barn. Tað verður ásett, at upplýsingarnar skulu gevast á ein stuttorðaðan og lætt skilligan máta. Eisini skal kunningin vera á einum greiðum og einføldum máli. Dátuábyrgdarin skal seta hóskandi tiltøk í verk – tað veri seg bygnaðarlig ella tøknilig –

fyri at tryggja, at hesi krøv verða hildin.

Sambært *stk. 2* skal dátuábyrgdarin gera tað ómakaleyst hjá skrásetta at brúka síni rættindi. Henda áseting hevur m.a. við sær, at dátuábyrgdarin hevur skyldu til at innrætta seg á ein hátt, sum ger tað lætt hjá skrásetta at brúka síni rættindi. Hetta kann t.d. verða við at gera tað møguligt at samskifta elektroniskt. Eisini verður ásett, at dátuábyrgdarin í útgangsstøðinum ikki kann nokta at eftirlíka umbøn frá skrásetta.

*Stk. 3 og 4* áseta krøv til dátuábyrgdaran um kunning til skrásetta um gongdina í sambandi við umbønir eftir løgtingslógini. Hetta skal tryggja, at skrásetti veit, hvussu langt viðgerðin er komin, og grundgevingarnar fyri longdari málsviðgerðartíð. Eisini skal kunnast um møguleikan at kæra til Dátueftirlitið.

Ásetingarnar um grundgeving o.s.fr. eru ikki nýggjar skyldur fyri almennar dátuábyrgdarar, sum longu í dag eru fevndir av kravi um t.d. grundgeving og kæruvegleiðing í fyrisitingarlógini. Tað er tó nýtt, at tað verður ein rættarlig skylda fyri privatar dátuábyrgdarar at grundgeva og vegleiða um kærumøguleikar.

Tað er eingin freist fyri, nær kæran skal vera Dátueftirlitinum í hendi. Dátueftirlitið skal sostatt í útgangsstøðinum viðgera allar kærur. Vanligi fyrisitingarrætturin kann tó í serligum førum hava við sær, at Dátueftirlitið kann vísa eini kæru aftur um eitt ógvuliga gamalt mál burtur.

Í *stk. 5* verður ásett, at upplýsingar, sum verða latnar skrásetta sambært §§ 23 og 24, §§ 26-36 og § 48, skulu verða ókeypis, uttan so at umbønirnar eru greitt ógrundaðar ella órímiligar.

Um ein umbøn er greitt ógrundað ella órímilig er ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri, har dátuábyrgdarin m.a. kann taka hædd fyri endurtøkum.

Ásetingin í § 25 í galdandi løgtingslóg, sum hevur við, at tað í útgangsstøðinum skulu ganga 6 mánaðir ímillum innlitsumbønir hjá skrásetta, verður ikki førd víðari. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 26.

Tað er dátuábyrgdarin, sum hevur próvbyrðuna fyri, at umbønir eru ógrundaðar ella órímiligar. Dátuábyrgdarin skal tí helst hava tryggjað sær skjalprógv, um ein umbøn verður víst aftur. Hetta kann t.d. verða við at goyma gamlar umbønir.

Gjaldið, sum dátuábyrgdarin kann krevja í sambandi við greitt ógrundaðar ella órímiligar umbønir, skal verða hóskandi í mun til umsitingarligu útreiðslurnar, sum standast av at avgreiða umbønina.

Um dátuábyrgdarin ynskir at veita upplýsingarnar fyri eitt hóskandi gjald, kann dátuábyrgdarin innan arbeiðið verður gjørt og umsitingarligu útreiðslurnar verða hildnar, upplýsa skrásetta um, at ætlanin er at taka gjald fyri upplýsingarnar.

Upplýsingarnar, sum verða veittar skrásetta sambært kunningarskylduni í §§ 23-24, verða ikki veittar eftir umbøn frá skrásetta, og tí er stk. 5, 2. og 3. pkt. ikki viðkomandi fyri hesar ásetingar. Dátuábyrgdarin kann tí ikki við heimild í stk. 5 lata vera við at kunna skrásetta.

**Til § 22**
Greinin ásetur, hvussu dátuábyrgdarin skal lata skrásetta upplýsingar. Í útgangsstøðinum er tað skrásetti, sum ger av, hvussu samskifti skal fara fram.

Ásett verður í *stk. 1*, at upplýsingar skulu latast elektroniskt um umbønin frá skrásetta er móttikin elektroniskt. Skrásetti kann tó biðja um at fáa upplýsingarnar á annan hátt.

Sambært *stk. 2* kann skrásetti biðja um at fáa upplýsingar frá dátuábyrgdaranum munnliga. Í hesum førum kann dátuábyrgdarin biðja um fleiri upplýsingar til tess at staðfesta samleikan hjá skrásetta um ivi valdar. Biður dátuábyrgdarin um fleiri upplýsingar fyri at tryggja sær samleikan hjá skrásetta, ávirkar hetta ikki § 15

Sambært grein 12, stk. 7 í GDPR kunnu upplýsingar, sum skulu latast skrásetta í sambandi við kunningarskylduna í §§ 23 og 24, eisini latast saman við standardiseraðum ímyndum. Hesar ímyndir eru ikki góðkendar í ES enn. Tá tær eru góðkendar í ES, kunnu tær eisini nýtast av dátuábyrgdarum og dátuviðgerum í Føroyum.

Sí eisini áskoðan nr. 58, 59 og 64 í GDPR.

**Kunningarskylda tá persónupplýsingar verða savnaðar frá skrásetta**

**Til § 23**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 13 í GDPR. Líknandi áseting er í § 20 í galdandi løgtingslóg.

Eins og í galdandi løgtingslóg verður skilt ímillum kunningarskylduna, tá persónupplýsingar verða savnaðar hjá skrásetta (§ 23 í uppskotinum), og tá persónupplýsingar verða savnaðar hjá øðrum enn skrásetta (§§ 24-25 í uppskotinum).

Kunningarskyldan hjá dátuábyrgdaranum er ein umráðandi skylda, tí hon hevur við sær, at skrásetti verður kunnaður um, at upplýsingar um skrásetta verða viðgjørdar, og tí kann taka støðu til viðgerðina og um onnur rættindi møguliga skulu brúkast.

Tá ið dátuábyrgdarin savnar inn persónupplýsingar hjá skrásetta sjálvum, skal dátuábyrgdarin lata skrásetta upplýsingarnar samstundis sum dátuábyrgdarin savnar persónupplýsingarnar. Hetta hevur við sær, at tann skrásetti kann lata dátuábyrgdaranum persónupplýsingarnar á einum upplýstum grundarlagi.

Í *stk. 1* verður ásett, hvørjar upplýsingar dátuábyrgdarin altíð skal siga skrásetta frá, tá upplýsingar verða savnaðar frá skrásetta. Hetta er t.d. navn og samskiftisupplýsingar dátuábyrgdarans.

Sambært *stk. 1, nr. 3* skal dátuábyrgdarin siga frá endamálinum við viðgerðini og heimildini fyri hesari.

Í kravinum um, at skrásetti skal kunnast um endamálið liggur, at skrásetti skal hava so mikið av kunning, at viðkomandi skilir, hví persónupplýsingarnar verða savnaðar. Hvat liggur í hesum er ein ítøkilig meting, men tað er í øllum førum eitt krav, at dátuábyrgdarin upplýsir, hvat persónupplýsingarnar skulu ella væntast at skula brúkast til. Ásetingin skal lesast saman

við meginregluni um endamálsavmarking í § 7, stk. 1, nr. 2. Sí serligu viðmerkingarnar til hesa grein omanfyri.

At endamálið skal upplýsast er ikki nýtt í mun til galdandi lóg. At heimildin skal upplýsast er harafturímóti nýtt. Heimildin fyri viðgerðini kann t.d. vera ein áseting í § 8 í hesi løgtingslóg. Er viðgerðin grundað á § 8, stk. 1, nr. 6 ásetur *stk. 1, nr. 4,* at heimilaðu áhugamálini, sum dátuábyrgdarin ella ein triðipersónur fylgir, skulu upplýsast. Eisini er ásett *stk. 1, nr. 5,* at upplýsast skal um møguligar móttakarar ella bólkar av móttakarum. Bólkar av móttakarum skal skiljast yvirskipað sum t.d. "aðrir myndugleikar" ella "samstarvspartar".

Sambært *stk. 1, nr. 6* skal dátuábyrgdarin upplýsa, um persónupplýsingarnar skulu flytast til eitt útland, triðjaland ella millumtjóðafelagsskap. At víst verður til útland og triðjaland skal skiljast í samsvari við allýsingarnar í § 6, nr. 14 og 15. Ásetingin hevur við sær, at skrásetti altíð verður kunnaður, um persónupplýsingar verða fluttar úr Føroyum, sjálvt um flutningurin ikki krevur loyvi el.tíl.

Um landsstýrismaðurin hevur tikið avgerð um, at eitt triðjaland ella ein millumtjóðafelagsskapur hevur nøktandi verndarstøði, skal hetta upplýsast. Um slík avgerð ikki er tikin, skal tann skrásetti upplýsast um grundarlagið fyri flutninginum. Í kravinum um at vísa á grundarlagið liggur – umframt at vísa á heimildina – m.a., at dátuábyrgdarin skal upplýsa um, hvussu skrásetti kann fáa eitt avrit av avtalu el.líkn., sum er grundarlagið undir flutninginum, ella hvar henda avtala el.líkn. er atkomulig.

Um upplýsing sambært eini áseting í stk. 1 ikki er viðkomandi, er ikki krav um, at dátuábyrgdarin skal upplýsa um hetta. Tað er sostatt ikki neyðugt at upplýsa, at upplýsingar *ikki* verða givnar víðari, ella at einki dátuverndarfólk er.

Lagt verður upp til at áseta í *stk. 2*, at dátuábyrgdarin skal lata skrásetta enn fleiri upplýsingar, um hetta er neyðugt fyri at tryggja skrásetta eina rímiliga og gjøgnumskygda viðgerð. Ásetingin svarar í ávísan mun til § 20, stk. 1, nr. 5 í galdandi løgtingslóg.

Ásetingin í stk. 2 hevur við sær, at tað í hvørjum einstøkum føri er upp til dátuábyrgdaran at meta um, hvørt tær upplýsingarnar, sum skrásetti fær sambært stk. 1 eru nøktandi ella um, skrásetti skal hava fleiri upplýsingar.

Sambært *stk. 2, nr. 1* skal dátuábygdarin geva skrásetta upplýsing um tíðarskeiðið, upplýsingarnar verða goymdar. Um tað ikki ber til skal dátuábyrgdarin upplýsa um tær fortreytir, sum verða nýttar at áseta hetta tíðarskeið. Henda áseting speglar meginregluna í § 7, stk. 1, nr. 5 um goymsluavmarking.

*Stk. 2, nr. 2-4* ásetur, at dátuábyrgdarin skal upplýsa skrásetta um rættindi eftir løgtingslógini, og í *stk. 2, nr. 5* er ásett, at dátuábyrgdarin skal upplýsa, um skrásetti hevur upplýsingarskyldu mótvegis dátuábyrgdaranum, hvar henda skylda er ásett, og hvat hendir, um skyldan ikki verður fylgd.

Í *stk. 2, nr. 6* er ásett, at dátuábyrgdarin skal upplýsa um automatiskar avgerðir koma fyri. Hetta fevnir m.a. um avgerðir sum verða tiknar við profilering sambært § 35. Koma hesar avgerðir fyri, skal dátuábygdarin í minsta lagi upplýsa skrásetta um skilvísi (logikkin) í hesum avgerðum, týdningin og væntaðu avleiðingarnar fyri tann skrásetta.

At dátuábyrgdarin skal upplýsa um skilvísið í automatisku avgerðunum hevur ikki við sær, at dátuábygdarin í smálutir skal greiða skrásetta frá viðgerðini. Tað avgerðandi er, at skrásetti gerst førur fyri at skilja tær metingar, sum liggja aftanfyri viðgerðina, og hvussu automatiska viðgerðin kemur til eina ávísa avgerð.

Er talan um eina fyrisitingarliga avgerð, koma upplýsingarnar, sum skulu latast sambært stk. 2, nr. 6, afturat fyrisitingarliga kravinum um grundgeving.

Í *stk. 3* er lagt upp til, at dátuábyrgdarin eisini hevur kunningarskyldu, um persónupplýsingarnar skulu viðgerast seinni til annað endamál enn tað, sum upplýsingarnar eru savnaðar til. Hetta er ein víðkan í mun til kunningarskylduna í galdandi løgtingslóg.

Nær kunningarskylda sambært stk. 3 verður viðkomandi veldst um, hvussu endamálið, sum skrásetti er kunnaður um sambært stk. 1, er orðað, og hvat tað fevnir um. Ásetingin er við fyri at tryggja, at skrásetti til eina og hvørja tíð veit, til hvørji endamál upplýsingar um hann ella hana verða viðgjørdar, eins og tað gevur skrásetta møguleika at brúka síni rættindi sambært løgtingslógini í mun til hesa viðgerð.

Tað er ein fortreyt fyri seinni viðgerðini, at ásetingarnar í løgtingslógini annars, undir hesum meginreglurnar, serliga endamálsavmarking, og viðgerðarreglurnar, verða fylgdar.

Í *stk. 4* verður ásett, at upplýsingarskyldan ikki er galdandi, um tann skrásetti longu er kunnaður um upplýsingarnar. Hetta er eisini galdandi í dag. Av tí at tað við nýggju løgtingslógini verða fleiri upplýsingar, sum skulu latast skrásetta, er tað tó væntandi í færri førum, at skrásetti hevur allar upplýsingarnar, sum skulu latast, og tí kann hugsast, at ásetingin ikki verður brúkt eins ofta.

Sí eisini áskoðan nr. 60-62 í GDPR.

**Kunningarskylda tá persónupplýsingar verða savnaðar frá øðrum enn skrásetta**

**Til § 24**
Ásetingin byggir á innihaldið í pørtum av grein 14 í GDPR. Líknandi áseting er í § 21 í galdandi løgtingslóg.

§ 24 ásetur kunningarskyldu dátuábyrgdarans mótvegis skrásetta, tá ið dátuábyrgdarin savnar inn persónupplýsingar hjá øðrum enn skrásetta.

Upplýsingar, sum sambært *stk. 1, nr. 1-3* og *nr. 5-6*, skulu latast skrásetta, eru tær somu, sum skulu latast sambært § 23, stk. 1, nr. 1-3 og nr. 5-6. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til hesar ásetingar omanfyri.

Sambært *stk. 1, nr. 4* skal tann skrásetti kunnast um sløgini av persónupplýsingum, sum verða viðgjørd. Innihaldsliga er talan um eina lítla broyting í mun til galdandi løgtingslóg við tað, at tað er nóg mikið, at dátuábyrgdarin upplýsir sløg av persónupplýsingum (t.d. *samskiftisupplýsingar*, ístaðin fyri ítøkiliga teldupostadressu, telefonnummar o.s.fr.).

Upplýsingar, sum kunnu latast fyri at tryggja skrásetta eina rímuliga og gjøgnumskygda viðgerð í *stk. 2, nr. 1-5* og *7*, eru tær somu sum skulu latast eftir § 23, stk. 1 ella 2 og víst verður til serligu viðmerkingarnar til hesar ásetingar.

Sambært *stk. 2, nr. 6* skal dátuábyrgdarin upplýsa skrásetta um, hvaðani persónupplýsingarnar stava. Dátuábyrgdarin skal undir hesum upplýsa, um persónupplýsingarnar stava frá almannakunngjørdum keldum. At skrásetti fær upplýst hvaðani persónupplýsingarnar stava, gevur skrásetta møguleika at meta um upplýsingarnar, undir hesum trúvirðið av upplýsingunum.

Í *stk. 3* er sama áseting um seinni viðgerð, sum í § 23, stk. 4. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til ta greinina.

**Til § 25**
§ 25 hongur saman við § 24 og inniheldur reglur um, hvussu kunningarskyldan verður hildin, tá persónupplýsingar verða savnaðar hjá øðrum enn skrásetta. § 25 byggir á innihaldið í pørtum av grein 14 í GDPR.

Ásett verður í *stk. 1* nær upplýsingarnar í § 24, stk. 1 og 2 skulu latast skrásetta. Sambært galdandi løgtingslóg skal dátuábyrgdarin beinanvegin persónupplýsingarnar eru útvegaðar siga skrásetta frá. Hetta verður broytt eitt sindur við hesum uppskoti.

Í *stk. 1, nr. 1* verður ásett, at upplýsingarnar skulu latast innan eina hóskandi freist, tó í seinasta lagi áðrenn 4 vikur eru gingnar. Um kunningin verður givin innan eina hóskandi freist er ein ítøkilig meting, og í tí sambandi skal m.a. fyrilit takast fyri teimum ítøkiligu umstøðum, sum persónupplýsingarnar verða viðgjørdar.

Í *stk. 1, nr. 2 og 3* eru neyvari ásetingar um, nær skrásetti skal kunnast, tá dátuábyrgdarin annaðhvørt skal samskifta við skrásetta ella geva persónupplýsingarnar víðari.

Í *stk. 2* er ásett nær kunningarskyldan ikki er galdandi. Eins og tá upplýsingar verða savnaðar frá skrásetta, er skyldan sambært *stk. 2, nr. 1* ikki galdandi, um skrásetti longu kennir upplýsingarnar. Sí serligu viðmerkingarnar til § 23, stk. 4.

Sambært *stk. 2, nr. 2* er kunningarskyldan ikki galdandi um tað er ógjørligt ella órímuliga torført at halda skylduna. Henda áseting er, við lítlari málsligari broyting tann sama sum galdandi § 21, stk. 2, nr. 3, 1. pkt.

Talan er eins og í dag um eina ítøkiliga proportionalitetsmeting. Dátuábyrgdarin skal meta um týdningin av, at skrásetti fær upplýsingarnar, so at skrásetti t.d. kann gera síni rættindi galdandi mótvegis arbeiðsbyrðuni hjá dátuábyrgdaranum í sambandi við at geva upplýsingarnar. Í hesi metingini eigur dátuábyrgdarin m.a. at taka við talið av skrásettum, aldurin á upplýsingunum og møgulig hóskandi trygdartiltøk, sum eru tikin.

Fráboðanin til hvønn einstakan skrásetta kann verða ógjørlig ella órímiliga torfør, um persónupplýsingar um eitt stórt tal av skrásettum verður viðgjørd til savnsendamál, til søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál.

Í *stk. 2, nr. 3* verður ásett, at kunningarskyldan ikki er galdandi, um hon sannlíkt fer at gera tað ómøguligt ella í sera stóran mun fer at forða fyri, at endamálið við viðgerðini verður rokkið. Hetta kann t.d. fevna um arbeiði, tá tryggingarfeløg kanna, hvussu ein skaði er farin fram. Upplýsingarnar skulu veitast skjótast gjørligt, eftir at endamálini eru rokkin.

Sambært *stk. 2, nr. 4* og *5* er upplýsingarskyldan ikki galdandi, um innsavnanin ella víðarigevingin ítøkiliga er heimilað í lóg, sum dátuábygdarin er fevndur av, ella upplýsingarnar eru fevndar av lógarásettari tagnarskyldu.

Sambært *stk. 3* skal dátuábyrgdarin í teimum førum, sum eru fevnd av stk. 2, nr. 2 og 3, seta hóskandi tiltøk í verk fyri at verja rættindini hjá skrásetta, undir hesum frælsisrættindini og heimilaðu áhugamálini hjá viðkomandi. Dátuábyrgdarin kann t.d. gera upplýsingarnar alment atkomuligar, eitt nú á heimasíðu dátuábyrgdarans. Á henda hátt er tað møguligt alment at kunna seg um endamálini við viðgerðini o.s.fr., og er hetta við til at tryggja gjøgnumskygni fyri tann skrásetta og fyri almenningin.

Sí eisini áskoðan nr. 61 og 62 í GDPR.

**Innlitsrætturin hjá skrásetta**

**Til § 26**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 15 í GDPR. Líknandi áseting er í § 19 í galdandi løgtingslóg.

Endamálið við ásetingini í § 26 um innlit er, at skrásetti skal hava møguleika at gera seg kunnugan við, hvørjar upplýsingar dátuábyrgdarin viðgerð um skrásetta, og upplýsingar um, hví og á hvørjum grundarlagi upplýsingarnar verða viðgjørdar. Á henda hátt hevur skrásetti m.a. møguleika at rætta skeivar upplýsingar.

*Stk. 1* ásetur, at um tann skrásetti krevur innlit, skal dátuábyrgdarin upplýsa um persón-upplýsingar um skrásetta verða viðgjørdar. Um persónupplýsingar verða viðgjørdar, skal dátuábyrgdarin eisini geva skrásetta atgongd til persónupplýsingarnar og siga skrásetta frá teimum upplýsingum, sum eru ásettar í stk. 1, nr. 1-8.

Tað eru eingi formkrøv til innlitsumbønina frá skrásetta, sum sostatt kann setast fram bæði munnliga og skrivliga. Hetta hevur m.a. við sær, at dátuábyrgdarin ikki kann krevja, at skrásetti setur umbønina fram skrivliga. Tað er tó einki í vegin fyri, at dátuábyrgdarin biður skrásetta nágreina sína umbøn, um hon er ógreið, ella so at viðgerðin hjá dátuábyrgdaranum verður lættari. Um skrásetti ikki nágreinar umbønina, kann dátuábyrgdarin ikki av teirri orsøk nokta at svara.

At skrásetti skal hava atgongd til upplýsingarnar merkir, at dátuábyrgdarin kann velja at geva skrásetta atgongd til (avrit av) frumrit, mál, vakmyndaupptøkur el.líkn. ella at avrita upplýsingarnar í eitt nýtt skjal. Avgerðandi er, at skrásetti fær atgongd til upplýsingarnar, so at skrásetti kann tryggja sær, at upplýsingarnar eru beinar, og at viðgerðin er lóglig.

Skrásetti hevur eftir § 26 bara atgongd til upplýsingar um seg sjálvan. Upplýsingar um onnur skulu tí strikast el.líkn. í tí tilfari, sum skrásetti fær atgongd til.

Upplýsingarnar, sum dátuábyrgdarin skal geva skrásetta sbrt. stk. 1 og 2 – umframt persónupplýsingarnar – eru meinlíkar teimum, sum skulu latast sambært kunningarskylduni í § 23 og § 24, og víst verður tí til serligu viðmerkingarnar til hesar greinar.

Sambært *stk. 3* skal dátuábyrgdarin útflýggja skrásetta eitt (skrivligt) avrit av persónupplýsingunum, sum verða viðgjørdar. Tað fyrsta avritið er ókeypis, og hetta er

galdandi uttan mun til, um dátuábyrgdarin er ein privat fyritøka ella ein almennur myndugleiki. Biður tann skrásetti um *fleiri* avrit, kann dátuábyrgdarin krevja eitt hóskandi gjald.

Eins og greitt frá í serligu viðmerkingunum til § 21, stk. 5 er hetta eitt gjald, sum er hóskandi í mun til umsitingarligu útreiðslurnar, sum standast av at avgreiða umbønina.

Ásetingin um hóskandi gjald snýr seg um tey føri, tá skrásetti biður um fleiri fysisk avrit av upplýsingum, og tær umsitingarligu útreiðslurnar, sum standast av hesum. Spurningurin um, hvørt dátuábyrgdarin kann krevja ómaksgjald fyri sjálva viðgerðina av umbønini, er regulerað í § 21, stk. 5. Víst verður til serligu viðmerkingarnar omanfyri.

§ 25 í galdandi løgtingslóg, sum ásetur, at skrásetti í útgangsstøðinum bara kann fáa innlit í upplýsingar 6. hvønn mánað, verður ikki førd víðari í hesum løgtingslógaruppskoti. Í staðin skal dátuábyrgdarin ítøkiligt meta um, um umbønin er greitt ógrundað ella órímulig, undir hesum tí hon er endurtakandi, sbrt. § 21, stk. 5. Vegleiðandi fyri hesa metingina er eisini áskoðan nr. 63. Í henni stendur m.a., at skrásetti eigur at hava rætt til innlit lætt og við jøvnum millumbili.

Galdandi løgtingslóg um viðgerð av persónupplýsingum hevur eina áseting um *alment* innlit í § 18, sum ikki verður førd víðari í hesum løgtingslógaruppskoti. Orsøkin er, at tað ikki verður mett neyðugt, at ein og hvør skal kunna krevja upplýsingar frá dátuábyrgdaranum eftir dátuverndarlógini. Løgtingslógin um innlit í fyrisitingina, sbrt. løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001, er framhaldandi galdandi, sbr. niðanfyri.

Í viðmerkingunum til § 18 í galdandi løgtingslóg verður greitt frá, at tað serliga verður hugsað um tey føri, tá ein persónur umhugsar, um hann ella hon vil lata dátuábyrgdaran viðgera upplýsingar um seg, t.d. um viðkomandi umhugsar at tekna seg sum lim í einum felag. Mett verður, at upplýsingarskyldan í §§ 23-25 í lógaruppskotinum er nøktandi, og at tað tí ikki er neyðugt við eini áseting, sum svarar til § 18 í galdandi løgtingslóg.

Í samband við umbønir um innlit hjá almennum myndugleikum, skal dátuábyrgdarin geva sær far um rættin til egið innlit, sum er ásettur í § 4, stk. 2 í innlitslógini. Tá dátuábyrgdarin fær eina umbøn um innlit frá skrásetta sjálvum, skal dátuábyrgdarin meta um, eftir hvørjum rættargrundarlagi skrásetti fær betri rættarstøðu. Við hesum verður hugsað um mongdina av upplýsingum, sum skrásettti fær, og ikki í mun til møguligar prosessuellar reglur, undir hesum reglur um gjald fyri avrit o.s.fr.

Hevur skrásetti víst til eitt ávíst rættargrundarlag og metir myndugleikin, at skrásetti kann fáa fleiri upplýsingar eftir einum øðrum grundarlagi, t.d. upplýsingarnar, sum skulu latast eftir § 26 í hesum uppskoti, skal myndugleikin vegleiða um hetta í samsvari við vanligu vegleiðingarskylduna.

Sí eisini áskoðan nr. 63 í GDPR.

**Rætturin til rætting**

**Til § 27**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 16 í GDPR. Líknandi áseting er í § 28 í galdandi løgtingslóg.

Í *stk. 1* verður lagt upp til, at tann skrásetti hevur rætt til at fáa rangar persónupplýsingar um seg sjálvan rættaðar. Tann skrásetti kann sjálvur heita á dátuábyrgdaran. Dátuábyrgdarin hevur tó eisini skyldu at rætta upplýsingarnar, um hann sjálvur gerst varur við, at upplýsingarnar eru rangar.

§ 27 er ein nágreining av meginregluni í § 7, stk. 1, nr. 4 um rættleika, sum hevur við sær eina skyldu at tryggja, at persónupplýsingar eru rættar og nøktandi dagførdar. Persónupplýsingarnar skulu rættast uttan óneyðugt drál.

Eru dátuábyrgdarin og skrásetti ikki samdir um, at upplýsingarnar eru rangar, hevur dátuábyrgdarin ikki eina treytaleysa skyldu at broyta upplýsingarnar.

Hetta er serliga viðkomandi, um talan er um upplýsingar, sum ikki kunnu staðfestast objektivt, so sum aldur og navn kunna.

Sum dømi kann nevnast ósemja millum dátuábyrgdaran og skrásetta um, hvør hevur sagt hvat á einum fundi, og sum er skrivað í eina fundarfrásøgn. Eisini kann hugsast, at skrásetti ikki er samdur við eini meting, sum eitt fakfólk, t.d. lærari ella námsfrøðingur, hevur gjørt og hevur skjalfest í eitt ítøkiligt mál. Loysnin í hesum førum kann vera, at tað verður skrásett, at ein ósemja er um persónupplýsingarnar eru rættar ella rangar.

Í *stk. 2* verður lagt upp til, at tann skrásetti harumframt skal hava rætt til at krevja ófullfíggjaðar persónupplýsingar fullfíggjaðar, t.d. við at leggja fram eina ískoytisváttan. Í metingini av, um persónupplýsingarnar eru ófullfíggjaðar skal m.a. fyrilit takast fyri endamálunum við viðgerðini.

Tá ið tað snýr seg um almennar myndugleikar, verður vanliga ikki rætta beinleiðis í skjølum, sum eru gjørd. Tískil má í slíkum førum ískoytisskjal leggjast við upprunaskjalinum, har gjørt verður greitt, hvørjar upplýsingar eru at meta sum rangar ella ófullfíggjaðar. Hetta ger seg galdandi bæði tá ið talan er um objektivar upplýsingar og subjektivar metingar.

Sí eisini áskoðan nr. 65 í GDPR.

**Rætturin til striking**

**Til § 28**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 17 í GDPR. Líknandi áseting er í § 27 í galdandi løgtingslóg.

Rætturin til striking í grein 17 í GDPR verður eisini kallaður “rætturin at verða gloymdur”. Hóast ásetingin í stóran mun førir galdandi rætt víðari, er endamálið við ásetingini at geva skrásettum víðari møguleikar at strika persónupplýsingar um seg sjálvan á internetinum enn tað áður var møguligt.

Í *stk. 1* er ásett í hvørjum førum persónupplýsingar skulu strikast – antin eftir áheitan frá skrásetta ella av eintingum dátuábyrgdarans. At persónupplýsingar vera strikaðir merkir, at

persónupplýsingarnar skulu strikast allastaðni, t.e. í øllum skipanum, hjá einum dátuábyrgdara. Skyldan fevnir í útgangsstøðinum eisini um at strika persónupplýsingar í back-up-skipanum o.tíl. Hetta útgangsstøðið hevur við sær, at skyldan einans er galdandi í tann mun, tað tøkniliga letur seg gera at strika í back-up-skipanum.

Í *stk. 1, nr. 1* verður lagt upp til, at persónupplýsingar skulu strikast, um persónupplýsingarnar ikki longur eru neyðugar fyri viðgerðina. Henda áseting er ein nágreining av meginreglunum í § 7, stk. 1, nr. 4 og 5 og byggir á grundleggjandi regluna um, at dátuábyrgdarin ikki skal goyma persónupplýsingar, sum hann ella hon ikki hevur brúk fyri. Sambært *stk. 1, nr. 2* skulu persónupplýsingarnar strikast, um skrásetti tekur samtykki aftur, sum viðgerðin var grundað á. Viðgerðin kann halda fram, um dátuábyrgdarin hevur eitt annað grundarlag fyri viðgerðini. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 9 um treytir fyri samtykki.

Rætturin til striking í *stk. 1, nr. 3* er tengdur at rættinum til mótmæli í §§ 32 og 33. Um treytirnar í §§ 32 ella 33 eru loknar, skulu persónupplýsingarnar strikast.

Verða persónupplýsingarnar viðgjørdar ólógliga, skulu tær strikast sambært *stk. 1, nr. 4*. Ásetingin speglar meginregluna í § 7, stk. 1, nr. 1, sum ásetur, at persónupplýsingar skulu viðgerast lógliga.

Um dátuábyrgdarin er fevndur av eini rættarskyldu, t.d. eini áseting í lóggávu, sum krevur, at persónupplýsingarnar skulu strikast, skal dátuábyrgdarin sambært *stk. 1, nr. 5* strikað hesar upplýsingar.

Sambært *stk. 1, nr. 6* skal dátuábyrgdarin eftir áheitan ella av sínum eintingum strika persónupplýsingar, sum eru savnaðar í sambandi við útboði av kunningarsamfelagstænastum, sbr. § 10. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 10. Stk. 1, nr. 6 hevur við sær, at tað verður einfaldari at strika persónupplýsingar, sum børn og ung hava latið kunningarsamfelagstænastum við samtykki sum heimildargrundarlagi. Orsøkin er, at tað skal verða léttari at strika upplýsingar, sum eru á internetinum.

Fyri at styrkja um ræði hjá skrásetta yvir egnum persónupplýsingum, sum verða deildar á internetinum, verður eisini ásett ein serlig fráboðanarskylda í *stk. 2*. Ásetingin hevur við sær, at um ein dátuábyrgdari hevur almannakunngjørt persónupplýsingar um tann skrásetta, sum eftir stk. 1 skulu strikast, skal dátuábyrgdarin eftir umbøn frá skrásetta, kunna aðrar dátuábyrgdarar um, at skrásetti ynskir, at leinkjur o.a. til persónupplýsingarnar verða strikaðar. Hesir dátuábyrgdarar skulu sletta leinkjurnar o.s.fr. til persónupplýsingarnar.

Dátuábyrgdarin skal seta rímilig tiltøk í verk fyri at boða hesum dátuábyrgdarum frá. Tað er ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri, hvussu nógv ein dátuábyrgdari skal gera. Dátuábyrgdarin skal í síni meting taka fyriliti fyri tøkari tøkni og útreiðslum, sum standast av hesum. Dátuábyrgdarin kann m.a. seta tøknilig tiltøk í verk.

Serliga fráboðanarskyldan í stk. 2 kemur afturat fráboðanarskylduni í § 30. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 30.

Í *stk. 3* er ásett í hvørjum førum rætturin til striking hóast alt ikki er galdandi.

Hetta er sambært *stk. 3, nr. 1* fyrst og fremst í teimum førum, tá viðgerðin er neyðug fyri at útinna rættin til framsøgufrælsi og kunningarfrælsi. Ásetingin hevur við sær, at rætturin til dátuvernd víkir fyri hesum grundleggjandi rættindum, sum m.a. eru tryggjað í Evropeiska mannarættindasáttmálanum, EMRS. Sí eisini pkt. 2.8. í almennu viðmerkingunum.

Í *stk. 3, nr. 2* verður lagt upp til, at rætturin til striking ikki skal vera galdandi, um viðgerðin er neyðug fyri at halda eina rættarligu skyldu, sum áliggur dátuábyrgdaranum, um hon er neyðug fyri at røkja samfelagsáhugamál ella uppgávur, sum liggja undir almennari myndugleikaútinnan, sum dátuábyrgdaranum er álagt. Ásetingin svarar til viðgerðarheimildirnar í § 8, stk. 1, nr. 3 og 5, og hevur við sær, at um hesar heimildir eru grundarlagið undir viðgerðini, so er rætturin til striking í útgangsstøðinum ikki galdandi.

Ásetingin hevur við sær, at rætturin til striking aloftast ikki kann gerast galdandi mótvegis almennum myndugleikum, sum viðgera persónupplýsingar, sum liður í teirra uppgávum. Eins og er galdandi fyri rættin til rætting, sbr. omanfyri um § 27 verður tað fyri tað almenna vanliga ikki rætta í skjølum, sum longu eru gjørd. Eru upplýsingar rangar o.s.fr. kann hetta verða skjalfest heldur enn strikað.

Sambært *stk. 3, nr. 3* er rætturin til striking ikki galdandi um viðgerðin er neyðugt til savnsendamál, søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál og tað er sannlíkt at striking fer at gera tað ómøguligt ella í sera stóran mun fer at forða fyri, at endamálini við viðgerðini verða rokkin.

Í *stk. 3, nr. 4* verður ásett, at rætturin til striking ikki er galdandi, um viðgerð er neyðug fyri, at rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast. Um hvussu rættarkrav skal skiljast, verður víst til serligu viðmerkingarnar til § 12, stk. 1, nr. 7.

Felags fyri undantøkini í stk. 3 er, at viðgerðin í øllum førum skal vera neyðug. Tað er sostatt ikki nokk, at viðgerðin lættir um hjá dátuábyrgdaranum el.líkn.

Sí eisini áskoðan nr. 65 og 66 í GDPR.

**Rætturin til viðgerðaravmarking**

**Til § 29**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 18 í GDPR. Líknandi áseting er í § 27 í galdandi løgtingslóg.

Viðgerðaravmarking inniber, at persónupplýsingar verða merktar við tí endamálið at avmarka framtíðar viðgerð av upplýsingunum.

Orðið viðgerðaravmarking er nýtt í mun til galdandi løgtingslóg. Hugtakið – at avmarka framtíðar viðgerð av persónupplýsingum – er tó ikki nýtt og verður í galdandi løgtingslóg nevnt *steingja*.

Sambært § 27 í galdandi løgtingslóg skal dátuábyrgdarin sostatt av sínum eintingum ella eftir áheitan frá tí skrásetta steingja persónupplýsingar, sum eru rangar, villeiðandi ella viðgjørdar ímóti lóg ella ásetingum heimilaðum í lóg.

Lagt verður upp til, at tann skrásetti í ávísum førum kann krevja, at dátuábyrgdarin avmarkar viðgerð av persónupplýsingum.

Sambært *stk. 1, nr. 1* skal dátuábyrgdarin avmarka viðgerðina, um tann skrásetti ger vart við, at persónupplýsingarnar eru rangar. Dátubyrgdarin kann – í staðin fyri at strika persónupplýsingarnar alt fyri eitt – avmarka viðgerðina til tað er staðfest, um persónupplýsingarnar eru rættar ella rangar.

Sambært *stk. 1, nr. 2* kann skrásetti krevja, at dátuábyrgdarin í staðin fyri at sletta persónupplýsingar, sum verða viðgjørdar ólógliga, avmarkar viðgerðina. Henda ásetingin kann m.a. verða nýtt, um tann skrásett ynskir at nýta upplýsingarnar sum prógv í sambandi við endurgjald.

Í *stk. 1, nr. 3* verður lagt upp til, at viðgerðin kann avmarkast, um dátuábyrgdarin ikki longur hevur brúk fyri upplýsingunum til ta viðgerð, sum upplýsingarnar upprunaliga vórðu viðgjørdar til, men brúk er fyri upplýsingunum, fyri at eitt rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast. Um hvussu rættarkrav skal skiljast, verður víst til serligu viðmerkingarnar til § 12, stk. 1, nr. 7.

Sambært *stk. 1, nr. 4* skal dátuábyrgdarin eisini avmarka viðgerð, meðan kannað verður um treytirnar í § 32 um mótmæli eru loknar. Eru treytirnar loknar, kann dátuábyrgdarin ikki longur viðgera upplýsingarnar (sum so skulu strikast sbrt. § 28, stk. 1, nr. 3).

Eru persónupplýsingarnar avmarkaðar sambært stk. 1, kann dátuábyrgdarin í útgangsstøðinum ikki viðgera persónupplýsingarnar á annan hátt enn at goyma tær. Um persónupplýsingarnar skulu viðgerast krevst, at heimild er fyri hesum í stk. 2, nr. 1-4.

Sambært *stk. 3* skal dátuábyrgdarin kunna tann skrásetta, áðrenn ein viðgerðaravmarking verður tikin av.

Ein viðgerðaravmarking kann takast av, tá treytirnar í stk. 1 ikki longur eru loknar. Hetta kann t.d. vera, tá dátuábyrgdarin hevur staðfest, at treytirnar fyri mótmæli í § 32 ikki eru uppfyltar.

Sí eisini áskoðan nr. 67 í GDPR.

**Fráboðanarskylda dátuábyrgdarans**

**Til § 30**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 19 í GDPR. Líknandi áseting er í § 27, stk. 2 í galdandi løgtingslóg.

Ásetingin hevur við sær, at dátuábyrgdarin av sínum eintingum gevur móttakarum, sum viðkomandi hevur givið persónupplýsingar víðari til, boð um, at hesar eru rættaðar, strikaðar ella viðgerðaravmarkaðar.

Móttakari skal skiljast í samsvari við allýsingina í § 6, nr. 9.

Fráboðanarskyldan hevur við sær, at tað ikki er neyðugt hjá tí skrásetta at venda sær til hvønn einstaka dátuábyrgdara o.s.fr., um persónupplýsingar eitt nú skulu strikast.

Fráboðanarskyldan er ikki galdandi, um hon vísir seg at vera ógjørlig ella órímuliga torfør. Um hvussu hetta skal skiljast, verður víst til serligu viðmerkingarnar til § 25, stk. 2, nr. 2.

Eftir áheitan skal dátuábyrgdarin kunna skrásetta um móttakararnar. Henda ásetingin skal lesast saman við kunningarskylduni í §§ 23 og 24, sum hevur við sær, at skrásetti í sambandi við savnan av persónupplýsingunum skal kunnast um, hvørjir móttakarar eru.

**Rætturin til dátuflutning**

**Til § 31**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 20 í GDPR. Líknandi áseting er ikki í galdandi løgtingslóg.

Rætturin til dátuflutning er ein av nýggju rættindinum í GDPR, sum í samsvari við eitt av aðalmálunum við GDPR skal tryggja skrásettum størri ræði á egnum persónupplýsingum.

*Stk. 1* hevur við sær, at skrásetti kann krevja sínar persónupplýsingar frá dátuábyrgdaranum, sum skrásetti sjálvur hevur latið dátuábyrgdaranum. Hesar persónupplýsingar skulu uttan forðingar frá dátuábrygdaranum kunna flytast úr einum KT-umhvørvið til eitt annað, um hetta tekniskt letur seg gera.

Rætturin fevnir bert um persónupplýsingar, sum tann skrásetti sjálvur hevur latið dátuábyrgdanum, og um viðgerðin er grundað á samtykki sambært § 8, stk. 1, nr. 1 ella § 12, stk. 1, nr. 1, ella á avtalu sambært § 8, stk. 1, nr. 2, og um viðgerðin er automatisk.

Hetta hevur við sær, at rætturin til dátuflutning ikki er galdandi fyri viðgerð, sum er neyðug fyri at røkja samfelagsáhugamál, ella sum hoyrir undir almenna myndugleikaútinnan, sum er áløgd dátuábyrgdaranum.

Í *stk. 2* verður ásett, at persónupplýsingarnar, sum skrásetti móttekur, skulu vera í einum skipaðum, vanligum nýttum og teldutøkum sniði. Júst hvørjum formati persónupplýsingarnar skulu verða í, er treytað av virksemi dátuábyrgdarans, undir hesum vinnugrein.

Mælt verður til, í tann mun tað letur seg gera, at nýta opnar og skjalprógvaðar standardar, so sum JSON, XML, CSV o.tíl. Umráðandi er, at persónupplýsingarnar verða latnar á ein slíkan hátt, at tað í mestan mun ber til hjá skrásetta at skilja upplýsingarnar, og at brúka tær aftur.

Rætturin til dátuflutning kann t.d. nýtast í teimum førum, tá skrásetti ynskir tilboð uppá tænastur frá fleiri dátuábyrgdarum ella ynskir at skifta útbjóðara. Tað kunnu vera upplýsingar, sum eru latnir einum banka, telefonvirki ella tryggingarfelag í sambandi við, at dátuábyrgdarin skal geva tilboð el.tíl.

At rætturin einans fevnir um persónupplýsingar, sum skrásetti sjálvur hevur latið, hevur við sær, at upplýsingar, sum dátuábyrgdarin hevur lagt afturat grunda á tær upplýsingar, sum skrásetti hevur latið, ikki skulu latast skrásetta. Tað kann t.d. vera greining (analysa) ella onnur viðgerð av persónupplýsingunum, sum dátuábyrgdarin hevur framt av virkseminum hjá skrásetta online, t.d. persónlig tilmæli til tónleik grundað á tónleik, skrásetti áður hevur lurtað eftir, ella upplýsingar í sambandi við eina kreditmeting.

Sambært *stk. 3* kann skrásetti krevja, at persónupplýsingar um skrásetta verða fluttar beinleiðis frá einum dátuábyrgdara til annan, um hetta er tøkniliga gjørligt. Hetta krevur, at dátuábyrgdararnir brúka somu ella líknandi skipanir o.s.fr. Í ásetingini liggur *ikki* eitt krav um, at dátuábyrgdarar skulu brúka ella fáa til vega sambæriligar skipanir.

Rætturin hjá skrásetta til dátuflutning eigur ikki at gera seg inn á rættin hjá øðrum. Hetta hevur við sær, at um persónupplýsingar um onnur enn skrásetta verða fluttar – t.d. samskiftisupplýsingar hjá vinum hjá skrásetta í sambandi við, at skrásetti skiftur teldupost-útbjóðara – hevur nýggi dátuábyrgdarin ikki rætt til at nýta hesar upplýsingar um onnur til egin áhugamál, t.d. marknaðarføring.

Sí eisini áskoðan nr. 68 í GDPR.

**Rætturin til mótmæli**
Rætturin til mótmæli er ásettur í grein 21 í GDPR. Líknandi áseting um átalu er í § 26 í galdandi løgtingslóg.

Ásetingarnar í §§ 32-34 byggja á innihaldið í grein 21 í GDPR.

**Til § 32**
Sambært *stk. 1* kann skrásetti – av orsøkum grundaðar á serligu støðu hansara ella hennara – mótmæla annars lógligari viðgerð av sínum persónupplýsingum, sum er grundað á § 8, stk. 1, nr. 5 og 6. Hetta er eisini galdandi fyri profilering, sum er grundað á hesar ásetingar.

Hetta hevur við sær, at skrásetti kann mótmæla um viðgerðin er:

- neyðug til tess at røkja samfelagsáhugamál ella uppgávur, sum liggja undir almennari myndugleikaútinnan, sum dátuábyrgdaranum er álagt ella
- neyðug fyri, at dátuábyrgdarin ella ein triðipersónur kann fylgja einum heimilaðum áhugamáli, um ikki áhugamál ella grundleggjandi rættindi og frælsisrættindi hjá tí skrásetta, sum krevja vernd av persónupplýsingum, ganga fram um.

Orðingin av stk. 1 hevur við sær, at møguleikin hjá skrásetta at mótmæla verður avmarkaður nakað í mun til rættin hjá skrásetta at átala viðgerð eftir § 26 í galdandi løgtingslóg. Átalurætturin eftir galdandi løgtingslóg er sostatt ikki avmarkaður til ávíst viðgerðargrundarlag.

Uppskotið til § 32, stk. 1 hevur við sær, at skrásetti t.d. ikki kann mótmæla viðgerð, sum er grundað á samtykki (§ 8, stk. 1, nr. 1 ella § 12, stk. 1, nr. 1) ella sum er neyðug fyri at halda eina rættarliga skyldu, sum áliggur dátuábyrgdaranum (§ 8, stk. 1, nr. 3).

Mett verður ikki, at henda broytingin, í mun til galdandi rætt hevur við sær ein munandi bága fyri skrásetta, sum skal hava við sær, at føroyska lóggávan á hesum økinum skal víkja frá GDPR.

Eins og í dag skal dátuábyrgdarin út frá einari ítøkiligari meting gera av, um skrásetti er í eini serligari støðu sum ger, at mótmælið skal hava við sær, at viðgerðin skal steðga. Skrásetti skal grundgeva fyri, hví hann ella hon mótmælir og viðgerðin skal steðga. Grundgevingarnar skulu hava ávísan týdning og vera munandi, áðrenn viðgerðin skal steðgast.

Um dátuábyrgdarin ikki metir, at treytirnar fyri mótmæli eru loknar, skal dátuábyrgdarin upplýsa skrásetta um hetta og um orsøkirnar til tess.

Tá skrásetti hevur mótmælt eini viðgerð sbrt. stk. 1, hevur dátuábyrgdarin sambært *stk. 2* – um mótmæli er heimilað – skyldu at steðga viðgerðini, uttan so at dátuábyrgdarin kann vísa á týðandi heimilaðar orsøkir til viðgerðina, sum ganga fram um áhugamálini, rættindini og frælsisrættindini hjá tí skrásetta, ella tí at viðgerðin er neyðug fyri, at rættarkrøv kunnu sannast, gerast galdandi ella verjast. Eisini hetta er ein ítøkilig meting, sum dátuábyrgdarin skal gera.

Sí eisini áskoðan nr. 69 í GDPR.

**Til § 33**
Í § 33 verður lagt upp til eina serliga áseting um mótmæli í teimum førum persónupplýsingar verða viðgjørdar til beinleiðis marknaðarføring.

Í *stk. 1* verður ásett, at skrásetti í hesum førum til eina og hvørja tíð hevur rætt til at mótmæla viðgerð av sínum persónupplýsingum. Hetta fevnir eisini um rættin at mótmæla profilering í tann mun hon viðvíkur beinleiðis marknaðarføring.

Rætturin til at mótmæla beinleiðis marknaðarføring í § 33, stk. 1 er breiðari enn almenni rætturin til mótmæli í § 32. Ásetingin gevur sostatt skrásetta rætt til – til eina og hvørja tíð og uttan mun til viðgerðargrundarlag – at mótmæla viðgerð, undir hesum profilering, til beinleiðis marknaðarførðing.

Beinleiðis marknaðarføring er at skilja sum marknaðarføring, sum er rættað beinleiðis til ein ávísan persón.

Í *stk. 2* verður ásett, at dátuábyrgdarin ikki hevur loyvi at viðgera persónupplýsingarnar til beinleiðis marknaðarføring, um skrásetti hevur mótmælt viðgerðini. Eitt mótmæli móti beinleiðis marknaðarføring inniber tí ikki, at dátuábyrgdarin skal steðga allari viðgerð av persónupplýsingunum, um dátuábyrgdarin eisin viðgerð persónupplýsingarnar til onnur endamál.

Sí eisini áskoðan nr. 70 í GDPR.

**Til § 34**
Í *§ 34* er ein serlig kunningarskylda um rættin til mótmæli, sum hevur við sær, at dátuábyrgdarin, tá hann fyrstu ferð samskiftir við skrásetta, skal upplýsa um rættin í §§ 32 og 33.

Kunningarskyldan kemur afturat skylduni í §§ 23 og 24, sum hevur við sær, at dátuábyrgdarin í tann mun tað er neyðugt fyri at tryggja rímiliga og gjøgnumskygda viðgerð, skal upplýsa skrásetta um rættindini í kapitli 4, sbr. § 23, stk. 2 og § 24, stk. 2.

Skyldan hevur við sær, at dátuábyrgdarin nágreiniliga skal vísa á rættin, t.e. at hetta skal vera klárt og ótvískiljandi, og kann ikki vera óbeinleiðis ella tigandi. Kunnast skal um mótmælisrættin greitt og sundurskilt frá øllum øðrum upplýsingum.

**Automatiskar individuellar avgerðir, undir hesum profilering**

**Til § 35**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 22 í GDPR. Líknandi áseting er ikki í galdandi løgtingslóg.

Sambært *stk. 1* eigur skrásetti ikki at verða evni fyri avgerð, sum hevur rættarvirknað ella á líknandi hátt týðandi ávirkar viðkomandi, og sum *einans* er grundað á automatiska viðgerð. Automatiska viðgerðin fevnir m.a. um profilering, sum er allýst í § 6, nr. 3.

Vísingin í stk. 1 til profilering hevur við sær, at skrásetti hevur rætt til ikki at vera fyri automatiskari viðgerð av persónupplýsingum – sum hevur við sær eina avgerð – sum nýtir upplýsingarnar til at meta um ávís persónlig viðurskifti hjá einum persóni, serliga fyri at greina ella meta um arbeiðsavrik, fíggjarliga støðu, heilsu, persónligar sertokkar, áhugamál, álitissemi, atferð, staðseting ella rørslur hjá viðkomandi.

Ásetingin fevnir einans um viðgerð, sum á einhvønn hátt metir um persónlig viðurskifti hjá skrásetta. Hetta sæst m.a. í áskoðan nr. 71 í GDPR, og er harafturat stuðlað á heitið á greinini.

Hetta hevur við sær, at um eingin meting av persónligum viðurskiftum fer fram, er viðgerðin ikki fevnd av ásetingini. Hetta kann t.d. verða, tá skrásetti skal taka pengar út í eini sjálvtøku. Automatiska viðgerðin, sum fer fram, og sum kann hava við sær, at skrásetti ikki kann taka pengar út, tí kontan er í troti, inniber eina automatisk avgerð, sum er grundað á fakta – t.e. eingin peningur er á kontuni – og ikki eina meting av persónligum viðurskiftum hjá skrásetta.

Um avgerðin hevur rættarvirknað ella á líknandi hátt týðandi ávirkar viðkomandi er ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri. Sum dømi kunnu nevnast avgerðir, sum hava við sær, at ein avtala verður ógildað, at skrásetti fær noktað eina sosiala veiting, ikki sleppur inn í eitt land ella ikki fær atgongd til eina útbúgving. Tá metast skal um avgerðin týðandi ávirkar skrásetta, skal eisini hædd takast fyri serligu støðuni, sum skrásetti er í.

Ásetingin fevnir bara um avgerðir, sum *einans* eru grundaðar á automatiska viðgerð. Hetta merkir, at um ein persónur (t.d. ein málsviðgeri) metir um málið og tekur avgerð í einum máli, sum í stóran mun er grundað á automatiska viðgerð, er avgerðin ikki fevnd av ásetingin. Fyri at koma út úr virkisøkinum krevst, at persónurin, sum er við í málsviðgerðini, veruliga hevur ávirkan og t.d. kann broyta niðurstøðuna, sum automatiska viðgerðin er komin fram til.

Í áskoðan nr. 71 í GDPR stendur, at børn ikki eiga at vera fyri avgerðum, sum eru grundaðar á automatiska viðgerð ella profilering. Hetta hevur við sær, at automatisk viðgerð um børn í útgangsstøðinum ikki eigur at fara fram, tó at forboð ikki er sett fyri viðgerðini.

Dátuábyrgdarar skulu tí vera serliga varnir, tá upplýsingar um børn verða viðgjørdar, um henda viðgerð kann vera fevnd av § 35.

Í hvønn mun automatisk viðgerð av persónupplýsingum um børn kann fara fram, verður lagt meiri nágreiniliga fast av Dátueftirlitinum.

Í *stk. 2* verður ásett í hvørjum førum forboðið í stk. 1 hóast alt ikki er galdandi.

Tað er fyrst og fremst sambært *stk. 2, nr. 1* um avgerðin, sum automatiska viðgerðin kemur til, er neyðug fyri at gera ella halda eina avtalu millum skrásetta og dátuábyrgdaran. Hetta kann t.d. verða, um dátuábrygdarin er ein banki og automatiskt viðger upplýsingar um skrásetta – t.d. aldur, inntøku, arbeiði og útbúgving – sum er neyðugt fyri at gera av, hvussu nógv skrásetti kann lána í bankanum.

Sambært *stk. 2, nr. 2* kunnu avgerðir verða tiknar, um hetta er heimilað í lóggávu, sum dátuábyrgdarin er fevndur av. Tað er ein fortreyt, at henda lóggáva ásetur tiltøk, sum verja tann skrásetta, so sum at geva skrásetta møguleika at kæra eina slíka avgerð.

Sambært *stk. 2, nr. 3* kann avgerð verða tikin, um skrásetti hevur givið nágreiniligt samtykki.

Í *stk. 3* verður ásett, at í teimum førum, tá avgerð verður tikin eftir stk. 2, nr. 1 og 3, t.e. fyri at gera ella halda eina avtalu ella grunda á samtykki, skal dátuábyrgdarin seta hóskandi tiltøk í verk fyri at verja rættindini hjá skrásetta. Hetta hevur m.a. við sær, at skrásetti í minsta lagi skal hava møguleika at krevja menniskjaliga uppíblanding, at leggja síni sjónarmið fram og at mótmæla avgerðina.

Hetta merkir, at skrásetti, sum í døminum omanfyri við automatiskari viðgerð fekk boðið lán í bankanum, skal kunna krevja, at bankin tekur eina nýggja avgerð við menniskjaligari uppíblanding.

Um dátuábyrgdarin viðger viðkvæmar persónupplýsingar, eru færri møguleikar at víkja frá útgangsstøðinum í stk. 1. Í *stk. 4* verður sostatt ásett, at avgerðir ikki kunnu grundast á viðkvæmar persónupplýsingar, uttan so at skrásetti hevur givið nágreiniligt samtykki, ella um viðgerðin er neyðug til tess at røkja samfelagsáhugamál, sbrt. § 12, stk. 2, og hóskandi tiltøk eru sett í verk fyri at verja rættindini hjá skrásetta.

Hóskandi tiltøkini, sum dátuábyrgdarin skal seta í verk, kunnu t.d. vera møguleikin fyri menniskjaligari uppíblanding, at leggja fram sjónarmið ella mótmæla avgerð, at dátuábyrgdarin so hvørt kannar um skipanin riggar, sum hon skal, og at dátuábyrgdarin anonymiserar ella dulnevnir mest møguligt.

Sí eisini áskoðan nr. 71 og 72 í GDPR.

**Avmarkingar í rættindunum hjá skrásetta**

**Til § 36**
Ásetingin svarar í høvuðsheitum til § 22 í galdandi løgtingslóg. Ásetingin er somuleiðis í samsvari við grein 23 í GDPR, sum ásetir, at ES-limalondini innan nærri ásettar karmar kunnu gera avmarkingar í rættindunum hjá skrásetta.

Ásetingin hevur við sær, at tað verða settar avmarkingar nær kunningarskyldan í §§ 23 og 24, rætturin til innlit í § 26 og § 48 um fráboðan til skrásetta eru galdandi.

Í stk. 1, nr. 1-5 eru uppreksað áhugamál, sum verða mett at hava størri týdning enn áhugamál hjá skrásetta, og sum kunning til skrásetta, sbrt. §§ 23, 24, 26 og 48, tí má víkja fyri. Ítøkilig meting skal gerast í hvørjum einstøkum føri.

Avmarkingar kunnu gerast um tað ítøkiliga verður mett, at um upplýsingarnar koma í ljósmála, kunnu skaða landsins trygd, verju ella samskifti við útlendskar tjóðir ella felagsskapir (nr. 1), upplýsingarnar eiga at dyljast við atliti at fyribyrging, eftirkanning, avdúking og rættarsøkjan av revsiverdum gerðum ella fremjan av revsirættarligum tiltøkum, undir hesum verjan ímóti og fyribyrgjan av hóttanum ímóti tí almennu trygdini (nr. 2), um tað ikki er ráðiligt, at skrásetti fær kunnleika um, umhugsandi heilsuna hjá skrásetta ella tøtt persónsambond við skrásetta (nr. 3), upplýsingarnar eru fevndar av tagnarskyldu ásett í lóggávu (nr. 4) ella áhugin hjá skrásetta at fáa kunning um eigur at víkja fyri, orsakað av altavgerandi almennum ella privatum áhugamálum (nr. 5).

Í *stk. 2* verður ásett, at upplýsingar, sum verða viðgjørdar av almennu fyrisitingini sum liður í umsitingarligari málsviðgerð, kunnu verða undantiknar rættinum til innlit í § 26 í sama mun sum ásett í §§ 7-11 og 14 í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina, sbrt. løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001. Ásetingin skal tryggja, at tann viðgerð av persónupplýsingum, sum almenna fyrisitingin ger, kann undtantakast frá innliti í sama mun eftir báðum løgtingslógunum.

Í *stk. 3* er ein serlig áseting um avmarkingar, um upplýsingarnar einans verða viðgjørdar til søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál, og um persónupplýsingarnar bert verða goymdar sum persónupplýsingar so leingi, sum neyðugt er, við atliti at endamálinum við viðgerðini. Í hesum førum eru ásetingarnar í § 26 um innlit, § 27 um rætting, § 29 um viðgerðaravmarking og § 32 um mótmæli ikki galdandi.

Ásetingin hevur til endamáls at tryggja, at t.d. vísindaligar kanningar grundaðar á alla ellar partar av populatiónini kunnu fara fram samfelagnum sum heild til fyrimuns. Mett verður, at um treytirnar í stk. 3 eru loknar – t.e. viðgerðin einans fer fram til hesi endamál og persónupplýsingarnar bara verða goymdar so leingi tað er neyðugt – viga fyrilitini til samfelagsáhugamálini tyngri enn áhugamálini hjá hvørjum einstøkum skrásettum.

Í *stk. 4* verður ásetingin í § 22, stk. 5 í galdandi løgtingslóg førd víðari, so at landsstýrismaðurin í ávísum førum kann áseta nærri reglur um onnur undantøk frá reglunum um innlit og kunningarskyldu og um treytir annars í sambandi við, at innlit verður givið. Heimildin í galdandi løgtingslóg er ikki brúkt.

Sí eisini áskoðan nr. 73 í GDPR.

## Kapittul 5
## Dátuábyrgdari og dátuviðgeri

Kapittulin byggir á innihaldið í kapitli 4 í GDPR. Líknandi kapittul er ikki í galdandi løgtingslóg, tó at fleiri av ásetingunum ganga aftur.

Ásetingarnar um dátuábyrgdarar og dátuviðgerar eru meira rúgvusmiklar í hesum løgtingslógaruppskoti. Orsøkin er m.a. at finna í reglunum um ábyrgd og váðagrundaða tilgongd, sum greitt frá undir pkt. 1.4.2. í almennu viðmerkingunum, sum er grundarlagið undir uppskotinum og hvørs fyritreyt í ávísan mun er ein gjølligari lóggáva.

### Ábyrgd dátuábyrgdarans

### Til § 37

Ásetingin byggir á innihaldið í GDPR. Líknandi áseting er ikki í galdandi løgtingslóg.

§ 37 hevur við sær, at tað yvirskipað verður gjørt greitt, at tað er dátuábyrgdarin, sum hevur ábyrgdina av at tryggja, at viðgerð av persónupplýsingum er í samsvari við løgtingslógina. Ábyrgd dátuábyrgdarans er eisini staðfest í §7, stk. 2 í hesum løgtingslógaruppskotið.

Dátuábyrgdarin skal seta í tiltøk í verk – tøknilig og bygnaðarlig – sum svara til tann váðan, sum er við viðgerðini fyri tann skrásetta.

§ 37 er ein verkseting av váðagrundaðu tilgongdini til dátuvernd, sum løgtingslógin byggir á, og sum hevur við sær, at dátuábyrgdarin ítøkiliga skal meta um, hvørjir váðar eru við viðgerðini fyri tann skrásetta, tá trygdartiltøk verða sett í verk. Dátuábyrgdarin skal í tí sambandi m.a. hava í huga slag, vavi, samanhang og endamál við viðgerðini. Dátuábyrgdarin skal eisini hava í huga hvørjar persónupplýsingar talan er um (vanligar ella viðkvæmar) og hvønn tær eru um (t.d. um børn). Víst verður eisini til pkt. 1.4.2. í almennu viðmerkingunum.

Dátuábyrgdarin skal umframt at tryggja, at viðgerðin er í samsvari við lógina, vera førur fyri at vísa á, at tað er so. Hetta kann dátuábyrgdarin t.d. gera við á einhvønn hátt at skjalfesta tiltøkini. Dátuábyrgdarin skal m.a. kunna vísa Dátueftirlitinum á, at løgtingslógin verður hildin.

Tiltøkini, sum dátuábyrgdarin setur í verk, skulu um neyðugt endurskoðast og dagførast. Um tað stendur mát við viðgerðina, kunnu tiltøkini fevna um verksetan av hóskandi dátuverndarpolitikki. Hetta hevur við sær, at krøvini til dátuábyrgdaran ikki eru statisk, og at dátuábyrgdarin alsamt skal meta um váðarnar við viðgerðini og um viðgerðartrygdin er, sum hon skal vera.

Sí eisini áskoðan nr. 74 í GDPR.

**Dátuvernd ígjøgnum sniðgeving og dátuvernd ígjøgnum standardstillingar**

**Til § 38**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 25 í GDPR. Ásetingin er nýggj í mun til galdandi løgtingslóg og hevur við sær, at dátuvernd skal hugsast inn sum ein náturligur partur longu tá skipanir o.tíl., sum skulu viðgera persónupplýsingar, verða sniðgivnar.

Í *stk. 1* verður ásett, at dátuábyrgdarin ígjøgnum sniðgeving (*by design*) skal tryggja, at løgtingslógin verður fylgd.

Hetta hevur við sær, at dátuábyrgdarin – bæði tá tólini til viðgerð verða fastløgd, og tá sjálv viðgerðin fer fram – skal seta hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk í verk, sum eru sniðgivin á ein slíkan hátt, at viðgerðin lýkur krøvini í løgtingslógini, herundir meginreglurnar. Hetta kann t.d. verða dulnevning av persónupplýsingum skjótast gjørligt. Tað er ein skylda at innrætta seg tøkniliga og bygnaðarliga á ein slíkan hátt, at løgtingslógin verður hildin.

Stk. 1 er ikki galdandi fyri skipanir, sum longu viðgera persónupplýsingar, tá henda løgtingslóg kemur í gildi. Ásetingin hevur sostatt ikki við sær, at skipanir, sum dátuábyrgdarin longu nýtir, skulu sniðgevast av nýggjum. Ásetingin merkir, at dátuábyrgdarin í sambandi við at nýggj skipan verður umhugsað – t.e. tá tólini til viðgerð

verða fastløgd – skal hugsa dátuvernd inn. Eisini hevur hon við sær, at dátuábyrgdarin, tá viðgerðin fer fram, skal verða serliga varur við dátuvernd.

Dátuvernd ígjøgnum sniðgeving byggir á váðagrundaða tilgongd til dátuvernd. Dátuábyrgdarin skal tí í sniðgevingini hava fyrilit fyri verandi tøkniliga støði, íverksetingarkostnaði og slagi, vavi, samanhangi og endamáli við viðgerðini, umframt váðum av skiftandi sannlíkindum og álvaran fyri rættindum og frælsisrættindum hjá persónum, sum viðgerðin hevur við sær. Dátuábyrgdarin skal sostatt í hvørjum einstøkum føri meta um váðan við viðgerðini í mun til, hvørji tiltøk eru fyri neyðini, og hvussu hetta kann sniðgevast inn í skipanir.

Sí eisini pkt. 1.4.2. í almennu viðmerkingunum.

Í *stk. 2* er ein skylda fyri dátuábyrgdaran at seta tiltøk í verk fyri gjøgnum standardstillingar (*by default*) at tryggja, at einans persónupplýsingar, sum eru neyðugar til eitt ávíst endamál, verða viðgjørdar.

Skyldan er galdandi bæði í mun til mongdina av persónupplýsingum, sum verða savnaðar, vavið av viðgerðini, eins og goymsluskeið og atkomu. Slík tiltøk skulu serliga tryggja, at persónupplýsingar ígjøgnum standarstillingar ikki uttan uppílegging frá einum persóni, verða atkomuligar fyri óavmarkað tal av persónum.

Kravið í stk. 2, sum byggir víðari á meginregluna um dátuminimering í § 7, stk. 1, nr. 3, kemur afturat kravinum í stk. 1, og hevur við sær, at hvørja ferð ein skipan, tænasta el.líkn. verður tikin í nýtslu, t.d. ein online-tænasta ella ein app, skulu stillingarnar, sum útgangsstøði tryggja, at persónupplýsingar verða viðgjørdar, herundir deildar, minst møguligt.

Kravið í stk. 2 hevur heldur ikki við sær eina skyldu at broyta ella skifta út allar verandi KT-skipanir, tá ið løgtingslógin kemur í gildi. Um tað er møguligt at broyta stillingarnar uttan stórvegis hóvasták, eigur hetta tó at verða gjørt.

Kravið um dátuvernd ígjøgnum sniðgeving og standardstillingar verður nágreinað av Dátueftirlitinum í sambandi við vegleiðing í ítøkiligum málum og almenna vegleiðing, eitt nú í skrivligari vegleiðing. Dátueftirlitið kann í tí sambandi í tann mun tað verður mett viðkomandi taka vegleiðingina hjá danska Datatilsynet um hesa ásetingina við í arbeiðið.

Sí eisini áskoðan nr. 78 í GDPR.

**Felags dátuábyrgdarar**

**Til § 39**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 26 í GDPR. Líknandi áseting er ikki í galdandi løgtingslóg, men talan er neyvan um nakra broyting í mun til galdandi rættarstøðu.

§ 39 snýr seg um tey føri, tá ið tveir ella fleiri dátuábyrgdarar í felag viðgera persónupplýsingar. Greinin ásetur, at í hesum førum, skulu dátuábyrgdararnir á ein gjøgnumskygdan hátt skipa sínámillum ábyrgd at halda skyldurnar sambært løgtingslógini. Skyldan er serliga viðkomandi fyri skrásett, sum skulu brúka síni rættindi, og sum altíð eiga at vita, hvør viðger persónupplýsingar um viðkomandi, og hvør hevur ábyrgdina.

Fyri at lúka treytirnar í hesi áseting, skulu dátuábyrgdararnir avtala sínámillum ábyrgd um m.a. hvør skal halda kunningarskylduna í §§ 23 og 24, og skulu eisini áseta eitt samskiftisstað fyri tey skrásettu. Orsøkin til, at hetta greitt skal avtalast er, at hetta ikki eigur at detta burtur ímillum, skrásetta til skaða.

Ábyrgdarbýtið, sum dátuábyrgdararnir verða samdir um, skal á hóskandi hátt endurspegla leiklutirnar felags dátuábyrgdarnir hvør sær hava, og samband teirra við tey skrásettu.

Tað skal verða møguligt fyri tey skrásettu at kunna seg um høvuðsinnihaldið í ábyrgdarbýtinum, sum tí skal vera atkomuligt fyri tey skrásettu, t.d. við at tann skrásetti fær innlit í eina avtalu.

Hóast dátuábyrgdararnir avtala, hvussu skyldurnar skulu býtast teirra millum, kann tann skrásetti altíð útinna síni rættindi sambært løgtingslógini mótvegis tí einstaka dátuábyrgdaranum.

Sí eisini áskoðan nr. 79 í GDPR.

**Umboð fyri dátuábyrgdarar og dátuviðgerar, sum ikki eru staðsettir í Føroyum**

**Til § 40**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 27 í GDPR. Líknandi ásetingar eru í § 7, stk. 3 og 4 í galdandi løgtingslóg.

*Stk. 1* hevur við sær, at dátuábyrgdarar og dátuviðgerar, sum ikki eru staðsettir í Føroyum, men sum eru fevndir av lógini, sbrt. § 5, stk. 2 skulu tilnevna eitt umboð í Føroyum. Hetta merkir, at um persónupplýsingar verða viðgjørdar um skrásett, sum eru í Føroyum, er útgangsstøðið, at eitt umboð fyri dátuábyrgdaran ella dátuviðgeran er í Føroyum, sum skrásetti kann venda sær til.

Um hvør er fevndur av § 5, stk. 2 verður víst til serligu viðmerkingarnar til ásetingina omanfyri.

Fyri tann skrásetta merkir hetta ítøkiliga, at fjarstøðan til dátuábyrgdaran ella dátuviðgeran ikki verður stór, og at tað gerst léttari at samskifta, av tí at umboðið ofta er føroyingur ella hevur kunnleika til føroyskt og føroysk viðurskifti.

Í stk. 2 eru ásett undantøk frá skylduni í stk. 1 at hava umboð í Føroyum.

Sambært *stk. 2, nr 1* er skyldan at hava umboð í Føroyum ikki galdandi um viðgerðin einans er viðhvørt, sum ikki í stórum fevnir um viðkvæmar persónupplýsingar, og sum sannlíkt ikki hevur við sær eina hóttan ímóti rættindinum, her undir frælsisrættindinum, hjá skrásetta.

Stk. 2, nr. 1 er enn eitt dømi um váðagrundaðu tilgongdina til dátuvernd, og hevur ásetingin við sær, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin ikki skulu hava umboð í Føroyum, um váðin við viðgerðini fyri tann skrásetta er lítil. Sí eisini pkt. 1.4.2. í almennu viðmerkingunum.
Um viðgerð er fevnd av undantakinum í stk. 2, nr. 1 er ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri. Metingin skal fevna um allar tríggjar kumulativu treytirnar.

Fyrsta treytin er, at viðgerðin einans er *viðhvørt*.

Viðgerð av persónupplýsinum, sum fer fram regluliga, t.d. innkrevjing av limagjaldið hvønn ársfjórðing, er ikki bara *viðhvørt*, um so er, at persónupplýsingarnar verða goymdar ímillum hvørja innkrevjing. Hetta er tí, at sjálvt um persónupplýsingarnar einans verða nýttar “aktivt” hvønn ársfjórðing, so verða tær goymdar í tíðarskeiðnum ímillum innkrevinjarnar, og at goyma persónupplýsingar er eisini at viðgera persónupplýsingar.

Onnur treytin er, at viðkvæmar persónupplýsingar ikki verða viðgjørdar í stórum. Um, hvørt persónupplýsingar *í stórum* verða viðgjørdar, skal metast ítøkiliga við at taka við, hvussu nógv skrásett eru, mongdin av persónupplýsingum, tíðarskeiðið persónupplýsingarnar skulu viðgerðast, her undir um viðgerðin er varandi, og tað landafrøðiliga øki viðgerðin fevnir um. Fyri at undantakið í stk. 2, nr. 1 skal kunna brúkast, skal triðja treytin eisini verða lokin, og tað merkir, at tað skal vera ósannlíkt, at viðgerðin hevur við sær *ein váða* fyri rættindini hjá einstaklingum. Í hesum førum skal dátuábyrgdarin ella dátuviðgerðin m.a. meta um, hvussu viðgerðin fer fram, hvørji tól skulu nýtast og í hvørjum samanhangi viðgerðin fer fram.

Umboðsskyldan er heldur ikki galdandi fyri almennar myndugleikar, stovnar og eindir, sbrt. *stk. 2, nr. 2*.

Í *stk. 3* er greitt frá leiklutinum hjá umboðnum, sum vegna dátuábyrgdaran ella dátuviðgeran kann taka ímóti fráboðanum frá skrásettum o.ø. í sambandi við allar spurningar um viðgerð av persónupplýsingum.

At dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin hava eitt umboð hevur ikki við sær, at skrásetti er útilokaður frá at venda sær beinleiðis til dátuábyrgdaran ella dátuviðgeran.

Í framhaldi av hesum kann eisini viðmerkjast, at, at tilnevning av umboði ikki forðar fyri rættaratsóknum ímóti dátuábyrgdaranum ella dátuviðgeranum sjálvum í sambandi við t.d fylgjur av viðgerðini.

Sí eisini áskoðan nr. 80 í GDPR.

**Dátuviðgeri**

**Til § 41**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 28 í GDPR. Líknandi ásetingar er í § 31 í galdandi løgtingslóg og í trygdarkunngerðini, sum hevur heimild í § 31, stk. 7.

Ásetingin nágreinar treytirnar, tá ein dátuábyrgdari nýtir ein dátuviðgera.

*Stk. 1* avmarkar hvønn dátuábyrgdarin kann brúka sum dátuviðgera, og ásetur sum krav, at dátuábyrgdarin bert skal brúka dátuviðgerar, sum veita fullgóða trygd fyri, at hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk verða sett í verk, sum tryggja, at viðgerðin lýkur krøvini í løgtingslógini.

Ásetingin staðfestir yvirskipað, at dátuábyrgdarin umframt at syrgja fyri, at viðgerð, sum dátuábyrgdarin sjálvur fremur, er í samsvari við lógina, eisini skal tryggja sær, at viðgerð sum dátuviðgeri fremur vegna dátuábyrgdaran, er í trá við lógina. Hetta hóast § 46 um viðgerðartrygd ásetur, at dátuviðgerin hevur eina sjálvstøðuga skyldu at tryggja at trygdin er í lagi.

Hvussu dátuábyrgdarin tryggjar, at dátuviðgerin veitir *fullgóða trygd* er ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri grundað á váðan við viðgerðini. Í ávísum førum kann tað vera nóg mikið, at dátuviðgerin t.d. skrivliga váttar, at hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk eru ella verða sett í verk, meðan tað í øðrum førum t.d. kann verða neyðugt við eini váttan frá einum triðjaparti.

Stk. 1 hevur – saman við m.a. ásetingin í § 7, stk. 2 um ábyrgd – við sær, at dátuábyrgdarin bæði áðrenn viðgerð og meðan viðgerð fer fram, hevur skyldu leypandi at hava eftirlit við, at viðgerðin hjá dátuviðgeranum fer fram í samsvari við løgtingslógina.

Í praksis kann dátuábyrgdarin nýta ta avtalu, sum sambært stk. 2 skal verða grundarlagið undir viðgerðini hjá dátuviðgeranum, sum útgangsstøðið fyri sínum eftirliti eftir, at aftalan er inngingin.

Eins og í dag verður nevniliga í *stk. 2* ásett, at tá ein dátuviðgeri viðger persónupplýsingar fyri ein dátuábyrgdara, skal hetta vera gjørt sambært bindandi avtalu ella øðrum rættarligum skjali, sum kann binda dátuviðgeran til dátuábyrgdaran. Avtalan skal gera uppgávu-, arbeiðs-, og ábyrgdarbýti millum dátuábyrgdaran og dátuviðgeran klárt.

Í stk. 2, nr. 1-9 er nágreinað, hvat avtalan millum dátuábyrgdaran og dátuviðgeran í øllum førum skal innihalda. Hetta eru tær rammur, sum dátuviðgerin skal virka innanfyri.

Sambært *stk. 2, nr. 1* skal avtalan tilskila, at dátuviðgerin einans viðgerð persónupplýsingar eftir boðum frá dátuábyrgdaranum. Hetta er í samsvari við almenna uppgávubýtið millum partarnar, herundir at tað er dátuábyrgdarin, sum ger av endamálini við viðgerðini, sbr. § 6, nr. 6.

Boðini frá dátuábyrgdaranum skulu verða skjalfest. Kravið um skjalfest boð frá dátuábyrgdaranum er ikki galdandi um so er, at dátuviðgerin sambært aðrari lóggávu skal viðgera persónupplýsingarnar. Í hesum føri kunnar dátuviðgerin dátuábyrgdaran um hetta lógarkrav áðrenn viðgerðina, uttan so, at lógarkravið bannar slíkari kunning.

Í avtaluni skal tað, sambært *stk. 2, nr. 2* tryggjast, at teir persónar, sum hava heimild at viðgera persónupplýsingar, hava tagnarskyldu. Tað kann antin vera, tí teir í avtalu hava bundið seg til trúnað, ella tí at teir eru lógarbundnir av einum hóskandi trúnaði.

Sbrt. *stk. 2, nr. 3* skal tað vera ásett, at dátuviðgerin skal lúka treytirnar í § 42 um at nýta undirdátuviðgerar.

Í *stk. 2, nr. 4* er gjørt greitt, at avtalan eisini skal áseta, at dátuviðgerin fremur tey tiltøk, sum eru kravd í § 46.

Hendan áseting hevur við sær, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin, tá avtalan verður inngingin gera sær greitt, hvørji trygdartiltøk eru neyðug fyri at lúka krøvini í § 46. Hetta hevur m.a. við sær, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu gera eina meting av váðunum, sum viðgerðin hevur við sær, sbr. § 46, til tess at tryggja, at trygdarstøðið er nøktandi. Hesi trygdartiltøk kunnu tá verða lýst í avtaluni.

Hetta merkir ikki, at dátuábyrgdarin í smálutum skal gera av, hvussu dátuviðgerin tøkniliga innrættar seg o.tíl., men at eisini dátuábyrgdarin tekur støðu til váðan og hóskandi trygdarstøði.

Tað eftirlit, sum dátuábyrgdarin skal hava við dátuviðgeranum fyri at tryggja, at viðkomandi dátuviðgeri framhaldandi veitir fullgóða trygd, sbr. stk. 1, kann sostatt m.a. taka útgangsstøði í tí, sum stendur í avtaluni um, hvørji trygdartiltøk skulu vera.

Sambært *stk. 2, nr. 5* skal tað nágreinast í avtaluni, at dátuviðgerin skal stuðla dátuábyrgdaranum í sambandi við umbønir eftir kapittul 4. Hetta merkir, at avtalan skal lýsa, hvussu dátuviðgerin í mestan mun – við atliti at slagi av viðgerð –stuðlar dátuábyrgdaranum við hóskandi tøkniligum og bygnaðarligum tiltøkum at uppfylla skylduna hjá dátuábyrgdaranum at svara umbønum um at brúka rættindini hjá teimum skrásettu í kapitli 4.

Sambært *stk. 2, nr. 6* skal dátuviðgerin hjálpa dátuábyrgdaranum at tryggja, at skyldurnar sambært §§ 46-52 verða hildnar. Í tí sambandinum skal hædd verða tikin fyri slagi av viðgerð og teimum upplýsingum, sum eru tøkar hjá dátuviðgeranum.

Í *stk. 2, nr. 7* er ásett, at avtalan skal taka støðu til, um dátuviðgerin – eftir hvat dátuábyrgdarin velur – skal strika ella lata aftur allar persónupplýsingar til dátuábyrgdaran eftir, at viðgerðin er liðug, og skal strika verandi avrit, um ikki er álagt sambært lóggávu, at dátuviðgerin skal goyma persónupplýsingarnar.

At enda skal tað eisini sambært *stk. 2, nr. 8 og 9* vera við í avtaluni, at dátuviðgerin eftir kravboði frá dátuábyrgdaranum letur dátuábyrgdaranum allar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at vísa á, at krøvini í hesi grein verða hildin, og fær í lag og hjálpir til við skoðan, her undir eftirliti, sum verða framd av dátuábyrgdaranum ella grannskoðara, sum hevur fulltrú frá dátuábyrgdaranum.

Í *stk. 3* er ásett, at um dátuviðgerin metir, at eini kravboð, sum hann fær frá dátuábyrgdaranum eru í ósamsvari við løgtingslógina, so skal hann uttan drál boða dátuábyrgdaranum frá hesum.

Um ein dátuviðgeri brýtur løgtingslógina við at gera av, til hvørji endamál og við hvørjum hjálpitólum persónupplýsingar kunnu viðgerðast, verður dátuviðgerin, sbrt. *stk. 4*, mettur at vera dátuábyrgdari í mun til ta viðgerðina. Ásett verður, at hetta ikki ávirkar reglurnar í §§ 77-79 um endurgjald, revsing og fyrisitingarlig sektaruppskot. Tað merkir, at dátuviðgerin kann verða revsaður ella skal gjalda endurgjald í tann mun, hann við at gera av til hvørji endamál persónupplýsingarnar skulu fara fram, hevur brotið lógina.

Um ein dátuviðgeri, sum lýst í stk. 4, fer frá at vera dátuviðgeri til at vera dátuábyrgdari, er avleiðingin tann, at tann "nýggi" dátuábyrgdarin skal lúka allar treytirnar í løgtingslógini, her undir hava eina viðgerðarheimild. Um nýggi dátuábyrgdarin ikki hevur eina viðgerðarheimild, er viðgerðin í ósamsvari við løgtingslógina.

Sí eisini áskoðan nr. 79 og 81 í GDPR.

**Til § 42**
Í *stk. 1* verður ásett, at dátuviðgerin ikki hevur loyvi at nýta ein annan dátuviðgera – ein sokallaðan undir-dátuviðgera – uttan so, at dátuábyrgdarin ítøkiligt ella alment hevur givið

loyvi. Loyvi frá dátuábyrgdaranum skal verða skrivligt, so eingin ivi stingur seg upp um heimild.

Hevur dátuviðgerin eitt alment loyvi, skal hann ella hon boða dátuábyrgdaranum frá, áðrenn nýggjur dátuviðgeri verður nýttur, so at dátuábyrgdarin kann seta seg ímóti hesum.

Ásetingin speglar, at tað er dátuábyrgdarin, sum hevur ábyrgdina av, at persónupplýsingar verða viðgjørdar í samsvari við løgtingslógina, og at dátuábyrgdarin tí eisini eigur at hava síðsta orðið í mun til, hvør viðger persónupplýsingarnar hansara vegna.

Í *stk. 2* verður ásett, at um so er, at dátuviðgerin nýtir ein undir-dátuviðgera, skulu somu dátuverndarskyldur áleggjast hesum dátuviðgera, sum eru álagdar upprunaliga dátuviðgeranum í avtaluni við dátuábyrgdaran. Á henda hátt verður m.a. tryggja, at trygdarstøðið ikki verður lækkað, hóast viðgerðin fer fram longur burtur frá dátuábyrgdaranum.

**Til § 43**
Í *stk. 1* verður lagt upp til, at landsstýrismaðurin eftir ummæli frá Dátueftirlitinum kann gera standardavtaluásetingar í teimum førum, sum eru nevnd í § 41, stk. 2 og § 42, stk. 2.
Í *stk. 2* verður ásett, at avtalan millum dátuábyrgdaran og dátuviðgeran heilt ella lutvíst kann verða grundað á hesar standardásetingar. Eisini verður ásett, at avtalan millum dátuábyrgdaran og dátuviðgeran skal vera til taks skrivliga, her undir elektroniskt.

Eisini ásetingarnar um dátuviðgeran og sambandið við dátuábyrgdaran verða nágreinaðar av Dátueftirlitinum. Í tann mun tað verður mett viðkomandi kann Dátueftirlitið brúka vegleiðingina, sum danska Datatilsynet hevur gjørt um dátuábyrgdaran og dátuviðgeran í arbeiðnum, eins og skabelónin, sum Datatilsynet hevur gjørt til dátuviðgerarsáttmála kann nýtast sum íblástur í hesum arbeiði.

**Yvirlit yvir viðgerðir**

**Til § 44**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 30 í GDPR. Líknandi áseting er ikki beinleiðis í galdandi løgtingslóg, tó at tað í trygdarkunngerðini er ásett í § 4, stk. 1, at tað í sambandi við váðameting skal gerast yvirlit yvir, hvørji sløg av persónupplýsingum verða viðgjørd. Greinin hevur við sær, at dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin skulu gera yvirlit yvir viðgerðir.

Kravið um yvirlit kemur í staðin fyri fráboðanarskylduna til Dátueftirlitið, sum ikki verður førd víðari. Orsøkin til, at fráboðanarskyldan ikki verður førd víðari, og at tað í staðin verður ein skylda fyri tann, sum viðgerð persónupplýsingar at gera og goyma yvirlit, er í samsvari við meginregluna um ábyrgd, sum GDPR byggir á. Víst verður til pkt. 1.4.2. í almennu viðmerkingunum.

Í *stk. 1* verður ásett, at dátuábyrgdarin skal gera yvirlit yvir *allar viðgerðir*, sum eru undir ábyrgd hansara. Skyldan er galdandi fyri allar dátuábyrgdarar, líkamikið um viðgerðin fer fram við dátuviðgera ella ikki.

Í yvirlitinum skal dátuábyrgdarin skráseta tær upplýsingar, sum víst er til í stk. 1, nr. 1-7. Hetta hevur við sær, at yvirlitið skal fevna um navn og samskiftisupplýsingar (nr. 1), endamálið við viðgerðini (nr. 2), eina lýsing av bólkum av skrásettum og sløgum av

persónupplýsingum (t.d. *samskiftisupplýsingar*, ístaðin fyri ítøkiliga teldupostadressu, telefonnummar o.s.fr.) (nr. 3), bólkar av móttakarum, her undir móttakarum í útlondum ella triðjalondum (nr. 4), upplýsing um flutning til útland, triðjaland ella millumtjóðafelagsskap (nr. 5), ætlaðu tíðarfreistirnar fyri striking (nr. 6) og eina almenna lýsing av tøkniligu og bygnaðarligu trygdartiltøkunum, sum eru sett í verk (nr. 7).

Í *stk. 2* verður lagt upp til, at dátuviðgerin eisini skal hava eitt yvirlit, men at hetta yvirlit er yvir *sløg av viðgerðum*, sum verða framdar dátuábyrgdarans vegna. Skyldan hjá dátuviðgeranum er sostatt eitt sindur linari enn skyldan hjá dátuábyrgdaranum, sum skal hava yvirlit yvir *allar viðgerðir*.

Yvirlitini hjá dátuviðgeranum skulu heldur ikki innihalda eins nógvar upplýsingar. Upplýsingarnar, sum skulu við, eru nevndar í stk. 2, nr. 1-4. Hetta er navn og samskiftisupplýsingar (nr. 1), slag av viðgerð (nr. 2), upplýsing um flutning til útland, triðjaland ella millumtjóðafelagsskap (nr. 3) og eina almenna lýsing av tøkniligu og bygnaðarligu trygdartiltøkunum, sum eru sett í verk (nr. 4).

Upplýsingar skulu einans í yvirlitið, um tær eru viðkomandi, t.e. tað er ikki neyðugt at føra í yvirlitið, at persónupplýsingar ikki verða givnar víðari o.tíl.

Tað er upp til dátuábyrgdaran og dátuviðgeran sjálvar at gera av, hvussu yvirlitini verða førd. Í *stk. 3* verður tó ásett, at yvirlitini skulu verða skrivlig, herundir elektronisk, og at tey eftir umbøn skulu latast Dátueftirlitið.

Fyrimunurin við at hava yvirlit er – umframt at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin til allar tíðir hava greiðu á, hvørjar upplýsingar verða viðgjørdar og til hvørji endamál o.s.fr. – at eftirlitsarbeiðið hjá Dátueftirlitinum verður lættari. Við yvirlitunum kann Dátueftirlitið skjótt fáa greiðu á, hvør viðgerð fer fram o.s.fr. Yvirlit verða sostatt ein umráðandi partur av eftirlitsarbeiðnum hjá Dátueftirlitinum.

Í *stk. 4* verður ásett, at skyldan eisini er galdandi fyri umboð í teimum førum hesi, eru tilnevnd. Í mun til navn og samskiftisupplýsingar, sbrt. stk. 1, nr. 1 og stk. 2, nr. 1 skulu eisini navn og samskiftisupplýsingar hjá møguligum umboðum og dátuverndarfólki við í yvirlitið.

**Til § 45**
Í § 45 verða ásett undantøk frá skylduni at gera yvirlit.

Lagt verður upp til, at skyldan ikki skal vera galdandi fyri fyritøkur, sum hava færri enn 250 starvsfólk. Hetta hevur við sær, at smáar og millumstórar fyritøkur í útgangsstøðinum ikki eru fevndar av skylduni.

Sum starvsfólk er at skilja fólk, sum fyritøkan til eina og hvørja tíð hevur í starvi.

Sum fyritøkur verða í hesum føri eisini roknað felagsskapir o.o. Almennir myndugleikar eru hinvegin ikki fevndir av undantakinum. Skyldan at gera yvirlit er sostatt altíð galdandi fyri almennar myndugleikar.

Hóast undantakið at síggja til sýnist breitt, so er tað ikki uttan víðari so. Ásett verður nevniliga, at undantakið hóast alt ikki er galdandi í trimum førum. Talan er *ikki* um

kumulativar treytir, og skyldan er sostatt galdandi um ein (ella fleiri) av ásetingunum eru galdandi.

Undantakið er sambært *nr. 1* ikki galdandi um viðgerðin sannlíkt hevur við sær ein váða fyri rættindi og frælsisrættindi hjá teimum skrásettu. Í mun til váðan skal talan ikki vera um stóran váða, men um *ein* váða. Hetta er ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 40, stk. 2, og pkt. 1.4.2. í almennu viðmerkingunum.

Undantakið er sambært *nr. 2* heldur ikki galdandi, um viðgerðin ikki bara er viðhvørt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 40, stk. 2 um metingina av, nær viðgerð bara er viðhvørt.

Í *nr. 3* verður ásett, at undantakið ikki er galdandi, um viðgerðin fevnir um viðkvæmar persónupplýsingar sambært § 11, stk. 1.

§ 45 skal skiljast soleiðis, at um ein fyritøka, sum er dátuábyrgdari, hevur færri enn 250 starvsfólk, men fremur eina viðgerð, sum hevur við sær ein váða (nr. 1) ella viðgerð viðkvæmar persónupplýsingar (nr. 3), hevur henda fyritøka skyldu at gera yvirlit, sbrt. § 44, stk. 1.

Skyldan fevnir um ta viðgerð, sum hevur við sær ein váða ella fevnir um viðkvæmnar persónupplýsingar. Onnur viðgerð, sum fyritøkan fremur, verður ikki fevnd. Tað er sostatt viðgerðin og ikki fyritøkan sum so, sum verður fevnd av skylduni.

Lagt verður við hesum upp til, at tað í løgtingslógini verður sama mark fyri undantakinum frá kravinum um at gera yvirlit – t.e. 250 starvsfólk – sum í GDPR. Hetta verður gjørt hóast tað óiva bara eru einstakar fyritøkur í Føroyum, sum hava fleiri enn 250 starvsfólk.

Orsøkin til, at markið ikki verður sett niður, er, at smærri fyritøkur í Føroyum skulu verða stillaðar á sama hátt, sum fyritøkur av somu stødd í ES. Var markið í Føroyum sett til 50, 100 ella 200 starvsfólk, hevði hetta havt við sær, at fyritøkur í Føroyum altíð vildu verði fevndar av meginregluni um at gera yvirlit, meðan fyritøkur av sama slag í ES í útgangsstøðinum vóru undantiknar.

Sí eisini áskoðan nr. 82 í GDPR.

**Viðgerðartrygd**

**Til § 46**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 32 í GDPR. Samsvarandi ásetingar um trygdarskipanir eru í § 31 í galdandi løgtingslóg og í trygdarkunngerðini, sum hevur heimild í § 31.

Eins og aðrar ásetingar í løgtingslógaruppskotinum, byggir ásetingin um viðgerðartrygd á eina váðagrundaða tilgongd til dátuvernd. Tað merkir, at tá mett verður um, hvat trygdarstøðið skal verða, verða serlig atlit tikin til teir váðar, sum standast av viðgerðini. Hetta hevur yvirskipað við sær, at jú størri váðin er, jú hægri krøv eru til trygdina.

Í *stk. 1* verður ásett, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin í hesi metingini serliga skulu hava fyrilit fyri verandi tøkniliga støði, verksetanarkostnaði og slagi av viðgerð, vavi, samanhangi og endamáli umfram sannlíku váðunum og álvara fyri rættindi hjá einstaklingum.

Hetta er ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri.

Víst verður til almennu viðmerkingarnar í pkt. 1.4.2. um ábyrgd og váðagrundaða tilgongd. Í stk. 1 er eisini ásett dømi um tey trygdartiltøk, sum dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin kunnu seta í verk. Dentur skal leggjast á, at talan er um dømi, og at tað sostatt er upp til dátuábyrdaran ella dátuviðgeran at meta um, hvørt eitt ella fleiri av nevndu tiltøkunum skulu setast í verk ella um tað eru heilt onnur tiltøk, sum eru neyðug til ta viðgerðina, sum skal fara fram.

Sambært *stk. 1, nr. 1* kunnu trygdartiltøkini fevna um dulnevning (pseudonymisering) ella brongling (kryptering) av persónupplýsingum.

Dulnevning skal skiljast í samsvari við allýsingina í § 6, nr. 4.

Dulnevndar persónupplýsingar eru framhaldandi persónupplýsingar og sostatt fevndar av løgtingslógaruppskotinum.

Eru persónupplýsingar anonymiseraðir, soleiðis skrásetti ikki longur kann eyðmerkjast, og er hetta óafturvendandi, eru upplýsingarnar ikki longur fevndar av løgtingslógini.

Brongling av persónupplýsing hevur – eins og dulnevning – við sær, at óviðkomandi ikki skilja tær uttan víðari, tí at eyka upplýsingar eru kravdar fyri at gera upplýsingarnar skiljandi.

Hóast talan er um dømi um trygdartiltak og ikki um krav, verður tað framhaldandi mett sum skilagott, at persónupplýsingar, sum verða fluttar elektroniskt við flutningsmiðlum uttan fyri fysiska eftirlitið hjá dátuábyrgdaranum, vera bronglaðar um trúnaður er neyðugur, eins og tað í dag er ásett í § 11, stk. 3 í trygdarkunngerðini.

Sambært *stk. 1, nr. 2* kunnu tiltøkini eisin fevna um at tryggja áhaldandi trúnað, integritet, atkomu og treystleika frá viðgerðarskipanum og viðgerðartænanstum. At dátuábyrgdarin áhaldandi skal tryggja hetta er dømi um, at dátuvernd ikki er statisk, men kann broytast yvir tíð, og at trygdartiltøkini tí leypandi eiga at verða mett.

Við integritet er at skilja, at tað skal verða møguligt at kanna eftir, um skipaninar eru rættar, álítandi og fullfíggjaðar.

Við atkomu er at skilja, at viðgerðarskipanir og tænastur altíð eru atkomuligar fyri góðkendar brúkarar, t.d. við at tryggja eina vælvirkandi back-up-skipan.

Við haldføri er m.a. at skilja tøkniliga og bygnaðarliga mótstøðuførið hjá viðgerðarskipanum og tænastum, t.d. við at tryggja tær ímóti skaðiligum tilburðum.

Sambært *stk. 1, nr. 3* kunnu tiltøkini eisini fevna um føri til rættstundis at fáa í rættlag atkomu og atgongd til persónupplýsingar í sambandi við fysikan ella tøkniligan tilburð.

Hetta hevur við sær, at dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin skal hava eina tilbúgving, sum tryggjar, at atgongd fæst til upplýsingar í sambandi við tilburðir, so sum eldsbruna, hacking ella ransomware.

Sambært *stk. 1, nr. 4* kunnu tiltøkini fevna um mannagongdir til regluligar royndarkanningar, metingar og eftirmetingar av virkisføri í sambandi við tøknuligu og bygnaðarligu tiltøkini, sum tryggja viðgerðartrygd.

Hetta hevur m.a. við sær, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin við jøvnum millumbilum royna, meta um og eftirmeta firewalls, bronglað sambond, atkomueftirlit o.s.fr.

Í stk. 2 er ásett, at avgerðandi fyri, hvat trygdarstøðið skal vera, er váðin, sum stendst av viðgerðini. Eisini er ásett ein vegleiðing til dátuábyrgdaran og dátuviðgeran um, hvat ítøkiliga metingin av váðunum skal taka støði í. Í metingini skal m.a. takast hædd fyri møguleikanum fyri, at persónsupplýsingar av tilvild ella ólógliga verða burturbeindar, burturmistar, broyttar ella minka í virði ella at óviðkomandi fáa kunnleika til persónsupplýsingar, sum eru sendar, goymdar ella á annan hátt viðgjørdar, misbrúka tær ella annars ólógliga viðgera tær.

Undir pkt. 1.4.2. í almennu viðmerkingunum um ábyrgd og váðagrundaða tilgongd eru onnur dømi um trygdartiltøk nevnd, sum kunnu verða sett í verk fyri at taka hædd fyri teimum váðunum, sum standast av eini viðgerð. Tað avgerandi er, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin gera eina samlaða meting av viðgerðini, umstøðunum rundan um og váðunum fyri tann einstaka.

Løgtingslógaruppskotið hevur við sær, at galdandi kunngerð um trygd í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum fer úr gildi. Innihaldi í kunngerðini er tó í stóran mun í samsvari við nýggju ásetingina um viðgerðartrygd í løgtingslógini. Galdandi kunngerð og praksis eftir kunngerðini kann tí nýtast sum íblástur fyri at lúka krøvini í hesi áseting – bæði fyri dátuábyrgdarar og dátuviðgerar og fyri Dátueftirlitið í sambandi við, at nýggjar vegleiðingar um viðgerartrygd skulu gerast.

Sum ein part av viðgerðartrygdini verður ásett í *stk. 3*, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin taka stig til at tryggja, at tann, sum arbeiðir fyri dátuábyrdaran ella dátuviðgeran, og tí fær atgongd til persónupplýsingar, einans viðger hesar upplýsingar eftir boðum frá dátuábyrgdaranum. Hetta kann fevna um bæði bygnaðarlig og tøknilig tiltøk.

Í *stk. 4* er ein heimild til landsstýrismannin at áseta nærri reglur um, at persónupplýsingar, sum verða viðgjørdar í ávísum kt-skipanum fyri almennu fyrisitingina, heilt ella lutvíst skulu goymast í Føroyum.

Meðan ásetingarnar í stk. 1-3 snúgva seg um viðgerðartrygd, snýr stk. 4 seg í høvuðsheitum um vernd av trygd landsins o.a. Høvuðsendamálið við ásetingini er sostatt ikki at verja einstøku persónpplýsingarnar, men at tryggja persónupplýsingar, sum eru týdningarmiklar fyri trygd landsins o.a.

Ásetingin í stk. 4 kemur ístaðin fyri og er ein endurnýggjan av sokallaðu krígsregluni í § 31, stk. 6 í galdandi løgtingslóg, sum inniber, at serlig tiltøk skuldu setast í verk fyri at tryggja, at persónupplýsingar, sum verða viðgjørdar fyri tað almenna, og sum hava serligan áhuga fyri fremmandar tjóðir, vald o.a., kunnu burturbeinast ella týnast, tá kríggj ella líknandi støður eru.

Krígsregulin í galdandi løgtingslóg hevur sostatt í útgangsstøðinum við sær, at skipanir skulu hava ein “reyðan knapp”, sum tryggjar, at persónupplýsingar og skipanir kunnu burturbeinast, t.e. destruerast, um Føroya verða hersettar.

Tann “reyði knappurin” er ikki eitt krav í uppskotinum til § 46, stk. 4. Ásetingin hevur í staðin við sær, at hon skal tryggja, at ávísar kt-skipanir eru í Føroyum, og á tann hátt tryggja føroyskt rættardømi og atgeingi fyri føroyskar myndugleikar til hesar kt-skipanir.

Sambært stk. 4 er tað landsstýrismaðurin í dátuverndarmálum, sum ásetur nærri reglur í samráð við avvarðandi landsstýrismann. Hetta hevur við sær, at tað er møguligt at tryggja eina einsháttaða siðvenju. Hetta hevur eisini við sær, at tað er eitt krav, at avvarðandi landsstýrismaður, tá nýggjar kt-skipanir skulu keypast ella verandi skipanir endurútbjóðast, skal venda sær til landsstýrismannin í dátuverndarmálum við tí fyri eyga at mett verður um, hvørt skipanin er fevnd av § 46, stk. 4.

Í metingini av, um skipanin er fevnd, inngongur m.a. um skipanin er landsumfatandi, hvørjar persónupplýsingar, hon fevnir um og mongdina, og hvønn týdning skipanin hevur fyri føroyska samfelagið.

Stk. 4 kemur ístaðin fyri § 31, stk. 6 í galdandi løgtingslóg og er galdandi fyri innkeyp av kt-skipanum eftir at henda løgtingslóg kemur í gildi. Hetta fevnir eisini um (endur) útboð og útveitan av verandi kt-skipanum.

Hetta merkir, at verandi skipanir, sum eru fevndar av § 31, stk. 6 í galdandi løgtingslóg og mettar í tí sambandi, ikki verða fevndar av nýggju ásetingini, uttan so, at skipanin verður boðin út av nýggjum o.tíl.

Sí eisini áskoðan nr. 28, 75-77, 83 og 87.

**Fráboðan til Dátueftirlitið um brot á persóndátutrygdina**

**Til § 47**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 33 í GDPR. Líknandi áseting, sum hevur við sær, at frávik skulu fráboðast Dátueftirlitinum, men sum tó ikki er so breið sum fráboðanarskyldan í GDPR og sum lagt verður upp til, er § 6, stk. 3 í trygdarkunngerðini.

Sambært *stk. 1* skal dátuábyrgdarin boða Dátueftirlitinum frá broti á persóndátutrygdina uttan óneyðugt drál og um gjørligt innan 72 tímar eftir, at hann ella hon er vorðin kunnugur við brotið.

Sum brot á persóndátutrygdina er at skilja brot á trygdina, sum førir við sær, at persónupplýsingar av tilvild ella ólógliga verða burturbeindar, burturmistar, broyttar, óheimilað givnar víðari ella at atgongd verður givin til persónupplýsingar, sum eru sendar, goymdar ella á annan hátt viðgjørdar.

Sum dømi um brot á persóndátutrygdina kunnu nevnast, at:

- onnur enn tey, sum eru heimilað av dátuábyrgdaranum at hava atgongd til persónupplýsingarnar, fáa atgongd,
- starvsfólk hjá dátuábyrgdaranum broytir ella strikar persónupplýsingar av misgáum,
- starvsfólk hjá dátuábyrgdaranum gevur við vilja ella av óvart persónupplýsingar um ein kunda víðari til ein annan kunda, ella at
- servarin hjá dátuábyrgdaranum verður fyri álopi av teldusníki, sum fær atgongd til persónupplýsingar.

Dátuábyrgdarin skal boða Dátueftirlitinum frá *eftir*, at hann er vorðin kunnugur við brotið. Hetta hevur við sær, at eitt brot á trygdina skal vera farið fram, áðrenn skyldan er galdandi. Ein varhugi um, at eitt brot møguliga er farið fram er ikki nóg mikið. Um dátuábyrgdarin hevur henda varhugan eigur hann tó at kanna hetta nærri til tess at brotið kann verða forðað. Í metingini av, um eitt brot er farið fram, kann støðið takast í, um upplýsingarnar, sum skulu latast Dátueftirlitinum sbrt. stk. 4 eru tøkar.

Dátuábyrgdarin skal boða Dátueftirlitinum frá uttan óneyðugt drál. Hetta merkir, at dátuábyrgdarin skal boða frá so skjótt, sum tað er møguligt. Dátuábyrgdarin skal ikki bíða til 72 tímar eru farnir, um hann hevur upplýsingarnar tøkar, áðrenn tímarnir eru farnir.

Tað kunnu ikki hugsast nógv føri, tá tað ikki er gjørligt hjá dátuábyrgdaranum at boða frá innan 72 tímar eftir, at hann er vorðin kunnugur við brotið, sbr. eisini stk. 5 um stigvísa fráboðan. Í teimum førum skal dátuábyrgdarin tó vera førur fyri at greiða nærri frá, hví tað ikki bar til at boða frá innan 72 tímar, sbrt. stk. 1, 2 pkt.

Sambært *stk. 2* skal dátuábyrgdarin ikki boða Dátueftirlitinum frá brotinum, um tað er ósannlíkt, at brotið hevur við sær ein váða fyri rættindi og frælsisrættindi hjá skrásetta. Tað er ein ítøkilig meting hjá dátuábyrgdaranum um brotið er fevnt av stk. 2, og Dátueftirlitið tí ikki skal fráboðast. Tað krevst ein rímiliga høg trygd fyri, at brotið ikki hevur váðar við sær.

Tað er dátuábyrgdarin, sum hevur próvbyrðuna fyri, at tað er ósannlíkt, at brotið hevur ein váða við sær. Dátuábyrgdarin skal verða førur fyri at greiða frá og grundgeva fyri hesum, um Dátueftirlitið seinni er av eini aðari fatan.

At eitt brot ikki hevur ein váða við sær fyri skrásetta kann vera tí, at dátuábyrgdarin hevur borið seg skjótt at við at rætta brotið og hevur sett trygdartiltøk í verk í mun til brotið. T.d. um dátuábyrgdarin hevur slettað persónupplýsingar av eini heimasíðu og hevur vissu fyri, at eingin hevur verið á heimasíðuni, meðan upplýsingarnar vóru tøkar. Eitt annað dømi er, at um dátuábrygdarin hevur slettað persónupplysingar, sum eru neyðugar, men sum eru tøkar í eini back-up-skipan.

Sambært *stk. 3* skal dátuviðgerin uttan óneyðugt drál eftir at viðkomandi er vorðin kunnugur við eitt brot, boða dátuábyrgdaranum frá brotinum. Fráboðanarskyldan hjá dátuviðgeranum er galdandi í øllum førum – t.e. eisini um hann ella hon metir, at tað er ósannlíkt, at brotið hevur ein váða við sær. Henda metingin liggur sostatt hjá dátuábyrgdaranum. Tá dátuviðgerin hevur boða dátuábyrgdaranum frá, skal dátuábyrgdarin sostatt meta um, um stk. 2 kann brúkast.

Í *stk. 4* er greitt frá, hvørjar upplýsingar fráboðanin frá dátuábyrgdaranum til Dátueftirlitið skal innihalda.

Fráboðanin skal lýsa slag av broti á persóndátutrygdina, undir hesum so vítt møguligt sløgini og umleið hvussu nógv skrásett hetta fevnir um og eisini sløgini og umleið hvussu nógvar skrásetingar av persónupplýsingum talan er um (nr. 1), upplýsa navn og samskiftisupplýsingar hjá dátuverndarfólkinum ella øðrum sambindingarliði, har fleiri upplýsingar kunnu fáast til vega (nr. 2), lýsa sannlíkar avleiðingar av brotinum (nr. 3), og lýsa tey tiltøk, sum dátuábyrgdarin hevur sett í verk ella mælir til fyri at handfara brotið (nr. 4).

Lagt verður upp til, at Dátueftirlitið ger eina vegleiðing, sum nærri nágreinar ásetingina um fráboðan, undir hesum um hvørji brot skulu fráboðast.

Er ikki møguligt hjá dátuábyrgdaranum at lata upplýsingar í einum, kunnu upplýsingarnar latast stigvíst, sbrt. *stk. 5*.

Sambært *stk. 6* skal dátuábyrgdarin skjalfesta øll brot á persóndátutrygdina. Skjalfestingin kann m.a. brúkast, tá Dátueftirlitið kannar um greinin er hildin.

Skyldan at skjalfesta er galdandi fyri *øll* brot. Tað merkir, at eisini brot, sum *ikki* verða fráboða Dátueftirlitinum, tí tey ikki hava ein váða við sær fyri skrásetta, skulu skjalfestast. Á henda hátt verður tað m.a. møguligt hjá Dátueftirlitinum í sambandi við eftirlit at síggja, hvørji brot hava verið og hvussu tey eru handfarin.

Eftir ætlan skulu brot kunnu fráboðast elektroniskt, t.d. ígjøgnum heimasíðuna hjá Dátueftirlitinum.

Sí eisini áskoðan nr. 85, 87 og 88.

**Fráboðan til skrásetta um brot á persóndátutrygd**

**Til § 48**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 34 í GDPR. Líknandi áseting er ikki í galdandi løgtingslóg.

*Stk. 1* hevur við sær, at dátuánbyrgdarin – umframt at boða Dátueftirlitinum frá um brot – í teimum førum, tá brotið hevur við sær ein stóran váða fyri rættindi hjá einstaklingum, skal boða skrásetta frá uttan óneyðugt drál.

Í mun til váðametingina verður víst til pkt. 1.4.2. í almennu viðmerkingunum.

Uppskotið til §§ 47 og 48 er sett soleiðis saman, at tað eru føri, tá brot skulu fráboðast Dátueftirlitinum, men ikki skrásetta, av tí at váðagáttin ikki er tann sama. Sambært § 47 krevst *váði* og sambært § 48 krevst *stórur váði*. Hetta er m.a. fyri ikki at ørkymla skrásetta meira enn neyðugt.

Í *stk. 2* verður ásett, at fráboðanin til skrásetta skal verða á einum greiðum og skilligum máli og skal lýsa slag av broti og í minsta lagi innihalda upplýsingarnar í § 47, stk. 4, nr. 2-4. Orsøkin til, at tað verður serliga ásett, at fráboðanin skal verða greið og skillig er, at tað kann tykjast ørkymlandi fyri skrásetta at fáa boð um brot, og tí er tað týdningarmikið, at hetta verður handfarið á ein skilagóðan hátt.

Í *stk. 3* eru undantøk frá fráboðanarskylduni. Fráboðan er sbrt. *stk. 3, nr. 1* ikki neyðug um dátuábyrgdarin hevur sett í verk hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, og hesi tiltøk eru nýtt til tær persónupplýsingar, sum brotið fevnir um, serliga tiltøk, sum gera persónupplýsingarnar óskiljandi fyri tann, sum ikki hevur heimilaða atgongd til hesar.

Umfatað av hesum undantakið er t.d. tann støðan, at dátuábyrgdarin hevur mist ein geyma við persónupplýsingum burtur, men persónupplýsingarnar eru brongladar á ein slíkan hátt, at tað ikki er møguligt hjá óviðkomandi at bróta bronglanina.

Sambært *stk. 3, nr. 2* er fráboðan til skrásetta ikki neyðug, um dátuábyrgdarin hevur sett í verk eftirfylgjandi tiltøk, sum tryggja, at stóri váðin fyri rættindi hjá skrásetta, sannlíkt ikki longur er til staðar.

Dømi, sum kann verða fevnt av hesi áseting, er, at dátuábyrgdarin dagførir KT-skipanir, og hetta av misgáum hevur við sær, at atgongd verður til persónupplýsingar umvegis internetið. Dátuábyrgdarin gerst varur við brotið og syrgir beinanvegin fyri, at óheimilaða atgongdin verður latin aftur. Samstundis setur dátuábyrgdarin eina kanning í verk, sum m.a. vísir, at tað í tíðarskeiðnum skipanin var atkomulig, hava bara heimilaðir persónar hava verið á heimasíðuni.

Sambært *stk. 3, nr. 3* kann dátuábyrgdarin lata vera við at boða skrásetta frá, um hetta krevur ósamsvarandi arbeiði. Hetta er ein ítøkilig proportionalitetsmeting. Dátuábyrgdarin skal meta um týdningin av, at skrásetti fær upplýsingarnar, mótvegis arbeiðsbyrðuni hjá dátuábyrgdaranum í sambandi við fráboðanina. Um tað krevur ósamsvarandi arbeiði at kunna hvønn einstaka skrásetta, skal dátuábyrgdarin í staðin kunna alment, t.d. við tíðindaskrivi, kunning á heimasíðuni o.tíl.

Í *stk. 4* verður ásett, at um dátuábyrgdarin ikki longu hevur boðað skrásetta frá um brotið, kann Dátueftirlitið eftir at hava mett um sannlíkindini fyri, at brotið hevur við sær ein stóran váða, krevja, at dátuábyrgdarin ger hetta, ella avgera, at ein av treytunum í stk. 3 er lokin.

Sí eisini áskoðan nr. 86 í GDPR.

**Avleiðingargreining viðvíkjandi dátuvernd**

**Til § 49**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 35 í GDPR. Líknandi áseting er ikki í galdandi løgtingslóg.

Ásetingin hevur við sær, at tað í ávísum førum skal gerast ein avleiðingargreining um dátuvernd, áðrenn viðgerð kann fara fram. Ein avleiðingargreining um dátuvernd inniber, at dátubyrgdarin, áðrenn viðgerð verður framd, greinar og metir um teir vansar o.a., sum eru við viðgerðini. Hetta fyri at persónupplýsingar hjá tí einstaka verða vardar í mestan mun.

Í *stk. 1* verður ásett, at um eitt *slag* av viðgerð – serliga við atliti at slagi, vavi, samanhangi og endamáli – sannlíkt hevur við sær *stóran* vága fyri rættindi hjá skrásetta, skal dátuábyrgdarin undan viðgerðini gera eina greining av, hvørjar avleiðingar viðgerðin hevur fyri dátuverndina. Ásetingin byggir, sum undanfarnar greinar, á váðagrundaðu tilgongdina til dátuvernd. Sí pkt. 1.4.2. í almennu viðmerkingunum.

Dátuábyrgdarin skal sbrt stk. 1 gera eina ítøkiliga meting av viðgerðini og váðunum við henni. Í stk. 1 er tó víst á, at avleiðingargreining kann verða serliga viðkomandi, tá nýggj tøkni verður nýtt.

Við "nýggja tøkni" er m.a. at skilja nýtslan av biometriskum dátum, undir hesum iris-skanningar, ella samskifti við almennar myndugleikar gjøgnum "appir". Tøknin skal objektivt verða nýggj. At tað er fyrstu fer ein dátuábyrgdari nýtir eina elektroniska loysn er ikki í sær sjálvum nokk, um so er, at tøknin er nýtt av øðrum.

Tað er ikki ein treyt í stk. 1, at talan skal verða um nýggja tøkni. Um talan ikki er um nýggja tøkni, krevst sostatt ein ítøkilig meting um, um avleiðingargreining skal gerast.
Ein avleiðingargreining kann fevna um fleiri sløg av viðgerðum, sum hava líknandi stóran váða við sær.

Í *stk. 2* eru nevnd trý dømi um sløg av viðgerð, sum hava við sær, at ein avleiðingargreining er kravd. Stk. 2 er ikki úttømandi.

Sambært stk. 2 skal avleiðingargreining gerast í sambandi við eina skipaða og víðfevnda meting av persónligum viðurskiftum um einstaklingar, sum er grundað á automatiska viðgerð, og sum er grundarlag fyri avgerðir, sum hava rættarvirknað fyri einstaklingin ella á samsvarandi hátt munandi ávirka viðkomandi (nr. 1), viðgerð í stórum av viðkvæmum persónupplýsingum, sambært § 11, stk. 1 (nr. 2) ella umfatandi og skipaða yvirvøku av alment atkomiligum øki (nr. 3).

Stk. 2 skal lesast saman við áskoðan nr. 91, sum lýsir tey føri, tá avleiðingargreining skal gerast. Alment kann sigast, at tey dømi, sum verða nevnd í stk. 2, hildi saman við stk. 1 og áskoðan nr. 91 hevur við sær, at virkisøki er smalt, og at dátuábyrgdarin sostatt í flestu førum í sambandi við "vanliga" viðgerð *ikki* skal gera eina avleiðingargreining.

Dátueftirlitið fer við ítøkiligari ráðgeving og almennari vegleiðing at greina kravið um avleiðingargreining og nær greiningin skal gerast.

Í stk. 3 og stk. 4 verður ásett, at Dátueftirlitið ger og almannakunngerð listar yvir sløg av viðgerðum sum krevja ella ikki krevja avleiðingargreining. Listarnir eru ikki úttømandi, men dømi um viðgerðir, sum ávikavist krevja og ikki krevja avleiðingargreining.

**Til § 50**
Í § 50 verður nærri ásett, hvat ein avleiðingargreining skal fevna um.

Í *stk. 1* verður ásett, at avleiðingargreiningin í minsta lagi skal fevna um eina skipaða lýsing av ætlaðu viðgerðini og endamálinum við viðgerðini, undir hesum heimilaðu áhugamálini, sum verða fylgd av dátuábyrgdaranum (nr. 1), eina meting av, um viðgerðin eru neyðug og stendur í rímiligum lutfalli við endamálið (nr. 2), eina meting av váðunum fyri rættindi hjá teimum skrásettu (nr. 3), og tey tiltøk, sum eru ætlaði fyri at ganga váðunum á møti, undir hesum trygdir, trygdarfyriskipanir og mekanismur, sum kunnu tryggja dátuvernd og ávísa at henda løgtingslóg verður hildin (nr. 4).

*Stk. 1, nr. 1* skal skiljast soleiðis, at tað skal verða ein skipað lýsing av teimum viðgerðum, sum persónupplýsingarnar verða við í. Persónupplýsingarnar skulu verða greitt lýstar og allýstar. Greiningin skal eisini innihalda eina lýsing av endamálinum við viðgerðini, undir hesum tey heimilaðu áhugamálini, sum dátuábyrgdarin fylgir.

*Stk. 1, nr. 2* hevur m.a. til endamáls at tryggja, at tað einans eru persónupplýsingar, sum eru neyðugar, sum verða viðgjørdar, og at fyribyrgja dátusamanstúving, t.e. at dátuábyrgdarin savnar saman fleiri persónupplýsingar enn neyðugt fyri at røkka endamálinum.

Sambært *stk. 1, nr. 3* skal greiningin innihalda eina meting av váðunum fyri tey skrásettu. Rættindini hjá teimum skrásettu skulu sostatt metast aftur ímóti ætlaðu viðgerðini og endamálini við henni.

*Stk. 1, nr. 4* skal lesast saman við nr. 3, av tí at tiltøkini, sum verða sett í verk skulu standa mát við váðarnar við viðgerðini.

Dátuábyrgdarin kann í sambandi við, at ein avleiðingargreining skal gerast, savna sjónarmið frá teimum skrásettu um dátuábyrgdarin metir, at tað er neyðugt ella gagnligt at hoyra hesi sjónarmið. Um dátuábyrgdarin velur at hoyra sjónarmið hjá skrásettu, so eigur hetta ikki fara ímóti handilsligum ella samfelagsligum áhugamálum ella gera seg inn á trygdina við viðgerðini.

Sambært *stk. 2* skal dátuábyrgdarin gjøgnumganga viðgerðina av nýggjum, um broyting er í váðunum, fyri at meta um, um viðgerðin er í samsvari við tað greining, sum er gjørd. Hetta hevur við sær eina skyldu fyri dátuábyrgdaran altíð at fylgja við og áhaldandi tryggja at viðgerðin er í samsvari við greiningina.

**Til § 51**
Í § 51 verður ásett, at í teimum førum, tá ein avleiðingargreining um dátuvernd er gjørd í sambandi við, at ein løgtingslóg er komin í gildi, so er ikki neyðugt við eini avleiðingargreining í sambandi við ítøkiliga viðgerð.

Tann almenna metingin, sum er gjørd í sambandi við, at løgtingslógin er gjørd og viðgjørd í landsstýrinum, Løgtinginum o.a., er nøktandi.

Um avleiðingargreining um dátuvernd (§§ 49-51) sí eisini áskoðan nr. 75-77, 84, 89-93 og 95.

**Ummæli frá Dátueftirlitinum áðrenn viðgerð**

**Til § 52**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 36 í GDPR. Ásetingin hongur neyvt saman við ásetingunum um avleiðingargreining, og tí er líknandi áseting ikki at finna í galdandi løgtingslóg, tó at samskifti við Dátueftirlitið – t.d. í sambandi við loyvi ella ummæli – ikki er ókent í galdandi løgtingslóg.

Ásetingin hongur sum nevnt neyvt saman við ásetingunum um avleiðingargreining um dátuvernd. Ásett verður í *stk. 1*, at um ein avleiðingargreining um dátuvernd vísir, at viðgerðin hevur við sær stóran váða, sum dátuábyrgdarin ikki fær avmarkað, skal dátuábyrgdarin hoyra Dátueftirlitið, áðrenn viðgerð verður sett í verk.

Skyldan at biða um ummæli frá Dátueftirlitinum er sostatt einans galdandi í teimum førum, tá avleiðingargreiningin vísir, at viðgerðin hevur við sær stóran váða fyri tey skrásettu og dátuábyrgdarin ikki fær avmarkað henda váðan, og dátuábyrgdarin hóast hetta velur, at viðgerðin skal fara fram.

Um ein avleiðingargreining um dátuvernd vísir, at váðin er stórur fyri tey skrásettu, kann dátuábyrgdarin broyta viðgerðina ella seta onnur trygdartiltøk í verk, so at váðin ikki longur er stórur. Hetta hevur við sær, at kravið um ummæli frá Dátueftirlitinum fellur burtur.

Í *stk. 2* verða ásettar freistir fyri Dátueftirlitið í teimum førum, at eftirlitið metir, at ein viðgerð – sum Dátueftirlitið skal ummæla – er brot á løgtingslógina, t.d. tí at dátuábyrgdarin ikki hevur eyðmerkt ella avmarkað váðan á nøktandi hátt. Ásett verður at Dátueftirlitið innan

hesar freistir skal veita dátuábyrgdaranum skrivliga ráðgeving og annars kann nýta sínar heimildur sambært løgtingslógini.

Tað er ikki krav, at Dátueftirlitið skrivliga vendir aftur til dátuábyrgdaran, um Dátueftirlitið metir, at viðgerðin er í samsvari við løgtingslógina. Dátueftirlitið skal í allari málsviðgerð tó halda vanliga fyrisitingarrættin og tær treytir, sum fylgja við.

Um Dátueftirlitið ikki vendir aftur til dátuábyrgdaran innan freistirnar, hevur hetta ikki við sær, at Dátueftirlitið er útilokað frá seinni at nýta sínar heimildir eftir løgtingslógini í sambandi við viðgerðina. Ein manglandi afturmelding er sostatt ikki ein almenn góðkenning ella blástempling av øllum greinum av viðgerðini, sum var løgd fyri eftirlitið. Tað er framhaldandi dátuábyrgdarin – og ikki Dátueftirlitið – sum hevur ábyrgdina av at tryggja, at ein viðgerð til eina og hvørja tíð er í samsvari við løgtingslógina, sbrt. eisini pkt. 1.4.2. í almennu viðmerkingunum.

Í *stk. 3* er ásett, hvørjar upplýsingar dátuábyrgdarin skal lata Dátueftirlitinum í sambandi við eina hoyring eftir stk. 1. Hetta eru upplýsingar, sum gera tað møguligt hjá Dátueftirlitinum at taka støðu til viðgerðina. Talan er m.a. um endamálið við ætlaðu viðgerðini (nr. 2), trygdartiltøk (nr. 3) og avleiðingargreiningina um dátuvernd (nr. 5).

Sí eisini áskoðan nr. 94-96 í GDPR.

**Val av dátuverndarfólki**

**Til § 53**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 37 í GDPR. Líknandi áseting er ikki í galdandi løgtingslóg.

Dátuverndarfólk er ein nýggjur persónur í føroyskum dátuverndarhøpi. Dátuverndarfólkið – á enskum kallað Data Protection Officer (DPO) – hevur m.a. til uppgávu at ráðgeva dátuábyrgdaranum um viðurskifti viðvíðkjandi dátuvernd og á tann hátt verða við til at tryggja, at persónupplýsingar hjá tí einstaka verða viðgjørdir á ein tryggan hátt.

Í § 53 verður ásett í hvørjum førum dátuverndarfólk skulu verða tilnevnd.

Í *stk. 1, nr. 1* verður lagt upp til, at dátuverndarfólk skal verða tilnevnd, um dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin er ein almennur myndugleiki. Hetta hevur við sær eina skyldu til allar almennar myndugleikar. Almennir myndugleikar skal skiljast í samsvari við § 1, stk. 1 í fyrisitingarlógini (løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg).

Í stk. 1, nr. 2 og 3 verður ásett, í hvørjum førum privatar fyritøkur skulu tilnevna eitt dátuverndarfólk.

Sambært *stk. 1, nr. 2* skal eitt dátuverndarfólk verða tilnevnt, tá kjarnuvirksemi dátuábyrgdarans ella dátuviðgerans er viðgerð, sum sambært sínum eyðkenni, vavi ella endamáli krevur umfatandi regluliga og skipaða yvirvøku av skrásettum persónum.

Sambært *stk. 1, nr. 3* skal eitt dátuverndarfólk eisini verða tilnevnt, tá kjarnuvirksemi dátuábyrgdarans ella dátuviðgerans er umfatandi viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum.

Fyri at ein privat fyritøka er fevnd av skylduni at tilnevna eitt dátuverndarfólk, skulu sostatt tríggjar treytir verða loknar.

Í stk. 1, nr. 2 og 3 eru tvær felags treytir. Í bæði nr. 2 og nr. 3 verður víst til, at viðgerðin av persónupplýsingum skal vera *kjarnuvirksemi* hjá dátuábyrgdara ella dátuviðgera. Harumframt skal viðgerðin verða *umfatandi*.

Fyrsta treytin um *kjarnuvirksemi* skal skiljast so, at viðgerðin av persónupplýsingum skal vera høvuðsvirksemi hjá fyritøkuni og ikki einans hjávirksemi.

Hetta hevur við sær, at hóast ein fyritøka regluliga viðgerð persónupplýsingar, hevur hetta ikki altíð við sær, at kravið í stk. 1, nr. 2 ella 3 um kjarnuvirksemi er uppfylt. T.d. er tað í útgangsstøðinum ikki kjarnuvirksemi, tá ein fyritøka í sambandi við kundasamskifti, sølu ella starvsfólkamál viðgerð persónupplýsingar. Hinvegin er tað kjarnuvirksemi um dátuábyrgdarin ella dátuviðgerðin bjóða eitt produkt, sum inniber viðgerð av persónupplýsingum.

Sum dømi um fyritøkur, hvørs kjarnuvirksemi er viðgerð av persónupplýsingum, kunnu nevnast fyritøkur, sum bjóða goyming (hosting) av persónupplýsingum, undir hesum útbjóðarar av marknaðarkanningum. Tað kann eisini verða, at produktið er óloysiligt samantvunnið við viðgerðina av persónupplýsingum, soleiðis at talan verður um ein kjarnuaktivitet. Tað er t.d. tryggingarfeløg, sum bjóða tryggingar grundaðar á persónupplýsingar, sum eru savnaðar um verandi og komandi kundar. Eisini útbjóðarar av tele- og internetið hava viðgerð av persónupplýsingum sum kjarnuvirksemi.

Onnur treytin er, at viðgerðin skal vera umfatandi. Um ein viðgerð er *umfatandi* er ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri.

Í áskoðan nr. 91 stendur m.a., at umfatandi viðgerð kann fevna um viðgerð av eini ógvuliga stórari mongd av persónupplýsingum regionalt, nationalt ella internationalt, sum viðkoma nógvum skrásettum persónum og sum sannlíkt hevur við sær stóran váða. Víðari stendur, at viðgerð, sum ein lækni ella sakførari fremur um sjúklingum ella kundum ikki er at skilja sum umfatandi.

Fevnt av hugtakinum *umfatandi* er t.d. viðgerð av upplýsingum um sjúklingar á einum sjúkrahúsi. Í útgangsstøðinum kann við eisini viðgerð av kundaupplýsingum hjá tryggingarfeløgum ella bankum vera *umfatandi* viðgerð. Tað sama er galdandi fyri útbjóðarar av tele- og internetið.

Samanumtikið kann sigast, at tað í metingini av um ein viðgerð er umfatandi skal takast støði í m.a. mongdini av upplýsingum, mongdini av skrásettum persónum og tíðarskeiðið upplýsingarnar skulu viðgerðast. Eisini landafrøðiliga øki viðgerðin fevnir um, kann innganga.

Umframt felags treytirnar um, at viðgerðin skal fevna um *kjarnuvirksemi* og vera *umfatandi*, er eisini ein triðja treyt, sum skal verða lokin, áðrenn ein fyritøka hevur skyldu at seta eitt dátuverndarfólk.

Triðja treytin er, at talan skal vera um yvirvøku av skrásettum, sum er reglulig og skipað (stk. 1, nr. 2) *ella* fevnir um viðkvæmar persónupplýsingar, sbrt. § 11, stk. 1 (stk. 1, nr. 3).

At talan skal vera um yvirvøku av skrásettum, sum er reglulig og skipað, fevnir m.a. um sporing av atferð á internetinum, undir hesum sporing, sum hevur við sær, at tað er møguligt at profilera skrásett við tí endamáli at greina ella meta um atferð, hugburð ella sertokka. Reglulig og skipa yvirvøka kann eisini fara fram uttan fyri internetið. Fevnt er eisini rakstur av tele- og internetið og tænastum, sum eru knýttar at hesum, yvirvøka av fitness- og heilsuupplýsingum á berbarum eindum, profilering við tí endamáli at váðameta (t.d. í mun til lántøku ella trygging), trúskaparskipanir (loyalitetsprogram) o.s.fr.

Fyri at verða fevnd av stk. 1, nr. 3 skal ein viðgerð fevna um viðkvæmar persónupplýsingar, sbrt. § 11, stk. 1.

Eru hesar tríggjar treytir loknar, skal ein privat fyritøka eins og almennir myndugleikar tilnevna eitt dátuverndarfólk.

Í stk. 1 er ásett í hvørjum førum dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin *skulu* tilnevna eitt dátuverndarfólk. Tað er møguligt hjá dátuábyrgdarum ella dátuviðgerum uttanfyri hesi føri at velja at tilnevna eitt dátuverndarfólk.

Velur dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin at tilnevna eitt dátuverndarfólk, skulu reglurnar í §§ 54-58 fylgjast. Orsøkin er, at um eitt starvsfólk fær tær uppgávur og tær skyldur, sum eitt dátuverndarfólk hevur, skal viðkomandi eisini hava ta somu verju. Arbeiðsgevarin kann tískil ikki fáa ágóðarnar av at hava eitt dátuverndarfólk uttan eisini at vera fevndur av skyldunum.

Í *stk. 2* verður ásett, at eitt samtak kann velja eitt felags dátuverndarfólk og í *stk. 3* verður ásett, at almennir myndugleikar kunnu velja eitt felags dátuverndarfólk um hetta er í samsvari við bygnað og stødd.

At tað er ásett, at eitt samtøk og myndugleikar kunnu tilnevna felags dátuverndarfólk hevur ikki við sær, at felags dátuverndarfólk eru útilokaði í øðrum førum. Tað er sostatt møguligt, at ymisk samtøk ella samstørv hava felags dátuverndarfólk. Eisini er møguligt, at kommunur hava felags dátuverndarfólk.

Tað er ein tó ein grundleggjandi treyt fyri at tilnevna felags dátuverndarfólk, at viðkomandi er førur fyri at røkja sínar uppgávur sambært løgtingslógini á nøktandi hátt, undir hesum, at tað ikki hevur við sær áhugamálsstríð.

Sí eisini áskoðan nr. 24, 91 og 97 í GDPR.

**Til § 54**
Í § 54 verða m.a. krøvini til førleikarnar hjá dátuverndarfólkinum ásett.

Sambært *stk. 1* skal dátuverndarfólkið tilnevnast grundað á sín fakliga førleika. Hetta fevnir m.a. um serkunnleika til dátuverndarrætt og førleikan at útinna tær uppgávur, sum dátuverndarfólkinum verða álagdar í løgtingslógini.

Í hesum liggur í øllum førum er eitt krav um, at tann persónurin sum verður tilnevndur, hevur útbúgving og royndir, sum gera, at viðkomandi er førur fyri at meta um, um viðgerð, sum fer fram og er ætlað, er í samsvari við løgtingslógina. Eisini skal persónurin vera førur fyri at røkja tær uppgávur, sum eru nevndar í § 58.

Fyri at lúka hesar treytir verður í útgangsstøðinum lagt upp til, at persónurin hevur løgfrøðiligar førleikar innan dátuverndarrætt og hevur royndir á hesum økinum. Á hvørjum støði hesir førleikar ella royndir skulu vera, veldst um viðgerðina av persónupplýsingar, undir hesum mongd, viðkvæmi og torgreidni. Tað verður við hesum ikki sett sum krav, at dátuverndarfólkið er løgfrøðingur (cand.jur). Hetta verður upp til dátuábyrgdaran ella dátuviðgeran at meta um. Í ávísum førum kann tað eisini vera skilagott, um dátuverndarfólkið hevur eina tøkniliga útbúgving ella ávísar tøkniligar førleikar.

Í *stk. 2* verður ásett, at dátuverndarfólkið kann verða starvsfólk hjá dátuábyrgdaranum ella dátuviðgeranum ella kann loysa uppgávurnar sambært einum tænastuveitingarsáttmála, t.e. sum konsulentur.

Tað er ikki við uppskotinum lagt upp til, at dátuábyrgdarin ella dátuviðgerðin skal seta nýtt fólk í starv. Starvið sum dátuverndarfólk kann sostatt vera røkt av starvsfólki, sum longu er sett, við síðuna av øðrum uppgávum, sbr. serligu viðmerkingarnar til § 55.

Í *stk. 3* verður ásett, at dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin skulu almannakunngera samskiftisupplýsingarnar hjá dátuverndarfólkinum og geva Dátueftirlitinum boð. Henda áseting skal m.a. tryggja gjøgnumskygni, og at skrásett altíð vita – ella lætt kunnu finna útav – hvør dátuverndarfólkið er, og hvar tey skulu venda sær.

**Starvið hjá dátuverndarfólkinum**

**Til § 55**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 38 í GDPR. Líknandi áseting er ikki í galdandi løgtingslóg.

Í *stk. 1* verður ásett, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu tryggja, at dátuverndarfólkið rættstundis verður tikin við upp á ráð í øllum spurningum um vernd av persónupplýsingum. Hetta kann m.a. tryggjast við, at dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin hava fastar innanhýsis mannagongdir el.líkn. viðvíkjandi spurningum um dátuvernd.

Ásetingin hevur við sær, at dátuverndarfólkið skal verða tikin við upp á ráð í øllum spurningum, sum snúgva seg um at halda hesa løgtingslóg og aðrar reglur um vernd av persónupplýsingum, undir hesum innanhýsis politikkir.

At dátuverndarfólkið skal verða tikin við upp á ráð *rættstundis* hevur í útgangsstøðinum við sær, at dátuverndarfólkið skal hava stundir at seta seg inn í málið og koma við viðmerkingum o.s.fr., *áðrenn* ein viðgerð verður sett í gongd.

Í *stk. 2* er lagt upp til, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu stuðla dátuverndarfólkinum, soleiðis at hesin kann útinna tær uppgávur, sum sambært løgtingslógini eru álagdar viðkomandi.

Hetta hevur m.a. við sær, at dátuverndarfólkið skal hava stundir at taka sær av uppgávunum, og at nokk av peningi er sett av til at røkja hesar uppgávur. Hvussu nógv tíð, orka og peningur skal setast av til hesa uppgávuna er ein ítøkilig meting, sum m.a. tekur støði í støddini av fyritøkuni ella myndugleikanum, hvørjar viðgerðir fara fram, hvussu torgreiddar tær eru, og hvørjir váðar standast av viðgerðini.

Eisini skulu dátuábyrgdarin og dátuviðgerin stuðla undir, at dátuverndarfólkið varðveitir sín sakkunnleika. Hetta kann t.d. vera við hóskandi møguleikum fyri eftirútbúgving. Dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu eisini veita dátuverndarfólkinum atgongd til persónupplýsingar og viðgerðir, av tí at hetta er neyðugt fyri, at dátuverndarfólkið kann røkja sínar uppgávur til fulnar.

Tað er umráðandi fyri dátuverndarfólkið, at hann ella hon virkar – og hevur møguleika fyri at virka – óheft í sínum starvi, sum dátuverndarfólk. Týdningurin av óheftninum framgongur m.a. av áskoðan nr. 97.

Í *stk. 3* verður sum ein partur av óheftninum ásett ein skylda fyri dátuábyrgdaran og dátuviðgeran at tryggja, at dátuverndarfólkið ikki fær kravboð um, hvussu starvið skal røkjast. Eisini verður ásett, at dátuverndarfólk ikki kunnu sigast upp ella aðramáta vera fyri agatiltøkum vegna uppgávur sínar sum dátuverndarfólk.

At dátuverndarfólk ikki kunnu sigast upp ella verða fyri øðrum agatiltøkum vegna uppgávur sum dátuverndarfólk, gevur viðkomandi eina serliga trygd, sum onnur starvsfólk ikki hava, og sum tí skerjir leiðslurættin hjá arbeiðsgevaranum. Verndin, sum dátuverndarfólk fáa, minnir um verndina, sum álitisfólk hava í sambandi við, at tey røkja álitisfólkauppgávur. Tá henda serliga trygdin verður veitt, er hetta fyri at tryggja, at dátuverndarfólk veruliga kunnu røkja sínar uppgávur á nøktandi hátt, dátuverndini og serliga skrásetta til fyrimunar.

Ásetingin hevur ikki við sær eina treytaleysa vernd ímóti uppsøgn. Dátuverndarfólk kunnu sostatt – sum onnur starvsfólk – sigast úr starvi um tey t.d. ikki røkja sínar arbeiðsuppgávur ella ikki halda starvssáttmálan.

Sum greitt frá í serligu viðmerkingunum til § 54 setur løgtingslógaruppskotið ikki sum krav, at dátuábyrgdarin ella dátuviðgerðin skal seta nýtt fólk í starv at røkja starvið sum dátuverndarfólk. Í teimum flestu førunum er starvið ikki eitt fulltíðarstarv, men er at samanlíkna við at vera álitisfólk ella trygdarumboð.

Í *stk. 4* verður tað nágreiniliga ásett, at dátuverndarfólkið kann hava aðrar uppgávur og skyldur. Hetta hevur við sær, at eitt starvsfólk hjá dátuábyrgdaranum ella dátuviðgeranum kann røkja uppgávurnar sum dátuverndarfólk sum ein part av sínum vanliga arbeiði.

Stk. 4 setur tó eisini sum krav, at dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin tryggja, at slíkar uppgávur og skyldur ikki hava við sær áhugamálsstríð, sum hevur við sær, at dátuverndarfólkið ikki fær røkt sínar uppgávur til fulnar ella í fullum óheftni. Hetta hevur m.a. við sær, at dátuverndarfólkið ikki samstundis kann hava evstu ábyrgdina av, at viðgerð fer lógliga fram. Hetta er ein ábyrgd, sum vanliga kann liggja hjá kt-stjóranum, sum sostat ikki samstundis kann vera dátuverndarfólk.

**Til § 56**
Sum liður í at tryggja óheftni hjá dátuverndarfólkinum verður í *stk. 1* ásett, at dátuverndarfólk geva frágreiðing beinleiðis til ovasta leiðslustig hjá dátuábyrgdaranum ella dátuviðgeranum. Dátuverndarfólkið kann geva frágreiðing regluliga ella eftir tørvi, so sum fyritøkan ella myndugleikin velja at innrætta seg.

Hvat ovasta leiðslustig er, veldst um bygnaðin hjá dátuábyrgdaranum ella dátuviðgeranum.

Í privatum fyritøkum, sum hava eina nevnd og eina stjórn, er tað stjórnin, sum tekur sær av dagliga rakstrinum, sum er at meta sum ovasta leiðslustig í mun til hesa áseting, sjálvt um tað bygnaðarliga er nevndin, sum hevur evsta valdið í fyritøkuni.

Fyri almennar myndugleikar er ovasta leiðslustig at skilja sum ovasta fyrisitingarliga leiðsla. Í kommunum gevur dátuverndarfólkið frágreiðing beinleiðis til kommunustýrið uttan at hetta krevur viðgerð í serligari nevnd áðrenn.

Í *stk. 2* verður ásett, at skrásett kunnu seta seg í samband við dátuverndarfólkið viðvíkjandi øllum spurningum um viðgerð av teirra upplýsingum og um útinnanina av teirra rættindum sambært hesi løgtingslóg.

**Til § 57**
Í § 57 verður ásett ein serlig tagnarskylda fyri dátuverndarfólk í privatum fyritøkum tilnevnd sambært § 54, stk. 1, nr. 2 og 3. Ásett verður, at hesi dátuverndarfólk ikki óheimilað hava loyvi at víðarigeva ella brúka upplýsingar, sum er komin til teirra kunnleika gjøgnum starvið sum dátuverndarfólk.

Dátuverndarfólk sum eru vald av almennum myndugleika eru fevnd av vanligu tagnarskylduni fyri almenn starvsfólk í § 152 og §§ 152 a-152 f í revsilógini.

**Uppgávur hjá dátuverndarfólki**

**Til § 58**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 39 í GDPR. Líknandi áseting er ikki í galdandi løgtingslóg.

Meðan §§ 55-57 yvirskipa áseta karmar fyri starvið hjá dátuverndarfólki, verður lagt upp til at áseta meira ítøkiligt í § 58, hvørjar uppgávur dátuverndarfólkið *í minsta lagi* skal hava. Dátuverndarfólk kunnu sostatt gott hava fleiri uppgávur enn tær nevndu. Tað er tó týdningarmikið at hava fyri eyga, at dátuverndarfólkið hevur førleikar til og møguleika fyri at røkja allar sínar uppgávur og at røkja tær á ein slíkan hátt, at hetta ikki er í stríð við §§ 54-57 annars.

Ásett verður í *stk. 1*, at dátuverndarfólkið í minsta lagi skal kunna og ráðgeva dátuábyrgdaran, dátuviðgeran og starvsfólk, sum viðgera persónupplýsingar, um teirra skyldur sambært løgtingslógini (nr. 1), halda eyga við, at løgtingslógin, aðrar reglur o.a. um dátuvernd verða hildnar (nr. 2), ráðgeva, tá ið biðið verður um tað, um avleiðingargreiningina um dátuvernd og at halda eyga við, at hon verður gjørd í samsvari við reglurnar (nr. 3), samstarva við Dátueftirlitið (nr. 4) og virka sum samskiftisstað hjá Dátueftirlitinum í spurningum um viðgerð av persónupplýsingum (nr. 5).

Leggjast skal til merkis, at sjálvt um dátuverndarfólk skulu halda eyga við, at løgtingslógin verður hildin, so hevur hetta ikki við sær, at dátuverndarfólkið hevur ábyrgdina av, at so er. Ábyrgdin liggur framhaldandi hjá dátuábyrgdaranum, sbr. § 7, stk. 2 og § 37 og serligu viðmerkingarnar til hesar ásetingar. Varnast dátuverndarfólkið, at løgtingslógin ikki verður hildin, skal viðkomandi gera vart við hetta – eftir umstøðunum til ovasta leiðslustig, sbr. § 56.

Í *stk. 2* er lagt upp til, at eisini dátuverndarfólk skulu arbeiða váðagrundað, og tí í sambandi við sínar uppgávur skal taka hóskandi fyrilit fyri tí váða, sum er knýttur at viðgerðini, við

atliti at slagi, vavi, samanhangi og endamáli við viðkomandi viðgerð. Víst verður til pkt. 1.4.2. í almennu viðmerkingunum.

## Kapittul 6
## Flutningur av persónupplýsingum til útlond, triðjalond ella millumtjóðafelagsskapir

Kapittulin byggir í høvuðsheitum á innihaldið í kapitli V í GDPR. Tillagingar eru gjørdar, so ásetingarnar passa til Føroyar, sum ikki eru limir í ES, og føroysk viðurskifti.

Ásetingar eru í kapitli 5 í galdandi løgtingslóg um flutning av persónupplýsingum til útlond. Lagt er tó upp til ávísar broytingar, sbr. pkt. 1.4.8. í almennu viðmerkingunum og serligu viðmerkingarnar niðanfyri. Største broytingin er, at skilt verður ímillum útlond og triðjalond, tá persónupplýsingar skulu flytast úr Føroyum.

Reglurnar um flutning av persónupplýsingum úr Føroyum skulu tryggja, at tað ikki verður máað undan tí verndarstøði, sum henda løgtingslóg tryggjar. Tí er útgangsstøðið, at persónupplýsingar bara kunnu flytast til lond, sum tryggja – í minsta lagi – sama verndarstøði. Hetta hevur eisini við sær, at reglurnar um flutning í løgtingslógini í útgangsstøðinum eisini skulu verða loknar, um persónupplýsingarnar verða fluttar víðari úr landinum, sum tær av fyrstan tíð vóru fluttar til, tá tær vóru fluttar úr Føroyum.

Reglurnar um flutning skulu eisini tryggja, at upplýsingar kunnu flytast frítt, tá trygdin er í lagi. Hetta er m.a. í samsvari við endamálið við løgtingslógaruppskotinum, sbr. § 1.

Tá persónupplýsingar skulu flytast úr Føroyum skal heimild vera fyri hesum í kapitli 6 í hesum løgtingslógaruppskotið, umframt at hinar reglurnar í uppskotinum skulu verða loknar, herundir reglurnar um viðgerðarheimild.

### Flutningur av persónupplýsingum til útlond

**Til § 59**
Lagt verður upp til, at tað í § 59 verður ásett, at flutningur av persónupplýsingum til útlond ikki krevur serliga góðkenning ella loyvi. Útlond eru, sbrt. § 6, nr. 14, lond, sum eru liiur í Evopeiska Samveldinum (ES) ella í Evropeiska Búskaparliga Samstarvinum (EBS).

Orsøkin til, at tað verður lagt upp til, at flutningur av persónupplýsingum til hesi londini ikki skal verða tengt at góðkenning ella loyvi er, at verndarstøðið í hesum londum verður mett at vera nóg høgt, og at veita skrásettum í Føroyum eina nøktandi trygd.

Ásetingin hevur við sær, at um treytirnar fyri viðgerð av persónupplýsingum o.a. í løgtingslógini eru loknar, t.e. at heimild er fyri viðgerðini o.s.fr., kunnu persónupplýsingar flytast til útlond uttan loyvi ella góðkenning. Ásett er tó m.a. í reglunum um kunningarskyldu og innlit, at skrásetti skal kunnast um flutningin til útlond. Tað hevur við sær, at skrásetti í øllum førum veit, at persónupplýsingar um hann ella hana verða fluttar úr Føroyum.

Viðmerkjast skal, at persónupplýsingar *úr* ES kunnu flytast til góðkend triðjalond *uttan* serligt loyvi ella góðkenning. Persónupplýsingar kunnu sostatt í dag – og eisini framhaldandi um Føroyar aftur verða góðkendar, sum trygt triðjaland – flytast úr ES til Føroya uttan serligt loyvi ella góðkenning frá viðkomandi dátueftirliti.

Henda broyting í mun til galdandi rætt skal serliga lætta um fyrisitingarligu byrðuna hjá privatum fyritøkum, sum samskifta við ES-lond, og sum nú ikki skulu boða Dátueftirlitinum frá flutninginum ella fáa loyvi til flutningin (um talan er um viðkvæmar persónupplýsingar).

**Flutningur, sum er grundaður á avgerð um nøktandi verndarstøði**

**Til § 60**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 45 í GDPR. Líknandi áseting er í § 16 í galdandi løgtingslóg.

Tá persónupplýsingar skulu flytast til *triðjalond* – t.e. lond, sum ikki eru limir í Evopeiska Samveldinum (ES) ella í Evropeiska Búskaparliga Samstarvinum (EBS), sbr. § 6, nr. 15 – skal heimild verða fyri hesum í § 60, § 61, § 62 ella § 63.

Útgangsstøðið er, at flutningurin skal fara fram við heimild í § 60. Um heimild ikki er í § 60, kann heimild finnast í § 61. Er eingin heimild í § 61, kann heimild finnast í § 62 o.s.fr.

Er eingin heimild í nevndu greinum, kann flutningurin *ikki* fara fram. Umframt at hava heimild at flyta persónupplýsingarnar til eitt triðjaland, skal dátuábyrgdarin lúka hinar treytirnar í løgtingslógini, her undir hava heimild fyri viðgerðini.

Í *stk. 1* verður ásett, at persónupplýsingar kunnu flytast til eitt triðjaland ella ein millumtjóðfelagsskap uttan góðkenning ella loyvi frammanundan, um landsstýrismaðurin hevur tikið avgerð um, at triðjalandið, eitt øki ella ein ella fleiri ávísir geirar í hesum triðjalandi, ella millumtjóðfelagsskapur, hevur eitt nøktandi verndarstøði.

Hesi triðjalond o.a., sum landsstýrismaðurin góðkennir verða vanliga nevnd trygg triðjalond. Í mun til galdandi løgtingslóg verður ítøkiliga ásett, at landsstýrismaðurin – umframt at góðkenna eitt heilt land – kann góðkenna eitt øki ella ein ella fleiri ávísar geirar í einum triðjalandi, ella millumtjóðfelagsskapir, um hesi hava eitt nøktandi verndarstøði.

Sum greitt er frá í m.a. pkt. 1.2.3. í almennu viðmerkinunum er tað so í dag, at hóast landsstýrismaðurin hevur góðkent eitt triðjaland sum trygt, skal flutningur av persónupplýsingum til hetta triðjaland annaðhvørt fráboðast Dátueftirlitinum ella grundast á viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum.

Við hesum uppskoti til § 60 verður henda skipan strikað. Hevur landsstýrismaðurin góðkent eitt triðjaland, eitt øki ella ein ella fleiri geirar í triðjalandinum, ella ein millumtjóðafelagsskap, sum trygt, krevur flutningur av persónupplýsingum til tað landið ikki góðkenning ella loyvi.

Í *stk. 2* verður lagt upp til, at landsstýrismaðurin eftir ítøkiliga meting av verndarstøðinum, og eftir ummæli frá Dátueftirlitinum, ásetir, at eitt triðjaland, eitt øki ella ein ella fleiri ávísir geirar í einum triðjalandi, ella ein millumtjóðafelagsskapur, tryggja eitt nøktandi verndarstøði.

Lagt verður upp til, at landsstýrismaðurin eins og í dag í kunngerð ásetir, hvørji lond verða mett at hava eitt nøktandi verndarstøði.

Í artikli 45 í GDPR er nágreiniliga ásett, hvat ES-nevndin skal leggja dent á í síni meting av, um verndarstøðið í einum triðjalandi o.a. er nøktandi. Henda grein er m.a. grundað á siðvenju hjá ES-dómstólinum, og er í ávísan mun kodifisering av galdandi ES-rætti. Lagt verður upp til, at landsstýrismaðurin skal leggja dent á hesi somu viðurskifti í síni meting. Á henda hátt verður føroysk siðvenja meinlík ES-siðvenju á hesum økinum.

Viðurskiftini, sum landsstýrismaðurin serliga skal leggja dent á í síni meting eru:

1) rættarstatsmeginregluna, virðing fyri mannarættindunum og teimum grundleggjandi frælsisrættindunum, viðkomandi lóggávu, bæði almenna og geiralóggávu, her undir viðvíkjandi almennari trygd, verju, trygd hjá statinum og revsirætt og atgongd til persónupplýsingar hjá almennum myndugleikum, her undir reglur fyri víðarigeving av persónupplýsingum til eitt annað triðjaland ella ein annan millumtjóðafelagsskap, rættarpraksis eins og virkin rættindi hjá teimum skrásettu, sum kunnu handhevjast, og virkin umsitingarlig og rættarlig roynd hjá teimum skrásettu, um persónupplýsingarnar flytast.
2) um eitt ella fleiri vælvirkandi óheft dátueftirlit eru í triðjalandinum, ella sum millumtjóðfelagsskapurin er undir eftirliti av, við ábyrgd av at tryggja og handhevja, at dátuverndarrreglurnar haldast, her undir nøktandi handhevilsilsheimildir, fyri at hjálpa og ráðgeva teimum skrásettu, tá ið tey gera brúk av sínum rættindum, og fyri at samarbeiða við dátueftirlitsmyndugleikan í Føroyum, og
3) teimum millumtjóða skyldum, sum triðjalandið ella millumtjóðafelagsskapurin hevur átikið sær, ella aðrar skyldur, sum fylgja av rættarliga bindandi millumtjóðasáttmálum ella instrumentum, og av luttøku í multilateralum ella regionalum skipanum, serliga viðvíkjandi vernd av persónupplýsingum, sum triðjalandið ella millumtjóðafelagsskapurin luttekur í.

Lagt verður upp til, at tá ES-nevndin hevur tikið avgerð um, at eitt triðjaland o.a. hevur eitt nøktandi verndarstøði, kann landsstýrismaðurin leggja stóran dent á hesa avgerðina í síni meting av, um verndarstøðið er nøktandi. Hetta hevur við sær, at góðkendu londini í útgangsstøðinum eru tey somu, og at føroyskar fyritøkur tí t.d. hava sama grundarlag at virka á, sum samsvarandi fyritøkur í ES.

Í *stk. 3* verður ásett, at tað er Dátueftirlitið, sum skal fylgja við, um verndarstøðið í einum góðkendum triðjalandi o.a. framvegis er at meta sum nøktandi. Tað er sostatt umráðandi, at Dátueftirlitið heldur eyga við, um broytingar fara fram í triðjalandinum o.a., sum kunnu hava við sær, at ásetingin hjá landsstýrismanninum skal broytast. Eisini í hesum arbeiðinum kann Dátueftirlitið hava eyga við, hvørjar avgerðir verða tiknar hesum viðvíkjandi í ES.

Metir Dátueftirlitið, at verndarstøðið ikki longur er nøktandi, boðar Dátueftirlitið uttan drál landsstýrismanninum frá hesum.

Tá landsstýrismaðurin fær eina fráboðan frá Dátueftirlitinum, skal landsstýrismaðurin skjótast gjørligt taka støðu til, um broytingar skulu gerast í galdandi ásetingum. Landsstýrismaðurin kann í hesum sambandi gera av, at ásetingin um nøktandi verndarstøði skal broytast, t.d. ikki fevna um eitt heilt land, men bara ávísar geirar í einum landi. Landsstýrismaðurin kann eisini gera av, um broytingin skal verða fyribils ella endalig.

Tekur landsstýrismaðurin avgerð um at taka avgerðina um nøktandi verndarstøði aftur o.tíl., skal allur flutningur av persónupplýsingum til viðkomandi triðjaland o.a. í útgangsstøðinum

steðga. Flutningur til hesi lond kann eftir hetta í einstøkum undantaksførum fara fram, um treytirnar í §§ 61-64 eru loknar.

Sí eisini áskoðan nr. 103-107 í GDPR.

**Flutningur til triðjalond o.a., sum er grundaður á fullgóða trygd**

**Til § 61**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 46 í GDPR. Líknandi áseting er í § 17, stk. 2 í galdandi løgtingslóg.

Ásetingin nágreinar nær persónupplýsingar kunnu flytast til triðjalond o.a., sum landsstýrismaðurin *ikki* hevur góðkent sum trygg.

Í *stk. 1* verður ásett, at slíkur flutningur kann fara fram, um dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin veita fullgóða trygd, og treytað av, at rættindi og virkin rættarstig fyri skrásett eru tøk.

Endamálið við ásetingini er at tryggja, at dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin seta tiltøk í verk, sum tryggja, at dátuverndarreglur verða hildnar, og at rættindi hjá skrásettum, sum kunnu handhevjast, eru atkomilig, eins og virkin rættarstig, her undir fyrisitingarlig ella rættarlig roynd, eru møgulig antin í Føroyum ella í triðjalandinum.

Fullgóða trygdin skal viga upp ímóti, at landsstýrismaðurin ikki hevur tikið avgerð um nøktandi verndarstøði, og at landið sum so, tí í útgangsstøðinum ikki veitir nóg góða trygd.

Í *stk. 2* er greitt frá, hvussu dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin kunnu veita fullgóða trygd.

Hetta kann sbrt. *stk. 2, nr. 1* verða í einum bindandi skjali, sum kann handhevjast, millum almennar myndugleikar.

Tað er eitt krav fyri at stk. 2, nr. 1 kann brúkast, at talan er um almennar myndugleikar í Føroyum og í einum triðjalandi, at skjalið – ein avtala á skattaøkinum, eitt memorandum o.tíl. – er bindandi fyri báðar partar, og at skjalið kann handhevjast.

Í hesum skjali skulu rættindi hjá skrásettum og virkin rættarstig tryggast.

Í stk, 2, nr. 2 er ásett, at fullgóð trygd eisini kann veitast í standardásetingum um dátuvernd, sum eru góðkendar av landsstýrismanninum eftir ummæli frá Dátueftirlitinum.

Í GDPR er tilsvarandi áseting um, at ES-nevndin ella eftirlitsmyndugleikarnar í ES-londunum við góðkenning frá ES-nevndini kunnu góðkenna standardásetingar um dátuvernd.

Standardásetingarnar um dátuvend, sum verða góðkendar av landsstýrismanninun eftir ummæli frá Dátueftirlitinum kunnu taka støði í góðkendum standardásetingum á ES-støðið.

Tað er umráðandi, at landsstýrismaðurin góðkennir standardásetingar í góðari tíð, áðrenn løgtingslógin kemur í gildi, so tað er møguligt hjá dátuábyrgdarum o.ø. at innrætta seg.

Standardásetingarnar um dátuvernd kunnu verða partur av eini breiðari avtalu millum partarnar, eins og tað er møguligt, at partarnir avtala fleiri trygdartiltøk o.tíl. enn tað, sum fylgir av standardásetingunum.

Broyta avtalupartarnir í standardásetingunum hevur hetta við sær, at tað ikki longur er talan um góðkendar standardásetingar, sbrt. stk. 2, nr. 2, og ásetingin kann sostatt í útgangsstøðinum ikki vera grundarlag undir flutninginum uttan (nýggja) góðkenning. Verða góðkendar standardásetingar nýttar, tá persónupplýsingar verða fluttar til triðjalond, skal dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin ikki hava serligt loyvi ella góðkenning frammanundan.

Sambært *stk. 3* kann fullgóð trygd eisini verða veitt *ad hoc* í sáttmálaásetingum ímillum dátuábyrgdaran ella dátuviðgeran og dátuábyrgdaran, dátuviðgeran ella móttakaran av persónupplýsingum í triðjalandinum o.a. um Dátueftirlitið góðkennir hetta frammanundan. Hetta ger tað sostatt møguligt hjá pørtunum at avtala ítøkiligt, men hevur eisini við sær, at Dátueftirlitið skal góðkenna ásetingarnar. Hetta kann verða ein tíðarkrevjandi tilgongd, av tí at Dátueftirlitið skal tryggja sær, at ásetingarnar veita fullgóða trygd.

Sí eisini áskoðan nr. 108-109 í GDPR.

**Undantøk í serligum støðum**

**Til § 62**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 49 í GDPR. Líknandi áseting er í § 17 í galdandi løgtingslóg.

Ásett verður, nær flutningur í serligum støðum kann fara fram, tá tað hvørki er heimild í § 60 ella § 61. Er ein av treytunum í stk. 1 lokin, kann flutningur í undantaksførum fara fram.

Legg merki til, at § 62 snýr seg um undantøk í serligum førum. Tað hevur við sær, at henda áseting ikki kann verða grundarlag undir regluligum ella endurtakandi flutningi av persónupplýsingum til triðjalond o.a. § 62 er ein undantaksregla, og tí er virkisøkið snævurt.

Sambært *stk. 1, nr. 1* kann flutningin fara fram, um skrásetti hevur givið nágreiniligt samtykki til ætlaða flutningin eftir at vera kunnaður um møguliga váðan, sum flutningurin kann hava við sær fyri skrásetta, av tí at treytirnar í §§ 60 og 61 ikki eru loknar.

At skrásetti skal kunnast um møguliga váðan inniber, at skrásetti samtykkir á upplýstum grundarlagi.

Flutningurin kann eisini fara fram, um flutingurin er neyðugur fyri at halda eina avtalu ímillum skrásetta og dátuábyrgdaran ella fyri at fremja tey tiltøk, sum verða sett í verk eftir áheitan frá skrásetta, áðrenn avtalan verður inngingin *(nr. 2)*, fyri at innganga ella halda eina avtalu, sum skrásetta til fyrimuns verður fingin í lag ímillum dátuábyrgdarin og ein annan likamligan ella løgfrøðiligan persón *(nr. 3)*, fyri týðandi samfelagsáhugamál *(nr. 4)* ella fyri at verja altumráðandi áhugamál hjá skrásetta ella einum øðrum persóni í førum, tá skrásetti hvørki likamliga ella løgfrøðiliga fær givið samtykki *(nr. 6)*.

Sambært *stk. 1, nr. 5* kann flutningur fara fram um flutningurin er neyðugur fyri, at rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast. Sí serligu viðmerkingarnar til § 12, stk. 1, nr. 7 um, hvussu hetta skal skiljast.

Um rættarkrøv skal tað í mun til flutning til triðjalond serliga viðmerkjast, at eitt rættarkrav í útgangsstøðinum ikki kann hava støði í avgerð, dómi o.tíl., sum er tikin av dómstóli ella myndugleika í einum triðjalandi. Avgerðir o.a. frá útlendskum myndugleikum kunnu einans handhevjast í Føroyum, um hetta byggir á sáttmála el.líkn. millum Føroyar og triðjalandið um sínamillum rættarhjálp.

Sambært *stk. 1, nr. 7* kann flutningur til eitt triðjaland o.a. eisini fara fram, um flutningurin verður framdur frá eini skrá, sum sambært lóg er ætlað at kunna almenningin, og sum annaðhvørt er atkomilig hjá almenninginum ella hjá persónum, sum kunnu ávísa at hava ein heimilaðan áhuga í hesum um treytirnar fyri almennari atkomu eru loknar í hvørjum einstøkum føri.

Sambært *stk. 2* kann flutningur, sum fer fram við heimild í stk. 1, nr. 7 ikki fevna um allar persónupplýsingarnar ella bólkar av persónupplýsingum í eini skrá.

Stk. 1, nr. 7 og stk. 2 hava t.d. við sær, at persónupplýsingar úr skránni hjá fólkayvirlitinum kunnu verða fluttur til triðjalond, um persónurin, sum er skrásettur biður um tað, tí at viðkomandi er fluttur til triðjalandið. Ásetingarnar hava tó eisini við sær, at øll skráin hjá landsfólkayvirlitinum ikki kann flytast til eitt triðjaland við heimild í stk. 1, nr. 7.

Tá ið ein skrá er ætlað til at verða ráðførd av persónum, sum hava ein heimilaðan áhuga í hesum, kann flutningur bert fara fram eftir áheitan frá hesum persónum, ella um teir skulu verða móttakarar.

Sí eisini áskoðan nr. 108-109 í GDPR.

**Til § 63**
Er ikki heimild at flyta persónupplýsingarnar til triðjalond o.a. í §§ 60-62 er ein síðsta undantaksáseting í § 63. Ásetingin kann einans nýtast í undantaksføri og tá eingin onnur áseting um flutning til triðjalond kann brúkast. Ásetingin hevur eitt enn meira snævurt virkisøki enn § 62.

Sambært stk. 1 kann flutningur til triðjalond o.a. bara fara fram – tá heimild ikki er í §§ 60-62 – um flutningurin ikki verður endurtikin (nr. 1), bara snýr seg um eitt avmarkað tal av skrásettum (nr. 2), er neyðugur í mun til týðandi heimilað áhugamál, sum dátuábyrgdarin fylgir, og áhugamálini ella rættindi hjá skrásetta ikki ganga fram um hesi áhugamál (nr. 3), *og* dátuábyrgdarin hevur mett um allar umstøður í sambandi við flutningin og á hesum grundarlagi veitir fullgóða trygd fyri vernd av persónupplýsingum (nr. 4).

Talan er um kumulativar treytir.

Um dátuábyrgdari ella dátuviðgeri flytir persónupplýsingar til triðjalond o.a. við heimild í hesi áseting, skal viðkomandi boða Dátueftirlitinum frá hesum og skal eisini kunna skrásetta um flutningin, og um tey týðandi heimilaðu áhugamálini, sum verða fylgd.

Sí eisini áskoðan nr. 111-115 í GDPR.

**Til § 64**
Í *stk. 1* er lagt upp til, at § 62, stk. 1, nr. 1-3 og § 63 eru ikki galdandi fyri almennar myndugleikar, tá ið teir røkja sínar uppgávur.

Orsøkin er, at almennir myndugleikar í útgangsstøðinum skulu hava eitt almannarættarligt heimildargrundarlag í sínum virki sum myndugleiki, og ikki í hesum førum skulu røkja sínar uppgávur á privatrættarligum grundarlagi.

Í *stk. 2* verður ásett, at dátuábyrgdarin ella dátuviðgerðin skulu skjalfesta metingina og fullgóðu trygdina sambært § 63, stk. 1, nr. 4 í yvirlitunum nevnd í § 44.

**Forboð ímóti flutningi av viðkvomum persónupplýsingum**

**Til § 65**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 49, stk. 5 í GDPR.
Ásett verður, at Dátueftirlitið í serligum førum kann banna, avmarka ella fyribils steðga flutningi av viðkvomum persónupplýsingum til triðjalond o.a., tá landsstýrismaðurin ikki hevur tikið avgerð um nøktandi verndarstøði.

At ásetingin er galdandi í serligum førum hevur við sær, at virkisøkið er snævurt. Tað skal vera ein serlig støða, sum ítøkiliga er orsøkin til, at Dátueftirlitið í undantaksførum tekur avgerð sambært hesi áseting. Dátueftirlitið skal fylgja vanligu proportionalitetsmeginregluni og taka ta avgerð, sum er minst víðfevnd, men sum samstundis røkkur endamálinum. Orsøkin til, at Dátueftirlitið tekur avgerð sambært ásetingini kann vera óstabilitetur í triðjalandinum, t.d. orsakað av hernaðarkvetti ella umfatandi náttúruvanlukku.

Danska Datatilsynet, sum hevur eina tilsvarandi heimild, hevur síðani danska lógin kom í gildi í maj 2018 ikki brúk heimildina.

Dátueftirlitið skal kunna alment, tá avgerð sambært § 66 verður tikin og skal eisini so vítt møguligt kunna um orsøkina til avgerðina og um tíðarskeiðið avgerðin er galdandi. Dátueftirlitið skal leypandi meta um, hvørt tað er neyðugt at halda fast í avgerðini ella um hon skal takast av.

## Kapittul 7
## Dátueftirlitið

Kapittul 7 byggir á innihaldið í kapitli 6 í GDPR.

Uppskotið til kapittul 7 um Dátueftirlitið førir í stóran mun víðari reglurnar í kapitli 10 í galdandi løgtingslóg.

**Bygnaður**

**Til § 66**
Ásetingin snýr seg um bygnaðin hjá Dátueftirlitinum og svarar í høvuðsheitum til § 36 í galdandi løgtingslóg.

Í *stk. 1* verður ásett, at Dátueftirlitið – eins og í dag – er ein óheftur fyrisitingarmyndugleiki, sum fremur sítt virksemi í fullum óheftni. Hetta er eitt krav um funktionelt óheftni.

Dátueftirlitið er partur av almennu fyrisitingini. Hetta hevur við sær, at fyrisitingarlógin, sbrt. løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993, lógin um innlit í fyrisitingina, sbrt. løgtingslóg nr. 133

frá 10. juni 1993, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001, og aðrar alment galdandi fyrisitingarreglur eru eisini galdandi fyri virksemi Dátueftirlitsins.

At Dátueftirlitið er óheft og skal fremja sítt virksemi í fullum óheftni hevur til endamáls at tryggja eitt virkisført og álítandi eftirlit. Tá óheftni verður tulkað, skal tað tulkast við útgangsstøði í hesum endamáli.

At *Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarmyndugleiki* merkir, at Dátueftirlitið ikki eigur at vera ein samantvunnin partur av einum øðrum størri fyrisitingarmyndugleika í sambandi við sítt virki sum eftirlitsmyndugleiki. Hetta merkir t.d., at Dátueftirlitið ikki eigur at vera ein deild o.tíl. í einum størri stovni. Tað er sostatt umráðandi, at stovnurin Dátueftirlitið *sum so* er óheftur.

Ásetingin um óheftni hevur hinvegin ikki við sær, at Dátueftirlitið skipanarliga ikki kann hoyra til eitt ávíst málsøki, t.e. vera ein stovnur undir einum aðalráði og undir einum landsstýrismanni. Ásetingin hevur heldur ikki við sær, at stovnurin ikki kann húsast saman við øðrum stovnum, um Dátueftirlitið hevur síni egnu høli o.s.fr.

At Dátueftirlitið skipanarliga hoyrir undir viðkomandi landsstýrismann hevur við sær, at tað er viðkomandi landsstýrismaður, sum skal syrgja fyri at játtan á fíggjarlógini o.a. er nøktandi, so at Dátueftirlitið fær virkað fult út. Hetta kann vera eftir tilmæli frá Dátueftirlitinum og ávirkar ikki óheftnið hjá Dátueftirlitinum.

At Dátueftirlitið skal *fremja sítt virksemi í fullum óheftni* merkir m.a. at tær avgerðir sum Dátueftirlitið tekur eru endaligar innan fyrisitingina, og at landsstýrismaðurin sum varðar av Dátueftirlitinum, ikki hevur heimild at geva Dátueftirlitinum tænastuboð um, hvussu hesar avgerðir skulu takast, ella um hvussu eftirlitsvirksemið hjá Dátueftirlitinum annars skal fara fram. Hetta er annars nakað ein landsstýrismaður vanliga kann gera í mun til sínar stovnar.

Kravið um óheftni í virkseminum hjá Dátueftirlitinum vísur í mestan mun til aðrar partar av útinnandi valdinum, t.e. landsstýri og aðalráð. Í sambandi við sítt virksemi sum eftirlitsmyndugleiki, skal Dátueftirlitið sostatt fakliga verða óheft av landsstýrinum og aðalráði, sum tí heldur ikki kunnu geva Dátueftirlitinum tænastuboð í ítøkiligum ella almennum málum í mun til fyrisiting av løgtingslógini.

Kravið um óheftni inniber, at Dátueftirlitið ikki sjálvt kann verða fyri eftirlitið í sínum virksemi við at føra eftirlit. Kravið hevur tó ikki við sær, at aðrir myndugleikar eru útilokaðir frá at hava eftirlit við t.d. fíggjarstýring hjá Dátueftirlitinum ella at stovnurin virkar í samsvari við fyrisitingarreglur. Hesum viðvíkjandi er Dátueftirlitið, sum aðrir fyrisitingarmyndugleikar, og t.d. fevnt av virkisøkinum hjá Løgtingsins umboðsmanni og Landsgrannskoðanini.

Avgerðir hjá Dátueftirlitinum kunnu eisini verða lagdar fyri rættin eftir vanligu reglunum í rættargangslógini.

Umframt at vera galdandi fyri stovnin sum so eru krøvini til óheftni eisini galdandi fyri stjóran í Dátueftirlitinum og limirnar í Dáturáðnum, sum sostatt í sínum uppgávum ikki mugu vera beinleiðis ella óbeinleiðis ávirkaðir ella gera eftir kravboðum frá nøkrum.

Í *stk. 2* er lagt upp til, at Dátueftirlitið – eins og í dag – verður skipað við ráði og avgreiðsluskrivstovu. Eisini verður ásett, at Dátueftirlitið skal hava eftirlit við allari viðgerð av persónupplýsingum, sum løgtingslógin fevnir um.

Ásetingin skal lesast saman við reglunum um virkisøki og landaøkisáseting í kapitli 1. Dátuverndarlógin hevur eitt breitt virkisøki og er galdandi tvørtur um nógv ymisk rættarøki. Hetta hevur við sær, at Dátueftirlitið hevur eftirlitsmyndugleika á øllum hesum økjum, sum kunnu verða rættiliga ymisk, men sum tó hava tað til felags, at grundleggjandi reglurnar um dátuvernd skulu verða loknar.

Mett verður, at tað er skynsamt at halda fast í sama bygnaði sum í dag, soleiðis at tað framhaldandi verður eitt Dáturáð og ein avgreiðsluskrivstova. Lagt verður tó upp til, at Dáturáðið fær ein meira aktivan leiklut frameftir, og at virki ráðsins verður meira gjøgnumskygt.

Tað er Dáturáðið, sum í øllum ivamálum leggur fast, hvussu løgtingslógin skal tulkast og hvussu siðvenja á ávísum økjum skal verða, meðan tað er avgreiðsluskrivstovan, sum t.d. upplýsir mál og fremur avgerðir í verki.

Harumframt skulu øll prinsipiel mál og mál av stórum týdningi í útgangsstøðinum leggjast fyri Dáturáðið.

Avgreiðsluskrivstovan og Dáturáðið er *ein og sami* myndugleiki. Tí kunnu avgerðir frá avgreiðsluskrivstovuni, sum verða tiknar grundað á siðvenju ella leiðreglur frá Dáturáðnum, ikki kærast til Dáturáðið.

Í *stk. 3* verður ásett, at dagliga virksemið hjá Dátueftirlitinum verður røkt av avgreiðsluskrivstovuni undir leiðslu av einum stjóra.

Um óheftni stjórans sí omanfyri undir stk. 1. Harumframt eru vanligu reglurnar um ógegni í fyrisitingarlógini eisini galdandi fyri Dátueftirlitið, her undir avgreiðsluskrivstovuna.

Ásetingin í stk. 3 skal lesast saman við stk. 2, sum hevur við sær, at tað er Dáturáðið, sum leggur fast, hvussu løgtingslógin skal tulkast, og at tað eftir tað er avgreiðsluskrivstovan, sum avgreiðir málini í tí dagliga.

Tað dagliga virksemið fevnir um allar tær uppgávur, sum eru nevnar í § 68. Dátueftirlitið skal í sínum virksemi fylgja reglunum í vanliga fyrisitingarrættinum.

Í *stk. 4* verður ásett, at Dáturáðið ásetir egna starvsskipan og nærri reglur um arbeiðsbýtið millum Dáturáð og avgreiðsluskrivstovu.

Lagt verður við hesum upp til, at tað – eins og í dag – skal verða Dáturáðið, sum sjálvt ger av, hvussu arbeiðið í ráðnum skal fara fram. Starvsskipanin skal sostatt hava reglur um viðtøkuføri, hvussu fundirnir verða skipaðir o.s.fr.

Lagt verður upp til, at Dáturáðið møtist javnan, í øllum førum annan hvønn mánað. Dáturáðið kann á hesum fundum – umframt at viðgera ítøkilig og almenn mál um dátuvernd – eisini verða kunnað um dagliga virksemið í avgreiðsluskrivstovuni.

At tað verður ásett, at Dáturáðið eisini ásetur nærri reglur um arbeiðsbýtið millum Dáturáð og avgreiðsluskrivstovu hevur við sær, at Dáturáðið m.a. kann gera av, at ávís mál kunnu avgreiðast av avgreiðsluskrivstovuni.

Sum greitt frá omanfyri skulu øll prinsipiel mál í útgangsstøðinum leggjast fyri ráðið, eins og mál av stórum almennum týdningi, eisini skulu leggjast fyri ráðið. Onnur mál kunnu avgreiðast av avgreiðsluskrivstovuni við støði í leiðreglum, sum kunnu dragast burturúr teimum avgerðum, sum ráðið tekur.

Fyri at tryggja gjøgnumskygni fyri tann skrásetta o.o. skal starvsskipanin almannakunngerast. Lagt verður harafturat upp til, at avgerðir o.a. frá Dátueftirlitinum í útgangsstøðinum verða almannakunngjørdar, sbr. § 73 og serligu viðmerkingarnar til hesa áseting.

**Til § 67**
Í § 67, stk. 1 verður ásett, at landsstýrismaðurin setir eitt Dáturáð.
Landsstýrismaðurin skal, tá hann setir ráðið miða eftir óheftni og fakkunnleika.

Lagt verður upp til, at Dáturáðið verður víðkað við tveimum limum, soleiðis at limatalið fer fra trimum til fimm. Orsøkin er eitt ynski um eina breiðari samanseting, sum hevur við sær, at sjónarmið frá fleiri sjónarhornum eru við til at leggja siðvenju hjá Dátueftirlitinum fast. Við størri áherðslu á kunnandi arbeiði og upplýsing o.a. verður eisini mett, at tað er skynsamt at hava umboð fyri kommunala geiran og privatu vinnuna í Dáturáðnum.

Tað er lagt upp til, at tað framhaldandi verður eitt krav, at formaðurin er løgfrøðingur, t.e. at viðkomandi hevur løgfrøðiligt embætisprógv (cand.jur). Orsøkin er, at dátuverndarøkið er eitt torskilt løgfrøðiligt øki, og at tað tí er skynsamt, at í minsta lagi ein limur í ráðnum er løgfrøðingur.

Umframt at verða løgfrøðingur skal landsstýrismaðurin í tilnevningini taka við í metingina, um viðkomandi hevur innlit í persónupplýsingarlóggávu. Hetta kann t.d. vera ígjøgnum starvsroyndir ella eftirútbúgving.

Tað er einki serstakt útbúgvingarkrav til hinar limirnar í ráðnum.

Lagt verður tó upp til, at landsstýrismaðurin, tá hann tilnevnir limir í ráðið, gevur sær fær um, at minst ein limur í ráðnum hevur eina tøkniliga útbúgving ella serligar kt-førleikar. Umframt at verða eitt løgfrøðiliga torskilt rættarøki, er dátuverndarøkið nær tengt at tøknini og tøkniligum loysnum. Tí er neyðugt, at hesin fakkunnleikin er í ráðnum.

Harumframt eigur landsstýrismaðurin at miða eftir, at ein limur í ráðnum hevur kunnleika til gransking og viðgerð av persónupplýsingum í tí sambandinum.

Afturat teimum limunum, sum landsstýrismaðurin tilnevnir uttan tilmæli, tilnevnir landsstýrismaðurin tveir limir eftir tilmæli frá ávikavist Kommunufelagnum og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Tað verður heldur ikki fyri hesar limir ásett, hvørja útbúgving el.tíl. hesir persónar skulu hava, men tað verður mett týdningarmikið, at hesir persónar, sum skulu umboða ávikavist kommunurnar og vinnuna hava neyðuga innlitið í tað økið, sum teir umboða, umframt at hava eitt ávíst innlit í dátuverndarøkið.

Hóast Dáturáðið er samansett av 5 føstum limum er eingin forðing fyri, at Dáturáðið í síni starvsskipan ásetur, at tað í sambandi við ítøkilig mál er møguleiki fyri, at persónar við serligum fakkunnleika luttaka á fundum o.tíl. Hesir persónar luttaka á fundum fyri at upplýsa málið og luttaka uttan atkvøðurætt.

Sambært *stk. 2* tilnevnir landsstýrismaðurin eisini tiltakslimir. Kommunufelagið og Føroya Arbeiðsgevarafelag geva landsstýrismanninum eisini tilmæli um tiltakslim.

Tilnevning varar 4 ár og kunnu persónar endurtilnevnast 2 ferðir.

Krøvini til óheftni gera seg eisini galdandi fyri limir í Dáturáðnum, sum sostatt heldur ikki mugu verða beinleiðis ella óbeinleiðis ávirkaðir ella gera eftir kravboðum frá nøkrum, sbr. omanfyri í serligu viðmerkingunum til § 66. Vanligu reglurnar um ógegni í fyrisitingarlógini eru eisini galdandi.

Lagt verður upp til, at landsstýrismaðurin tilnevnir eitt nýtt Dáturáð í sambandi við, at nýggja løgtingslógin verður sett í gildi. Núverandi limirnir í Dáturáðnum verða sitandi til landsstýrismaðurin hevur tilnevnt limir av nýggjum eftir hesi løgtingslóg.

Í *stk. 2, 3. pkt.* er ásett, at tilnevningin av formanni, limum og tiltakslimum skal verða grundað á fakligar førleikar.

**Uppgávur**

**Til § 68**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 57 í GDPR. Ásetingin svarar í høvuðsheitum til § 37 í galdandi løgtingslóg.

Í § 68 verður ásett, hvørjar uppgávur Dátueftirlitið hevur, men listin er ikki úttømandi. Aðrastaðni í løgtingslógini eru ásettar ítøkiligar skyldur fyri Dátueftirlitið, t.d. í § 61, stk. 2, nr. 2 um ummæli av standardásetingum.

Í *§ 68, nr. 1* verður ásett, at Dátueftirlitið av sínum eintingum ella eftir klagu frá skrásetta skal ansa eftir, at viðgerð av persónupplýsingum bert fer fram í samsvari við løgtingslógina og tær reglur, sum eru ásettar sambært løgtingslógini. Her er tað eftirlitsskyldan hjá Dátueftirlitinum, sum verður staðfest.

Sum nakað nýtt verður tað ítøkiliga ásett í *§ 68, nr. 2,* at Dátueftirlitið skal styrkja almenna kunnleikan til dátuvernd. Mett verður, at tað er umráðandi at myndugleikin á økinum, sum ein raðfestan part av sínum virksemi, arbeiðir fyri at styrkja um almenna kunnleikan til dátuvernd. Hetta kann t.d. verða við almennum lýsingarátøkum, skeiðum ella við kunnandi tilfari. Eisini eru skrivligar vegleiðingar um løgtingslógina ein týdningarmikil partur av arbeiðnum. Kunning er við til alment at hækka um dátuverndina og at veita skrásettum betri trygd ítøkiligt.

Dátueftirlitið skal eisini ráðgeva Føroya landsstýri og øðrum stovnum o.a. um lóggávu og umsitingarlig tiltøk dátuvernd til frama (*nr. 3*) og styrkja kunnleikan hjá dátuábyrgdarum og dátuviðgerum til teirra skyldur sambært hesi løgtingslóg (*nr. 4*). Hetta arbeiðið kann fevna um bæði ítøkiliga ráðgeving og almenna vegleiðing.

Í *§ 68, nr. 5* verður ásett, at Dátueftirlitið skal gera kanningar, har persónupplýsingar verða viðgjørdar. Við hesum er at skilja, at Dátueftirlitið skal gera kanningar av viðgerðini av persónupplýsingum hjá privatum fyritøkum og almennum myndugleikum, her undir um viðgerðin er í samsvari við reglurnar í løgtingslógini. Talan er um kanningar, sum Dátueftirlitið ger sjálvkravt (ex officio), og sum kunnu fevna um t.d. eftirlitsvitjanir.

Í *§ 68, nr. 6* verður ásett, at Dátueftirlitið skal fylgja við í og kunna um gongdina í viðgerðini av persónupplýsingum her á landi og uttanlands. Henda áseting førir víðari galdandi áseting. Skyldan at fylgja við verður við nýggju løgtingslógini av enn størri týdningi, av tí at nýggja lóggávan á økinum í enn størri mun enn galdandi løgtingslóg er skrivað og skal tulkast í samsvari við ES-lóggávuna á økinum.

Dátueftirlitið skal harumframt sambært *§ 68, nr. 7* gera eina ársfrágreiðing, sum skal almannakunngerast. Ársfrágreiðingin er ein umráðandi partur av at tryggja gjøgnumskygni á økinum.

Sí eisini áskoðan nr. 123 og 132 í GDPR.

**Til § 69**
Ásetingin førir í høvuðsheitum § 42 í galdandi løgtingslóg víðari. Ásetingin svarar ikki beinleiðis til eina grein í GDPR, tó at tað er ein ógvuliga týdningarmikil partur av GDPR, at eftirlitsmyndugleikarnir í ES-londunum samstarva sínamillum og við onnur.

Sambært § 69 skal Dátueftirlitið samstarva við aðrar eftirlitsmyndugleikar í Føroyum og uttanlands í tann mun, tað er neyðugt. Talan kann verða um bæði føroyskar myndugleikar og ríkismyndugleikar í Føroyum, umframt eftirlitsmyndugleikar í øðrum londum. Samstarvið kann verða um ítøkilig so væl sum almenn mál.

**Heimildir**

**Til § 70**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 58 í GDPR. Ásetingin svarar í høvuðsheitum til § 38 í galdandi løgtingslóg.

Grein 58 í GDPR deilir heimildirnar, sum dátueftirlit skulu hava, í trý sløg av heimildum:

1) Kanningarheimildir.
2) Rættleiðingarheimildir
3) Góðkenningarheimildir og ráðgevingarheimildir

Tó at § 70 ikki er deild upp í trý á sama hátt sum grein 58 í GDPR, eru heimildirnar hjá Dátueftirlitinum stórt sæð tær somu, sum samsvarandi myndugleikar í ES-londunum hava.

Tað er Dátueftirlitið, sum í hvørjum einstøkum føri ger av, hvussu eitt ítøkiligt mál skal handfarast, og hvør heimild skal nýtast. Dátueftirlitið arbeiðir út frá vanligu proportionalitetsmeginregluni, sum hevur við sær, at tað í útgangsstøðinum er tað minst víðfevnda heimildin, sum kann røkka endamálinum, sum skal nýtast.

Sambært *stk. 1* kann Dátueftirlitið ávara ein dátuábyrgdara ella dátuviðgera um, at ætlað viðgerð sannlíkt eru í ósamsvari við løgtingslógina ella átala viðgerð, sum hevur verið í ósamsvari við løgtingslógina.

Ásetingin gevur í fyrstu atløgu Dátueftirlitinum møguleika at ávara dátuábyrgdara ella dátuviðgera, áðrenn ein viðgerð fer fram. Tað er í øllum førum dátuábyrgdarin, sum hevur ábyrgdina av viðgerðini, og ein ávaring hevur ikki við sær, at viðgerin ikki kann fara fram, men er heldur ein eyka møguleiki hjá Dátueftirlitinum at tryggja, at alt fer rætt fram.

Stk. 1 gevur eisini Dátueftirlitinum møguleika at átala, tá viðgerð er farin fram. Ætlanin er, at henda heimild skal nýtast í málum, tá viðgerð, sum var í ósamsvari við lógina, longu er farin fram og er steðgað, og ikki er mett at vera so álvarssom, at tað er neyðugt at seta onnur tiltøk í verk.

*Stk. 2* førir víðari § 38, stk. 1 í galdandi løgtingslóg og hevur við sær, at Dátueftirlitið kann krevja, at dátuábyrgdari ella dátuviðgeri steðgar viðgerð, og at viðkomandi rættar, strikar ellar viðgerðaravmarkar ávísar persónupplýsingar.

Ásetingin hevur við sær, at Dátueftirlitið t.d. kann seta forboð fyri ávísari viðgerð og áleggja dátuábyrgdaranum ella dátuviðgeranum at rætta upplýsingarnar.

Í *stk. 3* er lagt upp til, at Dátueftirlitið kann geva dátuábyrgdaranum ella dátuviðgeranum kravboð um at fáa viðgerð o.a. í samsvar við løgtingslógina innan eina nærri ásetta freist.

Freistin verður ásett grundað á eina ítøkiliga meting av, hvussu álvarsligt brotið á løgtingslógina er, og hvussu umfatandi broytingar o.tíl. dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin skal seta í verk fyri at tryggja, at viðgerð verður í samsvari við løgtingslógina.

*Stk. 4* førir víðari galdandi áseting og hevur við sær, at Dátueftirlitið kann geva dátuábyrgdara ella dátuviðgera kravboð um at fremja tøknilig og fyrisitingarlig trygdartiltøk soleiðis, at bert viðgerð fer fram, sum hevur heimild í løgtingslógini, og soleiðis at persónupplýsingar ikki ólógliga forkomast, missast ella skerjast, og at tær ikki koma óviðkomandi til kunnleika ella verða misnýttar.

**Til § 71**
Ásetingin førir § 40 í galdandi løgtingslóg víðari.

§ 71, stk. 1 og 2 eru avgerandi fyri, at Dátueftirlitið kann føra eftirlit á nøktandi hátt.

Tað er sostatt neyðugt fyri, at Dátueftirlitið kann taka avgerðir á upplýstum grundarlagi, at eftirlitið kann fáa atgongd til neyðugu upplýsingarnar og kann fáa atgongd til høli. Dátueftirlitið kann krevja upplýsingar o.a. frá bæði almennum og privatum pørtum.

Sambært *stk. 1* kann Dátueftirlitið krevja allar upplýsingar útflýggjaðar, sum er av týdningi fyri virksemið hjá Dátueftirlitinum.

Stk. 1 er ikki broytt í mun til galdandi løgtingslóg, og upplýsingarskyldan hjá dátuábrygdara og dátuviðgera skal framhaldandi umsitast í samsvari við forboðið ímóti sjálvinkriminering í grein 6 í Evropæiska Mannarættindasáttmálanum.

Grein 6 í EMRS hevur í útgangsstøðinum við sær, at ein persónur ikki hevur skyldu at upplýsa eitt mál, um viðkomandi er mistonktur fyri eitt lógarbrot, sum kann hava við sær revsing.

Um Dátueftirlitið skal upplýsa eitt mál, t.d. í sambandi við eina klagu, fyri at fáa greiðu á, um løgtingslógin er yvirhildin, og *áðrenn* nakar er mistonktur fyri eitt lógarbrot, sum kann hava við sær revsing, er grein 6 í mannarættindasáttmálanum ikki galdandi.

Ásetingin í *stk. 2* gevur ráðslimum og leiðandi starvsfólki í Dátueftirlitinum atgongd til høli hjá dátuábyrgdara og dátuviðgera.

Ásetingin í stk. 2 hevur við sær, at Dátueftirlitið uttan rættarúrskurð kann fáa atgongd til viðkomandi høli. Hetta fevnir m.a. um vanliga arbeiðsstaðið, lagurbygningar, teknikhølið og heimaarbeiðspláss. Ráðslimir og leiðandi starvsfólk skulu í sambandi við atgongdina hava høvi til sjálvi at halda eyga við viðgerðini og til sjálvi t.d. at sláa upp í eini skrá.

Dátueftirlitið kann við heimild í stk. 2 fáa atgongd til høli í sambandi við bæði fráboðaðar og ófráboðaðar vitjanir. Vanliga fráboðar Dátueftirlitið eina vitjan 2-3 vikur undan vitjanini. Av tí, at heimildin at fáa atgongd til høli uttan rættarúrskurð er ein víðgongd heimild, skal hon nýtast við varsemi og virðing. Hetta hevur m.a. við sær, at tað í útgangsstøðinum eiga at vera ráðslimir ella leiðandi starvsfólk hjá Dátueftirlitinum, sum standa fyri kanningini á staðnum.

**Avgerðir hjá Dátueftirlitinum o.a.**

**Til § 72**
Ásetingin svarar til § 39, stk. 3 í galdandi løgtingslóg.

*§ 73* hevur við sær, at fyrisitingarligar avgerðir hjá Dátueftirlitinum ikki kunnu kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika. Ásetingin er við til at tryggja Dátueftirlitinum tað neyðuga óheftnið, sbr. eisini serligu viðmerkingarnar til § 66.

Ásetingin fevnir um fyrisitingarligar avgerðir. Fevnt av hesum eru t.d. ítøkiligar avgerðir í kærum um brot á viðgerðarreglurnar ella brot á rættindini hjá skrásetta.

Tá Dátueftirlitið gevur ummæli, vegleiðandi úttalilsi o.tíl. er tað ikki fevnt av hesi áseting, tí talan ikki er um fyrisitingarligar avgerðir.

At avgerðir hjá Dátueftirlitinum ikki kunnu kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika, avmarkar ikki møguleikan hjá tí einstaka at leggja avgerðina fyri rættin sambært vanligu reglunum um borgarlig mál í rættargangslógini.

**Til § 73**
Í § 73 verður ásett, at Dátueftirlitið kann almannakunngera úttalilsir og avgerðir. Avgerðir, sum verða kunngjørdar, skulu verða navnleysar og gjørdar so ókenniligar sum gjørligt. Ásetingin er nýggj í mun til galdandi løgtingslóg, tó at tað óivað er ein heimild, sum Dátueftirlitið longu má metast at hava.

§ 73 inniheldur ikki eina skyldu fyri Dátueftirlitið at almannakunngera avgerðir og úttalilsir. Tað verður tó mett at hava sera stóran týdning fyri gjøgnumskygnið á dátuverndarøkinum, at Dátueftirlitið almannakunnger í mestan mun, og tí er ásetingin við í uppskotinum.

At Dátueftirlitið almannakunngerð úttalilsir og avgerðir hevur ómetaliga stóran týdning fyri dátuábyrgdarar og dátuviðgerar, sum skulu halda løgtingslógina. Tað verður sostatt eitt týdningarmikið amboð fyri tey, sum eru fevnd av lógini, og sum hava ábyrgdina av, at løgtingslógin verður hildin, at tey kunnu kunna seg um, hvør siðvenjan hjá Dátueftirlitinum er, og hvørjar tulkingar av løgtingslógini verða lagdar til grund í bæði ítøkiligum og almennum málum.

Fevndar av ásetingini eru avgerðir í ítøkiligum málum, sum á einhvønn hátt hava almennan áhuga, t.d. tí ein prinsipiellur spurningur er viðgjørdur í Dáturáðnum. Eisini meira almenn úttalilsi, t.d. um eina kanning av viðgerð av persónupplýsingum í eini vinnugrein ella um, hvussu ein ávís áseting eigur at verða tulkað, eiga at verða almannakunngjørd.

Dátueftirlitið kann almannakunngera avgerðir o.a. á síni heimasíðu. Avgerðir, sum verða kunngjørdar, skulu verða navnleysar og gjørdar so ókenniligar sum gjørligt. Orsøkin er, at endamálið ikki er, at ávísar fyritøkur ella stovnar skulu heingjast út, men at tað verður lættari hjá dátuábyrgdarum o.ø. at fylgja lógini í samsvari við siðvenju hjá Dátueftirlitinum. Harumframt er ásett, at avmarkingarnar í § 36 galdandi í mun til almannakunngeringina.

**Til § 74**
Ásett verður ein serlig ummælisskylda, tá reglur, sum hava ásetingingar um viðgerð av persónupplýsingum, verða skrivaðar. Reglurnar skulu *áðrenn* tær verða settar í gildi, sendast Dátueftirlitinum til ummælis.

Ásetingin hevur ikki við sær eina serliga skyldu at senda reglur til ummælis hjá Dátueftirlitinum, áðrenn tær verða sendar til ummælis hjá øðrum pørtum. Dátueftirlitið kann sostatt ummæla uppskot samstundis, sum uppskotið er til ummælis hjá øðrum.

Tað er óivað so, at ummælisskyldan longu í dag verður fylgd, av tí at nýggjar reglur eiga at verða sendar til ummælis, sbrt. m.a. pkt. 1.1.10. í rundskivi um lógarsmíð frá Løgmansskrivstovuni.

**Til § 75**
Í § 75 er heimild til landsstýrismannin at áseta reglur um, at samskifti við Dátueftirlitið skal vera talgilt, her undir at samskiftast skal ígjøgnum ávísa kt-skipan, at ávíst talgilt fílasnið skal nýtast o.s.fr.

Í dag hevur Dátueftirlitið ikki heimild til at krevja, at borgarar o.o. skulu samskifta talgilt við Dátueftirlitið. Heimildin fer m.a. at lætta um umsitingina hjá Dátueftirlitinum.

## Kapittul 8
## Rættarráð, ábyrgd og revsing

Kapittul 8 byggir á innihaldið í grein 77-80, 82 og 84 í kapittul 8 í GDPR.

GDPR ásetingarnar eru yvirskipaðar og lata tað í stóran mun verða upp til ES-limalondini at nágreina hesar ásetingar í teirra nationala rætti. Ásetingarnar, sum lagt verður upp til í hesum

kapitli føra í stóran mun víðari galdandi rætt, og mett verður, at ásetingarnar kunnu rúmast innanfyri karmarnar, sum GDPR hevur.

**Rætturin at klaga**

**Til § 76**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 77 í GDPR og til § 30 í galdandi løgtingslóg.

Ásett verður, at tann skrásetti kann klaga til Dátueftirlitið um viðgerð av persónupplýsingum viðvíkjandi honum. Tað er líka mikið um viðgerðin fer fram í almenna ella privata geiranum.

Dátueftirlitið skal viðgerða klaguna, sbr. § 68, nr. 1 og kann brúka sínar heimildir sbrt. § 70. Dátueftirlitið skal í viðgerðini fylgja reglunum í vanliga fyrisitingarrættinum.

Um kæran snýr seg um serlóggávu, kann Dátueftirlitið seta seg í samband við avvarðandi sermyndugleika til tess at fáa greiðu á, hvussu reglur o.a. skulu skiljast.

Skrásetti kann klaga sjálvur, men kann eisini lata seg umboða av øðrum eftir vanligu reglunum í fyrisitingarlógini um umboðan.

Umframt at klaga til Dátueftirlitið, hevur skrásetti møguleika fyri at leggja mál fyri rættin um, hvørt dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin hava hildið løgtingslógina. Hetta fer fram eftir vanligu reglunum í rættargangslógini um borgarlig mál.

Sambært artikli 78 í GDPR skulu ES-limalondini tryggja, at skrásett hava møguleika fyri virknum rættarráðum ímóti dátueftirlitunum. Hetta er ikki við í ásetingini í § 76. Men tað er tó altíð møguligt hjá skrásettum – eftir vanligu reglunum í rættargangslógini um borgarlig mál – at leggja mál fyri rættin um avgerðir hjá Dátueftirlitinum, óvirkni í sambandi við klagu og um vantandi kunning. Tað er tó ein fortreyt, at vanligu reglurnar í rættargangslógini fyri rættarsókn eru loknar.

Sí eisini áskoðan nr. 141-143 og 145 í GDPR.

**Endurgjald**

**Til § 77**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 82 í GDPR. Ásetingin svarar í høvuðsheitum til § 46 í galdandi løgtingslóg.

Eins og í galdandi løgtingslóg verður lagt upp til eina kulpa-ábyrgd við øvutari próvbyrðu (præsumptionsansvar). Hetta hevur við sær, at dátuábyrgdarin – ella dátuviðgerin – skal endurgjalda skaða, sum kemur av, at viðgerð fer fram ímóti reglunum í løgtingslógini, uttan so, at viðkomandi kann prógva, at skaðin ikki kundi verið forðaður við tí eftiransni og umhugsni, sum krevst í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum.

Eins og í dag er tað eitt krav, at vanligu treytirnar fyri endurgjaldi eru loknar, her undir treytirnar um kausalitet og adækvans.

§ 77 fevnir á sama hátt, sum grein 82 í GDPR um endurgjald fyri bæði materiellan og immateriellan skaða, men tað verður framhaldandi í útgangsstøðinum eitt krav fyri at fáa endurgjald, at skrásetti hevur havt eitt fíggjarligt tap.

Um fleiri dátuábyrgdarar ella ein dátuábyrgdari og ein dátuviðgeri saman hava ábyrgdina av skaðanum, sum skrásetti hevur verið fyri, hefta hesir solidariskt í samsvari við vanliga endurgjaldsrættin. Tað fylgir eisini av vanliga endurgjaldsrættinum, at skrásetti kann rætta sítt krav ímóti einum av ábyrgdarunum. Tann, sum rindar endurgjaldið, kann søkja regres hjá øðrum ábyrgdaranum.

Í mun til í dag verður tað ásett, at skrásetti eisini kann fáa endurgjald frá dátuviðgeranum. Av tí, at tað í útgangsstøðinum altíð er dátuábyrgdarin, sum hevur ábyrgdina av eini viðgerð, kann dátuviðgerin einans hefta fyri skaða, sum kemur av, at viðkomandi viðger upplýsingar í ósamsvari við ásetingar í løgtingslógini, sum venda sær beinleiðis til dátuviðgerar ella um dátuviðgerin viðgerð persónupplýsingarnar í ósamsvari við avtaluna við dátuábyrgdaran.

Sí eisini áskoðan nr. 146 og 147 í GDPR.

## Revsing

**Til § 78**
Ásetingin byggir á innihaldið í grein 84 í GDPR. Líknandi áseting er í § 44 í galdandi løgtingslóg.

Í stk. 1 verður lagt upp til, at revsiramman verður hækkað úr bót (sekt) ella hefti – t.e. fongsul í upp til 4 mánaðir – til sekt ella fongsul í upp til 6 mánaðir.

Orsøkin til, at tað verður lagt upp til at hækka revsirammuna til upp í 6 mánaðar er m.a. so at samsvar er við revsirammuna í § 264 d í revsilógini. Sambært § 264 d verður tann revsaður, sum av órøttum víðarigevur boð ella myndir, ið viðvíkja persónligum viðurskiftum hjá øðrum persóni ella aðramáta vísa hann í umstøðum, sum skilliga kunnu krevjast ikki at koma fyri almenningin.

Brotini verða sostatt mett at vera sambærilig, og tí verður lagt upp til, at brotini kunnu revsast á sama hátt.

Í samsvari við § 19 í revsilógini fevnir revsiásetingin bæði um tilætlað og óviljað brot á ásetingarnar í løgtingslógini.

Lagt verður upp til, at brot á løgtingslógina – bæði tilætlað og óviljað – í útgangsstøðinum verða revsað við sekt, og at revsingin bara í serligum førum verður hækkað til fongsul. Hetta kann t.d. verða, um viðkvæmar persónupplýsingar í stórum tilætlað eru almannakunngjørdar.

Viðmerkjast skal, at tað ikki er ein fortreyt við løgtingslógaruppskotinum, at øll brot skulu revsast við sekt (ella fongsul). Ítøkiligu viðurskiftini í einum máli kunnu sostatt tala fyri, at Dátueftirlitið í staðin fyri at melda málið til politiið – ella at geva eitt fyrisitngarligt sektaruppskot um treytirnar fyri tí eru loknar – gevur eina ávaring ella kravboð el.líkn. Víst verður til áskoðan nr. 148 í GDPR.

Í mun til, hvat sektarstøðið skal verða, verður hetta til dómstólarnar at meta um í hvørjum einstøkum føri.

Í artikli 83, stk. 2 í GDPR eru ásett viðurskifti, sum eftirlitsmyndugleikar skulu taka við í metingina, tá sektin verður ásett. Hetta er t.d um brotið er tilætlað ella framt við ósketni, um dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin hava roynt at avmarka skaðan, hvussu langa tíð brotið hevur strekt seg yvir o.s.fr. Hesi viðurskifti eiga eisini at verða tikin við í metingini, tá revsing verður ásett í ítøkiligum revsimálum í Føroyum. Harumframt er kapittul 10 í revsilógini um áseting av revsing galdandi.

Tað verður tó við uppskotinum lagt upp til, at sektarstøðið verður hækkað munandi í mun til galdandi støði. Lagt verður upp til, at sektarstøðið í Føroyum í útgangsstøðinum skal fylgja gongdini í Danmark uttan so, at tað eru serlig føroysk viðurskifti, sum gera seg galdandi, sum kunnu grunda, at sektarstøðið skal vera eitt annað. Tað kann í tí samanhanginum viðmerkjast, at tað, at sektarstøðið skal fylgja gongdini í Danmark, ikki í øllum førum merkir, at sektin í krónum og oyrum skal verða tann sama í Danmark og í Føroyum. Støddin á samfelagnum og á fyritøkum er í sær sjálvum viðurskifti, sum kunnu grunda, at sektarstøðið kann verða øðrvísi.

Tað skal serliga viðmerkjast, at støddin á fyritøkum og fyrimunirnir, sum eru fingnir við at bróta lógina, skulu takast við í metingina av, hvussu høg sektin skal verða. Tað er sostatt ikki endamálið við at hækka sektarstøðið, at sektirnar skulu gerast so høgar, at fyritøkur ikki hóra undan fíggjarliga um løgtingslógin verður brotin.

Tað er umráðandi, at reglurnar um dátuvernd verða tiknar í størsta álvara, og at hækka sektarstøðið er ein partur av hesum.

Um sektarstøðið annars verður víst til pkt. 1.4.10. í almennu viðmerkingunum.

Í stk. 1, nr. 1-7 eru nevndar tær ásetingar, sum revsast kann fyri brot á. Hetta svarar í høvuðsheitum til tær ásetingar, sum revsing kann áleggjast fyri eftir galdandi løgtingslóg.

Tað kann í tí sambandinum viðmerkjast, at tann, sum kann revsast eftir stk. 1 í útgangsstøðinum er tann, sum hevur ábyrgdina, t.e. dátuábyrgdarin. Dátuábyrgdaranum verða sostatt ásettar skyldur í lógini, sum tað í útgangsstøðinum ikki eru onnur, sum kunnu revsast fyri. Í løgtingslógaruppskotinum eru tó eisini ásetingar, sum áleggja dátuviðgeranum skyldur. Verða hesar ikki røktar, kann eisini dátuviðgerin revsast.

Dátuverndarfólk hava ikki ábyrgd av viðgerð ella ábyrgd av, at viðgerð er í samsvari við lógina. Dátuverndarfólk hava ein ráðgevandi leiklut og kunnu tí í útgangsstøðinum ikki revsast eftir dátuverndarlógini. Dátuábyrgdarin og dátuviðgerin kunnu tó revsast, um teir ikki hava dátuverndarfólk, sum røkjur tær skyldur, sum sambært lógini skulu røkjast.

*Stk. 2* hevur við sær, at brot á § 57 einans kann verða revsað við sekt eftir hesi løgtingslóg. Sambært § 57 hava dátuverndarfólk, sum eru vald sambært § 53, stk. 1, nr. 2 og 3 – t.e. dátuverndarfólk í privatum fyritøkum – ikki loyvi óheimilað at geva víðari ella brúka upplýsingar, sum er komnir til teirra kunnleika í starvinum sum dátuverndarfólk.

Tað verður sostatt ikki mett at vera neyðugt at revsa brot á hesa áseting við fongsli, um fongsulsrevsing ikki er heimilað í aðrari lóggávu.

Sambært *stk. 3* kann í reglum givnum við heimild í hesi løgtingslóg ásetast revsing við sekt ella fongsli í upp til 6 mánaðir.

Sambært *stk. 4* kunnu feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd sambært reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

Í mun til almennar myndugleikar er tað ein alment galdandi regla í § 27, stk. 2 í revsilógini, at almennir myndugleikar ikki kunnu sektast fyri brot á lóggávu, um hetta er í sambandi við myndugleikaútinnan. § 27, stk. 2 ásetur sostatt, at *"statslige myndigheder, myndigheder under hjemmestyret og kommuner kan alene straffes i anledning af overtrædelser, der begås ved udøvelse af virksomhed, der svarer til eller kan sidestilles med virksomhed udøvet af private"*.

Hetta verður ikki broytt ella vikið frá við hesum uppskotinum. Tað hevur við sær, at almennir myndugleikar ikki kunnu revsast fyri viðgerð av persónupplýsingum, sum brýtur reglurnar í hesi løgtingslóg, tá viðgerðin er liður í myndugleikaútinnan, t.d. tá myndugleikar taka ítøkiligar avgerðir.

Í *stk. 5* verður ásett, at fyrningarfreistin fyri brot á løgtingslógina skal verða 5 ár. Hetta víkur frá vanligu regluni í § 93 í revsilógini, sum uttan serreglu hevði havt við sær eina fyrningarfreist uppá 2 ár.

Orsøkin til, at fyrningarfreistin verður longd er, at Ríkispolitiið, tá donsku dátuverndarreglurnar vórðu broyttar í 2018 í sambandi við at GDPR kom í gildi, viðmerkti, at mál um brot á dátuverndarlóggávu kunnu vera stór og torgreidd eins og slík mál kunnu strekkja seg yvir longri tíðarskeið. Grundað á hetta bleiv fyrningarfreistin í donsku lógini sett at vera 5 ár.

Mett verður, at somu viðurskifti gera seg galdandi í Føroyum. Tí er lagt upp til, at fyrningarfreistin fyri brot á dátuverndarlógina verður sett til 5 ár.

Sí eisini áskoðan nr. 149-152 í GDPR.

**Fyrisitingarlig sektaruppskot**

**Til § 79**
Ásetingin byggir lutvíst á innihaldið í 83 í GDPR. Líknandi áseting er ikki í galdandi løgtingslóg. Heimildin hjá Dátueftirlitinum at avgreiða mál við fyrisitingarligum sektaruppskotum er sostatt nýggj.

Lagt verður upp til, at um Dátueftirlitið metir, at eitt brot á løgtingslógina ella brot á reglur givnar við heimild í løgtingslógini, ikki kemur undir strangari revsing enn sekt, kann Dátueftirlitið sambært *stk. 1* við einum fyrisitingarligum sektaruppskoti boða frá, at málið kann avgerast uttan rættarmál. Tað er ein treyt fyri at nýta ásetingina, at tann, sum hevur framt brotið, játtar seg sekan í brotinum og váttar at gjalda sektina sambært sektaruppskotinum innan nærri ásetta freist, sum kann leingjast.

Eitt fyrisitingarligt sektaruppskot er ein revsirættarlig avgerð, og treytirnar fyri at brúka henda avgerðarhátt eru strangar. Orsøkin er m.a. at fyrisitingarlig sektaruppskot víkja frá,

hvussu revsimál vanliga verða viðgjørd. Revsimál verða í útgangsstøðinum kannað av politiinum. Er grundarlag fyri tí letur politiið ákæruvaldinum málið, sum ger av, um ákæra skal verða reist. Verður ákæra reist, eru tað dómstólarnir, sum taka støðu til, um ákærdi er sekur og áseta revsingina.

Rættargangslógin inniheldur eina umfatandi regulering av mannagongdum í revsimálum, sum m.a. tryggjar rættartrygdina hjá tí einstaka í revsimálum. Ein av meginreglunum er, at tað er dómsvaldið, sum ásetir revsing. Rættargangslógin loyvir tó í ávísum førum ákæruvaldinum at avgreiða mál við fyrisitingarligum sektaruppskotum.

Við ásetingini í § 79 verður heimildin at geva fyrisitingarlig sektaruppskot løgd Dátueftirlitinum. Hetta víkir frá høvuðsregluni um, at tað eru politi, ákæruvald og dómstólar, sum avgreiða revsimál. Hetta hevur tann fyrimun, at tann myndugleikin, sum arbeiðir við økinum í tí dagliga og hevur serligan kunnleika á økinum, undir ávísum treytum kann avgreiða mál, sum ikki hava við sær hægri revsing enn sekt.

Av rættartrygdarávum kunnu fyrisitingarlig sektaruppskot bara nýtast í heilt serligum førum. Tað er sostatt eitt krav, at málini eru egnað at avgreiða á henda hátt. Við hetta er at skilja, at talan skal verða um lógarbrot, sum eru av *sama slagi*, eru *einføld* og *uttan próvlig ivamál.*

Sum brot, sum eru at meta sum egnað, t.e. eru av sama slag, einføld og uttan próvligar ivaspurningar, kann t.d. vera óætlað almannakunngerð av persónupplýsingum á heimasíðum ella brot á reglurnar um kunningarskyldu.

Umframt, at fyrisitingarlig sektaruppskot einans kunnu nýtast í serligum førum, er tað eisini ein treyt, at tann, sum hevur framt brotið, játtar seg sektan í brotinum og váttar at gjalda sektina.

Áðrenn Dátueftirlitið kann geva fyrisitingarlig sektaruppskot í málum, sum eru egnað, skal dómsvaldið skal hava lagt sektarstøðið fast. Hetta hevur við sær, at tey fyrstu málini um brot á tær einstøku greinarnar skulu leggjast fyri rættin, sum ger av, hvat sektarstøðið fyri brotini er. Tað merkir, at Dátueftirlitið í fyrstu syftu skal melda brotini til politiið, og at ákæruvaldið síðan leggur málið fyri rættin. Tá sektarstøðið er lagt fast, kann Dátueftirlitið nýta hetta støðið at geva fyrisitingarlig sektaruppskot fyri somu brot.

Tað er ein fortreyt, at spurningur um, um eitt mál skal hava við sær fyrisitingarligt sektaruppskot í øllum førum skulu leggjast fyri Dáturáðið.

Í *stk. 2* verður ásett, at reglurnar í rættargangslógini um innihald í ákæruritum og um, at skuldsetti ikki hevur skyldu til at úttala seg, verða at nýta samsvarandi.

Henda áseting skal tryggja, at tann sum tekur við einum fyrisitingarligum sektaruppskoti verður kunnaður á nøktandi hátt, so viðkomandi veit, hvat váttanin hevur við sær.

At víst verður til reglurnar í rættargangslógini hevur eisini við sær, at tann, sum skal hava brotið løgtingslógina, ikki hevur skyldu at úttala seg, og at viðkomandi skal kunnast um hetta. Ynskir viðkomandi ikki at úttala seg ella at taka við sektini, skal málið latast politinum.

Sambært *stk. 3* fellur onnur revsirættarsókn burtur, um fyrisitingarliga sektaruppskotið verður samtykt. Hetta hevur við sær, at tann sum tekur við einum sektaruppskotið ikki seinni kann verða ákærdur fyri sama brot, og at sama brot ikki seinni kann verða lagt fyri rættin.
Víst verður í heilum til pkt. 1.4.9. í almennu viðmerkingunum og til serligu viðmerkingarnar til § 78.

**Frádøming av vinnurætti**

**Til § 80**
Ásetingin byggir lutvíst á innihaldið í grein 84 í GDPR í føroyska lóggávu. § 80 førir við ávísum tillagingum § 45 í galdandi løgtingslóg víðari.

Ásett verður, at tann, sum rekur ella fæst við rættarkunningarskipanir, sbrt. § 19, og privatir dátuviðgerar, sum goyma persónupplýsingar, við dómi fyri revsiverd viðurskifti kunnu frádømast rættin hesum viðvíkjandi, um nærliggjandi vandi er fyri misbrúki.

§ 80 kemur afturat § 79 í revsilógini, sum snýr seg um frádøming. § 80 tryggjar, at frádøming kann fara fram í hesum førum. Metingin sum skal gerast í hvørjum einstøkum føri svarar til metingina, sum dómstólarnir longu í dag gera eftir § 79, stk. 1 og 2 í revsilógini.

§ 79, stk. 3 og 4 í revsilógini um, hvussu leingi rætturin verður kann frádømast eru galdandi.

Sí eisini áskoðan nr. 149-152 í GDPR.

## Kapittul 9
## Gildiskoma

Í kapitli 9 er einans ein áseting, og tað er um gildiskomu løgtingslógsins.

**Gildiskoma**

**Til § 81**
Lagt verður upp til, at løgtingslógin um vernd av persónupplýsingum kemur í gildi tann 1. januar 2021. Samstundis fer galdandi løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónupplýsingum úr gildi. Eisini tær kunngerðir, sum eru givnar við heimild í løgtingslógini, undir hesum trygdarkunngerðin, fara úr gildi samstundis, sum løgtingslógin fer úr gildi.

Hetta hevur við sær, at øll viðgerð, sum fer fram frá 1. januar 2021 skal lúka treytirnar í hesi løgtingslóg. Dátuábrygdarar o.o. skulu tí, áðrenn løgtingslógin kemur í gildi, gera sær greitt um tann viðgerð, sum fer fram, er í samsvari við nýggju løgtingslógina ella um tað krevst, at tillagingar verða gjørdar.

Legg til merkis, at henda meting kann hava við sær, at treytirnar í nýggju løgtingslógini longu eru loknar, av tí, at nýggja løgtingslógin á nógvum punktum førir galdandi rætt víðari.

Sum tað er greitt frá undir serligu viðmerkingunum til § 38 um dátuvernd ígjøgnum sniðgeving og dátuvernd ígjøgnum standardstilling, hevur løgtingslógin ikki við sær, at

dátuábyrgdarar o.o. skulu gera íløgur í nýggjar skipanir til tess at lúka hesa áseting. Tað er tó eitt krav – eins og tað er í dag – at skipanir o.a. lúka treytirnar í løgtingslógini, undir hesum meginreglurnar í § 7.

Í *stk. 2* er lagt upp til, at viðgerð, sum í dag fer fram grundað á loyvi frá Dátueftirlitinum, kann fara fram sambært loyvinum til 1. januar 2022.

Henda áseting hevur við sær, at dátuábyrgdarar o.o., sum hava innrættað seg grundað á eitt loyvi frá Dátueftirlitinum, hava longri tíð at innrætta seg til nýggju lógina. Hetta er einans galdandi fyri viðgerð, sum longu er í gongd, tá lógin kemur í gildi, og sum Dátueftirlitið hevur heimilað. Tað merkir, at nýggj viðgerð ella nýggjur flutningur kann ikki fara fram grundað á loyvi givin eftir áður galdandi lóg.

Í *stk. 3* verður lagt upp til eina longri skiftistíð fyri dátuviðgeraravtalur inngingnar áðrenn henda løgtingslóg kemur í gildi, og sum eru í samsvari við galdandi lóg, sbrt. § 31, stk. 2 í lóg um viðgerð av persónsupplýsingum. Dátuábyrgdarar og dátuviðgerar fáa til 1. januar 2022 at syrgja fyri, at hesar avtalur eru í samsvari við hesa løgtingslóg.

Løgmansskrivstovan, 20. desember 2019

**Bárður á Steig Nielsen**
løgmaður

/ Marjun Hanusardóttir

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) 2016/679 af 27. april 2016 om beskyttelse af fysiske personer i forbindelse med behandling af personoplysninger og om fri udveksling af sådanne oplysninger og om ophævelse af direktiv 95/46/EF (generel forordning om databeskyttelse)
Fylgiskjal 2: Ummælisskjal
Fylgiskjal 3: Ummælisskriv frá Dátueftirlitinum við fylgiskjølum
Fylgiskjal 4: Ummælisskriv frá Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu
Fylgiskjal 5: Ummælisskriv frá Ílegusavninum
Fylgiskjal 6: Ummælisskriv frá Fólkaheilsuráðnum
Fylgiskjal 7: Ummælisskriv frá Granskingarráðnum
Fylgiskjal 8: Ummælisskriv frá Fróðskaparsetri Føroya
Fylgiskjal 9: Ummælisskriv frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 10: Ummælisskriv frá Almannamálaráðnum
Fylgiskjal 11: Ummælisskriv frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum
Fylgiskjal 12: Ummælisskriv frá Almannaverkinum
Fylgiskjal 13: Ummælisskriv frá Familjufyrisitingini
Fylgiskjal 14: Ummælisskriv frá Gjaldstovuni
Fylgiskjal 15: Ummælisskriv frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

Fylgiskjal 16: Ummælisskriv frá Starvsmannafelagnum
Fylgiskjal 17: Ummælisskriv frá Kommunufelagnum
Fylgiskjal 18: Ummælisskriv frá Føroya Politi
Fylgiskjal 19: Ummælisskriv frá BankNordik
Fylgiskjal 20: Ummælisskriv frá Betri
Fylgiskjal 21: Ummælisskriv frá KT-felagnum
Fylgiskjal 22: Ummælisskriv frá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar
Fylgiskjal 23: Ummælisskriv frá Faroe Law
Fylgiskjal 24: Ummælisskriv frá Klaksvíkar Kommunu
Fylgiskjal 25: Ummælisskriv frá LÍV
Fylgiskjal 26: Ummælisskriv frá Landssjúkrahúsinum
Fylgiskjal 27: Ummælisskriv Uttanríkis- og mentamálaráðnum
Fylgiskjal 28: Ummælisskriv frá Fiskimálaráðnum
Fylgiskjal 29: Ummælisskriv frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 30: Ummælisskriv frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum